# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2016

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

AUGUST 2017

# Innihaldsyvirlit


**0 INNGANGUR 7**

**0.1 LANDSROKNSKAPURIN 2016 7**
**0.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 7**
**0.3 FRAMLØGA 9**

**1 ALMENNAR VIÐMERKINGAR 11**

**1.1 EGNAR BÚSKAPARSKIPANIR 11**
**1.2 KEYP AV TÆNASTUM UTTANHÝSIS 12**
**1.3 SPJAÐING AV FYRISITINGARÚTREIÐSLUM 12**
**1.4 FERÐAÚTREIÐSLUR UTTANLANDS 14**

**2 LØGMANSFYRISITINGIN 15**

**2.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (LG 2016/202-0111) 15**

**3 FÍGGJARMÁL 17**

**3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-0001) 17**
**3.2 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR 19**
**3.3 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/203-0111) 20**
**3.4 REGLUR UM MATSTOVUR (LG 2014/203-0111) 21**
**3.5 GJALDSTOVAN (LG 2016/203-0151) 21**
**3.6 TAKS (LG 2016/203-0151) 25**
**3.7 KERVISSKOÐAN 27**
3.7.1 KERVISSKOÐAN HJÁ TAKS 27
3.7.2 KERVISSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 29
3.7.3 KERVISSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 29
3.7.4 KT EFTIRLITSSKIPANIR Á FØROYA GJALDSTOVU OG KT LANDSINS 30
**3.8 HAGSTOVA FØROYA (LG 2015/203-0152) 30**
**3.9 ÓMAKSGJØLD (LG 2014/203-0151) 31**
**3.10 STUÐUL TIL FLUTNING OG DUPULT HÚSARHALD (LG 2016/203-0212) 32**
**3.11 TVUNGIN EFTIRLØN AV B-INNTØKUM (LG 2016/220-0521) 33**
**3.12 NEGATIVT MEIRVIRÐISGJALD (LG 2016/220-0522) 34**
**3.13 NOTAT UM KEYP AV VØRUM OG TÆNASTUM (LG 2016/405-0008) 37**

**4 FISKIVINNUMÁL 39**

**4.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/205-0111) 39**
**4.2 EFTIRLIT VIÐ UPPBOÐSSØLU (LG 2016/205-0111) 40**
**4.3 MRCC OG TÓRSHAVN RADIO (LG 2015/205-0311) 40**
**4.4 BÚNAÐARSTOVAN (LG 2014/205-0332) 41**
**4.5 HVALAGRANSKING OG HVALATELJING (LG 2016/205-0341) 42**
**4.6 HAVSTOVAN (LG 2016/205-0343) 43**
4.6.1 VERKÆTLANIR 45
4.6.2 VÁTTAN FYRI VERKÆTLANINA NACLIM 46
**4.7 FLUTNINGSSTUÐUL (LG 2016/205-0344) 47**

**5 MENTAMÁL 49**

**5.1 MENTAMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/207-0111) 49**
**5.2 NÁM (LG 2014/207-0231) 50**
**5.3 LÆRARALØNIR Í FÓLKASKÚLANUM (LG 2016/207-0232) 51**
**5.4 RÁSIN (LG 2014/207-0232) 52**
**5.5 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY (LG 2016/207-0233) 52**
**5.6 HEILSUSKÚLI FØROYA (LG 2016/207-0233) 53**
**5.7 MIÐNÁM Á KAMBSDALI (LG 2016/207-0233) 53**
**5.8 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK, LØGUJÁTTAN (LG 2016/2007-0233) 55**
**5.9 SKÚLADEPIL Í SUÐUROY, LØGUJÁTTAN (LG 2016/207-0233) 55**
**5.10 SKÚLADEPIL VIÐ MARKNAGIL (LG 2016/405-0009) 57**
**5.11 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (LG 2014/207-0235) 58**
5.11.1 LÓGARGRUNDARLAG 58
5.11.2 FYRISITING 59
**5.12 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2014/207-0235) 61**
**5.13 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2016/207-0236) 61**
**5.14 GRANSKINGARRÁÐ FØROYA (LG 2014/207-0236) 62**
**5.15 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2014/207-0236) 62**
**5.16 STUDNI, UMSITING AV LESTRARSTUÐLI (LG 2016/207-0237) 63**
5.16.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI, STOVNSRAKSTUR 65
**5.17 MÁLRÁÐIÐ (LG 2016/207-0241) 66**
**5.18 TJÓÐPALLUR FØROYA (LG 2015/207-0242) 66**
**5.19 MENTANARGRUNNUR LANDSINS (LG 2015/207-0242) 68**
**5.20 SØVN LANDSINS (LG 2014/207-0243) 71**
**5.21 KIRKJUGRUNNURIN (LG 2014/207-0245) 72**

**6 HEILSU- OG INNLENDISMÁL 73**

**6.1 HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/211-0111) 73**
**6.2 LÆKNAKANNINGAR AV BØRNUM (LG 2014/211-0201) 74**
**6.3 FÓLKAHEILSURÁÐIÐ (LG 2016/211-0201) 74**
**6.4 HEILSUTRYGD (LG 2015/211-0202) 76**
6.4.1 HEILSUTRYGDARVEITINGAR 77
6.4.2 FÍGGJARSTØÐA 77
6.4.3 KOMMUNULÆKNASKIPANIN 78
**6.5 SJÚKLINGATRYGGING (LG 2016/211-0203) 79**
**6.6 GIGNI, HEILSUFRØÐI TIL BØRN OG UNG (LG 2016/211-0213) 80**
**6.7 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2016/206-0374) 85**

**7 ALMANNAMÁL 93**

**7.1 ALMANNAMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/212-0111) 93**
**7.2 ALMANNAVERKIÐ (LG 2016/212-0211) 94**
**7.3 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (LG 2016/212-211) 94**
**7.4 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-0213) 94**
**7.5 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-0213) 94**
**7.6 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-0213) 96**
**7.7 FAMILJUÍSKOYTI (LG 2016/212-0213) 96**
**7.8 KASSAEFTIRLIT Á EINDUM UNDIR BARNAVERND (LG 2016/212-0213) 99**
**7.9 KASSAEFTIRLIT Á VERKSTØÐUM OG VERKHÚSUM (LG 2016/212-0216) 100**
**7.10 DAGPENINGUR VEGNA SJÚKU V.M. (LG 2014/212-0214) 101**
**7.11 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTAN (LG 2016/212-216) 102**
7.11.1 TRIVNAÐAREIND 4 102
7.11.2 LØNARGRANNSKOÐAN, EIND 4 107
7.11.3 KASSAEFTIRLIT 109
**7.12 VANLIG FORSORG (LG 2014/212-0217) 109**
**7.13 VARANDI VEITING (LG 2015/212-0217) 109**
**7.14 SJÚKRATRYGD (LG 2015/212-0344) 110**

**8 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL 111**

**8.1 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/213-0111) 111**
**8.2 KUNNGERÐIR O.A. TIL VINNUFELAGALÓGINA (LG 2014/206-0111) 112**
**8.3 STUÐULSJÁTTANIR UNDIR UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLUM (LG 2016/213-0111) 114**
8.3.1 MILLUMTJÓÐA SAMSTARV 115
8.3.2 NEYÐHJÁLP OG MENNINGARSAMSTARV 117
8.3.3 GJALD FYRI SEISMISK KANNINGARLOYVI 119
8.3.4 HAVBÚNAÐARROYNDIR 119
8.3.5 YMISKUR STUDNINGUR 119
8.3.6 ÚTLÁN 120
8.3.7 FERÐAVINNA 121
8.3.8 MARKNAÐARFØRING AV FØROYUM 123
8.3.9 EFTIRMETING AV STUÐLI 124
**8.4 JARÐFEINGI (LG 2016/213-0321) 124**
8.4.1 GJALD FYRI SEISMISK FORKANNINGARLOYVI 127
8.4.2 MARKNAÐARFØRING AV LANDGRUNNINUM TIL KOLVETNISLEITING 127
8.4.3 AÐRAR INNTØKUR, VÍDDARGJØLD OLJUVINNAN 127
**8.5 SJÓVINNUSTÝRIÐ (LG 2015/206-0351) 129**
**8.6 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2016/213-0373) 129**

**9 SAMFERÐSLUMÁL 135**

**9.1 SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/217-0111) 135**
**9.2 BRUNAEFTIRLITIÐ (LG 2016/217-0311) 136**
**9.3 LANDSVERK (LG 2015/203-0381) 137**
**9.4 LANDSVERK, LØGUJÁTTANIR (LG 2015/203-0381) 138**
9.4.1 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM 139
9.4.2 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING 139
9.4.3 BÚSTOVNAR O.A. 140

9.4.4 VIÐMERKINGAR FRÁ LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM 140
**9.5 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2016/217-0382) 140**
9.5.1 VIÐMERKINGAR FRÁ LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM TIL 2015 140
9.5.2 GRANNSKOÐAN 2016 141
**9.6 AKSTOVAN (LG 2015/206-0384) 147**
**9.7 BARSILSSKIPANIN (LG 2016/220-0521) 148**

**10 FÍGGJARSTØÐA 155**

**10.1 FÍGGJARSTØÐA (LG 2016/300-0000) 155**
10.1.1 KAPITALINNSKOT (LG 2016/300-0102) 155
10.1.2 VIRÐISBRØV 157
10.1.3 ÚTLÁN 159
10.1.4 ÁOGN O.A. 159
10.1.5 TØKUR PENINGUR 161
10.1.6 SKULD 163
10.1.7 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2015/300-0203) 165
**10.2 FÍGGING LANDSINS (LG 2016/203-0151) 165**
10.2.1 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 165
10.2.2 PORTEFØLJUSKIPANIN OG PLASERINGAR AV GJALDFØRI 170

**11 ORÐALISTI 171**

# 0 Inngangur

## 0.1 Landsroknskapurin 2016

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.[1]

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í grannskoðanarlógini, at landsstýrismaðurin í seinasta lagi 5 mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

***Aðalráð og stovnar skulu leggja fram ein rættan roknskap – gjørdur í BSL.***

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."[2] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

***Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.***

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

***Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal leggja fram samlaðan landsroknskap.***

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2016 varð latin Løgtinginum 30. mai 2017.

## 0.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

### Endamálið við grannskoðanini

***Endamálið við grannskoðanini.***

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at ongin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

[1] Í 2015 var tíðarfreistin stytt úr 6 mánaðum í 5 mánaðir.
[2] Broytt við kunngerð nr. 110 frá 14. juli 2017.

at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og víkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

### Landsgrannskoðanin

*Ábyrgd grannskoðarans.*

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnarnar.[3]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

### Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um slíka frágreiðing er frágreiðing “um játtanar- og útreiðslugongdina í sambandi við verkætlanina at byggja Skúladepil við Marknagil (nú Glasir)”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í januar 2017.

### Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum.

### Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

*Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.*

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

[3] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at eisini landsstýrismaðurin fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

## 0.3 Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í grannskoðanarlógini skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir[4] eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2016 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er skipað eftir sama málsøkjabýti sum landsroknskapurin fyri 2016.

Frágreiðingin er løgd fyri tey landsstýrisfólk, sum nú umsita avvarðandi øki, til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2016 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2016 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 31. august 2017

Beinta Dam
landsgrannskoðari

[4] Í 2015 var freistin stytt úr 10 mánaðum í 8 mánaðir.

# 1 Almennar viðmerkingar

## 1.1 Egnar búskaparskipanir

Í roknskaparkunngerðini er ásett, at allir almennir stovnar skulu nýta Búskaparskipan landsins. Stovnarnir skulu lata skipanini upplýsingar og eftirkanna tað tilfar, teir fáa úr skipanini.

***Nakrir stovnar hava egna búskaparskipan.***

Tó at nógv teir flestu stovnarnir skráseta sínar roknskapardátur beinleiðis í Búskaparskipan landsins, er tað hjá nøkrum stovnum neyðugt ella ynskiligt at hava egnar búskaparskipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, skuldarar o.a. Fíggjarmálaráðið kann loyva stovnum við serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta sínar egnu búskaparskipanir. Tá skal ein skrivlig rakstraravtala verða gjørd við Gjaldstovuna, sum gjøllari útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.t.

Tá ið Búskaparskipan landsins er grundarlagið undir landsroknskapinum og tí samlaða landsroknskapinum, sum Løgtingið samtykkir, hevur tað stóran týdning, at skrásetingarnar í henni eru tær røttu. Landsgrannskoðanin hevur tó staðfest, at samsvar er ikki altíð millum skipanirnar.

***Stovnsleiðarin hevur hevur ábyrgd av, at samsvar er við Búskaparskipan landsins.***

Í ársfrágreiðingini 2015 vísti Landsgrannskoðanin á týdningin, at samsvarið millum Búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir verður tryggjað, og at góðkenningarmannagongdir verða tiknar í álvara, tá ið stovnsleiðslur vátta, at samsvar er millum skipanirnar. Stovnsleiðarin hevur ábyrgdina av, at upplýsingarnar í egnari búskaparskipan eru rættar, og at tær samsvara upplýsingunum í Búskaparskipan landins.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var als ikki nøktandi, at samsvar ikki var ímillum skipanirnar, og vístu á, at tað onkuntíð hevur ført til óheimilaða meirnýtslu. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu tí Fíggjarmálaráðnum til at tryggja, at tølini, sum verða latin landsroknskapinum, eru tey røttu.

Í niðurstøðuni um kæru frá Vinnumálaráðnum um fyrrverandi grannskoðara hjá Strandfaraskipum landsins hevur Grannskoðanarnevndin 8. juni 2016 gjørt vart við, at "*tað áttu at verðið gjørdar leiðreglur/vegleiðingar um, hvat grannskoðanin av landsroknskapinum inniber, t.d. um at váttast skal í samsvari við Búskaparskipan Landsins*".

***Løgtingsgrannskoðararnir hava ásett reglur um samsvar við Búskaparskipan landsins.***

Vísandi til §12, stk. 4, í Ll. nr. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum hava løgtingsgrannskoðararnir ásett, at tá ið roknskapir hjá landsumsitingini, landsstovnum o.ø. verða grannskoðaðir, skal grannskoðarin kanna eftir og vátta, at roknskapurin er í samsvari við innrapporteraðu tølini í landsroknskapinum.

## 1.2 Keyp av tænastum uttanhýsis

Løgmaður og landsstýrismenn lata ræðisrættin yvir játtanum til aðalstjórar, sum aftur lata ræðisrættin til stjórar, fulltrúar og aðrar leiðarar, sum hava dagligu ábyrgdina av rakstrinum av stovnum ella fyrisitingarligum eindum, sum teir varða av.

***Stovnar skulu røkja lógarásettar upgávur.***

Endamálið hjá stovnum er at fyrisita og røkja tær uppgávur, sum ásettar eru í lóg, og at ábyrgdarpersónar við førleikum eru settir at taka neyðugu avgerðirnar fyri at røkka endamálinum.

Almennir stovnir rinda oftari og oftari privatum fyritøkum fyri at útinna vanligar fyrisitingarligar uppgávur, sum stovnarnir sjálvir helst áttu at havt førleika at útint. Í summum førum kundu teir helst fingið annan serkønan stovn í landsumsitingini at ráðgivið sær, sum t.d. Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, tá ið ræður um setanar- og uppsagnarmál. Onnur dømi eru: at taka sær av málsligum uppgávum og at orða skriv og tænastur í sambandi við fyriskipan av starvfólkadøgum o.l.

***Stovnar eiga at hava førleikar at røkja sínar fyrisitingarligu uppgávur.***

Landsgrannskoðanin heldur, at leiðsla og starvsfólk á einum almennum stovni, sum er settur á stovn at røkja fyrisitingarligar uppgávur, eiga at hava førleikar til tær uppgávurnar, sum natúrliga hoyra til stovnin. Øðrvísi er, tá ið talan er um aðrar uppgávur, sum stovnurin, av givnum orsøkum, ikki kann taka á seg.

Um uppgávurnar hjá einum almennum stovni ikki eru nóg neyvt lýstar, kann verða torført at gera av, hvørjar uppgávurnar eru, sum myndugleikin ætlaði at stovnurin skal útinna. Harvið ber heldur ikki altíð til at siga við vissu, um stovnurin sjálvur skuldi átikið sær uppgávuna ella latið hana til onnur.

Stovnsleiðsla skal altíð taka neyðug búskaparlig atlit, tá ið hon leggur raksturin av stovninum til rættis. Tá ið ein stovnur keypir tænastur, sum áttu at verði partur av uppgávunum hjá starvsfólkum stovnsins, kann ivi verða sáddur um, um neyðug búskaparlig atlit verða tikin.

Sambært játtanarreglunum er tað landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, ið skal síggja til, at m.a. reglurnar á øllum fíggjarliga økinum verða hildnar. Landsstýrismaðurin skal eisini síggja til, at regluverkið á fíggjarliga økinum støðugt er hóskandi og vælvirkandi, og um ikki, so at taka stig til at bøta um tað.

***Neyðugt er at sláa fast, hvat stovns-rakstur inniber.***

Landsgrannskoðanin heldur, at tíðin er komin at taka spurningin upp, hvussu uppgávurnar hjá stovnum skulu vera greinaðar, fyri at sláa fast, hvat stovnsrakstur er.

## 1.3 Spjaðing av fyrisitingarútreiðslum

Fyrisitingarútreiðslur eru útreiðslur, sum ein stovnur hevur av at útinna tað virksemi, sum er álagt honum at fremja sambært fíggjarlóg og aðrari lóggávu. Spjaðing av fyrisitingarútreiðslum er, tá ið ein stovnur leggur kostnaðin av uppgávum, sum stovnurin í sínum virki eigur at bera kostnaðin av, út til aðrar stovnar at rinda. Tað kann t.d. vera, tí at stovnurin heldur seg hava ov tronga játtan ella ov nógvar uppgávur, til at kostnaðurin rúmast í játtanini.

***Fyrisitingarútreiðslur hjá stovnum verða rindaðar av øðrum játtanum.***

Í fleiri førum hava stovnsleiðarar ræðisrætt á fleiri høvuðskontum, sum markað upp í móti stovninum sjálvum. Tá ber til at rinda sær sjálvum fyri fyrisitingarútreiðslur av øðrum játtanum, sum stovnurin í veruleikanum sjálvur átti at borið. Eyðvitað eru fyrimunirnir fyri stovnin stórir, tí stovnurin kann økja um fyrisitingarútreiðslurnar við at spjaða tær.

Avleiðingin av, at stovnur sjálvur ger av, um hann fær inntøkur frá øðrum játtanum, er, at Løgtingið ikki fær nágreiniligar upplýsingar um, hvat veruligi raksturin av landinum kostar, tí ein partur av rakstrinum kann vera skrásettur t.d. á løgukontur.

***Grunnar rinda fyri møguliga meirnýtslu hjá stovnum.***

Hevur stovnur - afturat sínari játtan í fíggjarlógini - atgongd til fígging av sínum virksemi á annan hátt, t.d. við ræðisrætti yvir einum grunni, kann hann flyta pening úr grunninum til meirnýtslu, tá ið játtanin er brúkt. Í tí førinum er talan um óheimilaða nýtslu av landsins pengum, tí Løgtingið hevur ikki fingið møguleika at taka støðu til, um peningur landsins skuldi brúkast soleiðis. Óheimilaða meirnýtslan verður tá neyvan sjónlig í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin vísti í undanfarnu ársfrágreiðing á, at Landsgrannskoðanin hevur gjørt stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda fyrisitingarútreiðslur hjá einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin umsitur.

M.a. varð nevnt, at Landsverk er ein stovnur, sum umsitur nógvar og stórar løgujáttanir vegna aðalráðini, og er byggiharri, umframt at Landsverk onkuntíð eisini samstundis er arbeiðstakari. Flytingarnar frá løgujáttanum til Landsverk kunnu roknast fyri at vera flytingar millum nærstandandi partar, og mælti Landsgrannskoðanin til at gera reglur um, hvørjar útreiðslur viðvíkjandi starvsfólkum hjá Landsverki kunnu rindast av løgujáttanunum.

Ivi varð sáddur um, um stovnurin fær útreiðslur sínar goldnar tvær ferðir, bæði sum vanlig rakstrarjáttan og sum flytingar frá løgujáttanum fyri løn og umsitingargjøld v.m.

***Ivi kann vera um, hvørjar útreiðslur hoyra til inntøku-fíggjað virksemi.***

Ivamálini eru tey somu, tá ið stovnur hevur inntøkufíggjað virksemi; hvørjar útreiðslur kunnu haldast av inntøkufíggjaðum virksemi, og hvørjar eiga at verða skrásettar á rakstrinum sjálvum.

Í hesari frágreiðingini er dømi um, at rakstrarútreiðslur hjá Uttanríkistænastuni eru hildnar av stuðulsjáttan, heldur enn av rakstrarjáttanini hjá ráðnum.

***Rakstrarútreiðslur verða rindaðar av stuðulsjáttanum.***

Sambært fíggjarlógini fevna Uttanríkismál um millumtjóða samstarv. Limaskapur í millumtjóða samstarvi kann helst roknast sum ein partur av virkseminum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og útreiðslurnar av at vera í millumtjóða samstarvi kunnu samanberast við aðrar rakstrarútreiðslur, tí tær standast av virkseminum hjá stovninum.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað hevur týdning, at rakstrarútreiðslurnar verða skrásettar, har tær hoyra heima, soleiðis at veruligu rakstrarútreiðslurnar hjá stovnum síggjast í landsroknskapinum.

Annað dømi er, at útreiðslur av at avgreiða útgjøld av stuðulsjáttanum verða rindaðar av stuðulsjáttanini. Landsgrannskoðanin heldur, at stovnar kunnu ikki lata stuðuls-játtanir fíggja fyrisitingarútreiðslur, ið standast av stuðulsumsitingini.

***Gjaldari hevur onga ávirkan á útreiðslur-nar, tá ið stovnar kunnu senda rokning fyri rakstur.***

Nakrir almennir eftirlitsstovnar fíggja sínar útreiðslur við rakstrar- og eftirlitsgjøldum. Í teimum førum, har stovnur verður fíggjaður við, at feløg ella fyritøkur rinda fyri t.d. eftirlit, hevur tann, sum rindar fyri raksturin, lítla ella onga ávirkan á, hvørjar útreiðslur stovnurin hevur av at gera eftirlitini.

## 1.4 Ferðaútreiðslur uttanlands

Fyri árum síðani var tað soleiðis, at tænastumenn, sum skuldu ferðast uttanlands fyri landið, skuldu søkja um loyvi frá landsstýrinum frammanundan.[5]

*Fyrr skuldu starvsfólk hava loyvi frá løgmanni at fara tænastuferð.*

Í rundskrivi frá 1987 til allar almennar stovnar ásetti landsstýrið, at tænastufólk skuldu hava farloyvi frá løgmanni, áðrenn farið varð á tænastuferð. Rundskrivið ásetti eisini, at tað var ikki loyvt at skriva ferðaseðilin uppá landsstýrið ella stovnin, men skuldi ferðaforskot nýtast til tað. Ferðauppgerðin skuldi sendast landsskrivstovuni innan 4 vikur eftir heimkomu.

Tíðirnar eru broyttar; nú umsita almennir stovnar sjálvir sínar ferðaútreiðslur. Galdandi reglur um ferðaútreiðslur og ferðauppgerðir í sambandi við tænastuferðir uttanlands eru í rundskrivum frá Fíggjarmálaráðnum og í semju millum Tænastumannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Ásett er, hvussu farast skal fram, upphæddir o.a., og stovnarnir hava skyldu til at fylgja reglunum.

Í sambandi við grannskoðanina 2016 hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað ferða-útreiðslurnar á fleiri stovnum, m.a. útreiðslur til ferðaseðlar, dagpening og gistingar á hotellum, umframt hvussu ferðauppgerðirnar eru avgreiddar.

*Ásetingar í vegleiðing um ferðauppgerð verða ikki hildnar.*

Í alt fleiri førum verða ásetingarnar í vegleiðingini frá Fíggjarmálaráðnum "til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands" ikki hildnar.

Í vegleiðingini er ásett, at goldið verður fyri innivist á hotelli eftir rokning, tó í mesta lagi 1.008 kr. fyri hvørja nátt í Danmark (frá 15. februar 2017 er upphæddin 1.020 kr.). Dagpeningaupphædd og náttarviðbót eru eisini ásettar.

*Mesta upphædd fyri innivist verður ikki hildin, og drigið verður ikki frá fyri goldnan kost.*

Reglur eru um, at tá ið starvsfólk fáa "kost goldnan av øðrum", skulu tey draga 30% av dagpeningaupphæddini frá. Um starvsfólk fáa allar máltíðir á ferðini goldnar, hava tey rætt til 40% av dagpeningaupphæddini.

Okkara kanning av ferðauppgerðum vísir, at ásetingin um "mestu upphædd" fyri hoteluppihald verður ikki hildin. Drigið verður heldur ikki altíð frá í dagpeninga-upphædd, tá ið starvsfólk hava fingið kost goldnan av øðrum.

*Skjøl vanta í ferðauppgerðum.*

Allar útreiðslur, ið landskassin rindar, skulu verða skjalprógvaðar. Fyri ferðaendurgjald merkir tað, at "upplýsingar um ferðina", skrá fyri fundir/skeið o.a. skulu liggja við. Annars ber ikki til at sanna, um upphæddirnar eru rættar. Vit hava staðfest, at tað alt ov ofta vanta skjøl til útreiðslurnar.

Reglurnar áseta, at útreiðslur av ferðapeningi við skipi, flogfari, bussi o.t. verða endurgoldnar eftir rokning, og altíð, tá ið til ber, skal almenna ferðasambandið verða nýtt.

*Reglurnar um at nýta almenna ferða-sambandið verða ikki hildnar.*

Tann ásetingin verður als ikki fylgd. Almennir stovnar rinda alsamt oftari fyri hýruvognskoyring uttanlands og fyri hýruvognskoyring til og frá flogvøllinum í Vágum. Stovnsleiðarar vísa á, at samlaði ferðakostnaðurin verður ikki hægri, tí starvsfólk spara arbeiðstíð við at koma lættari ella skjótari til og frá.

Í 2017 hevur Fíggjarmálaráðið boðað frá, at ráðið tekur undir við, at Airport taxa verður nýtt sum ferðasamband at koma á flogvøllin, tí prísurin nøkulunda samsvarar við kostnaðin at fara við hýruvogni frá bústaði ella arbeiðsplássi til bussambandið, fyri síðani at fara við bussi til flogvøllin. Fíggjarmálaráðið umhugsar at hava orðing um Airport taxa við í næstu dagføring av reglunum fyri ferðauppgerðir.

[5] Rundskriv frá november 1963: "tænastumaður, ið ætlar sær tænastuferð út um Føroyar, frammanundan eigur at søkja og vissa sær loyvi landsstýrissins".

# 2 Løgmansfyrisitingin

## 2.1 Løgmansskrivstovan (LG 2016/202-0111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Løgmansskrivstovuni fyri 2016. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina hjá stovninum og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

### Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin hjá Løgmansskrivstovuni er partvíst dagførd í oktober 2016, og arbeitt verður við at dagføra alla reglugerðina.

***Arbeitt verður við at dagføra alla roknskaparreglugerðina.***

### Lønir

Játtanin til Løgmansskrivstovuna er 13,4 mió.kr. í 2016, harav 10,2 mió.kr. eru til lønir. Á Løgmansskrivstovuni starvast 17 fólk.

Sambært roknskaparreglugerðini er flexsalda +30/-15 tímar loyvd. Sambært klokkuskipanini áttu nøkur starvsfólk meira enn 30 tímar tilgóðar.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri mars 2016 grannskoðaðu vit fýra lønarmál. Onki var at finnast at.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit roknskaparskjøl, um tey hoyra til stovnin og eru konterað sambært galdandi reglum. Vit umrøddu m.a. spurningin um meirvirðisgjald á útlendskum rokningum og líknandi føroyskum rokningum. Landsgrannskoðanin mælti umsitingini til at seta seg í samband við TAKS at fáa greiði á, um meirvirðisgjaldið er rætt viðgjørt, og boða okkum frá úrslitinum.

### Uttanlands ferðauppgerðir

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar uppgerðir fyri ferðir uttanlands. Tá ið farið verður til Danmarkar í tænastuørindum, rindar Løgmansskrivstovan fyri innivist á hotelli eftir rokning ella útlegg. Nakrar rokningar fyri innivist fóru upp um 1.008 kr. fyri náttina, sum er mest loyvda upphæddin fyri hvørja nátt sambært vegleiðingini hjá Fíggjarmálaráðnum. Sambært Løgmansskrivstovuni er trupult altíð at halda seg innan fyri ásettu upphæddina. Undantaksvís fer kostnaðurin upp um markið, tá verður mett um upphæddina í mun til tað, sum tey annars noyðast at rinda eyka fyri hýruvognar o.a.

### Gjaldkort

Løgmansskrivstovan hevði tvey “kredittkort MasterCard – Business Platinum”, knýtt at peningastovnskontu. Gjaldkortini vóru persónliga merkt; leiðsluskrivarin hevði annað um hendi, og hitt hevði løgmansstjórin. Heimildarváttanir vóru til kortini. Løgmansskrivstovan hevur kunnað um, at tey nú hava eitt gjaldkort, sum skrivarin hevur um hendi.

## KT viðurskifti

*Dagført yvirlit yvir KT brúkarar.*

Umframt Búskaparskipan landsins brúkar Løgmansskrivstovan journalskipanina 360 og gomlu journalskipanina Scanjour. Scanjour liggur uttan fyri Landsnet.

Vit spurdu, hvørji starvsfólk hava atgongd at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins, og fingu eitt dagført yvirlit yvir brúkarar. Onki var at finnast at.

## Annað

*Tekstur og skjøl um brotsverksoffur liggja í BSL.*

Løgmansskrivstovan umsitur játtanina til brotsverksoffur. Játtanin er 300 t.kr. um árið. Landsgrannskoðanin helt tað vera óheppið, at tekstur og skjøl í Búskaparskipan landsins vísa til navngivnar persónar, og mælti til at broyta mannagongdirnar. Løgmansskrivstovan hevur síðani kunnað um, at nýggj mannagongd er gjørd, soleiðis at tekstur og skjøl í Búskaparskipan landsins ikki vísa til navngivnar persónar.

*Ongin innkrevjing sett í verk at krevja endurgjøld fyri brotsverkini.*

Løgmansskrivstovan greiddi frá, at ongin innheinting var sett í verk at krevja endurgjøld frá teimum, sum hava framt brotsverkini. Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi. Sambært Løgmansskrivstovuni, hevur uppgávan hevur verið forsømd síðani 2011, tá ið málsøkið bleiv yvirtikið.

Ábyrgdin at krevja inn er fleiri ferðir flutt millum stjórnarráð, og roynt hevur verið at leggja uppgávuna til TAKS ella Gjaldstovuna. Higartil eru royndirnar endaðar við viðgerð av heimildum til innheintingaramboð o.a. Í desember 2016 sendi Løgmansskrivstovan út krøvini frá 2013. Krøvini fyri 2011 og 2012 fóru eftir ætlan at verða send út fyrst í 2017.

# 3 Fíggjarmál

## 3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-0001)

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið í gildi K. nr. 95/2013 “um at lata inn roknskapar-upplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit”. Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men er fevnt av almennu roknskaparlógini.

Landsroknskapurin fevnir um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum.

***Fleiri stovnar og grunnar ikki við í fíggjarlóg og lands-roknskapi.***

Í nógv ár hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlógini og landsroknskapinum. Skiftandi landsstýrismenn hava greitt frá um hesar stovnar og grunnar, uttan tó at komið er á mál við at greiða ivamálini um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftini.

Talan er um týðandi alment virksemi, sum ikki er við í landsroknskapinum, og sum heldur ikki verður lagt fyri Løgtingið. Í frágreiðing okkara frá mai 2014 “um leiklutin hjá landinum í partafeløgum, grunnum og øðrum virkiseindum” eru viðurskiftini nærri viðgjørd. Dømi um tílíkar almennar grunnar eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðs-marknaðareftirlønargrunnurin, sum hava einar 2 mia.kr. í eginogn.

Aftur í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað framvegis verður arbeitt við, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal gerast upp.

***Arbeitt verður fram-haldandi við, hvussu samlaði almenni rokn-skapurin skal síggja út.***

Í svari til løgmann í sambandi við løgtingsmál nr. 37/2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *tað “framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum full-fíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer sostatt fram í stigum. Bústaðir og Búnaðar-grunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin.”*

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum “Eksternir grunnar”. Ætlanin var, at eginpeningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Gransking-argrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa í framtíðini verður tikin við í landsroknskapinum undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Sambært landsstýrismanninum var eftir at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnur Føroya og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Flestu almennu reglur og fyriskipanir galda ikki almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið. Vit kunnu tí siga, at landsroknskapurin í minni mun

avspeglar veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum, umframt at tílíkt virksemi í stóran mun ikki skal fylgja øðrum almennum reglum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanini um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir tað vera týdningarmikið, at allir stovnar, grunnar, feløg o.o., sum koma undir § 2, stk. 2, í lógini um landsins almenna roknskaparhald, vórðu tiknir við í landsroknskapin. Løgtinsgrannskoðararnir funnust hvassliga at, at tveir stovnar, sum áður hava verið í landsroknskapinum, ikki vóru við í roknskapinum 2015.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum er ikki komin í rættlag. Húsalánsgrunnurin hevur latið inn roknskapartøl fyri onkran mánað, men enn eru tøkniligar og roknskapartøkniligar avbjóðingar, sum arbeitt verður við at loysa.

Fíggjarmálaráðið arbeiðir fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum verður tikin við í landsroknskapinum fyri 2017 undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t."

Sambært landsstýrismanninum arbeiðir ráðið áhaldandi fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Húsalánsgrunnurin og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin.

### Egnar búskaparskipanir

***Samsvar er ikki altíð millum egnar búskaparskipanir og BSL.***

Sambært roknskaparkunngerðini hava almennir stovnar skyldu at nýta Búskaparskipan landsins. Stovnar, ið hava fingið loyvi til at hava egna búskaparskipan, hava skyldu at kanna eftir, at samsvar er millum teirra skipan og Búskaparskipan landsins. Stovnar við egnari búskaparskipan skulu eisini vátta, at skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins samsvara við teirra búskaparskipan.

Í uppskoti til samtyktar fyri fíggjarárið 2014 vístu løgtingsgrannskoðararnir á týdningin, at skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins eru rættar, eftirsum tær eru grundarlagið undir landsroknskapinum, og at tað er samlaði landsroknskapurin, sum Løgtingið samtykkir á hvørjum ári.

Í august 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at fyri teir stovnar, ið nýta egna skipan, er týdningarmikið, at samsvar er millum skrásetingarnar í egnum búskaparskipanum og Búskaparskipan landsins. Fíggjarmálaráðið helt, at samsvarið kundi verðið tryggjað við ásetingum til stovnarnar, tá ið Fíggjarmálaráðið loyvir teimum at nýta egna búskaparskipan, og við uppfylging og eftirliti Gjaldstovunnar av skrásetingunum. Harafturat kundi grannskoðan tryggja, at samsvar var millum skrásetingar í egnum búskaparskipanum og skrásetingar í Búskaparskipan landsins.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við loysnini, at løgtingsgrannskoðararnir hava heitt á privatu grannskoðararnar um at tryggja, at samsvar er millum skrásetingarnar í egnu skipanunum hjá stovnum og Búskaparskipan landsins.

### Ásetingar frá løgtingsgrannskoðarunum

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir tað als ikki vera nøktandi, at samsvar var ikki ímillum skipanirnar, og vístu á, at tað onkuntíð hevði fört til óheimilaða meirnýtslu.

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu staðiliga til, at Fíggjarmálaráðið tryggjaði sær, at tølini, sum vórðu latin landsroknskapinum, vóru tey røttu.

Vísandi til grannskoðanarlógina hava løgtingsgrannskoðararnir í juni 2017 ásett, at tá ið roknskapir hjá landsumsitingini og landsstovnum o.ø. verða grannskoðaðir, skal grannskoðarin kanna eftir og vátta, at roknskapurin er í samsvari við innrapporteraðu tølini í landsroknskapinum.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tað, at stemma av við landsroknskapin, er ein natúrligur partur av tí grannskoðan, sum longu verður framd av almennum stovnum og skipanum. Men fyri at ongin ivi skal vera, hava løgtingsgrannskoðararnir formliga ásett, at grannskoðarar hjá almennum stovnum og skipanum skulu stemma av, at "egin roknskapur" er í samsvari við tølini, sum eru í landsroknskapinum.

Orsøkin til ásetingina er m.a. niðurstøðan hjá Grannskoðaranevndini 8. juni 2016. Í niðurstøðuni um kæru frá Vinnumálaráðnum um fyrrverandi grannskoðaran hjá Strandfaraskipum landsins ger nevndin vart við, at "tað áttu at verðið gjørdar leiðreglur/vegleiðingar um, hvat grannskoðan av landsroknskapinum inniber, t.d. um at váttast skal í samsvari við Búskaparskipan landsins".

## 3.2 Tænastumannaeftirlønir

### Eftirlønarskyldur landskassans

Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett allar tænastumannaeftirlønarskyldurnar og fekk fyri nøkrum árum síðani aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skylduni.

Í landsroknskapinum 2015 varð kunnað um, at nettoskylda landskassans var mett til um 3,3 mia.kr.

Tænastumannaeftirlønarskyldurnar eru roknaðar aftur fyri roknskapin 2016. Síðani skyldurnar seinast vórðu roknaðar eru færri tænastumenn í starvi, men rentan er lækkað nógv og livialdurin er hækkaður nógv. Skyldan hjá løgtingsmonnum og landsstýrismonnum er hækkað lutfalsliga mest.[6]

***Tænastumannaeftirlønarskyldur landskassans slakar 5 mia.kr. í 2016.***

Sambært landsroknskapinum 2016 er samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum slakar 5 mia.kr.

### Grannskoðan av eftirlønum hjá fólkaskúlalærarum

*Endurrindan frá statinum í 2016*

Tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúlaverkinum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum, koma undir hesa skipan. Eftirlønirnar verða veittar eftir somu reglum sum hjá teimum, ið fáa tænastumannaeftirløn.

Fyri teir tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997, er tænastumannalógin frá 1971 galdandi. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Staturin endurrindar 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av pensjónunum, sum varð vunnin inntil 31. desember 1987.

[6] Kelda: síða 250 í Landsroknskapinum 2016

Gjaldstovan sendir Moderniseringsstyrelsen eitt mánaðarligt krav um endurgjald fyri læraraeftirløn. Gjaldstovan ger endaliga uppgerð fyri upphæddirnar, sum staturin skal rinda sín part av.

Upphæddirnar, sum staturin hevur goldið, og tað, staturin átti at goldið:

*kr.*

| Ár | Endurgjaldskrav fra Gjaldstovuni | Endurgjaldskrav smb. eftirlønarlistunum | Ov lítið goldið |
|---|---|---|---|
| 2016 | 26.907.068 | 26.916.037 | 8.969 |

Sambært Gjaldstovuni er munurin íkomin, tí tey í september og november 2016 hava goldið eftirløn, sum ikki hevur verið við í endurgjaldsuppgerðini frá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin kannaði 7 eftirlønarmál við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining, um:

- eftirlønarmóttakarnir á teimum báðum yvirlitunum uppfylla ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og um
- endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakarnir hava rætt til eftirløn, og at Landsstýrið hevur rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønarupphæddirnar. Landsgrannskoðanin er komin fram á smávegis feilir, sum verða rættaðir frameftir.

Í seinastu frágreiðing okkara umrøddu vit spurningin viðvíkjandi útrokning av býtislyklinum. Fíggjarmálaráðið hevur heitt á Gjaldstovuna um at broyta útrokningarháttin frá juni 2017 at rokna, soleiðis at rundað verður niður til næsta heila ár.

## 3.3 Fíggjarmálaráðið (LG 2016/203-0111)

Í oktober 2016 grannskoðaði Landsgrannskoðanin roknskapin hjá Fíggjarmálaráðnum. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina hjá ráðnum og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

### Roknskaparreglugerð

Í desember 2016 sendi ráðið okkum eina roknskaparreglugerð og kunnaði um, at ásetingarnar um fyrisiting av vørugoymslu og øðrum ognum eru samsvarandi ætlaðari broyting í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit. Sambært Fíggjarmálaráðnum verður ognaryvirlit gjørt so skjótt, sum ætlaða broytingin í roknskaparkunngerðini verður framd.

***Krav um skráseting av ognum í BSL broytt frá 75 t.kr. til 50 t.kr.***

Í august 2017 hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at roknskaparkunngerðin er broytt, m.a. tá talan er um ognaryvirlit. Enn vantar tøknilig broyting í Búskaparskipan landsins til tess at skráseta ognir við virði yvir 50.000 kr.

### Lønir

Í Fíggjarmálaráðnum starvast 11 fólk. Játtanin er 9,5 mió.kr. í 2016, harav 8 mió.kr. eru til lønir. Ráðið hevur óskrivaðar reglur um +40/-20 tímar í flexsaldu. Stjórar og tænastumenn skráseta ikki arbeiðstíð. Við støði í lønarútgjaldingunum fyri mars 2016 grannskoðaðu vit trý lønarmál. Onki var at finnast at.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit roknskaparskjøl, um tey hoyra til stovnin og eru konterað sambært galdandi reglum. Onki var at finnast at.

### Uttanlands ferðauppgerðir
Landsgrannskoðanin mælti til at fylla út allar teigar á oyðublaðnum til ferðauppgerðir uttanlands og at leggja við innbjóðing, skrá e.l. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar.

### Gjaldkort
Skrivstovufulltrúin hevur gjaldkortið hjá ráðnum um hendi, og heimildarváttan er til gjaldkortið.

### KT viðurskifti
Fíggjarmálaráðið hevur ongar KT skipanir, sum liggja uttan fyri Landsnet.

Vit kannaðu, hvørji starvsfólk hava atgongd til at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 3.4 Reglur um matstovur (LG 2014/203-0111)

Í frágreiðing okkara februar 2006 umrøddu vit ymiskar starvsfólkaútreiðslur, m.a. um stovnar og aðalráð rindaðu ískoyti til rakstur av matstovu. Fýra stovnar, herímillum Fíggjarmálaráðið, svaraðu tá, at stovnurin rindaði ískoyti til rakstur av matstovu.

***Ongar reglur um starvsfólkamatstovur.***

Í 2010 staðfestu vit, at ongar reglur vóru gjørdar um matstovuvirksemi. Í januar 2010 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum umsat økið. Løgmansskrivstovan heitti í 2010 og 2011 á Fíggjarmálaráðið um at skipa so fyri, at dagførdar reglur vórðu gjørdar fyri matstovuvirksemi.

Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið hevði gjørt uppskot til rundskriv um starvsfólkamatstovur, sum hevði verið til hoyringar hjá stjórnarráðunum og stovnum. Fíggjarmálaráðið ætlaði at gera neyðugu tillagingarnar sambært hoyringsskrivunum, soleiðis at rundskrivið um starvsfólkamatstovur kundi verða sett í gildi á heysti 2016.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016), mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at ætlanin er at seta rundskriv um starvsfólkamatstovur í gildi innan árslok.

## 3.5 Gjaldstovan (LG 2016/203-0151)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Gjaldstovuni og KT Landsins.

Gjaldstovan er fyrisitingarliga skipað undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Sambært lýsingini av Gjaldstovuni í fíggjarlógini kunnu ábyrgdarøkini hjá Gjaldstovuni liðast á hesar høvuðsuppgávur:

- Landsins roknskaparhald og at gera landsroknskap.
- Føra bókhald og at avgreiða lønir fyri aðrar stovnar, grunnar og samstørv.
- Lønarfyrisiting og lønarbókhald.
- Allar inn- og útgjaldingar landskassans vegna.
- Undirvísa í m.a. skipanum og roknskaparverki.
- Menna, viðlíkahalda og reka Búskaparskipan landsins og Landsnet.
- Umsita verkætlanina Talgildu Føroyar.
- KT trygdarfyriskipanir undir Fíggjarmálaráðnum.
- Felagsfyrisiting í bygninginum á Kvíggjartúni 1.

Gjaldstovan sum stovnur er ikki skipað við lóg, men partar av virkseminum eru skipaðir við Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” og K. nr. 22/2007 “um landsins almenna roknskaparhald”.

***KT landsins er deild hjá Gjaldstovuni.***

Í 2009 varð KT Landsins (Landsnet) flutt til Gjaldstovuna at umsita. KT Landsins hevur egna játtan í fíggjarlógini, og umsitingin er fastløgd í serligari avtalu við Fíggjarmálaráðið. KT Landsins er nú deild hjá Gjaldstovuni og hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

Tá ið Landsbankin varð niðurlagdur í 2013, varð ognar- og skuldarfyrisitingin hjá Landsbankanum flutt til deild undir Gjaldstovuni, nevnd Fígging landsins. 1. januar 2017 vórðu hesar uppgávur fluttar aftur til endurstovnaða Landsbankan.

***Talgildu Føroyar flutt til Gjaldstovuna.***

Í 2016 varð verkætlanin Talgildu Føroyar flutt til Gjaldstovuna at umsita. Talgildu Føroyar er ein verkætlan, sum arbeiðir við at menna eitt talgilt undirstøðukervi í Føroyum, soleiðis at tað verður lættari fyri bæði borgarar og myndugleikar at samskifta við dátum. Verkætlanin hevur egna játtan í fíggjarlógini.

## Roknskaparviðurskifti

Virksemið hjá Gjaldstovuni verður fíggjað við játtan í fíggjarlóg og inntøkum av tænastuveitingum o.ø. Roknskapartøl 2012 til 2016, høvuðskonta 3.15.1.07.:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir | 14.312 | 16.707 | 17.863 | 18.780 | 19.925 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 10.569 | 11.640 | 13.308 | 11.274 | 12.156 |
| 15 | Keyp av útbúnaði | 1.784 | 2.729 | 1.053 | 2.718 | 3.286 |
| 16-19 | Leiga, viðlíkah., skattur o.a. | 241 | 265 | 184 | 935 | 648 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -408 | -1.110 | -1.368 | -1.536 | -1.668 |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | 15 | 0 | 5 | 0 | 0 |
| 71-76 | Innanh. flytingar ml. alm. stovn. | -638 | -206 | -664 | -1.288 | -3.147 |
| 77 | Flyting frá kommunum til landið | 0 | 0 | 0 | -951 | -1.246 |
| | **Tilsamans** | **25.875** | **30.025** | **30.381** | **29.933** | **29.954** |
| | Nettojáttan | 25.880 | 30.025 | 30.380 | 29.980 | 29.968 |

Virksemið hjá KT Landsins verður fíggjað við játtan í fíggjarlóg og inntøkum av tænastuveitingum. Roknskapartøl 2012 til 2016, høvuðskonta 3.38.3.19.:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir | 4.439 | 4.381 | 3.178 | 3.520 | 3.455 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 10.813 | 14.224 | 16.558 | 16.402 | 17.334 |
| 15 | Keyp av útbúnaði | 792 | 77 | 119 | 1.040 | 666 |
| 16-19 | Leiga, viðlíkah., skattur o.a. | 45 | 58 | 0 | 10 | 0 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -11.873 | -13.665 | -15.438 | -17.488 | -18.122 |
| 71-76 | Innanh. flytingar ml. alm. stovn. | 200 | -655 | 0 | 500 | 1.187 |
| | **Tilsamans** | **4.416** | **4.420** | **4.417** | **3.984** | **4.520** |
| | Nettojáttan | 4.420 | 4.420 | 4.400 | 4.400 | 4.540 |

Roknskaparreglugerðin er góðkend av Fíggjarmálaráðnum í 2001 og er ikki dagførd. Gjaldstovan hevur gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð eftir nýggjum leisti, sum stovnurin sjálvur hevur gjørt, og sum eftir ætlan skal gerast til eitt nýtt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í august 2017 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at ráðið fer at gjøgnumganga uppskotið til dagført roknskaparrundskriv og til dagførda roknskaparreglugerð saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tey kunnu verða sett í gildi og góðkend í heyst.

Stjórin á Gjaldstovuni hevur góðkent mánaðaroknskapirnar fyri 2016, hann varar av, uttan fyrivarni og til tíðina.

Gjaldstovan nýtir journalskipanina 360. Formligt samskifti verður journaliserað. Stórur partur av samskiftinum við stovnar er roknskaparskjøl; tey verða viðløgd sum skjøl í Búskaparskipan landsins. Umframt journalskipanina nýtir Gjaldstovan Sharepoint at goyma projektdokumentatión. Sambært Gjaldstovuni eru reglur um, hvat skal journaliserast, gjørdar í uppskotinum til nýggja roknskaparreglugerð.

Ognaryvirlitið er dagført. Í yvirlitinum er innbúgv og KT útbúnaður skrásett fyri hvørt rúm sær.

***Ognaryvirlitið hjá Gjaldstovuni er dagført.***

### Roknskaparskjøl

Landsgrannskoðanin hevur hugt at ferðauppgerðum innanlands. Flestu útreiðslurnar eru til koyripening og hýruvognar. Landsgrannskoðanin mælti til, at avroknað verður meira javnan. Sambært Gjaldstovuni verður tað gjørt hereftir.

Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar ferðauppgerðir fyri uttanlandsferðir 2016. Vit vístu á smávegis feilir í dagpengum og endurgjaldi fyri útreiðslur til mat.

Sambært fleiri ferðauppgerðum hevði Gjaldstovan rindað fyri Airport taxa. Sambært leiðreglunum frá Fíggjarmálaráðnum skal almenna ferðasambandið nýtast, har tað er møguligt. Gjaldstovan greiddi frá, at í nøkrum førum er trupult at nýta almenna ferðasambandið, og í øðrum førum er møguligt at spara arbeiðstíð, tá hýruvognur heintar starvsfólk á arbeiðsstaðnum. Verður bussur nýttur, er neyðugt at taka hýruvogn til bussteðgiplássið, og tá er ongin prísmunur.

***Gjaldstovan rindar fyri Airport taxa, hóast reglur um at nýta almenna ferða-sambandið.***

Í august 2017 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið tekur undir við, at Airport taxa verður nýtt sum ferðasamband at koma á flogvøllin, tí prísurin nøkulunda samsvarar við kostnaðin at fara við hýruvogni frá bústaði ella arbeiðsplássi til farstøðina, fyri síðani at fara við bussi hjá Bygdaleiðum á flogvøllin. Ráðið umhugsar at hava orðing um Airport taxi við í næstu dagføring av leiðreglunum.

***Fíggjarmálaráðið umhugsar at dagføra leiðreglurnar***

Starvsfólkini nýta fartelefonir í sambandi við arbeiðið. Gjaldstovan rindar upp til 2.000 kr. fyri hvørt starvsfólk at keypa telefon fyri. Kostar telefonin meira, rinda starvsfólk munin. Starvsfólkini eiga telefonirnar og kunnu nýta tær til privata nýtslu. Gjaldstovan rindar fasta gjaldið fyri fartelefonirnar. Leiðarar og ávís onnur starvsfólk hava fría telefon. Á einum kekklista hevur Gjaldstovan áseting um at siga fartelefonhaldið upp, tá fólk fara úr starvi.

Gjaldstovan og KT Landsins fáa í fleiri førum endurgjald fyri útlegg. Gjaldstovan fær m.a. endurgjald fyri at umsita lønir hjá eldrasamstørvunum og fyri útlegg av lønarseðlum/útgjøldum. KT Landsins fær endurgoldið útlegg fyri teldur, sambond, veitarauppgávur og brúkaragjøld/teldugjøld.

Gjaldstovan fær eisini inntøkur av at skipa fyri skeiðum. Á flestu skeiðunum undirvísa starvsfólk á Gjaldstovuni, men Gjaldstovan hevur eisini avtalu við veitara um nøkur skeið.

Prísurin fyri skeiðini, sum starvsfólk á Gjaldstovuni undirvísa í, verður ásettur út frá eini meting, at tað ikki er ov dýrt at koma á skeið. Nøkur skeið eru ókeypis. Skeiðini frá veitaranum eru útreiðsluneutral. Starvsfólk, sum undirvísa, fáa 100% oman á lønina fyri tímarnar, tey undirvísa. Orsøkin er, at talan er um eina truplari uppgávu, enn fólkini eru sett til. Stjórin og deildarstjórar fáa ikki hesa samsýning.

Gjaldstovan hevur sett reglur um samsýning fyri undirvísing í uppskotinum til nýggja roknskaparreglugerð.

Gjaldstovan fylgir rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum. Stjórin greiddi tó frá, at tá talan er um ávísar skipanir, er Gjaldstovan bundin at veitarum. Um onkur meirveiting skal keypast til hesar skipanir, er tað so at siga ógjørligt at fáa tað gjørt av

***Gjaldstovan hevur bjóðað næstan allar skipanir út.***

øðrum enn teimum, sum upprunaliga hava ment skipanina. Upprunaliga hevur Gjaldstovan bjóðað næstan allar tær stóru skipanirnar út.

Í august 2017 sigur Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Gjaldstovuna um, "*at tá talan er um viðlíkahald ella menning av størri KT-skipanum, er støðan oftani tann, at man er bundin at veitaranum. Eitt líknandi undantak finst í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum, og tó at tað ikki beinleiðis verður nevnt nakað um KT-skipanir, kann henda áseting analogt verða tulkað at eisini vera galdandi fyri størri KT-skipanir. Herumframt er møguleiki fyri at senda fyrispurning til keypsportalin um undantak. Rundskrivið um keyp av vørum og tænastum verður javnan dagført, og fer Fíggjarmálaráðið at umhugsa at taka við áseting um undantak viðvíkjandi viðlíkahaldi ella menning av størri KT-skipanum til næstu dagføring*".

## KT viðurskifti

Gjaldstovan hevur skipanir og dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin og samfelagið sum heild. Mest avgerandi eru Búskaparskipan landsins, Felags lønarskipanin og Landsnet. Hesar skipanir verða umsitnar av Elektron og Formula og eru undir trygdartiltøkunum, sum eru sett upp sambært krøvum, sum Gjaldstovan hevur avtalað við veitararnar. Avtalurnar verða grannskoðaðar av privatum grannskoðara.

Formula skipar fyri trygdartiltøkunum viðvíkjandi journalskipanini. Allar teldurnar hjá stovninum eru knýttar í Landsnet.

Landsgrannskoðanin hevur fingið avrit av dátuflokking, KT trygdarpolitikki og KT trygdarleiðreglunum hjá Gjaldstovuni. Sambært dátuflokkingini hevur Gjaldstovan ongar "ógvuliga kritiskar" dátur.

Í KT trygdarleiðreglunum verður m.a. nevnt: at

- KT trygdarpolitikkurin og váðametingin til trygdarpolitikkin skal endurskoðast eina ferð um árið. Sambært Gjaldstovuni varð tað gjørt í 2016, og í 2017 verður tað gjørt aftur.
- Gjaldstovan hevur eina tilbúgvingarætlan, sum skal roynast eina ferð um árið. Sambært Gjaldstovuni var tilbúgvingarætlanin seinast roynd í februar 2017, og royndin gekk væl.
- Trygdaravritini verða roynd javnan eftir einari fastari ætlan sambært avtalunum við veitararnar. Royndirnar hava víst, at trygdaravrit verða tikin, sum avtalað.
- KT nýtsla, frávik og trygdarhendingar verða loggaðar. Sambært Gjaldstovuni er talan um nógvar ymiskar loggar og ymsar mannagongdir at handfara teir. Higartil hevur Gjaldstovan ikki gjøgnumgingið loggar systematiskt, men arbeitt verður við at greina, hvørjir loggar brúk er fyri, og hvussu teir skulu gjøgnumgangast. Arbeiðið verður liðugt í ár (2017).

Leiðarar og ávís starvsfólk hava atgongd til stovnsnetið heimaníframá. Stjórin skal í hvørjum einstøkum føri góðkenna, um starvsfólk skulu hava atgongd heimaníframá. Sambandið verður bronglað. Atgongdin er váðamett. Gjaldstovan rindar fyri internet hjá stjóra og nøkrum starvsfólkum.

***Gjaldstovan hevur kekklista til at tryggja, at starvsfólk hava røttu atgongdirnar til skipanirnar.***

Gjaldstovan hevur kekklista, sum skal tryggja, at starvsfólk hava røttu atgongdirnar til skipanirnar, og at rættindini hjá starvsfólkum, sum fara úr starvi, verða strikað. Landsgrannskoðanin fekk yvirlit yvir, hvørji rættindi starvsfólk á Gjaldstovuni hava í Rokningaverkgongdarskipanini. Onki var at finnast at.

## Lønir og tíðarskráseting

Landsgrannskoðanin hevur kannað lønarumsitingina hjá Gjaldstovuni. Gjaldstovan skrásetir ikki, hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar. Ábyrgdarpersónar fylgja við, at lønirnar eru rættar sambært setanarskrivum, prógvum o.ø., og deildarleiðarar skulu góðtaka broytingar.

Stjórin kannar lønarbókingarlistan, hvørja ferð leysar lønir verða útgoldnar. Broyting í føstum lønum er partur av roknskapargóðkenningartilgongdini. Roknskaparleiðarin kannar í leiðslukunningarskipanini, um onnur enn starvsfólk hava fingið løn.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað 4 starvsfólkamál við støði í lønarútgjaldingini í oktober 2016. Onki var at finnast at.

Gjaldstovan nýtir klokkuskipanina Totalview. Starvsfólk skráseta, nær tey koma og fara, feriur o.a. Gjaldstovan hevur reglur um flexsaldu +32/-16 tímar. Nøkur starvsfólk høvdu størri tímasaldur, enn innanhýsis reglurnar áseta. Gjaldstovan hevur eftirsíðan kunnað um, at saldan hjá nøkrum starvsfólkum er farin niður um markið, og hjá øðrum er avtala gjørd um, hvussu saldan skal minkast. Gjaldstovan hevur eisini gjørt av, at tímasaldur verða partur av mánaðarliga eftirlitinum.

### Ófráboðað kassaeftirlit

Í januar 2017 hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á Gjaldstovuni. Eftirlitið umfataði tveir kassar. Samsvar var millum talda peningin, saldurnar í Búskaparskipan landsins og kassauppgerðirnar. Onki var at finnast at.

## 3.6 TAKS (LG 2016/203-0151)

TAKS virkar sambært Ll. nr. 169/1997 “um Toll- og skattafyrisiting”, sum ásetir yvirskipaðar reglur fyri stovnin og reglur um toll- og skattafyrisitingina.

TAKS er fyrisitingarliga skipað undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Fremsta endamálið hjá stovninum er at tryggja tí almenna skatta- og avgjaldsinntøkur og at fyribyrgja ólógligum inn- og útflutningi sambært galdandi lógum. Umframt hesar uppgávur skal TAKS eisini:

- umsita frítíðarløn og trygdargrunn løntakaranna, Barsilsskipanina og FAS skipanina,
- krevja inn gjøld til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Vinnusjúkugrunnin, og at gjalda út úr grunnunum,
- krevja inn gjøld til Arbeiðsloysisskipanina, Heilsutrygd og Kringvarpið,
- krevja inn almenna skuld, og
- umsita stuðulslóggávu og gera lóggávuarbeiði fyri Fíggjarmálaráðið, og ráðgeva um galdandi lóggávu og onnur viðurskifti á skatta- og avgjaldsøkinum.

TAKS hevur gjørt mál- og avrikssáttmála við Fíggjarmálaráðið fyri 2016. Sambært stjóranum kann sáttmálin nýtast sum stýringaramboð, serliga hjá eftirlitsdeildunum. TAKS hevur kvartárligar fundir við Fíggjarmálaráðið um gongdina.

***TAKS hevur mál- og avrikssáttmála fyri 2016.***

### Roknskaparviðurskifti

Virksemið hjá TAKS verður fíggjað við játtan í fíggjarlóg og inntøkum av tænastuveitingum o.ø. Roknskapartøl 2012 til 2016:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir | 50.559 | 50.857 | 50.118 | 50.407 | 52.094 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 26.781 | 20.627 | 21.464 | 21.540 | 23.257 |
| 15 | Keyp av útbúnaði | 7.628 | 12.547 | 9.236 | 7.785 | 6.082 |
| 16-19 | Leiga, viðlíkah., skattur o.a. | 2.014 | 2.609 | 1.801 | 1.985 | 2.775 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -3.510 | -3.480 | -3.346 | -3.120 | -3.325 |
| 25 | Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -56 | -108 | -160 | -175 | -140 |
| 62 | Kravd gjøld, bøtur o.a. | -7.093 | -7.473 | -7.722 | -8.199 | -9.797 |
| 64 | Aðrar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | -6.048 | 0 |
| 71-76 | Innanh. flytingar ml. alm. stovn. | -3.573 | -4.315 | -4.017 | -4.492 | -5.688 |
| | **Tilsamans** | **72.750** | **71.264** | **67.374** | **59.683** | **65.258** |
| | Nettojáttan | 72.757 | 71.287 | 68.270 | 59.755 | 65.288 |

Nettojáttanin til TAKS 2012 til 2016 hevur ligið millum 59,8 mió.kr. og 72,8 mió.kr. Játtanin minkaði árini 2012 til 2015, men vaks nakað aftur í 2016.

***Roknskaparreglugerð er dagført í juni 2016.***

Roknskaparreglugerðin er dagført í juni 2016.

Stovnurin hevur gjaldkort, sum fyri tað mesta verður nýtt til ferðir. TAKS hevði ikki biðið Gjaldstovuna um loyvi til at hava gjaldkort. TAKS hevur nú biðið Gjaldstovuna um loyvi til gjaldkort.

***TAKS brúkar avstemmingslistar, kekklistar o.a. sum grundarlag undir góðkenning av mánaðar-roknskapinum.***

Í tíðarskeiðnum 2015 til 2016 hevur TAKS góðkent mánaðaroknskapirnar rættstundis og uttan fyrivarni. Sambært TAKS nýta tey avstemmingarlistar, kekklistar o.a. sum grundarlag undir góðkenningini.

TAKS nýtir journalskipanina 360. Í nøkrum ávísum førum verður teldupostur ikki journaliseraður. Landsgrannskoðanin mælti til, at allur postur viðvíkjandi TAKS verður journaliseraður.

TAKS hevur ognaryvirlit yvir innbúgv, bilar, teldur og telefonir. Útbúnaður, har keypsvirðið er hægri enn 75 t.kr. verður skrásettur í Búskaparskipan landsins.

### Roknskaparskjøl

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar ferðauppgerðir fyri ferðir uttanlands. Sum heild var onki at finnast at, men vit mæltu til, at øll viðkomandi skjalprógv verða løgd við, so sum skrá fyri skeiðum, seminarum o.t., umframt skjalprógv fyri staðfestar útreiðslur. TAKS er samt við tilmælinum.

***TAKS hevur keypt jakkar til starvsfólkini.***

TAKS hevur í november 2015 keypt 121 jakkar fyri 137 t.kr. eftir at hava biðið um tilboð frá 3 veitarum. Stjórin kunnaði um, at talan var um arbeiðsjakkar til starvsfólkini. Starvsfólkini hava loyvi at nýta jakkarnar, sum tey hava hug til.

Ongar greiðar reglur eru um gávur til starvsfólk, undantikið rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 12. desember 2008 um gávur til starvsfólk á serligum starvsdøgum. Landsgrannskoðanin mælti Fíggjarmálaráðnum til at áseta reglur á økinum.

Í august 2017 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið hevur ikki ætlanir um at áseta reglur um gávur til starvsfólk ella starvsfólkarøkt. Fíggjarmálaráðið metir, at tað ikki er óvanligt og heldur ikki órímiligt, at stovnsleiðslur nýta ein part av játtanini til starvsfólkarøkt. Júst hvørjar upphæddir, og júst hvat kemur undir starvsfólkarøkt er trupult at nágreina. Tí mugu stovnsleiðarar duga at vísa hógv, og um teir ikki duga tað, góðtaka at verða tiknir fram sum dømi um óhóskandi fíggjarligan atburð.

### Inntøkur

TAKS fær inntøkur fyri ymiskar tænastur, m.a. áminningargjøld, pantigjøld, tænastugjøld, reinførisváttanir og avgreiðslu- og ómaksgjøld. Í 2015 vóru tær inntøkurnar 8,2 mió.kr. Heimildir fyri inntøkunum eru í lógum, kunngerðum og í rundskrivi. Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at tað var ivasamt, um TAKS hevði heimild at krevja ómaksgjald frá vinnukundum fyri ikki at nýta hentleikarnir í Vinnuglugganum.

Í august 2016 kunnaði Landsstýrismaðurin um, at arbeitt verður við uppskoti um broyting í meirvirðisgjaldslógini. Heimild at taka ómaksgjald fyri ikki at nýta Vinnugluggan verður partur av lógarbroytingini.

TAKS fær flytingar frá øðrum stovnum, m.a. í sambandi við at umsita Barsilsskipanina, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og innkrevjing av kringvarpsgjaldi.

### KT viðurskifti

TAKS hevur skipanir og dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin og samfelagið sum heild. Tær mest avgerandi skipanirnar eru skattaskipanin, Vinnugluggin og Borgaragluggin. Tær verða umsitnar av Elektron og eru undir trygdartiltøkunum hjá teimum. Trygdartiltøk og skipanir á Elektron verða grannskoðað av privatum grannskoðara. TAKS umsitur ikki viðkvæmar persónsupplýsingar, burtursæð frá ávísum upplýsingum í HR-skipanini.

Journalskipanin er eisini ein týdningarmikil skipan hjá TAKS. Formula skipar fyri trygdartiltøkunum viðvíkjandi journalskipanini.

Teldurnar á TAKS eru knýttar í Landsnet, og eru tær undir trygdartiltøkunum hjá Landsneti.

***TAKS hevur gjørt KT váðametingar av øllum skipanum.***

Leiðarar og KT fólk hava saman gjørt KT váðametingar av øllum skipanum. Skipanirnar blivu gjøgnumgingnar í 2015. TAKS hevur eisini havt KT trygdarvenjing.

***TAKS hevur havt trygdarvenjing.***

TAKS hevur kekklista, sum skal tryggja, at starvsfólk hava røttu atgongdirnar til skipanirnar, og at rættindini hjá starvsfólkum, sum fara úr starvi, verða strikað.

Landsgrannskoðanin hevur fingið útskrift yvir brúkararættindi í Búskaparskipan landsins og HR-skipanini hjá TAKS. Onki var at finnast at.

### Lønir og tíðarskráseting

TAKS skrásetir ikki, hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar, men lønirnar verða skrásettar fyri hvørja deild.

Stjórin kunnaði um, at TAKS hevur gjørt avtalu við Starvsmannafelagið og Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum um ein karm, sum leiðslan kann innplasera lønir hjá starvsfólkum, uttan at spyrja um loyvi í hvørjum einstøkum føri.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum 5 starvsfólkamál. Í nøkrum málum vóru ikki øll viðkomandi skjøl. Landsgrannskoðanin mælti til, at TAKS goymir øll viðkomandi skjøl í sambandi við starvsfólkasetanir.

TAKS nýtir klokkuskipanina Totalview. Har verður skrásett, nær starvsfólk koma og fara, feriur o.a. TAKS hevur reglur um flexsaldu +37/-15 tímar. Áløgd yvirtíð kann gjaldast út.

Undantiknir nevndu reglum eru tollarar, sum arbeiða í vaktum. Hjá teimum heldur deildarleiðarin skil á tímunum og skipar fyri, at meirtíð verður rindað út.

***50 fólk høvdu størri tímasaldur, enn loyvt.***

Uppgerð yvir tímasaldur og feriur vísti, at um 50 starvsfólk høvdu størri tímasaldur, enn reglurnar áseta. Landsgrannskoðanin heldur tað vera í meira lagi. TAKS er samt við Landsgrannskoðanini.

Avtalur um at flyta 6. fríviku til eftirfylgjandi feriuár eru ikki skrivligar. Landsgrannskoðanin mælti til, at TAKS ásetir reglur um tímasaldur og feriu í roknskaparreglugerðini, og at skrivlig avtala verður gjørd, tá ið 6. frívika verður flutt.

## 3.7 Kervisskoðan

### 3.7.1 Kervisskoðan hjá TAKS

Grundarlagið undir samstarvinum millum TAKS og P/f Elektron er ein sáttmáli frá 1999. Tað eru síðani gjørdar rættingar og uppískoyti til sáttmálan, og í desember 2015 varð ein ískoytisavtala gjørd.

*Ein brúkaraskipan skoðað síðani 2004.*

*Húsaleiguskipanin skoðað í 2016.*

*Skattauppgerðin ætlandi skoðað í 2017.*

Í mai 2004 góðkendu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisskoðarin á Elektron avtalu um kervisskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru á Elektron.

Í avtaluni er ásett, at kervisskoðarin skal skoða eina brúkaraskipan um árið. Í 2016 var Húsaleiguskipanin skoðað, og er tað fyrsta skipanin, sum er skoðað síðani 2004. Tær serskipanir, sum higartil eru skoðaðar, eru Húsaleiguskipanin, eTollur og Innkrevjingarskipanin. KT trygdarleiðarin á Gjaldstovuni og TAKS hevur kunnað um, at skattauppgerðin verður skoðað í 2017.

Avtalan frá 2004 fevnir um tann partin av teldukervinum, sum Elektron hevur ábyrgdina av, men ikki um brúkaraumsiting, mannagongdir o.a hjá TAKS. Átekningar frá kervisskoðaranum eru tí treytaðar av, at mannagongdir og skipanir hjá TAKS eru tryggar.

## Frágreiðingar um kervisskoðan

Fyri árið 2016 hevur TAKS útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av trimum frágreiðingum. Tær eru:

- Frágreiðing 2016, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri TAKS.
- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri TAKS í 2016.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri árið 2016 í mun til SLA-avtalu við TAKS.

Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisskoðarin ítøkilig tilmæli.

Við árslok 2016 hevði kervisskoðanin tilsamans 6 óloyst tilmæli, av teimum høvdu 5 miðal raðfesting og eitt lága raðfesting. Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisskoðanini árini 2012 til 2016:

| Óavgreidd tilmæli árslok | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Høg raðfesting | 2 | 2 | 2 | 0 | 0 |
| Miðal raðfesting | 4 | 6 | 2 | 6 | 5 |
| Lág raðfesting | 4 | 3 | 3 | 1 | 1 |
| **Tilsamans** | **10** | **11** | **7** | **7** | **6** |
| Av hesum eldri enn eitt ár | 9 | 8 | 7 | 1 | 6 |

Niðurstøðan hjá kervisskoðaranum er, at:

*Skjalfestingin av skipanum hjá TAKS ikki fullfíggjað og talgild.*

*"Gjøgnumgongdin av útvaldum økjum innan almennar KT eftirlitsskipanir vísti, at skjalfestingin av týðandi skipanum hjá TAKS framvegis ikki er fullfíggjað og talgild. Arbeiðið við at skjalfesta skipanirnar hevur tó verið í gongd í eina tíð, og er væl ávegis. Kervisgrannskoðanin metir, at hetta arbeiðið framhaldandi eigur at raðfestast høgt, men tað er ein sannroynd, at tað er tíðarkrevjandi at gera fullfíggjaða skjalfesting til tíggjutals KT skipanir.*

*Arbeiðið at skjalfesta er í gongd.*

*Í árinum hava vit staðfest, at skipanir eru blivnar skjalfestar í árinum, og eitt av teimum seks tilmælunum um at fullfíggja skjalfesting er loyst, við tað at MVG-skipanin varð mett at vera vorðin skjalfest á nøktandi hátt sambært valda leistinum. Ongin veikleiki varð staðfestur, sum gav orsøk til nýggj tilmæli.*

*Sum heild er niðurstøða okkara, at - burtursæð frá teimum viðmerktu viðurskiftunum – er eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur sum TAKS nýtir, nøktandi, og at krøvini í avtaluni partanna millum hava verið yvirhildin av Elektron í tíðarskeiðnum".*

Í oktober 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS áhaldandi arbeiddi við at loysa grannskoðanartilmælini. Ein ætlan var gjørd fyri at skjalfesta skipanirnar. Ein triðingur av arbeiðinum var gjørdur, og væntast skuldi, at tað fór at taka 2-3 ár afturat at gera

arbeiðið liðugt. Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at fylgja málinum neyvt og var annars nøgdur við, at støðug gongd er í málinum at avgreiða tilmæli frá kervisskoðaranum.

#### Úrslit av grannskoðanini av Húsaleiguskipanini

Sambært kervisgrannskoðaranum vísti grannskoðanin av Húsaleiguskipanini, at trygdar- og eftirlitsstøðið í skipanini sum heild er nøktandi, og at skipanin tryggjar rætta, fullfíggjaða og stundvísa viðgerð, treytað av ávísum manuellum eftirlitum, sum starvsfólkini á TAKS skulu fremja, og sum eisini hava verið framd. Grannskoðarin hevði tvey tilmæli, sum nú eru loyst.

***Grannskoðanin av Húsaleiguskipanini hevði tvey tilmæli, sum nú eru loyst.***

### 3.7.2 Kervisskoðan hjá Gjaldstovuni

Í sambandi við at Gjaldstovan hevur útveitt KT skipanirnar til Elektron, er ein rakstrar- og viðlíkahaldsavtala (SLA) gjørd millum partarnar. Í tí sambandi varð í 2009 gjørd ein avtala um grannskoðan millum Gjaldstovuna, Elektron og innanhýsis kervisskoðanina á Elektron, sum m.a. ásetir, at tey hvørt ár gjøgnumganga generellu KT kontrollarnar. Grannskoðanin av KT kontrollunum á Elektron tekur støði í rakstrar- og viðlíkahalds-avtaluni millum Elektron og Gjaldstovuna frá 2012.

Fyri árið 2016 hevur kervisskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT viðurskiftini millum Gjaldstovuna og Elektron:

- Frágreiðing 2016, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá Føroya Gjaldstovu fyri árið 2016.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at fýra manglar ella veikleikar vórðu staðfestir. Kervisskoðarin heldur, at øll fýra tilmælini hava miðal raðfesting. Onki nýtt tilmæli var givið í 2016, og onki tilmæli er avgreitt. Øll tilmælini eru eldri enn eitt ár.

Hóast manglarnar er niðurstøðan hjá kervisskoðaranum, at sum heild er trygdar- og eftirlitsstøðið um skipanir og dátur, sum Gjaldstovan nýtir hjá Elektron, nøktandi.

***Hóast manglar, er trygdar- og eftirlits-støðið nøktandi.***

### 3.7.3 Kervisskoðan hjá KT landsins

Kervisskoðarin hjá Elektron hevur í 2015 grannskoðað generellu KT kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT landsins og kundar tess. Kervisskoðarin hevur eisini grannskoðað KT kontrollarnar v.m. í sambandi við KT tænastur, sum Formula veitir KT landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA avtalum millum partarnar.

#### P/f Elektron

Kervisskoðarin hevur fyri árið 2016 gjørt tvær frágreiðingar um KT viðurskiftini millum KT landsins og Elektron:

- Frágreiðing 2016, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri KT landsins.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá KT landsins fyri árið 2016.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at tveir manglar ella veikleikar vórðu staðfestir, annar við miðal raðfesting, og hin við lágari raðfesting. Síðani 2014 er eitt nýtt tilmæli komið, og eitt tilmæli er avgreitt. Eitt tilmæli er eldri enn eitt ár.

***Yvirhøvur er trygdar- og eftirlitsstøðið nøktandi.***

Tá sæð verður burtur frá nevndu manglum og veikleikum, heldur kervisskoðarin, at yvirhøvur er eitt nøktandi trygdar- og eftirlitsstøði skipað við atliti at skipanum og dátum, sum viðvíkja KT landsins. Kervisskoðarin heldur eisini, at Elektron hevur hildið krøvini í SLA-avtaluni í tíðarskeiðnum.

**P/f Formula**

Formula og KT landsins hava gjørt nýggja SLA-avtalu galdandi frá 1. september 2016, sum ásetir tænastustøðið fyri veitingina. Kervisskoðarin hevur fyri árið 2016 gjørt tvær frágreiðingar um KT viðurskiftini millum KT landsins og Formula:

- Frágreiðing um kervisskoðan, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum hjá Formula fyri árið 2016.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT landsins fyri árið 2016.

***Ávís viðurskifti eiga at verða betrað, men samanumtikið er trygdar- og eftirlits-støðið nøktandi***

Úrslitið av kervisskoðanini er, at 17 manglar ella veikleikar vórðu staðfestir, 2 við høgari raðfesting, 9 við miðal raðfesting og 6 við lágari raðfesting. Í 2016 eru 8 nýggj tilmæli, harav 2 við høgari raðfesting. 5 tilmæli eru avgreidd.

Kervisskoðarin sigur m.a.:
*"Grannskoðanin hevur tó eisini staðfest, at fleiri veikleikar framvegis eru til staðar, sum hava við sær, at málini í ISO-standardinum og SLA-avtaluni ikki kunnu metast at vera uppfylt á nøktandi hátt. 10 tilmæli, sum givin vórðu í 2012, eru framvegis opin, harav 6 miðal raðfest, og 4 lágt raðfest. Grannskoðanin hevur víst, at tørvur framvegis er á at skipa trygdararbeiðið og ítøkiligu trygdareftirlitini betur, til tess at tryggja, at neyðugar uppgávur eru framdar einsháttað og skjalfest."*

Samanumtikið er niðurstøðan hjá kervisskoðaranum tó, at við undantaki av nevndu veikleikunum eru almennu KT eftirlitsskipanirnar á einum trygdargóðum støði.

### 3.7.4 KT eftirlitsskipanir á Føroya Gjaldstovu og KT landsins

Kervisskoðarin hevur gjørt avtalu við Gjaldstovuna og KT landsins um at grannskoða innanhýsis KT viðurskifti og KT stýring hjá Gjaldstovuni og KT landsins, eins og tað verður gjørt fyri KT veitararnar. Endamálið er m.a. at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT eftirliti eru í samsvari við trygdar-ásetingarnar hjá Gjaldstovuni og KT landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Úrslitið av grannskoðanini er, at 15 manglar og veikleikar eru staðfestir, 3 við miðal raðfesting og 12 við lágari raðfesting. Síðani grannskoðanina fyri 2015 eru 3 nýggj tilmæli givin, og 7 eru avgreidd.

***Fleiri tilmæli eru loyst, so trygdar- og eftirlitsstøðið nú er nøktandi.***

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at Gjaldstovan og KT landsins hava gjølla og nøktandi stýring av sínum KT umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Grannskoðanin hevur víst, at Gjaldstovan og KT landsins hava loyst fleiri av tilmælunum, ið vórðu givin stovnunum til seinastu grannskoðan. Samanumtikið er niðurstøðan, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni og KT landsins, við undantaki av nevndu veikleikunum, er nøktandi.

## 3.8 Hagstova Føroya (LG 2015/203-0152)

Í seinastu ársfrágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á fleiri roknskaparviðurskifti hjá Hagstovuni, sum ikki vóru nøktandi.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at tryggja, at viðurskiftini vórðu fingin í rættlag.

Hagstovan hevði roknskaparreglugerð, sum var góðkend av Fíggjarmálaráðnum í juni 2005. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra reglugerðina.

Í august 2016 tók landsstýrismaðurin undir við, at tørvur var á at dagføra roknskaparrundskrivið, soleiðis at roknskaparreglugerðir kunnu gerast við støði í mannagongdum og virksemisheitum í verandi roknskaparverkgongd.

***Ognaryvirlitið ikki dagført.***

Hagstovan hevði bert ognaryvirlit yvir teldur og telefonir. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir mælt til, at ognaryvirlit verður gjørt og dagført regluliga.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at so skjótt sum tøkniliga menningin av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins er framd, fer Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna um at dagføra ognaryvirlitið.

Vit mæltu til at lýsa lønarumsitingina í roknskaparreglugerðini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, sjúka o.a. verður skrásett.

Vit fingu uppgerð yvir tímasaldur og feriur hjá teimum, ið nýttu klokkuskipanina. Fleiri starvsfólk høvdu stórar tímasaldur. Landsgrannskoðanin mælti til, at Hagstovan ásetti reglur um tímasaldur í roknskaparreglugerðini.

Landsgrannskoðanin mælti eisini til at lýsa mannagongdirnar um at krevja ómaksgjøld og at avskriva í roknskaparreglugerðini.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin víst á, at broyting í roknskaparkunngerðini um lønarútreiðslur, tíðaravmarking og tíðarskráseting er komin í gildi. Enn vantar hjá Fíggjarmálaráðnum at gera rundskriv um arbeiðstíð. Fíggjarmálaráðið fer, so skjótt sum roknskaparrundskrivið er dagført, og rundskriv um arbeiðstíð er gjørt, at heita á Hagstovuna um at dagføra roknskaparreglugerðina, herundir við ásetingum Landsgrannskoðanin mælir til.

## 3.9 Ómaksgjøld (LG 2014/203-0151)

Í apríl 2015 spurdi Landsgrannskoðanin, hvørja heimild TAKS hevði at áseta ómaksgjøldini, sum vóru umrødd í rundskrivi nr. 1/2014. Landsgrannskoðanin spurdi eisini, hvar innheintingar- og pantiheimildirnar fyri ómaksgjøldini vóru ásettar.

TAKS svaraði, at heimildin at áseta gjøldini var at finna í rættarpraksis. TAKS vísti á, at rættarpraksis ásetti, at ómaksgjøld í trongari merking ikki vóru fevnd av hugtakinum “skattur” í § 43 í grundlógini og § 41 í stýrisskipanarlógini og tí kundu áleggjast uttan at hava heimild í lóg. TAKS vísti til hægstarættardóm U1993.757H (sonevnda Gebyrmálið) og U1983.871H (Vedrørende hjemmelsgrundlaget for kommunes opkrævning af beløb til dækning af barns deltagelse i skoletur).

TAKS hevði ikki nakra siðvenju at áleggja gjøld uttan við lóg ella heimild í lóg. Øll onnur gjøld hava verið lýst í kunngerð ella í lóg, t.d. K. nr. 14/2010 “um tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð” og K. nr. 39/2010 “um tænastugjøld í samband við tolling og umtolling”.

Landsgrannskoðanin var samd við TAKS, at ómaksgjøld o.t. ikki eru “skattir”, sum kunnu tulkast at vera fevndir av ávikavist § 43 í grundlógini ella § 41 í stýriskipanarlógini, og at tað merkir, at ómaksgjaldið sjálvt ikki nýtist at vera ásett beinleiðis í lóg. Um gjaldið ikki er ein skattur, kundi heimildin at krevja tað latast (delegerast) til fyrisitingina at áseta fyrisitingarliga. Tað kravdi tó, at fyrisitingin fekk ta heimildina í lóg, ella í serligum førum siðvenju.

Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin, at tað tyktist ov ógreitt, hvussu TAKS kom til ta niðurstøðu, at stovnurin av sínum eintingum kundi áleggja ómaksgjøld fyri ikki at nýta Vinnugluggan. Landsgrannskoðanin vísti á, at:

- tað ikki var ásett í lóg, at vinnukundar skulu brúka Vinnugluggan,
- tað ikki var siðvenja hjá stovninum at áleggja ómaksgjøld á brúkarar,
- talan var um "revsing" ella gjald fyri ikki at nýta skipanina, og at
- talan var ikki um eina sjálvbodna skipan (uttan gjald).

Landsgrannskoðanin bað um viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum.

Í oktober 2015 svaraði landsstýrismaðurin ikki beinleiðis, men segði, at hann ætlaði at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera broyting í meirvirðisgjaldslógini soleiðis, at fyritøkur fingu álagt at nýta Vinnugluggan hjá TAKS til at lata inn MVG-uppgerðir og til at gjalda MVG.

Landsgrannskoðanin spurdi eisini Fíggjarmálaráðið, hvar innheintingar- og panti-heimildirnar fyri ómaksgjøldini vóru ásettar. Í august 2015 svaraði landsstýrismaðurin, at vegna vantandi pantiheimild, pantaði TAKS ikki longur fyri tílík gjøld.

Í august 2016 segði landsstýrismaðurin, at Fíggjarmálaráðið arbeiddi við uppskoti um broyting í meirvirðisgjaldslógini at leggja fyri Løgtingið. Í uppskotinum skuldu fyritøkur fáa álagt at nýta Vinnugluggan hjá TAKS til at lata inn MVG-uppgerðir og til at gjalda MVG. Heimild fyri ómaksgjøldum skuldi verða partur av hesi lógarbroyting.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at TAKS hevði kravt inn pening við, í minsta lagi, ivasamari heimild. Landsstýrismaðurin hevði boðað frá, at hann ætlaði at broyta lógina, so fyritøkum verður álagt at nýta Vinnugluggan. Tá má Landsstýrið eisini taka støðu til, hvat skal henda við teimum inngjøldum, sum eru kravd inn við ivasamari heimild.

***Landsstýrismaðurin ætlar at leggja upp-skot fram, sum gevur heimild fyri at áleggja ómaksgjøld fyri ikki at nýta Vinnugluggan.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann ætlar at fara í Løgtingið í hesari tingsetuni við ymiskum broytingum í meirvirðisgjaldslógini, herundir áseting um, at fyritøkur meginregluliga skulu nýta Vinnugluggan og heimild fyri at áleggja ómaksgjøld fyri ikki at nýta Vinnugluggan.

## 3.10 Stuðul til flutning og dupult húsarhald (LG 2016/203-0212)

Í 2017 hava vit grannskoðað ferðastuðul og stuðul til dupult húsarhald fyri m.a. at kanna, um stovnsleiðslan hevur sett í verk nøktandi og virkið innaneftirlit, sum tryggjar at roknskapurin er rættur, at útgjøldini eru samsvarandi veittari játtan og galdandi lógum og kunngerð, og at eftirlitsskipanir eru tryggar.

Ferðastuðul og stuðul til dupult húsarhald verða fíggjaðir av somu játtan í fíggjarlóg og verða veittir fólki, sum í sambandi við arbeiði hava útreiðslur til ferðing ella uppihald. Nærri treytir eru ásettar í K. nr. 131/2009, og TAKS hevur gjørt skrivligar vegleiðingar við innanhýsis mannagongdum at viðgera umsóknir.

Í talvuni niðanfyri eru roknskapartøl 2012 til 2016:

*t.kr.*

| Útgr. | Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 9501 | Ferðastuðul | 14.439 | 17.022 | 16.179 | 15.879 | 18.592 |
| 9502 | Stuðul til dupult húsarhald | 536 | 620 | 522 | 717 | 991 |
| | **Tilsamans** | **14.975** | **17.642** | **16.701** | **16.596** | **19.583** |
| | Játtan | 16.000 | 17.750 | 17.000 | 17.000 | 19.600 |

Sambært TAKS er orsøkin til hækkaða ferðastuðulin í 2016, at lógin er broytt, soleiðis at tey ferðandi fáa hægri stuðul. TAKS dugir ikki at siga, hví stuðulin til dupult húsarhald er øktur frá 717 t.kr. til 991 t.kr.

### Ferðastuðul

Treytirnar fyri at fáa ferðastuðul eru, at persónur er undir fullari skattskyldu í Føroyum, er búsitandi í Føroyum, hevur lønarinntøku, hevur eina ferðaleið aftur og fram hvønn arbeiðsdag, sum er longri enn 20 kilometrar, og hevur útreiðslur í sambandi við ferðing millum bústað og arbeiðsstað í Føroyum. Stuðul verður veittur til ferðing aftur og fram eina ferð um dagin í mesta lagi fyri 220 dagar um árið.

Umleið tveir triðingar av umsóknunum koma umvegis Borgaragluggan, og restin við posti. TAKS kannar hvar umsøkjarin býr, og um og hvar hann arbeiðir. TAKS stemmar útgoldnu upphæddirnar av millum bókhaldsskipanina og Búskaparskipan landsins hvønn mánað og eftirkannar við stakroyndum, áðrenn stuðulin verður goldin út.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur mál, um allar upplýsingar, ið eru kravdar í sambandi við útgjøldini vóru til skjals, og um útgjøldini vóru røtt. Vit høvdu onki at finnast at málsviðgerðini, men vístu á, at tað eru fleiri feilmøguleikar, tá ið upplýsingar verða tøppaðar frá einari skipan til aðra.

***Fleiri feilmøguleikar, tá ið upplýsingar verða tøppaðar frá einari skipan til aðra.***

### Stuðul til dupult húsarhald

Giftir persónar, búsitandi í Føroyum, og sum av arbeiðsávum hava útreiðslur til dupult húsarhald, hava rætt til stuðul. Stuðul verður bert veittur eftir umsókn og treytað av, at umsøkjari ikki fær endurgjald á annan hátt.

Stuðulin er 488 kr. um mánaðin fyri leigu av høli og 20,50 um dagin fyri eyka útreiðslur til kost. Umsøkjarin skal sjálvur bera 850 kr. fyri hvørt stuðulsskeið. Um 100 persónar fáa stuðul, og eru tey flestu útlendingar, sum koma til Føroya at arbeiða.

Áðrenn stuðulin verður goldin út kannar TAKS, um umsøkjarin er fult skattskyldugur, og um upplýsingarnar í umsóknini eru rættar.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur mál um stuðul til dupult húsarhald. Vit kannaðu, um allar upplýsingar, ið eru kravdar í sambandi við útgjøld, vóru til skjals, og um útgjøldini vóru røtt. Vit hava onki at finnast at viðvíkjandi upphæddunum, ið vórðu goldnar út.

Í málsviðgerðini av ferðastuðli og stuðli til dupult húsarhald eru ávísir vandar fyri feilum. Upplýsingar mugu tøppast inn manuelt úr journalskipanini í útgjaldsskipanina, tí er vandi fyri inntøppingarfeilum.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er týdningarmikið, at TAKS hevur skrivligar ásetingar um, hvørji eftirlit skulu gerast, og at eftirlitini verða skjalfest.

## 3.11 Tvungin eftirløn av B-inntøkum (LG 2016/220-0521)

Ll. nr. 49/2013 “um eftirløn (eftirlønarlógin)” kom í gildi 1. januar 2014 og álegði øllum persónum at rinda til egna eftirløn. Fyrsta árið varð tvungna eftirlønargjaldið 1% av bæði av A- og B-inntøkum. Sambært eftirlønarlógini skal gjaldið hækka eitt prosent um árið til 2029, tá tað verður 15%. Lógin ásetir, at 40% skulu rindast í skatti av øllum eftirlønargjaldingum.

Eftirlønargjald av A-inntøkum verður sjálvvirkjað tikið av A-inntøkunum og flutt á eftirlønarkontur hjá skattgjaldaranum. Samstundis verður skatturin fluttur landskassanum.

### B-inntøkur

Sambært eftirlønarlógini skulu persónar við B-inntøkum og uttanlandsinntøkum rinda eftirlønargjald og eftirlønarskatt.

Persónar við B-inntøku skulu gera vart við eftirlønaruppsparingina á sjálvuppgávuni. Síðan verða eftirlønin og skatturin roknað sum partur av árligu skattauppgerðini. Serstøk rokning verður send persónunum, sum skal vera goldin í seinasta lagi 1. november árið eftir inntøkuárið. Tað ber ikki til tøkniliga at fyribilsskráseta tvungna eftirlønargjaldið.

Tá ið rokningin fyri eftirlønina og skattin er goldin, verður eftirlønin flutt á persónliga eftirlønarkontu og skatturin í landskassan.

### Persónar við ongari eftirlønarkontu

***Fleiri persónar mangla eftirlønar-kontu.***

TAKS hevur síðani 2015 kravt inn eftirlønargjøld og eftirlønarskatt frá persónum, sum hava B-inntøkur. Fleiri persónar, sum verða kravdir eftir eftirlønargjaldi og eftirlønarskatti, hava ikki eftirlønarkontu, og av tí orsøk sleppur TAKS ikki av við eftirlønargjaldið. Tær upphæddirnar verða skrásettar á eina depotkontu í bókhaldinum hjá TAKS og verða bókaðar á aðra stuttfreistaða skuld á fíggjarstøðuni í landsroknskapinum. Upphædd á depotkontu fær ikki rentu tilskrivaða.

Við árslok 2016 eru eftirlønargjøld, sum ikki eru avroknað 2,1 mió.kr. netto. Upphæddin er við í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum. Eftirlønarskattur er roknaður av kravdu eftirlønargjøldunum. Upphæddin í talvuni svarar til 60% av samlaðu krøvunum:

| | *kr.* |
|---|---|
| Primo 2015 | 0 |
| Ultimo 2015 | 751.653 |
| Ultimo 2016 | 2.072.832 |
| Ultimo juli 2017 | 1.607.986 |

TAKS hevur heimild at panta, verða eftirlønargjøldini og eftirlønarskatturin ikki goldin til tíðina.

Í juli 2017 spurdi Landsgrannskoðanin TAKS, hvat ítøkiliga verður gjørt fyri at fáa eftirlønargjøldini á eftirlønarkontur hjá teimum, sum eru kravd at gjalda. TAKS hevur greitt frá, at persónar við B-inntøku fáa hvørt ár skriv um, hvussu nógv skal rindast í eftirløn og skatti. Í skrivinum verður upplýst, at sáttmáli skal gerast við ein eftirlønar-veitara og kontunummarið latast TAKS.

Ein skipan hjá TAKS lesur dagliga í skattaskipanunum, um nýggjar eftirlønarkontur eru stovnaðar. Er ein eftirlønarkonta stovnað hjá einum persóni við depotkontu, verður upphæddin á depotkontuni sjálvvirkandi flutt til ta kontuna hjá einum veitara.

## 3.12 Negativt meirvirðisgjald (LG 2016/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av negativum meirvirðisgjaldi. Tað er gjørt sum liður í at grannskoða innaneftirlitið hjá TAKS. Endamálið er at kanna, um TAKS hevur eitt virkið innaneftirlit, sum byrgir fyri og varnast ætlaðar og óætlaðar feilir og svik.

Játtanin til meirvirðisgjald er á høvuðskontu 20.52.2.01. “Meirvirðisgjald”. Av samlaðu inntøkum landskassans í 2016 á 4,9 mia.kr. stava 1,6 mia.kr. frá meirvirðisgjaldi.

Vinnudeildin hjá TAKS umsitur Meirvirðisgjaldsskipanina og hevur útgjaldseftirlit við negativum meirvirðisgjaldi. Deildin umsitur eisini Vinnuskránna, og leiðarin á deildini hevur harafturat ábyrgdina av innheintingini hjá stovninum. Umframt deildarleiðaran starvast fimm fólk á Vinnudeildini.

### Lógargrundarlag o.a.

Reglurnar um meirvirðisgjald eru í Ll. nr. 136/1992 "um meirvirðisgjald (meirvirðisgjaldslógin)". Sambært lógini skal avgjald rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutningi úr útlondum.

Í § 12 í MVG-lógini er ásett, hvørjar vørur og tænastur avgjaldsskylduga sølan ikki fevnir um. Virkir, sum burturav selja vørur og tænastur sambært § 12, eru tey, sum altíð hava negativt avgjaldstilsvar.

Í § 24 í MVG-lógini er ásett, at um inngangandi avgjaldið hjá einum virki fyri eitt avgjaldstíðarskeið er størri enn útgangandi avgjaldið, verður avgjaldsyvirskotið goldið virkinum.

Negativt meirvirðisgjald verður goldið virkjum, sum hava sølu sambært § 12 og virkjum, sum hava avgjaldsyvirskot sambært § 24.

TAKS hevur innanhýsis leiðreglur fyri umsitingina av útgjaldslistunum. Tað ber ikki til at grannskoða upp ímóti innanhýsis leiðreglunum. Reglurnar eru ikki dagførdar og lýsa ikki arbeiðsgongdina. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

***Innanhýsis reglurnar eru ikki dagførdar og lýsa ikki arbeiðsgongdina.***

*Uppgerðir*

Út við 4.000 virkir (V-tøl) eru skrásett við meirvirðisgjaldsskyldu og til at avrokna MVG-tilsvar til landskassan. Virkini gera meirvirðisgjaldstilsvarið upp eina ferð um ársfjórðingin, eina ferð um mánaðin ella eina ferð um vikuna, sambært ásetingunum í § 20 í MVG-lógini.

Meira enn 16.000 MVG-uppgerðir vórðu latnar inn í 2016. Harav vóru umleið 9.600 positivar uppgerðir, t.v.s. avroknaðu tilsvar til landskassan. Umleið 2.000 uppgerðir vóru "null-uppgerðir"[7], og 4.500 vóru negativar uppgerðir.

***4.500 negativar uppgerður av 16.000 innlatingum.***

### Sjálvvirkjaðar uppgávur og strategi

Seinastu árini hevur TAKS sjálvvirkja uppgávur við e-skatti og e-tolli. Í 2012 sjálvvirkjaði TAKS innlatingina av meirvirðisgjaldsuppgerðum um Vinnugluggan.

TAKS hevur sett yvirskipað mál fyri stovnin. Til at røkka málunum hevur TAKS gjørt eina strategi við trimum høvuðsevnum.

Eitt av høvuðsevnunum er "Null inntøpping", har endamálið m.a. er at burturbeina handaligar arbeiðsuppgávur og at leysgeva orku til betri tænastur, til innaneftirlit, eftirlitsuppgávur og menning.

Eitt annað høvuðsevni er "Betri eftirlit", har endamálið er at betra eftirlitið hjá TAKS. Tað er gjørt við at savna og menna eftirlitsførleikarnar, at skipa eftirlitið betur og harvið gera tað meira beinrakið.

Sambært TAKS er úrslitið av null inntøpping ikki sligið ígjøgnum í so stóran mun, at nøkur orka enn er flutt til eftirlit við MVG´num. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

***Null tøpping ongan mun gjørt enn.***

### Innaneftirlit og eftirlitspolitikkur

Innaneftirlitið er eitt hitt týdningarmesta amboðið hjá einari leiðslu at røkka sínum málum. Tað er ábyrgdin hjá leiðsluni at seta í verk eitt virkið og effektivt innaneftirlit.

Sum liður í innaneftirlitinum brúkar TAKS eina talgilda kekklistaskipan, sum leiðslan brúkar at stýra afturvendandi rutinuuppgávum innan tær freistir, hon ásetir. Saman við

[7] Tá ið ein MVG-uppgerð vísir "null" í avgjaldstilsvari.

eftirlitinum við játtanini kann ein kekklistaskipan vera týðandi partur av innaneftirlitinum hjá TAKS.

Ein annar eins týðandi partur av innaneftirlitinum eru tey tiltøk, sum leiðslan og starvsfólk seta í verk og fremja, fyri at røkka málinum um, at raksturin er málsøkin og effektivur, at roknskapurin er rættur og álítandi, og at lógir og reglur verða hildnar.

***Leiðslan hevur ikki nágreinað, hvussu TAKS tryggjar sær, at tað, sum verður goldið út, er rætt.***

Leiðslan hevur ikki nágreinað, hvørji eftirlit skulu gerast, ella hvussu leiðslan vil hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggja sær, at tað, sum TAKS rindar út, er rætt, og at roknskapurin tí kann sigast at vera rættur. Deildarleiðarin setir mál fyri eftirlitini, sum vanliga eru tey somu sum árið fyri. TAKS kannar umleið 4% av øllum negativum MVG-uppgerðum. Upphæddirnar, sum verða kannaðar, eru fyri tað mesta íløgur, sum á einstøkum uppgerðum gera, at avgjaldstilsvarið verður negativt. Landsgrannskoðanin ivast í, um kanningarhátturin er nøktandi út frá týdningi og váða. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Frá 2014 til 2016 hava tøl og úrslit av eftirlitunum verið:

| Ár | Mál Tal av eftirlitum | Tal av eftirlitum | Hækkingar í kr. |
|---|---|---|---|
| 2014 | Millum 160 og 180 | 150 | 2.427.783 |
| 2015 | Millum 160 og 180 | 171 | 11.476.568 |
| 2016 | 160 | 183 | 7.536.074 |

Í juni 2017 hevur TAKS greitt frá, at tey seta spurnartekn við, nær tey kunnu tryggja, at útgjøldini eru røtt. TAKS rindar yvir 1 mia.kr. út í negativum MVG um árið. Talið av negativum uppgerðum er eisini stórt. TAKS ivast eisini í, hvussu stór manning og eftirlit skulu til fyri at tryggja, at útgjøldini eru røtt. Við verandi játtan og manning hevur TAKS gjørt mannagongdir, sum í mest møguligan mun tryggja, at útgjaldslistin verður umsitin á ein so tryggan og forsvarligan hátt sum møguligt.

***Deildin fyri virkisskatt staðfestir, hvat skal kannast.***

Yvirskipað er tað Deildin fyri virkisskatt, ið ger av, hvat verður kannað, og hvat ikki verður kannað. Deildin fyri virkisskatt hevur eina ávísa manning og klárar eitt ávíst tal av eftirlitum. Kanning av virkjum, ið skulu hava negativt MVG aftur, verður sett upp ímóti, hvat annað er at kanna. Stutt sagt, er tað ein raðfesting, ið fer fram hjá Deildini fyri virkisskatt.

TAKS ger vart við, at tey hava kannað størri upphæddir, t.d. hjá alifeløgum, og at stovnurin millum ár og dag hevur gjørt nógvar kanningar av stórum upphæddum. TAKS kannar ikki altíð stórar upphæddir. Hugt verður m.a. eftir umstøðunum, hvat felag talan er um, og hvussu roknskapurin sær út. Undir givnum umstøðum heldur TAKS, at støðan viðvíkjandi kanning av útgjaldslistanum er nøktandi. Tað eru roynd starvsfólk, sum avgreiða útgjaldslistan og hava gjørt tað í 10 ár. TAKS er av teirri áskoðan, at royndirnar hava avgerandi týdning.

***Fleiri rættingar og hækkingar, um deildirnar vóru betur mannaðar***

TAKS vísir eisini á, at tey hava ikki og koma ongantíð at hava møguleika at kanna alt, ið verður goldið út. Tí verður tað altíð eitt tilval og eitt frával, ein raðfesting. Sjálvt um leiðreglur vóru um eftirlit, so kunnu tær ikki við fullari vissu forða fyri t.d. sviki. Í eftirlitsætlanini hevur TAKS møguleika at gera t.d. negativt MVG til eitt fokusøki ávís tíðarskeið og harvið økja munandi um eftirlitsinnsatsin á júst negativum MVG. Sambært TAKS vildu uttan iva fleiri rættingar ella hækkingar verðið gjørdar, um manningin á Vinnudeildini og Deildini fyri virkisskatt var størri. Tað hevur stovnurin eisini gjørt myndugleikan varugan við.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað, at TAKS ikki hevur møguleika at kanna allar útgjaldingar, kann ikki vera ein forðing fyri, at leiðslan hevur greiðari ásetingar um, hvussu hon vil hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggjað sær, at tað, sum TAKS rindar út, er so rætt sum gjørligt. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

***Leiðslan eigur at hava greiðari ásetingar um, hvussu hon vil hava eftirlitini framd og skjalprógvað.***

### MVG-uppgerðir

Virkir lata javnan MVG-uppgerðir inn til TAKS; teimum nýtist ikki at bíða til evstu freist. Uppgerðirnar, sum verða latnar inn umvegis Vinnugluggan, verða bókaðar sjálv-virkandi; og eru tær positivar, ber til hjá virkjum at gjalda umvegis Vinnugluggan.

Talan er um tvey ymisk sløg av eftirlitum; eftirlit við negativum uppgerðum og roknskapareftirlit. TAKS brúkar ikki nógva tíð at kanna dagligu útgjaldslistarnar, og tað er sjáldan, at feilir verða funnir í sambandi við útgjaldseftirlit. TAKS hevur onki eftirlit við positivum MVG-uppgerðum, tá ið tær verða latnar inn og goldnar, men MVG-roknskapurin kann verða kannaður seinni í sambandi við roknskapareftirlit. Vit hava spurt, um landsstýrismaðurin heldur eftirlitið vera nøktandi.

*Arbeiðsgongdir í sambandi við útgjald av negativum MVG*

Í roknskaparreglugerðini hjá TAKS eru generellar reglur um, at skilnaður skal vera ímillum tey, ið góðkenna, og tey, ið leysgeva. Aðrar reglur og mannagongdir um umsiting av negativum meirvirðisgjaldi eru ikki ásettar í roknskaparreglugerðini.

Tá ið eitt virki tøppar MVG-uppgerð inn í Vinnugluggan, spyr ein maskinellur kontrollur, um upphæddin er røtt. Um svarið er ja, verður uppgerðin skrásett. Kontrollurin er einans galdandi fyri upphæddir > 1 mió.kr., bæði fyri positivar og negativar upphæddir.

Allar negativar uppgerðir liggja í útgjaldsskipanini í 3 vikur. Sambært lógini kann TAKS steðga við at gjalda út negativt MVG til eitt virki, um TAKS, vegna viðurskiftini hjá virkinum, ikki kann hava eftirlit við uppgerðini. Sambært vegleiðingini hjá TAKS skulu allar MVG-uppgerðir, sum verða steðgaðar, hava eina málsviðgerð. TAKS hevur ikki ásett skrivliga, hvussu tann viðgerðin skal vera.

Hevur eitt virki ikki latið allar sínar MVG -uppgerðir inn, forðar ein sjálvirkjandi kontrollur fyri, at tað virkið fær negativt MVG goldið út. TAKS kann eisini steðga einum útgjaldi við at seta eina sonevnda “stoppkotu” í MV-skipanina. Tær uppgerðir, sum eru settar í stoppkotu, verða liggjandi, til stoppkoturnar verða loystar.

Tað standa fleiri útgjøld við stoppkotu í skipanini, tann elsta frá apríl 2013. TAKS hevur ikki skrivligar reglur um, hvussu leingi tey kunnu steðga einum útgjaldi.

Tá ið ein stoppkota er sett í eitt útgjald til eitt virki, fær tað virkið ikki upphæddir fyri nýggjari uppgerðir goldnar út heldur. TAKS vísti á ítøkiligt dømi um, at tá ið eitt MVG-tilsvar hjá virki, fyri seinni tíðarskeið, eru ásett sambært meting, ger tað ongan mun, um TAKS loysir stoppkotur fyri fyrru uppgerðirnar, tí onki verður goldið út kortini.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi, at tað ikki eru reglur fyri, hvussu leingi TAKS kann steðga útgjøldum, og at greiðar reglur ikki eru fyri mannagongdini.

## 3.13 Notat um keyp av vørum og tænastum (LG 2016/405-0008)

Í juni 2017 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um keyp av vørum og tænastum hjá landinum. Niðanfyri er ein samandráttur av kanningini. Frágreiðingin í síni heild er at finna á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini.

Løgtingsgrannskoðararnir heittu á Landsgrannskoðanina um at kanna, um keyp av vørum og tænastum hjá landinum, sum koma undir játtanarslagið “rakstrarjáttan” í løgtingslóg um landsins játtanarskipan, verða gjørd sambært rundskrivinum “um keyp av vørum og tænastum”, sum Fíggjarmálaráðið gav út fyrstu ferð í oktober 2013.

Eitt av endamálunum við almenna keypspolitikkinum er at skapa kapping millum verandi veitarar og at brúka skattapeningin skynsamt. Høvuðsspurningar í frágreiðingini vóru tí, um vørur og tænastur, sum kosta meiri enn 800.000 kr. u/MVG, verða bjóðaðar út á Keypsportalinum, og um stovnar biðja um tilboð frá minst tveimum veitarum, tá vøran ella tænastan kostar meiri enn 50.000 kr. u/MVG.

Kanningin tók støði í roknskaparárunum 2013 til 2016.

***Almennu stovnarnir hava kunnleika til rundskrivið.***

Samanumtikið vísir kanningin, at almennu stovnarnir hava kunnleika til rundskrivið. Aktiviteturin á Keypsportalinum hevur tó ikki verið tann stóri, síðani rundskrivið varð sett í gildi. Einans 15 keyp oman fyri 800.000 kr. u/MVG eru lýst á Keypsportalinum.

Fyri at kanna, um fleiri keyp áttu at verðið boðin út, gjøgnumgingu vit øll keyp oman fyri 800 t.kr., sum vóru bókað á standardkontu 14, 15 og 16. Úrslitið av gjøgnumgongdini var, at um 17 onnur keyp helst kundu verðið boðin út afturat. Talið skal tó takast við fyrivarni, tí í summum førum er ringt at meta um, um keypið er fevnt av rundskrivinum, ella um tað hóskar seg at verða boðið út. Tað er eisini møguligt, at vit í sambandi við gjøgnumgongdina hava valt keyp frá, sum kortini áttu at verðið boðin út. Afturmeldingarnar frá stovnum vístu, at tað í nøkrum førum kann vera trupult at bjóða keyp út á Keypsportalinum, annaðhvørt vegna umstøður, slag av vøru, ella í hvønn mun keypið er tongt at veitingum, sum eru veittar frammanundan.

***Lættari hjá stovnum at biðja um tilboð enn at nýta Keypsportalin.***

Hin keypshátturin, at biðja um tilboð frá minst tveimum veitarum, er lættari hjá stovnunum at handfara. Tó vísti kanningin, at í meira enn helvtini av keypunum, vit spurdu um, var ikki biðið um tilboð frá minst tveimum veitarum. Í flestu førum halda stovnar seg hava haldgóðar orsøkir til ikki at biðja um tilboð frá fleri veitarum. Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tað er nøktandi, at ásetingarnar í rundskrivinum ikki verða hildnar.

Tað krevur bæði tíð og kostar pening at gera útboðstilfar, og tá kundu tey, sum umsita Keypsportalin verið ein virkin sparringspartnari hjá stovnum, ið ikki megna uppgávuna. Skulu tey, sum umsita Keypsportalin, vera væl ílatin til hesa uppgávuna, krevst, at stovnar boða frá aftur, soleiðis at ein serkunnleiki verður bygdur upp um alment innkeyp.

***Ongin kennir ábyrgd av portalinum***

Tað tykist, sum tað er ongin, sum veruliga kennir ábyrgd av Keypsportalinum. Um tað almenna veruliga ætlar at skapa ein dynamiskan Keypsportal, har privata vinnan og tað almenna skulu møtast, krevst, at onkur fær ábyrgdina.

Tað má eisini fáast betri greiða á, hvørjar vørur kunnu vera undantiknar. Tað eru nógvar vørur og tænastur, sum liggja á markinum til ikki at egna seg til at verða bjóðaðar út, og sum ikki eru nevndar í undantakslistanum í rundskrivinum. Tað kann vera ein trupulleiki, tí kanningin hjá Landsgrannskoðanini vísti, at nógvir stovnar og ráð bróta ásetingarnar í rundskrivinum.

# 4 Fiskivinnumál

## 4.1 Fiskimálaráðið (LG 2016/205-0111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin 2016 hjá Fiskimálaráðnum. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina hjá stovninum og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

### Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin hjá Fiskimálaráðnum er frá 2011. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra reglugerðina.

***Roknskapar-reglugerðin ikki dagførd.***

### Lønir

Í Fiskimálaráðnum starvast 17 fólk. Játtanin var 13,3 mió.kr., harav 8,9 mió.kr. til lønir.

***Lønarmál ikki fullfíggjað.***

Við støði í lønarútgjaldingunum í mars 2016 grannskoðaðu vit trý lønarmál. Lønarmálini vóru ikki fullfíggjað. Fiskimálaráðið vísti á, at starvsfólkini eru sett í starv fyri fleiri árum síðani og hava flutt nakrar ferðir í starvstíðini. Lønarskjølini liggja spjadd í umsitingini. Avtalað varð, at Fiskimálaráðið, har tað ber til, savnar saman viðkomandi skjøl, t.d. lýsingar, umsóknir, prógv, setanarskriv og seinastu lønargjaldsumbønir, sum kunnu sanna, at lønirnar eru rættar.

***Stórar flexsaldur.***

Starvsfólkini, ið vit kannaðu lønirnar hjá, áttu sambært klokkuskipanini Totalview ímillum 16 og 1740 tímar til góðar. Sambært Fiskimálaráðnum eiga onnur starvsfólk eisini nógvar tímar til góðar.

Løgtingsgrannskoðararnir hava áður lagt dent á, at landsroknskapurin ikki er rættur/ fullfíggjaður, m.a. tí at starvsfólk skylda ella eiga nógvar lønartímar, og at reglur og mannagongdir vanta fyri uppgerð og skráseting av starvsfólkaskyldum.

Í februar 2014 mæltu løgtingsgrannskoðararnir staðiliga til, at viðurskiftini viðvíkjandi tíðarskrásetingini hjá Fiskimálaráðnum vórðu fingin í rættlag. Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ongi starvsfólk skyldaðu nógvar tímar, og at Fiskimálaráðið væntaði, at um ársskiftið fór at verða slætt borð.

***Semja gjørd við starvsfólkini um stóru flexsaldurnar.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at avtalur eru gjørdar við starvsfólk, ið eiga nógvar tímar til góðar, hvussu tímarnir kunnu avspákast. Semja er gjørd millum Fiskimálaráðið og starvsfólkini um at javna salduna til eitt lægri tímatal.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit roknskaparskjøl, um tey hoyra til stovnin og eru konterað sambært galdandi reglum. Onki var at finnast at.

### Uttanlands ferðauppgerðir

Vit kannaðu nakrar uppgerðir fyri ferðir uttanlands. Vit mæltu til at lýsa ørindini við ferðini neyvari. Á uppgerðunum stendur t.d., at ørindini eru “ráðstevna” og “fundir

við...", uttan at vísa til hvørjar dagar fundirnir eru hildnir, nær ráðstevna byrjar og endar, ella á annan hátt at greiða frá døgunum, ið ferðin varir.

Í uppgerðunum, sum vit kannaðu, er ikki drigið frá fyri kost goldin av øðrum. Um innbjóðing, skrá e.a. vórðu løgd við uppgerðunum, kundi borið til at staðfest, at uppgerðirnar vóru rættar.

Á kontuni fyri ferðaforskot eru bókingar í mars og apríl 2016, sum gera, at munur er á forskotum og avrokningum. Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at allar ferðauppgerðir eru avgreiddar, og at ongin munur er á forskoti og avrokning.

**KT viðurskifti**

Umframt Búskaparskipan landsins brúkar Fiskimálaráðið Teyggjuna og journalskipanina 360.

Teyggjan er ein KT skipan til at umsita fiskiloyvir og -rættindi. Teyggjan er ikki partur av Landsneti, men verður hýst av teimum. Ongar ætlanir eru um, at nýggj skipan skal avloysa Teyggjuna, sum ráðið annars upplýsti í mai 2014.

***Atgongdirnar til BSL ikki dagførdar.***

Vit spurdu, hvørji starvsfólk hava atgongd at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins. Vit fingu útskrift yvir brúkarar, og har vóru tvey starvsfólk, sum ikki longur starvast hjá Fiskimálaráðnum. Vit mæltu til, at atgongdirnar vórðu dagførdar.

## 4.2 Eftirlit við uppboðssølu (LG 2016/205-0111)

Í apríl 2016 samtykti Løgtingið í Ll. nr. 30/2016 "um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2016" at bjóða part av fiskirættindum út á uppboðssølu. Við heimild í lógini varð lýst K. nr. 78/2016 "um uppboðssølu av makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2016".

Rættindini vórðu boðin út á opnari uppboðssølu og á afturlatnari uppboðssølu. Fiskamarknaður Føroya stóð fyri opnu uppboðssøluni.

Afturlatnu uppboðssølurnar, sum vórðu skipaðar av Vørn, vóru í 6 umførum:

14. juli 2016, 600 tons av botnfiski í russiska partinum av Barentshavinum,
18. juli 2016, 600 tons av botnfiski í norska partinum av Barentshavinum,
21. juli 2016, 600 tons av botnfiski í russiska partinum av Barentshavinum,
22. juli 2016, 2.000 tons av makreli,
8. september 2016, 5.000 tons av svartkjafti, og
15. september 2016, 5.000 tons av svartkjafti.

Grannskoðanarvirkið Numo hevði eftirlit við afturlatnu uppboðssølunum. Landsgrannskoðanin var hjástødd.

***Uppboðssøla av fiskirættindum farin fram eftir reglunum.***

Í váttanum, sum Landsgrannskoðanin hevur fingið frá Numo fyri øll eftirlitini, er niðurstøðan, at: *"Tað er okkara fatan, at uppboðssølan fór fram, samsvarandi kunngerð 78/2016".*

## 4.3 MRCC og Tórshavn Radio (LG 2015/205-0311)

Í seinastu frágreiðing okkara umrøddu vit grannskoðan av MRCC og Tórshavn Radio, sum er partur av Vørn.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Vørn hevði ikki roknskaparreglugerð, sum var góðkend av aðalráðnum. Roknskaparmannagongdir eru ásettar í ISO-góðkenningini hjá stovninum. Roknskaparreglurnar vórðu sendar Fiskimálaráðnum at góðkenna í apríl 2016.

*Roknskaparmannagongdir góðkendar í 2017.*

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at ráðið hevur góðkent roknskaparmannagongdirnar hjá Vørn.

Vørn hevði ikki dagført ognaryvirlit, men hevði eitt yvirlit yvir tekniska útgerð frá juli 2012. Leiðslan hevði ætlanir um at gera eitt samlað ognaryvirlit. Í august 2017 sigur Fiskimálaráðið, at ráðið hevur ikki fingið svar frá Vørn, um ognaryvirlit er gjørt.

### Leigumál

Stovnurin leigaði høli á Sornfelli frá Arktisk kommando. Leigukostnaðurin var tá góðar 18 t.kr. um árið. Eftir at Føroya landsstýri yvirtók støðina á Sornfelli, er leigukostnaðurin hækkaður upp í 47 t.kr. um árið, harav 24 t.kr. fyri el-nýtslu og 5 t.kr. fyri trygdarskipan/húsavørð. Leiðslan helt, at kostnaðurin var ov høgur, og samskifti við Landsverk um leiguna. Spurt, hevur Fiskimálaráðið í august 2017 svarað, at Vørn hevur ikki svarað, hvat síðani er hent í málinum.

### KT viðurskifti

*Samstarvssáttmáli um tænastuveitingar ikki endurnýggjaður síðani 2006.*

Stovnurin hevur samstarvssáttmála við uttanhýsis veitara um tænastuveitingar. Sáttmálin varð gjørdur í 2006 og er ikki endurnýggjaður síðani. Í váðametingini um KT nýtslu vísti grannskoðanarvirkið á, at sáttmálin, eftir teirra áskoðan, ikki var nóg fullfíggjaður, hvat trygd viðvíkur.

Landsgrannskoðanin mælti leiðsluni til at taka stig til at dagføra samstarvssáttmálan við uttanhýsis veitaran.

*KT váðameting ikki nóg fullfíggjað.*

Í august 2016 boðaði Fiskimálaráðið frá, at ráðið var varugt við vandarnar við manglandi KT trygd. Fiskimálaráðið vísti á, at KT landsins hevur bestu førleikarnar at meta um váðarnar í sambandi við dáturnar hjá Vørn, og ætlaði ráðið at fáa KT landsins og Vørn at seta seg saman at finna fram til, hvussu Vørn best kundi skipa sínar dátur.

Í august 2017 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at arbeiðið bíðar, til nýggj sjófeingislóg er samtykt.

## 4.4 Búnaðarstovan (LG 2014/205-0332)

### Bygningar

Í frágreiðingini november 2015 umrøddu vit grannskoðan av Búnaðarstovuni og játtanini “Stuðul til stráfóður”.

Í 2013 vórðu 5,1 mió.kr. av innistandandi hjá Búnaðargrunninum markaðar til Búnaðarstovuna til ábøtur á bygningarnar í Kollafirði.

Í juli 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at enn var ikki greitt, hvat skuldi gerast við bygningarnar, og tí var peningurin ikki nýttur.

Í august 2016 greiddi Fiskimálaráðið frá, at nýggja leiðslan á Búnaðarstovuni var ikki komin á mál við at gera menningarætlan fyri stovnin, har ábøtur á bygningarnar fóru at vera ein partur av menningarætlanini. Tí var avgjørt neyðugt, at stovnurin framhaldandi hevði fígging tøka til endamálið.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fiskimálaráðið hevur givið tilsøgn um at nýta burtur av nevndu upphæddini til ætlan hjá Búnaðarstovuni at leggja hitaskipanina í fyrisitingarbygninginum um, frá upphiting við olju til jarðhita.

Sambært landsstýrismanninum er tilsøgn eisini givin Búnaðarstovuni at umbyggja gamla mjólkneytafjósið til eitt nútímans rannsóknarfjós. Talan verður um eitt seyðahús til royndir innan seyðahald og um ein greðingarstall til varðveitingararbeiðið at menna gamla føroyska rossaslagið.

***Tørvurin at umvæla bygningarnar er nógvar ferðir størri, enn játtanin røkkur til.***

Landsstýrismaðurin vísir á, at Landsverk hevur gjørt greitt, at tørvurin at umvæla bygningar hjá Búnaðarstovuni er nógvar ferðir størri, enn játtanin hjá Landsverki røkkur til. Sambært Fiskimálaráðnum verður upphæddin, sum Landsgrannskoðanin vísir til, uppi í seinasta lagi 2019.

### Kassaeftirlit

Í februar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Búnaðarstovuni.

*Kassi*

Búnaðarstovan hevur ein kassa skrásettan í Búskaparskipan landsins. Kassin verður brúktur til ymiskar smærri útreiðslur og inntøkur, serliga frá sølu av seyðakjøti. Landsgrannskoðanin hevur stemmað kassan av. Onki var at finnast at.

Eina ferð um árið ger røktarin uppgerð fyri raksturin av haganum hjá Búnaðarstovuni. Seyðakjøtið v.m., sum eftir er, tá ið fjallløn, flettingarløn, royndir og onnur hjálp er drigin frá, verður selt. Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu stovnurin tryggjar, at bókaða sølan samsvarar við skurðin eftir at fjall- og flettingarløn er drigin frá. Búnaðarstovan hevur svarað, at fyri bókaðu søluna, verður skjal viðheft, sum vísir, hvat tað er fyri, um tað eru heil krov ella partar av krovi. Sølan kann sostatt avstemmast, men Landsgrannskoðanin kann ikki vátta, um nøkur verulig avstemman verður gjørd.

*Peningastovnskonta*

Búnaðarstovan hevur peningastovnskontu, sum verður nýtt til inntøkur frá eitt nú seyðasýningum, sølu av seyðakjøti, inntøkur frá landbúnaðarskeiðum og sølu- og leigu av jørð. Kontan er skrásett í Búskaparskipan landsins. Vit stemmaðu salduna í peningastovninum við salduna í Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 4.5 Hvalagransking og hvalateljing (LG 2016/205-0341)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av hvalagransking og hvalateljing.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin hjá Søvnum landsins fatar eisini um Hvalagransking, og Søvn landsins hevur bókhaldið um hendi.

***Onki ognaryvirlit.***

Nakrar størri ognir, t.d. bilar, eru skrásettar í landsroknskapinum, men stovnurin hevur ikki ognaryvirlit. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin ger ognaryvirlit sum ásett í § 20 í roknskaparkunngerðini.

Í 2015 avtalaði stovnurin við fyritøku at leiga dronu og filmsútgerð fyri 100 t.kr. í sambandi við hvalateljing. Hvalateljing rindaði 50 t.kr., meðan tær írestandi 50 t.kr. eru settar av í roknskapinum, tí stovnurin heldur seg ikki hava fingið meira enn helvtina av avtalaðu veitingini.

Søvn landsins fór at krevja, at viðkomandi avhendaði alt tilfar, sum avtalað varð. Í øðrum lagi ætlaði stovnurin at tilskila sær rætt til at reisa endurgjaldskrav fyri vantandi avhending og annan fíggjarligan miss av avtaluni.

### KT viðurskifti

Søvn landsins er partur av KT landsins. Savnaða tilfarið verður goymt á teldu, og granskingardátur verða goymdar á netinum, tá ið tær eru liðugt viðgjørdar. Upplýsingar á pappíri verða goymdar í brandskápi. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin tekur støðu til, um KT trygdin er ílagi.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at stovnurin hevur tikið stig til at tryggja nøktandi KT trygd viðvíkjandi granskingardátum, og at backup verður tikið til tess at tryggja bæði vísindaligt dátutilfar og arbeiðsdátur.

### Lønir

Við støði í lønarútgjaldingum fyri oktober 2016 kannaðu vit, um lønirnar hjá starvsfólkunum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at lønunum, men í sambandi við umskipanina av Søvnum landsins hevur stjórin í januar 2016 gjørt uppskot til nýggj/dagførd setanarbrøv, sum leiðsla og starvsfólk skuldu undirskriva. Setanarbrøvini vóru ikki undirskrivað. Sambært stjóranum vóru setanarbrøvini ikki avgreidd, tí starvsfólk høvdu sent landsstýrismanninum í Mentamálum klaguskriv um starvsumstøður.

Søvn landsins nýtir Totalview til tíðarskráseting, sum Hvalagransking eisini hevur nýtt. Skrásett verður, nær starvsfólk koma og fara, feriur o.a. Uppgerð yvir tímasaldur og feriur fyri starvsfólkini á Hvalagransking vísti, at starvsfólkini skyldaðu ávikavist 1452 og 375 tímar.

***Bíðað verður eftir niðurstøðu um klagu, áðrenn tíðarskráset-ing verður sett í verk.***

Stjórin hevði álagt starvsfólkunum at nýta tíðarskrásetingina, soleiðis at leiðslan kundi tryggja sær, at útgoldnar lønir vóru rættar. Sambært stjóranum bíðaði málið eftir niðurstøðuni í klaguni, sum starvsfólk høvdu sent landsstýrismanninum í mentamálum í januar 2016 um starvsumstøður, m.a. um tíðarskráseting og avriksavtalur.

Landsstýrismaðurin hevur í 2017 kunnað um, at tá ið nýggjur stjóri er settur á Tjóðsavni Føroya, verður tað uppgávan hjá honum at fáa viðurskiftini viðvíkjandi setanarbrøvum og tíðarskráseting í rættlag.

## 4.6 Havstovan (LG 2016/205-0343)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar hjá Havstovuni og Magnus Heinasyni.

### Um stovnin

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini er greitt frá um endamál og virksemi. Útreiðslurnar til vanliga virksemið seinastu árini eru í størstan mun farnar til stovnsmetingar og at talfesta broytingar av havumhvørvinum við Føroyar.

Havstovan hevur ikki havt mál- og avrikssáttmála í 2015 og 2016. Eftir boðum frá Fiskimálaráðnum varð steðgað at gera mál- og avrikssáttmála.

### KT viðurskifti

Havstovan hevur nógvar upplýsingar og dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin og fyri samfelagið sum heild. Stovnurin hevur gjørt váðameting.

***Havstovan er ikki við í Landsneti, tí kostnaðurin er ov høgur***

Havstovan hevur áður verið við í KT samstarvinum, Traðanet. Samstarvið er niðurlagt, og hevur Havstovan nú egna KT skipan. Tveir KT vørðar umsita skipanina. Havstovan er ikki við í Landsneti, tí tey halda, at kostnaðurin er ov høgur.

Havstovan hevur 3 servarar, tveir á stovninum og ein uttanhýsis. Servararnir á Havstovuni spegla hvønn annan, meðan dagligt backup liggur uttanhýsis. Eina ferð um árið tekur Havstovan backup av øllum upplýsingum og goymir dáturnar í bankaboks.

***Ongin persónur hevur fulla atgongd til allar skipanir.***

KT handbókin og brúkarareglurnar eru frá 2015, og eru atgongdirnar til KT kervið býttar í partar, soleiðis at ein persónur ikki hevur fulla atgongd til allar skipanirnar.

## Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskapartøl fyri vanliga virksemi hjá Havstovuni seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 11.035 | 10.607 | 10.799 | 10.936 | 11.647 |
| 14-19 | Rakstrarútreiðslur | 1.842 | 2.273 | 2.034 | 1.950 | 1.758 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -1.281 | -945 | -819 | -1.033 | -633 |
| 29 | Yms. rakstrarinnt.innanh. flyt. | 0 | -83 | -7 | 0 | 0 |
| 71 | millum alm.stovn. (útr) | 220 | 85 | 15 | 15 | 15 |
| | **Tilsamans** | **11.817** | **11.938** | **12.021** | **11.868** | **12.787** |

Roknskapartøl fyri vanliga virksemi hjá Magnus Heinasyni seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 6.308 | 5.869 | 7.093 | 7.559 | 6.999 |
| 14-19 | Rakstrarútreiðslur | 6.016 | 6.169 | 5.416 | 6.181 | 4.842 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -1.417 | -1.046 | -1.733 | -2.982 | -1.154 |
| 71 | Innanh. flyt.m.alm.stovn. (útr) | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **10.906** | **10.996** | **10.776** | **10.757** | **10.687** |

Sambært Havstovuni var lønarkarmurin hjá stovninum ov lítil, og orsøkin til meirnýtsluna í 2016 er m.a., at samlaðu inntøkurnar eru lækkaðar 367 t.kr., umframt at rakstrarkostnaðurin er hækkaður. Tey høvdu tó fyrr klárað at hildið játtanina, tá ið verkætlanirnar høvdu fíggjað størri part við fremmandari fígging.

### *Roknskaparreglugerð*

Havstovan hevur roknskaparreglugerð frá 2012 og er farin undir at dagføra hana.

### *Innanvirkis roknskaparskipan*

Havstovan hevur egna skipan til at rokna út hýrur til manningina á Magnus Heinasyni. Avreiðingarvirðið og útreiðslurnar, sum skulu dragast frá, manningartal, eykapartar, manningarpartar (15%) o.a. verða tøppaðar inn í skipanina. Skipanin roknar síðani partin til hvønn mann sær út umframt frítíðarløn.

### *Peningastovnskontur*

Havstovan hevur tvær peningastovnskontur. Onnur er í navninum hjá Magnus Heinasyni, og hin í navninum Nordic WOCE. Umsitingarleiðarin stemmar konturnar av eina ferð um mánaðin. Í 2009 hevur Havstovan fingið loyvi at hava gjaldkort, sum bókhaldarin umsitur.

Peningastovnskontan “Magnus Heinason” verður m.a. brúkt til at rinda umvegis netbanka og til inngjald fyri avreiðingar hjá skipinum. Vit stemmaðu kontuna av, onki var at finnast at.

### Inntøkur

Meginparturin av inntøkunum hjá vanliga virkseminum hjá Havstovuni eru fyri at taka lut í verkætlanum, rakstrargjald og gjald fyri umbiðið arbeiði. Inntøkurnar hava seinastu 5 árini verið:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2181 | Vørusøla til privat | 0 | -16 | -16 | -29 | 0 |
| 2182 | Vørusøla til alm. stovnar v.m. | -57 | -137 | -46 | -50 | 0 |
| 2191 | Onnur søla av tæn., leigu v.m.,privat | 0 | -232 | -40 | -201 | -11 |
| 2192 | Onnur søla av tæn.leigu v.m. alm. | -1.223 | -560 | -717 | -753 | -621 |
| | **Tilsamans** | **-1.281** | **-945** | **-819** | **-1.033** | **-633** |

Havstovan hevur eisini egnar inntøkur av verkætlanum. Tær verða bókaðar á stovnsnummar 141252 “Havstovan, verkætlanir”.

### Lønir

Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2016 kannaðu vit, um lønirnar hjá trimum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

Stjórin varð settur í tíðaravmarkað starv í 5 ár við møguleika at leingja starvstíðina við upp til trimum árum. Avtalan varð longd munnliga, men nú eru meira enn 6 ár farin, og hava hann og ráðið ikki gjørt nakra skrivliga avtalu um leingjan av starvstíðini.

***Ongin skrivlig avtala um leingjan av áramálssetta stjóra-starvinum.***

*Tíðarskráseting*

Starvsfólkini á Havstovuni skráseta arbeiðstímarnar. Tey skráseta eisini, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til. Tann skrásetingin er manuel og verður tøppað inn í klokku-skipanina, tá ið mánaðurin er liðugur. Deildarleiðararnir vátta tímarnar.

Starvsfólk kunnu í mesta lagi skylda tímar, ið svara til tvær arbeiðsvikur. Yvirtíð verður bert latin, um avtalað er við leiðaran frammanundan.

Landsgrannskoðanin kannaði tímasaldurnar hjá starvsfólkunum í mars 2016 eftir lista frá stovninum. Yvirlitið vísti, at eitt starvsfólk átti góðar 500 tímar, meðan nøkur áttu um 100 tímar tilgóðar.

Umsitingarleiðarin ger tímarnar upp mánað fyri mánað, og hevur Havstovan skrivligar mannagongdir fyri arbeiðstíð og skráseting av tímum.

## 4.6.1 Verkætlanir

Undir høvuðskontu 5.34.3.01. eru fleiri undirkontur. Vit kannaðu undirkontu 45 “Verk-ætlanir”. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2011 fevnir kontan um verkætlanir, sum verða fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum og øðrum granskingargrunnum o.a. Har verður eisini kunnað um, at Havstovan fremur týðandi royndir í samstarvi við vinnu, einstaklingar o.o. í Føroyum og uttanlands. Havstovan fær í flestu førum 20-25% av lønarkostnaðinum í rakstrargjaldi (overhead).

Undirkonta 45, verkætlanir 2012 til 2016:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 3.266 | 2.748 | 4.500 | 3.124 | 2.691 |
| 14-19 | Rakstrarútreiðslur | 1.110 | 3.003 | 2.503 | 2.864 | 1.687 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 | 0 | 15 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -3.266 | -4.768 | -5.926 | -5.142 | -3.275 |
| 71 | Innanh. flyt. m.alm. stovn. (útr) | 4 | 2 | 7 | 0 | 0 |
| 76 | Innanh. flyt. m.alm.stovn. (innt) | -1.096 | -921 | -1.021 | -864 | -1.083 |
| | **Tilsamans** | **17** | **63** | **64** | **-18** | **35** |

Inntøkurnar í 2016 vóru 3.275 t.kr. Í 2015 og 2014 vóru inntøkurnar ávikavist 5.142 t.kr. og 5.926 t.kr.

Vit valdu at kanna 2 verkætlanir:

*Stað 8166 Reyðæti*

*t.kr.*

| St.kt. | | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 234 | 459 | 426 | 122 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 443 | 96 | 222 | 41 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 80 | 0 | 0 | 0 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 1 | 0 | 0 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -757 | -563 | -647 | -164 |
| 71 | Innanh. flyt. m.alm. stovn. (útr) | 0 | 7 | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Talan er um eina PhD-verkætlan, sum hevur til endamáls at kanna reyðæti í havøkinum norðan fyri Føroyar. Verkætlanartíðarskeiðið er 2013 til 2016, men sambært Havstovuni er verkætlanin seinkað nakað.

Stuðulin til verkætlanina er partur av fígging frá Forsknings- og Innovationsstyrelsen í Danmark, 12 mió.kr., sum eru ætlaðar til 5 ymiskar verkætlanir hjá Havstovuni, íroknað verkætlanina um reyðæti. Játtaðar eru 2.293 t.kr. til verkætlanina.

Havstovan ger roknskap fyri verkætlanina og verður hann sendur stuðulslataranum, tá ið verkætlanin er liðug. Havstovan hevur upplýst, at roknskapurin enn ikki er liðugur.

*Stað 8177 AtlantOS*

*t.kr.*

| St.kt. | | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 105 | 35 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 199 | -89 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -304 | 54 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** |

Høvuðsendamálið við verkætlanini er at sameina eina ørgrynnu av mátingum í Atlantshavinum. Mátingarnar eru bólkaðar í nakrar høvuðsbólkar. Havstovan er við í bólkinum “Fisheries and zooplankton observations”, sum eru dátur frá uppisjóvar-túrum, og “OceanSITES transport”, t.e. hita- og streymmátingar. Tilsamans 63 granskingarstovnar úr londum kring Atlantshavið, tó serliga í Evropa, eru við í verkætlanini, sum verður stýrd av havfrøðisstovninum GEOMAR í Kiel.

Verkætlanartíðarskeiðið er 2015 til 2019. Játtanin til føroyska partin av verkætlanini er 85,8 t.EUR og er fíggjað av ES-granskingarsamstarvinum. Talan er um stuðul til ferðakostnað og útgerð.

### 4.6.2 Váttan fyri verkætlanina NACLIM

Stovnar og onnur hava møguleika at søkja um ES-stuðul í sambandi við, at tey luttaka í ymiskum altjóða verkætlanum. Í ávísum førum virkar Landsgrannskoðanin sum grannskoðari fyri stuðulslataran fyri føroyska partin av verkætlanini, tí stuðulslatarin ikki hevur myndugleika at grannskoða henda partin.

Í hesum sambandi hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað verkætlan, sum Havstovan hevur luttikið í. Verkætlanin er nevnd NACLIM (North Atlantic Climate) og er stuðlað av “Seventh Research Framework” (FP7). Endamálið við verkætlanini er: *“NACLIM aims at investigating and quantifying the predictability of the climate in the North Atlantic/European sector related to North Atlantic/Arctic sea surface temperature (SST) and sea ice variability and change on seasonal to decadal time scales.”*

Landsgrannskoðanin kannaði um stuðulin, sum Havstovan hevur fingið til verkætlanina, er nýttur eftir ásetingunum hjá FP7, og hevur latið teimum váttan um grannskoðanina. Landsgrannskoðanin hevði onki at finnast at.

## 4.7 Flutningsstuðul (LG 2016/205-0344)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til "Flutningsstuðul". Trygdargrunnurin umsitur játtanina. Í 2016 hevur Fiskimálaráðið rindað 195 t.kr. fyri umsiting av stuðlinum.

Endamálið við flutningsstuðlinum er í rímiligan mun at javnstilla fiskaframleiðarar í útjaðaraøkjunum við meginøkið. Játtanin er á høvuðskontu 5.34.4.22. "Flutningsstuðul" (lógarbundin játtan). Lógargrundarlagið undir flutningsstuðlinum er Ll. nr. 14/1999 "um stuðul til flutning av fiski" og K. nr. 18/2009 "um stuðul til flutning av fiski".

Roknskapartøl 2012 til 2016 og játtanin fyri 2017:

*t.kr.*

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | J 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuðul til vinnu | 2.071 | 1.398 | 1.136 | 1.084 | 2.274 | 2.200 |

Í 2016 vóru samlaðu útreiðslurnar til flutningsstuðul 2.274 t.kr. til 11 umsøkjarar. Harav fingu tríggir umsøkjarar meginpartin, 2,2 mió.kr.

Vit valdu trý útgjøld fyri 65 flutningar til nærri grannskoðan.

Vit kannaðu, um:

- tíðarfreistin er hildin,
- rokning er fyri fiskakeyp, sum kann sanna nøgdina, ið søkt verður um,
- flutningsrokning er, sum kann sanna, at fiskurin er fluttur, og at virkið hevur havt útreiðslur av flutninginum,
- firðir ella sund skilja seljara og keypara, og
- rættur stuðul er latin pr. kg.

Vit høvdu onkrar spurningar, sum Trygdargrunnurin hevur svarað.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at umsitingin av flutningsstuðli er trygg. Okkara fatan er, at innaneftirlitið tryggjar, at rættar upphæddir verða rindaðar.

# 5 Mentamál

## 5.1 Mentamálaráðið (LG 2016/207-0111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin 2016 hjá Mentamálaráðnum. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

### Roknskaparreglugerð

Mentamálaráðið hevur eina roknskaparreglugerð frá juli 2016. Ráðið dagførir fylgiskjøl við heimildum, o.l., so hvørt broytingar eru.

### Lønir

25 fólk starvast á Mentamálaráðnum. Játtanin er 16,5 mió.kr. í 2016, harav 13,5 mió.kr. eru til lønir. Mentamálaráðið hevur reglur í roknskaparreglugerðini um at starvsfólk kunnu hava +30/-30 tímar í flexsaldu.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri mars 2016 grannskoðaðu vit fýra lønarmál. Í juni 2017 áttu 5 starvsfólk millum 31 og 139 tímar tilgóðar; ongin skyldaði yvir 30 tímar. Vit høvdu annars onki at finnast at.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit roknskaparskjøl, um tey hoyrdu til stovnin og vóru konterað sambært galdandi reglum.

Ráðið hevur goldið fyri diplomútbúgving í leiðslu, vegna starvsfólk, sum fór úr starvið í 2013. Útreiðslan er hildin sambært semju, sum ráðið gjørdi við starvsfólkið tá.

Semjan fevndi eisini um 90 t.kr. í endurgjaldi, sum varð flutt beinleiðis á kontu. Vit spurdu, hví endurgjaldið ikki varð goldið um A-skattaskipanina. Mentamálaráðið hevði onga meining ella avtalu um endurgjaldið skuldi verða skattskyldugt ella ikki, og vísti til TAKS. Landsgrannskoðanin ivast í, um ein generell áseting í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, um 2 1/2 mánaða endurgjald vegna ógrundaða uppsøgn, skal verða skattafrítt. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Vit umrøddu tvær rokningar, um hví onki meirvirðisgjald var á teimum. Onnur rokningin var frá danskari fyritøku, og hin var frá føroyskari fyritøku. Vit mæltu Mentamálaráðnum til at seta seg í samband við TAKS, tá ið ivamál um meirvirðisgjaldsskyldu stinga seg upp.

### Uttanlands ferðauppgerðir

Vit kannaðu nakrar uppgerðir fyri ferðing hjá starvsfólkum uttanlands. Vit høvdu onkrar viðmerkingar. M.a. varð ferðaendurgjaldið ikki gjørt rætt upp, endurgjald fyri ferðing til og frá flogvøllinum í Føroyum varð gjørt upp á ymsar hættir, og í einum dømi varð endurgoldið uttan skjal. Mentamálaráðið hevur kunnað um, at tey hava skerpað eftirlitið við ferðauppgerðum, soleiðis at tær fylgja almennu reglunum.

***Uttanlands ferðauppgerðir ikki gjørdar rætt upp.***

Dømi vóru um, at útreiðslur fyri gisting fóru upp um mest loyvdu upphædd, sambært vegleiðing frá Fíggjarmálaráðnum. Mentamálaráðið sigur, at viðhvørt er trupult at halda seg innan fyri ásettu upphæddina, og í flestu førum verður greitt frá orsøkini.

Siðvenja er, at Mentamálaráðið endurrindar starvsfólkum útreiðslur til Airporttaxa, tó at undantøk eru.

### Gjaldkort

Mentamálaráðið hevur eitt gjaldkort, sum stjórnarskrivarin hevur um hendi. Heimildarváttan er til kortið.

### KT viðurskifti

Mentamálaráðið hevur ongar KT skipanir, sum liggja uttan fyri Landsnet.

Vit spurdu, hvørji starvsfólk hava atgongd til at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 5.2 Nám (LG 2014/207-0231)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðanina av Námi.

### Undirvísingaramboð

Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a.” er sett í gildi í mai 2014. Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at reglur vóru ikki gjørdar um virksemið hjá stovninum og um stuðulsveitingina sambært ásetingunum í § 3 í lógini.

Í august 2015 segði landsstýrismaðurin, at arbeitt varð við kunngerðini um stuðul at gera undirvísingarmiðlar, men at arbeiðið við kunngerðini um virksemið hjá stovninum var ikki byrjað.

***Ongar reglur gjørdar um virkemið hjá stovninum.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at kunngerðin um virksemið á stovninum er ikki gjørd.

### Eftirútbúgving og skeið

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, var sambært landsstýrismanninum ikki liðugt.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið er ikki liðugt enn.

### Roknskaparreglugerð

***Góðkend roknskapar-reglugerð.***

Í 2015 mælti Landsgrannskoðanin Námi til at dagføra roknskaparreglugerðina, soleiðis at hon svarar til støðuna á samanlagda stovninum. Dagførda roknskaparreglugerðin varð góðkend í desember 2016.

### Flexsaldur

Í seinastu ársfrágreiðingunum umrøddu stóru flexsaldurnar, sum vóru á Mentamálaráðnum/Prófstovuni.

Landsgrannskoðanin helt, at tað var alt ov nógv, at starvsfólk áttu fleiri 100 tímar tilgóðar, og at tað var heldur ikki í tráð við reglurnar hjá ráðnum, sum loyva flexsaldur +30/-30 tímar.

Í juni 2016 segði landsstýrismaðurin, at stóru flexsaldurnar vóru avgreiddar, og at Prófstovan nú bygnaðarliga vísir til stjóran í Námi, sum harvið hevur ábyrgdina av starvsviðurskiftunum í Prófstovuni.

Vit hava spurt, hvørjar flexsaldurnar í dag eru hjá starvsfólkunum, sum bygnaðarliga vórðu flutt til Nám. Í august 2017 eru enn stórar flexsaldur.

***Framvegis stórar flexsaldur.***

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sambært leiðaranum á Námi verður arbeitt við at normalisera flexsaldurnar, men enn er ikki komið á mál. Starvsfólkini á Próvstovuni innvinna ofta flextíð í próvtøkutíðarskeiðnum, sum verður avspákað um heystið.

## 5.3 Læraraløgnir í fólkaskúlanum (LG 2016/207-0232)

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum grannskoðað læraraløgnir í fólkaskúlanum 2016. Vit kannaðu nakrar læraraløgnir á Skúlatrøð í Klaksvík. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um løgnirnar vóru rættar, og hvussu málsviðgerðin av starvsfólkamálum er.

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 125/1997 “um fólkaskúlan”. Sambært § 32, stk. 2, í lógini skipar landsstýrismaðurin í mentamálum læraratalið á skúlunum grundað á upplýsingar frá einstaka skúlanum um væntað tal av næmingum, flokkum o.ø.

Skúlin sendir Mentamálaráðnum næmingatalið, og stýrisdeildin í Mentamálaráðnum tillutar tímar til fólkaskúlarnar og umsitur skúlaforskipanina til løgnarkoyringarnar. Løgnardepilin á Gjaldstovuni rindar løgnirnar út.

### Roknskapartøl

Í 2016 er játtanin til fólkaskúlan 304,3 mió.kr., harav meginparturin fer til løgnir. Sambært fíggjarlógini er talan um 713 fulltíðarstørv.

Roknskapartøl 2012 til 2016:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Løgnir | 274.928 | 277.069 | 288.228 | 293.147 | 301.627 |
| 14 | Keyp av vørum og tænast. | 645 | 1.194 | 414 | 1.151 | 1.078 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 477 | 280 | 0 | 0 | 0 |
| 51 | Tilskot til útlandið o.a. | 0 | 0 | 180 | 0 | 0 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 0 | 22 | 0 | 0 | 2 |
| 54 | Stuðul til annað virksemi | 774 | 1.230 | 887 | 1.201 | 886 |
| 71 | Innanh.flyt.ml.almen.stovnar | 799 | 809 | 536 | 501 | 695 |
| | **Tilsamans** | **277.623** | **280.604** | **290.245** | **296.000** | **304.288** |

### Gjøgnumgongd av starvsfólkamálum

Við støði í løgnarútgjaldingunum í mars 2016 kannaðu vit nøkur løgnarmál. Stakroyndirnar vístu, at løgnirnar verða goldnar út eftir røttum sáttmála og røttum løgnarflokki. Frávera verður skrásett, og yvirskipað fylgir stjórin øðrum lærara-uppgávum, uttan at tað verður skjalfest.

Skúlastjórin er setanarmyndugleikin, og lýsir størv leys og skipar setanartilgongdina.

Eldru setanirnar kannaðu vit hjá Mentamálaráðnum. Læraraprógv vóru í øllum málunum. Ongar lýsingar ella umsóknir um starv vóru í málunum. Í trimum málum var ongin setanarsáttmáli. Tað kann skyldast, at starvssetanirnar eru gamlar, og at tað hava verið fleiri enn ein setanarmyndugleiki.

Tær báðar nýggju setanirnar hevur núverandi skúlastjórin avgreitt. Skúlin hevði eina mappu við starvssetanum 2014/15. Í mappuni vóru umsóknir og undirskrivaðir setanarsáttmálar. Vit fingu eisini avrit av læraraprógvum og starvslýsing. Landsgrannskoðanin mælti til, at skúlin nýtir eina starvsfólkamappu til hvørt starvsfólkamál.
Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja almenna setanarpolitikkinum, tá ið gjørt verður av, hvør skal setast í starv, t.e. at setanarbólkar gera skrivlig notat um, hvussu teir eru komnir til sínar niðurstøður/tilmæli.

***Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja almenna setanar-politikkinum.***

### Lønarútrokningar

Til tess at kanna, um lønarútgjaldingarnar eru rættar, samanhildu vit setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Hóast setanarskriv ikki eru í øllum málunum, halda vit, at lønirnar eru rættar, tí lærararnir hava verið í starvi nóg leingi til at vera á hægsta lønarstigi. Vit staðfestu, at næmingayvirlit og tímatalva samsvaraðu við virksemisætlan, undantikið onkran smávegis feil.

Skúlin ger virksemisætlan fyri hvønn lærara, sum vísir, hvat tímarnir skulu brúkast til, t.d. undirvísing, ráðlegging og foreldrafundir. Hesa virksemisætlan fáa lærararnir at arbeiða eftir. Skúlin førir ikki protokoll fyri einstøku uppgávurnar hjá lærarunum. Í høvuðsheitum er tað bert frávera, sum verður skrásett.

Stjórin greiddi frá, at hann fylgir gongdini í ymisku toymisarbeiðunum. Stjórin heldur, at neyv skráseting av øllum, ger arbeiðið stirvið bæði fyri lærara og skúla. Lærarin fær eitt ávíst tímatal til eitt nú foreldrasamstarv; okkurt ár verður minni tíð brúkt og okkurt ár meira. Stjórin metti mannagongdina vera best hóskandi fyri skúlavirksemið.

### Vikarlønir

Vit kannaðu eisini nakrar vikarlønir hjá bæði sáttmálasettum, tænastumannasettum og lærarum uttan sáttmála. Onki var at finnast at.

## 5.4 Rásin (LG 2014/207-0232)

Í seinastu ársfrágreiðing umrøddu vit aftur grannskoðanina av Rásini. Stovnurin hevði onga journalskipan, og sambært okkara kanningum vórðu persónsupplýsingar, ið kundu vera eymar, ikki goymdar forsvarliga. Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at skjølini skuldu verða goymd soleiðis, at lætt var at finna tey aftur, at eymar upplýsingar verða viðgjørdar og goymdar á rættan hátt, og at tær verða fyribeindar skynsamt.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Rásin nú er innlimað í Landsnet, og at journalskipan verður komin uppá pláss í hesum árinum.

Landsstýrismaðurin hevur eisini kunnað um, at roknskaparreglugerðin hjá stovninum er góðkend.

### Næmingagjøld

Næmingarnir á Rásini rindaðu 3.000 kr. um mánaðin, hóast ongar reglur vóru gjørdar, sum ásett er í Ll. nr. 67/2003. Landsgrannskoðanin vísti á, at viðurskiftini kundu sammetast við sambýlir undir Almannamálaráðnum, sum hava reglur um, hvat sambýli kunnu rinda av játtanini, og hvat búfólkini sjálvi skulu gjalda.

Í juni 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at reglur um næmingagjøld ikki vóru gjørdar, men skuldu gerast í næstum, og at Mentamálaráðið fór at kanna, hvørjar reglur Almannamálaráðið nýtir fyri døgnstovnatilboð.

***Rásin brúkar reglurnar hjá Almannamálaráðnum.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin víst á, at næmingarnir á Rásini rinda 3.000 kr. um mánaðin í 10 mánaðir fyri kost og logi. Útreiðslur til klæði, hárfríðkan, sápu o.a. rinda næmingarnir fyri sjálvir. Tað er eftir somu reglum, sum rundskrivið hjá Almannamálaráðnum ásetir.

***Kassaeftirlit.***

## 5.5 Miðnámsskúlin í Suðuroy (LG 2016/207-0233)

Í mars 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Miðnáms-skúlanum í Suðuroy. Landsgrannskoðanin stemmaði kassan av við Búskaparskipan

landsins. Uppgerðin vísti ein mun í kassanum, sum sambært Miðnámsskúlanum stavar frá einum skrásetingarfeili. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar.

Stovnurin hevur peningastovnskontu, sum er skrásett í Búskaparskipan landsins. Vit samanbóru saldurnar við kontuavrit frá peningastovninum 31. januar 2017. Onki var at finnast at.

## 5.6 Heilsuskúli Føroya (LG 2016/207-0233)

*Kassaeftirlit.*

Í mars 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Heilsuskúla Føroya.

Uppteljingin vísti, at samsvar var ikki millum kassapeningin og salduna í Búskaparskipan landsins, munurin var 5 t.kr. Heilsuskúli Føroya hevur greitt frá, at orsøkin stavar frá 2015, tá ein kassauppgerð bleiv bókað við skeivleikum. Gjaldstovan hevur í mars 2017 bókað kassauppgerðina, sum hon upprunaliga skuldi bókast.

Stovnurin hevur peningastovnskontu, sum er skrásett í Búskaparskipan landsins. Vit samanbóru saldurnar á kontuavritinum og Búskaparskipan landsins pr. 31. januar 2017. Onki var at finnast at.

## 5.7 Miðnám á Kambsdali (LG 2016/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Miðnámi á Kambsdali. Endamálið var at kanna innanhýsis mannagongdir, og um roknskapurin var rættur.

Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy og Føroya Handilsskúli á Kambsdali vórðu eftir summarferiuna 2015 lagdir saman í ein skúla. Nýggi skúlin eitur Miðnám á Kambsdali. HF-skeiðið í Klaksvík er partur av Miðnámi. Í løtuni ganga um 600 næmingar á skúlanum, og har starvast um 84 starvsfólk.

Miðnám á Kambsdali er skipað við støði í Ll. nr. 62/2012 “um gymnasialar miðnámsútbúgvingar” og veitir eisini undirvísing samsvarandi Ll. nr. 107/1998 “um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið” og Ll. nr. 49/2005 “um stuttar framhaldsútbúgvingar á yrkisskúlum og almennum útbúgvingarstovnum”.

Skúlin brúkar protokoll, prógv, miðaltøl og fráveru sum amboð fyri at meta um nádd úrslit. Lærarar skulu gera eftirmetingar.

### KT viðurskifti

Netið hjá skúlanum er deilt í næminga-, lærara- og skrivstovunet, og skulu lærarar og næmingar logga á. Backup verður tikin hvønn dag og goymt á netinum. Dáturnar verða krypteraðar til eina fílu, sum verður upploadað, og kann altíð farast aftur 2 mánaðir í goymdu dátunum.

Miðnámsskúlin hevur egnan fílu- og logonservara. Prótvøl o.l. verða goymd á skipan, sum Mentamálaráðið umsitur.

*Skúlin hevur orðað trygdarpolitikk og gjørt váðameting.*

Skúlin hevur í januar 2017 orðað trygdarpolitikk og gjørt váðameting. Harafturat er okkum upplýst, at skúlin hevur tryggjað sær, at allar dátur kunnu endurskapast.

### Roknskaparreglugerð

*Roknskaparreglugerðin er góðkend.*

Skúlin hevur gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, og landsstýrismaðurin hevur síðani eftirlitið kunnað um, at roknskaparreglugerðin er góðkend av Mentamálaráðnum.

Skúlin avgreiðir øll síni fíggjarviðurskifti í Búskaparskipan landsins. Mánaðarroknskapurin verður góðkendur rættstundis.

### Ognaryvirlit

Skúlin hevur ognaryvirlit, tónleikaútgerðin er tó ikki við í yvirlitinum. Sambært skúlanum er ætlanin at skráseta útgerðina í 2017.

### Kassi

*Kassarnir stemma.*

Á skúlanum eru tríggir kassar. Ein er á skrivstovuni og ein í hvørjari kantinu. Kassin á skrivstovuni verður mest nýttur til kopigjald, e-bøkur, ferðaútreiðslur og smærri keyp. Kassin á skrivstovuni verður gjørdur upp einaferð um vikuna, meðan kassarnir í kantinunum verða gjørdir upp hvønn dag. Vit taldu kassarnar upp og samanhildu við seinastu uppgerðirnar. Onki var at finnast at.

### Peningastovnskontur

Miðnám á Kambsdali hevur tríggjar peningastovnskontur, og allar eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Tvær kontur hava gjaldkort knýtt at. Gjaldkortini verða fyrst og fremst nýtt til keyp á alnótini. Vit stemmaðu konturnar av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

Triðja kontan verður serliga nýtt til kortterminalin, onkrar gjaldingar og ferðaútreiðslur hjá næmingum. Vit stemmaðu kontuna av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

### Skuldarar og inntøkur

Skúlin sendir rokningar til luttakarar á akademiútbúgvingini og øðrum skeiðum. Í oktober 2016 var debitorsaldan 95.217 kr., harav 54.375 kr. eru frá 2016.

Írestandi 40.843 kr. stava frá, at Føroya Handilsskúli í 2012 sendi Studentaskúlanum rokning fyri olju og telefon. Peningurin var í 2013 skeivt fluttur til Næmingaheimið á Kambsdali í staðin fyri til Handilsskúlan. Miðnám hevur í 2016 sent rokning til Næmingaheimið.

### Keyp

Skúlin biður um tilboð uppá størri keyp. Ætlanin er, at bókasavnsnevndin skal taka sær av øllum keypi av bókum og fakligari útgerð, so at tað er ein persónur, sum keypir og váttar.

### Lønir

Við støði í lønarútgjaldinginum fyri august 2016 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá fýra starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv, tímatalvur o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

### Kantina

*Prísirnir í kantinuni verða javnaðir eina ferð um árið.*

Kantinan hevur tvey sølustøð. Prísir verða javnaðir eina ferð um árið. Raksturin av kantinuni hvílir ikki heilt í sær sjálvum. Goymslan verður tald upp við ársskiftið.

Sambært skúlanum verða prísir ásettir soleiðis:

- prísirnir skulu vera á hædd við sølustøð í nærumhvørvinum, so skúlin hvørki er kappingaravlagandi ella tekur okursprísir,
- góðgæti verður vanliga prísásett við at seta umleið 100% oman á innkeypsprísin,
- gjørligt skal vera hjá næmingunum at fáa heitan mat á miðdegi til ein rímiligan pening. Søluprísurin má tó ongantíð fara undir framleiðslukostnað, og
- prísir á vanligum vørum verða dagførdir regluliga. Prísirnir á mati seldur á miðdegi, verða dagførdir 2 ferðir um árið.

## 5.8 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2016/2007-0233)

Verklagslógin varð samtykt í juni 2012. Sambært fíggjarlógini varð farið undir at byggja á várið 2014, og skuldi bygningurin standa liðugur áðrenn árslok 2016. Sambært Búskaparskipan landsins eru 36,6 mió.kr. brúktar frá 2012 til 2016:

*t.kr.*

| VE | Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1001 | Handverkaraútr. | 14 | 0 | 8.975 | 9.155 | 7.662 | 25.806 |
| 1002 | Projekteringsútr | 275 | 1.841 | 341 | 6 | -1.525 | 937 |
| 1003 | Eftirlit og byggileiðsla | 0 | 0 | 282 | 898 | 1.625 | 2.805 |
| 1004 | Innt. ráðg. og leiðsla | 126 | 320 | 481 | 413 | 93 | 1.432 |
| 1005 | Útgerð og tól | 0 | 0 | 0 | 2.000 | 1.053 | 3.053 |
| 1006 | Málásettar útr. | 0 | 36 | 97 | 151 | 52 | 336 |
| 1007 | Eyka og meir/minni veiting | 0 | 0 | 0 | 859 | 1.354 | 2.213 |
| 1008 | Prísvøkstur | 0 | 0 | 0 | 0 | 53 | 53 |
| | **Tilsamans** | **415** | **2.197** | **10.176** | **13.481** | **10.366** | **36.635** |

Vit kannaðu um:

- skrivligar avtalur eru gjørdar um allar arbeiðstøkurnar,
- kostnaðurin svarar til tilboðini, og
- skrivligar avtalur eru gjørdar um eyka- og meir/minniveitingar.

Vit fingu avrit av høvuðsavtalunum um byggingina. Avtalur vóru eisini um eyka- og meir/minniveitingar.

Vit samanbóru útgjøld í Búskaparskipan landsins við avtalaða kostnaðin. Flestu upphæddirnar stemmaðu, men útgjøldini til tvær fyritøkur samsvaraðu ikki við avtalaðu upphæddirnar. Vit fara at taka málið upp aftur við Landsverk.

***Útgjøldini til tvær fyritøkur samsvaraðu ikki við avtalaðu upphæddirnar.***

Sambært skjølum í Búskaparskipan landsins skuldi samlaða samsýningin fyri projektering vera 2,2 mió.kr. Í desember 2016 hevur Landsverk sett høvuðsráðgevanum krav á smáar 1,6 mió.kr. Sambært Landsverki er størsti parturin av útreiðslunum projekteringsfeilir og harav fylgjandi feilir, sum Landsverk hevur lagt út fyri. Upphæddin er mótroknað útreiðslunum til projektering í roknskapinum 2016.

Landsverk hevur greitt frá, at "*gjøgnum alla verkætlanina hava verið trupulleikar við ráðgevanum og í fleiri førum er talan um projektfeilir við fíggjarligum avleiðingum.*"

Sambært verklagslógini fyri skúlan skal Mentamálaráðið lýsa veðrætt í skúlanum. Í august 2017 hevur Mentamálaráðið svarað Landsgrannskoðanini, at tað er ikki gjørt.

***Mentamálaráðið ikki lýst verðrætt í skúlanum.***

## 5.9 Skúladepil í Suðuroy, løgujáttan (LG 2016/207-0233)

Í sambandi við grannskoðan av Inntøkufíggjaðum virksemi hjá Landsverki kannaðu vit m.a. verkætlanina nevnd "Hov mangulútbetringar". Verkætlanin var fíggjað við peningi, ið var støðlaður á játtanini "Skúladepil í Suðuroy".

Ymiskt hevur verið frá ári til ár, hvussu aktivitetirnir í sambandi við byggingina av Skúladeplinum í Suðuroy hava verið viðgjørdir roknskaparliga. Landsgrannskoðanin valdi tí at kanna roknskapin fyri byggingina.

Skúladepilin varð tikin í nýtslu í 2009. Í 2010 stóðu 4,9 mió.kr. støðlaðar á játtanini. Í 2010 vórðu 3,8 mió.kr. lagdar afturat, soleiðis at samlaða upphæddin varð 8,7 mió.kr.

Niðanfyri sæst fíggjarliga gongdin í sambandi við byggingina av Skúladeplinum.

*kr.*

| Ár | Roknskapur | Sett av | Brúkt avseting | Salda avseting |
|---|---|---|---|---|
| 2001 | 690.824 | | | |
| 2002 | 872.294 | | | |
| 2003 | 1.812.099 | | | |
| 2004 | 4.274.522 | | | |
| 2005 | 1.487.370 | | | |
| 2006 | 6.825.128 | | | |
| 2007 | 26.577.455 | | | |
| 2008 | 61.587.787 | 17.585.280 | 2.000.000 | -15.585.280 |
| 2009 | 0 | | 10.700.749 | -4.884.531 |
| 2010 | 2.333.349 | | -3.815.469 | -8.700.000 |
| 2011 | 0 | | 0 | -8.700.000 |
| 2012 | 0 | | 2.036.791 | -6.663.209 |
| 2013 | 0 | | 5.605.559 | -1.057.650 |
| 2014 | 0 | | 840.331 | -217.319 |
| 2015 | 0 | | 27.294 | -190.025 |
| 2016 | | | 190.025 | 0 |
| **Tilsamans** | **106.460.828** | | **17.585.280** | |

### 2008 til 2013

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er játtanin niðurløgd í 2009, tí skúla-verkætlanin varð liðuggjørd í 2008.

Landsgrannskoðanin spurdi Landsverk, um tað er rætt at skráseta á løgujáttanina, tá ið játtanin sambært viðmerkingunum er niðurløgd í 2009. Landsverk svaraði, at *"Hóast ongin játtan var, so var arbeiðið ikki endaliga liðugt. Vit høvdu gerðarrættarmál koyrandi umframt mangeludbedringer."* Stovnurin leggur afturat, at tey í samráði við Gjaldstovuna hava bókað á løguna fyri at tryggja gjøgnumskygni.

Í juni 2017 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at ráðið hevur ikki aðrar viðmerking, "*enn at Landsverk má hava hildið tað verið neyðugt fyri at rætta upp á avsettu upphæddina*."

Í 2012 vórðu 2 mió.kr. brúktar, harav 1 mió.kr. var keyp og restin, 1.035 t.kr., vóru kreditnotur fyri sølu í 2010. Landsgrannskoðanin spurdi Landsverk, hvar sølan var bókað. Landsverk svaraði, at sølan var bókað í 2010 og legði við kontukort fyri sølu 2010 og fíggjarstøðukontu 2012.

Landsgrannskoðanin helt, at Landsverk svaraði ikki spurninginum um, hvar upphæddin endaði og bað landsstýrismannin um frágreiðing. Mentamálaráðið svaraði, "*at tað er avmarkað, hvat Mentamálaráðið kann svara her, tí Mentamálaráðið kennir ikki til, hvussu Landsverk bókar innanhýsis.*"

Í 2013 varð semja gjørd í Gerðarrættinum ímillum Landsverk og P/f MT Højgaard viðvíkjandi Skúladeplinum í Suðuroy, og við endan av árinum stóðu 1.058 t.kr. eftir í fíggjarstøðuni á løgujáttanini.

### 2014 til 2016

Í 2014 eru 840 t.kr. brúktar av støðlaða peninginum. Upphæddin er skrásett sum søla á "Inntøkufíggjað virksemi" hjá Landsverki á verkætlanina "Hov mangulútbetringar". Útreiðslurnar eru: lønir 300 t.kr., keyp av tænastum 377 t.kr., útbúnaður 35 t.kr. og leiga, viðlíkahald og skattur 123 t.kr., soleiðis at úrslitið er 0 kr.

Í 2015 eru 27 t.kr. fluttar frá løgujáttanini til játtanina hjá Landsverki og í 2016 er restupphæddin, 190 t.kr., nýtt. Fluttar til raksturin eru 113 t.kr. meðan restupphæddin, 77 t.kr., er flutt til játtanina 17.11.1.56. "Umvæling av almennum bygningum".

Í juni 2017 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at "*eisini her er avmarkað, hvat ráðið kann svarað, tí Mentamálaráðið kennir ikki til, hvussu Landsverk bókar innanhýsis*".

### Flytingar ímillum játtanir

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er ivasamt, um tað er í tráð við játtanarlógina at flyta 867 t.kr. av játtanini "Skúladepil í Suðuroy" til "Inntøkufíggjað virksemi" hjá Landsverki.

Í januar 2017 hevur Landsverk kunnað um, at upphæddirnar í 2013 og 2014 vórðu fluttar á serstaka verkætlan undir inntøkufíggjaðum virksemi, sum varð nýtt sum arbeiðskonta.

Í mai 2016 hevur Landsverk goldið 113 t.kr. frá løgujáttanini vegna ventilatión til Skúladepilin, og restupphæddin 77 t.kr. er flutt til høvuðskontu 17.11.1.56 "Umvæling av almennum bygningum", á verkætlan 4112 "Skúladepilin í Suðuroy". Upphæddin er mótbókað útreiðslur, herundir rokningar frá Landsverki, og rokningar frá privatum fyritøkum fyri at leggja skerv á túnið, umvæla grótgarð, tøma rottanga og skorsteinsreins.

Sambært § 13 í játtanarlógini er sum høvuðsregla ikki loyvt at flyta játtanir millum høvuðskontur.

***Loyvt er ikki at flyta játtanir millum høvuðskontur.***

Í juni 2017 hevur Mentamálaráðið greitt frá at, uttan at kenna nærri til samanhangin, hví Landsverk ger so, er Mentamálaráðið samt við Landsgrannskoðanina um, at sambært § 13 í játtanarlógini ber ikki til at flyta játtanir millum høvuðskontur.

### Um avsetingar

Sum nevnt omanfyri hevur Landsverk í 2008 avsett 17,6 mió.kr. á StRk. 0889 "Skyldur, ið ikki eru endaligar". Sambært kontuvegleiðingini hjá Gjaldstovuni verður StRk. 0889 brúkt:

*"Um ein munandi upphædd, sum hoyrir til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann gerast endaliga upp, áðrenn roknskaparárið er lokið, skal upphæddin skrásetast á hesa kontu, grundað á eina meting. Upphæddin verður rættað í tí fíggjarárinum, tá ið kravið endaliga kann gerast upp.*

*Veittar tilsagnir, sum eru tiknar við í raksturin, men sum ikki eru útgoldnar enn, verða eisini tiknar við á hesa kontu".*

Landsgrannskoðanin spurdi Landsverk, um kontan ikki í seinasta lagi skuldi verðið gjørd upp endaliga, tá ið gerðarrættarmálið varð avgreitt í 2013. Í januar 2017 hevur Landsverk greitt frá, at tey halda ikki, at kontan skuldi verðið stongd, tí tað vóru fleiri manglar, ið ikki vóru umvældir.

Í juni 2017 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at ráðið kennir ikki til, hvussu bókað var, tá ið endurbyggingin av Skúladeplinum fór fram, men at úrslitið gjørdist, at Mentamálaráðið fekk ein brúkiligan skúlabygning.

***Mentamálaráðið heldur seg hava fingið ein brúkiligan bygning.***

## 5.10 Skúladepil við Marknagil (LG 2016/405-0009)

Í januar 2017 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um játtanar- og útreiðslugongdina í sambandi við verkætlanina at byggja Skúladepilin við Marknagil (nú Glasir). Niðanfyri er ein samandráttur av kanningini. Frágreiðingin í síni heild er at finna á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini, www.lg.fo.

Løgtingsgrannskoðararnir heittu á Landsgrannskoðanina um at gera eitt notat, sum greinar játtanar- og roknskaparviðurskiftini hjá verkætlanini "Skúladepil við Marknagil", herundir eisini lýsa útreiðslugongdina hjá verkætlanini.

Landsgrannskoðanin hevur viðgjørt, hvussu stýringin av verkætlanini var løgd til rættis, bæði yvirskipað í mun til játtan og roknskap og í mun til stýringina av útreiðslunum. Í kanningini hava vit lýst, hvussu útreiðslurnar vórðu stýrdar, men hava ikki eftirkannað tað, sum lá til grund fyri útgjaldingunum.

***Fíggjarlógirnar geva lítla ábending um aktivitetin.***

Møguleikin at flyta óbrúktar játtanir hevur verið nýttur øll árini síðani 2010, og tí geva fíggjarlógirnar lítla ábending um, nær ella í hvørjum fíggjarári aktivitetir eru á verkætlanini.

***Skipanarlig brek gera, at roknskapurin ikki er fullfíggjaður.***

Játtanar- og roknskaparskipanir landsins eru ikki heilt førar fyri at handfara eina verkætlan sum hesa, tá ið hon ikki koyrir sum á skinnarum. Kanningin vísir, at tað eru skipanarlig brek, sum gera, at roknskapirnir eru ikki fullfíggjaðir, hvørki stovns-roknskapurin ella landsroknskapurin. Brekini liggja ikki neyðturviliga hjá stovnum ella persónum, sum eru knýttir at verkætlanini, men heldur í vantandi reglum.

Árini 2008 til 2016 var samlaða nýtslan hjá verkætlanini sambært Búskaparskipan landsins góðar 413 mió.kr. Landsverk hevur fíggjarligu stýringina av verkætlani "Skúladepil við Marknagil", men Løgtingið kann ikki hava nágreiniligt eftirlit við nýtsluni orsakað av, at ymisk ógoldin krøv ikki eru sjónliga bókað í Búskaparskipan landsins.

Óvissa er um, hvussu krøvini, sum størsti arbeiðstakarin hevur sett móti Landsverki, og krøvini, sum Landsverk hevur sett móti arbeiðstakaranum, skulu viðgerast roknskaparliga.

***Verkætlanin í vanda fyri at tódna vegna vantandi reglur.***

Vantandi reglur um, hvussu krøv, ið partarnir eru ósamdir um, skulu handfarast, kunnu tí vera atvold til, at verkætlanin er í vanda fyri at tódna óneyðuga nógv.

### Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum

Vísandi til § 18 í grannskoðanarlógini lótu løgtingsgrannskoðararnir 16. mai 2017 Løgtinginum notatið saman við sínum viðmerkingum.

***Riggar illa við fleiri ábyrgdarhavarum.***

Løgtingsgrannskoðararnir vístu í viðmerkingunum á, at viðurskiftini høvdu ikki verið nøktandi. Samskifti millum tey, sum varða av Skúladeplinum, hevði ikki verið nøktandi, og at tað riggaði illa við fleiri ábyrgdarhavarum.

***Kunningin til Løgtingið ov sein og ikki altíð dagførd.***

Løgtingsgrannskoðararnir hildu eisini, at kunningin, sum hevði verið latin Løgtinginum, hevði verið ov sein og ikki altíð dagførd.

Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at ein generellur trupulleiki fyri byggiverkætlanir er, at tær gerast dýrari enn ætlað. Løgtingið hevur áður viðgjørt hesi viðurskifti, m.a. í Lm. nr. 84/2013, sum løgtingsgrannskoðararnir løgdu fyri Løgtingið í 2013.

## 5.11 Musikkskúlaskipanin (LG 2014/207-0235)

Endamálið við Musikkskúlaskipanini er, í samstarvi við heim, skúla og aðrar musikk-felagsskapir, at menna musikalsku evni og gávur næminganna og leggja grundarlag undir einum ríkum musikklívi á staðnum.

### 5.11.1 Lógargrundarlag

Síðani 2002 hevur Landsgrannskoðanin gjørt vart við, at samsvar er ikki ímillum ásetingar í lógini "um stuðul til musikkskúlar" og fyrisitingarligu mannagongdirnar.

Løgtingsgrannskoðararnir hava eisini aftur og aftur hvassliga átalað, at onki ítøkiligt hendir viðvíkjandi Musikkskúlaskipanini.

Í juni 2016 segði landsstýrismaðurin, at farið var undir eina tilgongd saman við kommununum, so loysn kundi finnast viðvíkjandi fyrisitingarligum mannagongdum.

Lógin um musikkskúlar hevur verið í gildi síðani 1984, og Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava síðani 2002 gjørt vart við, at samsvar var ikki millum allar ásetingarnar í lógini og fyrisitingarligu mannagongdirnar.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) vístu Løgtingsgrannskoðararnir á, at sambært lógini vóru tað kommunurnar, sum fyrisótu og landið endurrindaði, men í veruleikanum var tað landið, sum fyrisat, og kommunurnar, ið endurrindaðu. Skiftandi landsstýrisfólk hava síðani 2002 sagt seg vilja fáa greiði á málinum, men onki ítøkiligt var gjørt við tað. Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað als ikki vera nøktandi og átalaðu harðliga.

29. mai 2017 var Ll. nr. 83/2017 “um musikkskúlaskipan” lýst at koma í gildi 1. august 2017.

***Løgtingslóg um Musikkskúlaskipan sett í gildi.***

### 5.11.2 Fyrisiting

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 grannskoðað roknskapin hjá Musikkskúlaskipanini. Musikkskúlaleiðarin hevur dagligu, námsfrøðiligu og fakligu ábyrgdina av virksemi musikkskúlanna. Musikkskúlaleiðarin starvast einsamallur í fyrisitingini, men hevur gjørt avtalu við Mentamálaráðið um hjálp við bókhaldinum.

Í § 7, stk. 1, í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin setir eina nevnd við umboðum fyri musikkskúlarnar og landsstýrismannin at vera musikkskúlaleiðaranum til hjálpar og at samskipa musikkundirvísingina. Nevndin er mannað við 7 limum.

Nevndin kemur saman eina ferð um árið. Musikkskúlaleiðarin kunnaði um, at nevndin ikki virkaði eftir ætlan. Uppskot var sent Mentamálaráðnum um broyta nevndina, soleiðis at tað vera 3 nevndarlimir.

Landsstýrismaðurin hevur í 2017 kunnað um, at við nýggju broytingini í Ll. nr. 83/2017 verður nevndin mannað við kommunalu musikkskúlaleiðarunum og musikkskúla-stjóranum.

#### Roknskaparreglugerð

Musikkskúlaskipanin hevur roknskaparreglugerð frá desember 2004, og stovnurin dagførdi hana í 2012, men hon varð ongantíð góðkend av Mentamálaráðnum.

Landsstýrismaðurin hevur í 2017 kunnað um, at farið verður undir at orða nýggja roknskaparreglugerð, so hon er klár at taka í nýtslu, tá nýggja lógin um musikkskúla-skipan kemur í gildi.

#### Ognaryvirlit

Musikkskúlaskipanin hevur yvirlit yvir ognirnar á skrivstovuni og ljóðførini, sum stovnurin eigur.

***Ognaryvirlit er gjørt.***

#### KT viðurskifti

Musikkskúlaskipanin hevur ikki upplýsingar, sum hava týdning fyri onnur. Stovnurin skrivar ikki prógv út, uttan til næmingar, sum ganga á miðnámi.

#### Næmingagjald

Í § 3, stk. 2, í Ll. nr. 69/1984 eru ásettar treytir, sum skulu verða loknar, áðrenn studningur verður latin til skúlar, m.a. at:

- undirvísing skal standa øllum í boði,

- næmingagrundarlagið skal í minsta lagi vera 20,
- skúlin skal hava minst ein fastan lærara, og
- næmingarnir skulu gjalda eitt árligt gjald, sum er góðkent av landsstýrismanninum.

Hóast tað sambært § 3, stk. 2, skal standa øllum í boði at fáa musikkskúlaundirvísing, sleppa øll ikki inn. Um ein lærari heldur, at næmingur ikki ger nóg nógv við undirvísingina ella ikki møtir í skúla, sleppur næmingurin ikki at halda fram.

***Stórur munur á musikkskúla-gjaldinum.***

Næmingarnir rinda gjald fyri at ganga í skúla. Næmingagjaldið verður goldið til ta kommununa, har skúlin er. Gjaldið er ymiskt, alt eftir hvar næmingurin býr, t.d. 2.000 kr. í Tórshavnar Musikkskúla, meðan næmingar í Sandoyar Musikkskúla rinda 500 kr. árliga. Gjaldið í hinum musikkskúlunum liggur ímillum 1.000 og 1.600 kr.

Leiðarin greiddi frá, at hann ikki hevur nakað yvirlit yvir tað, sum næmingarnir rinda. Kostnaðurin er settur eftir viðurskiftunum í økinum.

***Tórshavnar kommuna hækkað næminga-gjøldini 20%.***

Í 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at síðani 1998 hevur musikkskúlaleiðarin ansað eftir, at gjøldini ikki verða sett hægri, enn at øll kunnu vera við. Seinast gjaldið varð hækkað, hækkaði Tórshavnar kommuna næmingagjaldið 20%. Mentamálaráðið góðkendi hækkingina.

Næmingar hava møguleika til at sleppa inn á eitt sonevnt musikkskúlamiðnám. Skipanin byrjaði sum ein royndarskipan fyri 10 árum síðani. Útbúgvingin er fyri næmingar úr øllum landinum í aldrinum 14 til 25 ár.

Tórshavnar Musikkskúli leggur miðnámið til rættis, og mest sum øll undirvísingin fer fram í Tórshavn. Árliga næmingagjaldið, sum er 2.400 kr., verður rindað til Tórshavnar kommunu. Tórshavnar Musikkskúli og Musikkskúlaskipanin rinda hvør sína helvt av av læraralønunum.

### Lønarumsiting

Í august ger leiðarin eitt yvirlit yvir tímabýtið, sum vísir, hvussu nógvar musikkskúlatímar skúlarnir fáa tillutaðar komandi skúlaárið. Yvirlitið vísir eisini, hvørjir lærarar eru settir at undirvísa tímarnar. Lønin til læraararnar verður roknað út frá teimum tímunum sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Musikklærarafelag Føroya.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri september 2016 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá fýra starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

Læraararnir, saman við leiðarunum á lokalu musikkskúlunum, leggja til rættis, hvussu undirvísingin fer fram við atliti at næmingunum og umstøðunum á staðnum.

Vit hava við stakroyndum kannað, um samsvar er millum tímabýtið hjá lærarunum og tímaætlanina hjá næmingunum úti á skúlunum, eins og vit kannaðu, um uppmøtingin hjá næmingunum svaraði til tímabýtið og tímaætlanina. Onki var at finnast at.

### Ferðaútreiðslur

Musikkskúlaskipanin rindar ferðaútreiðslurnar hjá lærarunum. Læraararnir gera vanliga ferðaútreiðslurnar upp eina ferð um mánaðin. Ferðapeningurin verður goldin út saman við mánaðarlønini.

Flestu læraararnir eru settir at undirvísa ávíst tímatal í musikkskúlum í ymiskum økjum. Musikkskúlaskipanin rindar ikki fyri ferðing innan fyri kommunumark, tí tað gera kommunurnar. Læraararnir fáa koyripening fyri at koyra millum kommunur. Leiðarin greiddi frá, at hann avtalar við hvønn lærara sær, hvussu nógvan koyripening teir

kunnu fáa. Kilometurendurgjaldið verður roknað eftir tí vegalongd, sum Landsverk hevur á heimasíðu sínari.

Vit hava við stakroyndum kannað, um ferðaútreiðslurnar eru rættar sambært galdandi reglum. Onki var at finnast at.

### Leiga

Musikkskúlaskipanin hevur leigað hús, sum hevur verið brúkt til lærarar, sum undirvísa í Suðuroy. Tey valdu at leiga eini sethús, tí trupult var at ferðast aftur og fram hjá lærarunum, sum eru búsitandi á meginøkinum og arbeiða í Suðuroy.

## 5.12 Frítíðarundirvísing (LG 2014/207-0235)

Í ársfrágreiðingini 2013 umrøddu vit grannskoðan av frítíðarundirvísing.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið at dagføra kunngerðir steðgaði, tá ið frítíðarundirvísingin sambært lóggávuni varð løgd til kommunurnar at umsita. Ráðið var tó í holt við at dagføra tær.

Í august 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at kunngerðirnar vórðu ikki dagførdar, tí Mentamálaráðið helt, at neyðugt var at dagføra lógina, Ll. nr. 70/1983 “um frítíðarundirvísing v.m.”

Landsstýrismaðurin kunnaði í juni 2016 um, at lógin enn ikki var broytt. Sambært landsstýrismanninum var eitt upprit um at skipa vaksnamannaútbúgving í Føroyum sent til landsstýrisfund, og fór frítíðarundirvísingin helst at verða ein partur av tí útbúgvingini.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at greining av eini komandi vaksnamannaútbúgving verður møguliga grundarlag undir einari lógarbroyting.

***Lógin er enn ikki dagførd.***

## 5.13 Vinnuháskúlin (LG 2016/207-0236)

Í februar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Vinnuháskúlanum.

### Kassar

Vinnuháskúlin hevur tveir kassar við reiðum peningi. Annar verður brúktur til sølu av bókum og smærri útreiðslur hjá skúlanum. Hin er til sølu í kantinuni.

***Kassaeftirlit.***

Landsgrannskoðanin taldi bókakassan upp og stemmaði av við Búskaparskipan landsins. Eftirlitið vísti ein kassamun. Vinnuháskúlin hevur greitt frá, hvat helst var orsøkin til munin. Landsgrannskoðanin mælti til at gera kassan upp og bóka í Búskaparskipan landsins eina ferð um mánaðin, teir partar av árinum, ið nógv søla fer fram. Vit mæltu eisini til, at peningurin frá kantinuni verður settur inn meiri regluliga.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið hevur mælt skúlanum til at fylgja tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini og gera kassan upp og bóka í Búskaparskipan landsins eina ferð um mánaðin tann partin av árinum, ið nógv søla er.

### Peningastovnskonta

Vinnuháskúlin hevur peningastovnskontu, sum verður nýtt til inngjøld frá bóka- og kantinukassunum, skeiðum v.m. Gjaldkort og netbanki eru knýtt at kontuni.

Landsgrannskoðanin hevur stemmað salduna í Búskaparskipan landsins við kontuavritið frá peningastovninum pr. 31. desember 2016. Munurin var 5.828,62 kr. Sambært Vinnuháskúlanum er talan um feilbókingar, sum nú eru rættaðar.

26. januar 2017 var saldan góðar 500 t.kr., og vórðu 450 t.kr. sama dag fluttar Gjaldstovuni. Eftirlitsdagin, t.e. 22. februar, var saldan aftur yvir 300 t.kr., og rørslurnar á kontuni í 2017 vóru tá ikki bókaðar í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin heldur, at tá so stórar upphæddir ikki verða bókaðar á røttum tíðarskeiði, verður mánaðarroknskapurin ikki rættur.

Landsgrannskoðanin mælti til, at peningastovnskontan verður bókað eina ferð um mánaðin teir partar av árinum, ið nógv virksemi er.

Í august 2017 hevur landsstýsmaðurin kunnað um, at frameftir verður bókað eina ferð um mánaðin, og kontan tømd oftari.

## 5.14 Granskingarráð Føroya (LG 2014/207-0236)

***Ógreiða um avlop av óbrúktari játtan.***

Í frágreiðingum seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin umrøtt roknskaparreglugerðina hjá Granskingarráð Føroya og Granskingargrunninum. Reglugerðin, sum er frá 2012, var send Mentamálaráðnum, men varð ikki góðkend, tí ógreiða var, hvørt avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi fella aftur til landskassan. Í juni 2016 arbeiddi Mentamálaráðið enn við málinum.

Í grannskoðanarprotokollini hjá Granskingargrunninum stóð, at "*í januar 2012 ger stjórin greitt, at til annað svar fyriliggur, verður hildið fram við verandi praksis.*" Grannskoðarin mælti enn einaferð til, at leiðslan skundaði undir at fáa svar frá Mentamálaráðnum.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var ikki nøktandi, at so long tíð gekk, uttan at prinsipiellu spurningarnir frá grunninum vórðu svaraðir, og mæltu landsstýrismanninum til skjótast at taka stig til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Mentamálaráðið síðani seinastu frágreiðing m.a. hevur kannað, hvussu Mentanargrunnur landsins umsitur sína játtan, og vil í heyst saman við Fíggjarmálaráðnum koma til eina endaliga niðurstøðu.

## 5.15 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2014/207-0236)

### Roknskaparreglugerð

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at Fróðskaparsetur Føroya, ið er samanlagdur stovnur frá 2008, hevði ikki gjørt felags roknskaparreglugerð fyri stovnin.

Í februar 2017 hevur Mentamálaráðið góðkent roknskaparreglugerðina.

### Verkætlanir

Landsgrannskoðanin grannskoðaði í 2014 verkætlanir hjá Fróðskaparsetri Føroya við m.a. at kanna, um roknskapir vóru í samsvari við fíggjarætlanir, ið vóru grundarlag undir m.a. stuðulsumsóknum, um verkætlanarroknskapir í landsroknskapinum eru rættir, og um skrivligar mannagongdir og innaneftirlit eru.

***Verkætlanarroknskapir vóru ikki nøktandi.***

Okkara kanningar vístu, at roknskapir fyri verkætlanir vóru ikki nøktandi, m.a. vóru inntøkur í stóran mun ikki skrásettar í rakstrarroknskapinum, men bert í fíggjarstøðuni. Reglurnar um endurrindanir av ferðakostnaði, dagpeningi o.a. vóru ikki hildnar.

Í 2014 heitti Mentamálaráðið á stýrið fyri Fróðskaparsetrið um at syrgja fyri, at mannagongdirnar viðvíkjandi verkætlanum verða allýstar við nýggjari roknskapar-reglugerð.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fróðskaparsetrið hevur gjørt tríggjar mannagongdir til umsiting av verkætlanum:

1. rakstrargjald fyri Ph.D verkætlanir,
2. hvussu verkætlanir verða umsitnar á Setrinum, og
3. býti av overhead.

Í mai 2015 bað Landsgrannskoðanin Mentamálaráðið um endaligar uppgerðir fyri nakrar verkætlanir.

Verkætlanin "Normer" er ein Ph.D verkætlan, ið skuldi vara frá 2012 til 2015, har NordForsk[8] skuldi fíggja 2.760 t.NOK. Í juni 2016 boðaði landsstýrismaðurin frá, at verkætlanin varð longd eitt ár vegna farloyvi. Fróðskaparsetrið hevði í hesum sambandi fingið játtað 72 t.NOK. til meirútreiðslur.

Verkætlanin "Craft International" skuldi fíggjast av NPP[9], og sambært fíggjarætlanini varð kostnaðurin 1.559 t.kr. Eftir ætlan skuldi hon enda við árslok 2013. Frá 2011 til 2014 vórðu 1.272 t.kr. brúktar til verkætlanina. Ongin inntøka er komin tey árini. Í 2015 eru slakar 400 t.kr. goldnar verkætlanini frá Hordaland Fylkeskommune. Landsgrannskoðanin fekk ikki frágreiðing frá Mentamálaráðnum, hví so stórur munur var á ætlaðu fíggingini frá NPP og upphæddunum, sum Fróðskaparsetrið hevði móttikið.

Landsstýrismaðurin kunnaði í juni 2016 um, at tað framvegis varð arbeitt við fíggingini frá NPP, og væntaði Fróðskaparsetrið, at arbeiðið varð liðugt í 2016. Fróðskaparsetrið væntaði somuleiðis verkætlanina "Craft International" at verða lidna á heysti 2016.

Sambært Fróðskaparsetrinum er tann parturin av verkætlanini, sum hevur ligið í "Craft International" liðugur, men heldur fram í verkætlanini "Craft Reach". Munurin á fígging og inngjøldum til NNP-verkætlanir stavar frá, at tað vanliga tekur drúgva tíð at fáa stuðulin inn.

Landsgrannskoðanin hevur áður vístá, at verkætlanarroknskapir vóru ófullfíggjaðir, og í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýris-manninum til at fáa greiði á viðurskiftunum.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at allar inntøkur í sambandi við verkætlanir verða nú bókaðar beinleiðis inn í raksturin, og mannagongdirnar fyri umsiting av verkætlanum verða fylgdar, tá ferðakostnaður verður endurrindaður.

***Allar inntøkur til verk-ætlanir verða nú bókaðar beinleiðis í raksturin.***

## 5.16 Studni, umsiting av lestrarstuðli (LG 2016/207-0237)

Landsgrannskoðanin hevur í 2017 grannskoðað umsitingina av lestrarstuðli. Í hesum sambandi hava vit kunnað okkum um mannagongdir og eftirlit í sambandi við útgjald og innkrevjing.

Studni letur stuðul til lesandi í Føroyum og umsitur eisini stuðulsskipanir, ið veita stuðul til føroyingar, ið eru undir útbúgving uttanlands. Stuðul og lán verða latin við heimild í Ll. nr. 36/2007 "um lestrarstuðul". K. nr. 107/2011 "um lestrarstuðul" ásetir neyvari reglur á økinum.

[8] Nordic Center for Research on Marine Ecosystem and Resources under Climate Change.
[9] Northern Periphery Programme.

### Umsiting av stuðli og lánum

Studni rindar stuðul og lán um Búskaparskipan landsins. Á talvuni niðanfyri eru roknskapartølini fyri stuðulsveitingar, útlán og afturgjald fyri árini 2012 til 2016 á høvuðskontunum 7.23.7.04. Lestrarstuðul (Lógarbundin játtan) og 7.23.7.05. Lestrarlán (Stuðulsjáttan).

*t.kr.*

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Stuðulsveitingar | 109.897 | 112.589 | 109.836 | 112.675 | 111.684 |
| Útlán | 13.821 | 12.153 | 12.193 | 11.585 | 10.424 |
| *Stuðul/Útlán tilsamans* | *123.718* | *124.742* | *122.029* | *124.260* | *122.108* |
| Afturgjald | -9.333 | -9.308 | -10.333 | -10.009 | -11.859 |
| Rentuinntøkur | -1.839 | -1.412 | -1.888 | -2.043 | -1.937 |
| *Inntøkur tilsamans* | *-11.172* | *-10.720* | *-12.221* | *-12.052* | *-13.796* |
| **Útreiðslur/útgjøld netto** | **112.546** | **114.022** | **109.808** | **112.208** | **108.312** |

Samlaðu útreiðslurnar til stuðul og lán frá 2012 til 2016 hava verið ímillum 122,1 og 124,7 mió.kr. Útlánini eru í sama tíðarskeiðið minkað úr 13,8 mió.kr. í 10,4 mió.kr., og inngjøld uttan rentuinntøkur eru økt úr 9,3 mió.kr. í 11,9 mió.kr.

### Stuðul

Treytirnar fyri, hvør kann fáa lestrarstuðul, eru ásettar í § 2, stk. 1 og 2, í lógini. Sambært § 4, stk. 1-3, verður stuðul latin til útbúgvingar, ið eru skipaðar sum heiltíðarlestur, vara í minst 3 fylgjandi mánaðir, eru óløntar og enda við prótvtøku. Talan kann vera um hægri útbúgvingar, styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar, miðnámsútbúgvingar, partar av miðnámsútbúgvingum ella útbúgvingar á framhaldsdeildarstigi fyri lesandi, ið eru eldri enn 18 ár. Í K. nr. 107/2011 eru neyvari ásetingar um, hvørjar útbúgvingar talan er um.

Stuðulstíðin er 1. august til 30. juni, ella 11 mánaðir, og stuðul verður latin frá tí lestrarhálvuni, søkt verður. Tó fáa einsamallir uppihaldarar og aspirantar stuðul í 12 mánaðir. Stuðul fyri juli verður veittur fyrstu ferð í 2017. Lestrarhálvurnar eru 1. august til 31. desember og 1. januar til 30. juni. Stuðulin lækkar 10% fyri hvørjar 1.000 kr., miðal mánaðarliga útgoldna A-inntøkan síðstu 12 mánaðirnar fer upp um 20.000 kr.

### Lán

Lestrarvirkin kunnu søkja Studna um lestrarlán til livikostnað, skúlagjald, málskúla og endalán. Tann lesandi byrjar vanliga at gjalda aftur lestrarlán og rentur eitt ár aftaná, at stuðulsárið, har útbúgvingin er lokin, er endað.

Í útbúgvingartíðini verða lánini rentað 2% árliga. Eftir lokna útbúgving rentar upphæddin við 3% oman fyri ta til eina og hvørja tíð galdandi diskontu. Afturgjaldstíðin er í mesta lagi 15 ár, og hvørt gjald skal í minsta lagi vera 300 kr.

Lýkur lántakari ikki lánstreytirnar, ella letur hann vera við at gjalda falnar rentur og avdráttir, kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan. Sambært § 21, stk. 2 og 3, í lógini kunnu krøv verða innheintað og pantað av TAKS, sum eisini hevur heimild at krevja skuld inn við at halda aftur í A-inntøku lántakarans sambært heimildum í skattalógini.

Býr lántakari ikki í Føroyum, og TAKS tí ikki kann heinta krøv inn, kann Studni sambært § 21, stk. 4, í lógini lata annan innkrevjingarstovn heinta krøvini inn. Studni hevur ikki heimild at strika ella eftirgeva skuld uttan so, at lántakari doyr, áðrenn lánið er afturgoldið, og/ella lántakari er farin undir skuldarumskipan.

### Stakroyndir

Við støði í saldulista við árslok 2016 valdu vit 22 stakroyndir til nærri grannskoðan. Vit kannaðu, um umsóknarbløð og neyðugt skjalatilfar var í málunum og samanbóru útgjalds- og lánsupphæddir við ásetingar í kunngerðum og vegleiðingarskrivum annars.

Í sambandi við tí einu stakroyndina spurdi Landsgrannskoðanin, hví farið var uppum mest loyvdu upphædd til skúlagjald. Studni hevur greitt frá, at talan er um ein feil, ið verður rættaður.

Í einum máli hevði stuðulsmóttakari skift skúla í skúlaárinum og hevði fingið studning úr Danmark og Føroyum samstundis. Tí er viðkomandi kravdur eftir peninginum, sum Studni hevur latið.

Í einum øðrum máli eru 61.252 kr. umlagdar til lán, tí umsøkjarin var givin í skúla uttan at boða Studna frá. Talan er um studning til eitt heilt skúlaár.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til stakroyndirnar.

### Innheinting av eftirstøðum

31. desember 2016 var samlaða lánsupphæddin 77,3 mió.kr., harav vóru 33,9 mió.kr. ikki falnar til gjaldingar, tí lántakararnir enn vóru undir útbúgving.

Studni sendir upp til tríggjar rykkjarar til tey, sum eru í eftirstøðu. Um krøvini ikki verða goldin, verða tey send til innkrevjingar. Skuldin hjá persónum, búsitandi í Føroyum, verður kravd inn umvegis TAKS, meðan skuld hjá persónum, búsitandi uttanlands, verður send til innheintingarfyritøku at krevja inn. Sambært leiðsluni á Studna er ongin avtala millum lond, herundir Norðurlond, sum gevur møguleika fyri at heinta inn eftirstøður umvegis aðrar almennar innkrevjingarmyndugleikar.

Við árslok 2016 var samlaða skuldin undir afturgjaldi 43,4 mió.kr. Niðanfyri er yvirlit yvir, hvussu stóran part rykkjarar eru sendir fyri:

| Rykkjari | Salda 31. desember 2016 (kr.) |
|---|---|
| Undir afturgjaldi | **43.399.321** |
| Ongin rykkjari | 34.346.554 |
| Ein rykkjari | 1.350.680 |
| Tveir rykkjarar | 763.264 |
| Tríggir ella fleiri rykkjarar | 6.939.821 |

Studni sendir ikki kontuavrit út, men í januar senda tey øllum skuldarum ársyvirlit, eisini teimum, sum eru send til TAKS ella innkrevjingarfyritøku.

Fyrningarfreistin fyri lánskrøv er 20 ár og fyri tilskrivaðar rentur 5 ár. Studni heldur lív í krøvunum, so tey ikki fella fyri fyrningarfreistunum.

## 5.16.1 Roknskaparviðurskifti, stovnsrakstur

Stovnurin hevur ikki egnar búskaparskipanir. Í talvuni niðanfyri eru roknskapartølini á høvuðskontu 7.23.1.04. fyri árini 2012 til 2016:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 2.141 | 2.233 | 2.180 | 2.193 | 2.239 |
| 14 | Keyp av vørum og tænast. | 723 | 625 | 671 | 753 | 755 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 181 | 139 | 141 | 296 | 75 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **3.045** | **2.997** | **2.994** | **3.242** | **3.068** |

### Roknskaparreglugerð

***Roknskaparreglugerð ikki góðkend.***

Studni hevur tvær roknskaparreglugerðir, eina fyri stovnsrakstur og eina fyri útgjald av stuðli og útgjald og umsiting av lánum. Roknskaparreglugerðirnar eru frá 2011. Studni hevur í apríl 2016 sent Mentamálaráðnum dagførdar roknskaparreglugerðir til góðkenningar, men hevur enn onki svar fingið.

### Lønir

Studni brúkar tíðarskráseting, har starvsfólk skráseta nær tey koma og fara, fráveru og feriu.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri september 2016 kannaðu vit lønirnar hjá trimum starvsfólkum. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

### Ferðaútreiðslur

Vit kannaðu tríggjar ferðauppgerðir. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja skjøl, so sum innbjóðing, skrá ella aðra frágreiðing við ferðauppgerðunum. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar.

### Keyp

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur keyp hjá Studna, m.a. um keypið er veruligt, viðvíkir stovninum, og er rætt konterað. Onki var at finnast at.

## 5.17 Málráðið (LG 2016/207-0241)

Í januar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá Málráðnum.

***Landsgrannskoðanin mælti til at taka kassan av.***

Kassin var seinast gjørdur upp í september 2011 fyri tíðarskeiðið 1. januar 2010 til 31. desember 2010. Tá var saldan í bókhaldinum 194,50 kr. Landsgrannskoðanin mælti til, at kassin bleiv gjørdur upp og tikin av. Tilmælið er tikið til eftirtektar.

Málráðið hevur tríggjar peningastovnskontur, tvær eru skrásettar í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin hevur samanborið saldurnar á peningastovnskontuavritinum við saldurnar í Búskaparskipan landsins. Samsvar var ikki millum saldurnar, m.a. orsakað av, at rentutilskrivingar hava ikki verið bókaðar í fleiri ár.

Landsgrannskoðanin mælti til at skráseta triðju kontuna í Búskaparskipan landsins. Málráðið hevur tikið tilmælið til eftirtektar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at kontan er skrásett í Búskaparskipan landsins.

## 5.18 Tjóðpallur Føroya (LG 2015/207-0242)

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á nógv viðurskifti hjá Tjóðpallinum, sum ikki vóru í lagi, m.a. at roknskaparhaldið á fleiri økjum ikki var nøktandi skipað, og hevði tað við sær óvissur.

Talan var um álvarsamar viðmerkingar, og løgtingsgrannskoðararnir átalaðu tað í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) og mæltu landsstýrismanninum til skjótast at fáa viðurskiftini í rættlag.

### Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin hjá Tjóðpallinum er frá 2007. Í 2014 var uppskot til nýggja reglugerð sent Mentamálaráðnum, og ætlaði ráðið at gjøgnumganga hana saman við Tjóðpallinum.

Í 2015 gjøgnumgingu vit uppskotið til roknskaparreglugerð, dagligar mannagongdir o.a., sum vóru viðkomandi fyri roknskaparhaldið. Okkara fatan var, at roknskaparhaldið á fleiri økjum ikki var nøktandi skipað, og hevði tað við sær óvissur.

Landsgrannskoðanin helt, at óvissurnar vóru álvarsamar, og mælti leiðsluni til at fáa skipað roknskaparhaldið betur og at fáa eina roknskaparreglugerð góðkenda við ábyrgdar- og heimildarreglum, ið svara til reglurnar, ið landsstýrið hevur ásett.

Í mars 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið fór at tryggja, at roknskaparhaldið á Tjóðpallinum verður nøktandi skipað við mannagongdum sambært roknskaparkunngerðini.

Eftirsíðan hevur Tjóðpallurin gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð, sum m.a. tekur viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini við í mannagongdirnar.

***Uppskot til nýggja roknskaparreglugerð.***

### Aðrar lønir, bókaðar á St.kt. 11

Í 2014 hevði Tjóðpallurin goldið 1.248 t.kr. sum "Aðrar samsýningar og viðbøtur". Av teimum vóru 524 t.kr. goldnar um felags lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, meðan 724 t.kr. vóru avgreiddar umvegis kreditorskipanina.

Sambært Kontuskipan landsins skal standardkonta 11 bert nýtast til lønir v.m., og sambært skattalógini skulu lønir gjaldast um skattaskipanina.

Vit gjøgnumgingu nøkur útgjøld, ið ikki vóru goldin um skattaskipanina, og í nógvum førum luku rokningarnar heldur ikki krøvini til fakturar. Landsgrannskoðanin mælti Tjóðpallinum til at ávísa lønirnar um skattaskipanina, og tá ið goldið varð um kreditorskipanina at ansa eftir, at krøvini til fakturar eru lokin.

Mentamálaráðið segði í mars 2016, at ráðið hevði heitt á Tjóðpallin um at fylgja tilmælinum frá Landsgrannskoðanini.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at allar nýggjar starvssetanir innan listarliga økið o.a., verða nú gjørdar við sáttmála og útgjald gjøgnum A-skattaskipanina. Tað hevur ført við sær eina ávísa ónøgd, tí víst verður á, at hesin yrkisbólkur hevur aðrar treytir enn hinir í samfelagnum. Men hetta eru krøvini fyri at blíva settur á Tjóðpallinum nú; hin spurningin mugu tey taka upp við fakfelagið. Handverksliga arbeiðið sum at smíða, mála o.l. verður gjørt uppá rokning, og er eftirlit við, at krøvini til rokningar eru fylgd.

***Allar nýggjar starvssetanir eru við sáttmála, og lønir verða goldnar um skattaskipanina.***

### Gjald fyri bústað og ferðing til og frá arbeiði

Tjóðpallurin rindaði ferðaseðlar fyri leikstjórar og leikarar, ið búgva uttanlands, fyri at koma til Føroya at arbeiða og rindaði í ávísum førum fyri bústað til leikstjóra. Eisini rindaði stovnurin t.d. skattafría dag- og náttarviðbót til leikstjóra. Stovnurin endur-rindaði leikarum útreiðslur av at koma til og frá arbeiði í Føroyum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðpallurin, í samráði við Mentamálaráðið og TAKS, fekk greiði á spurningunum viðvíkjandi skattligu viðgerðini av fríari ferðing til og frá útlandinum, fríum bústaði og fríari ferðing til og frá arbeiði í Føroyum.

Mentamálaráðið kunnaði um, at tey í samráði við Tjóðpallin og TAKS fóru at taka stig til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at starvsfólk, ið búgva í Føroyum, fáa ikki goldið fyri ferðaútreiðslur. Landsstýrismaðurin vísir á, at *"vit eru í tí støðu, at tað ikki búgva útbúnir leikstjórar, pallsniðgevar, ljóssniðgevar o.l. í Føroyum. Tí er neyðugt at fáa hesar fluttar til Føroya. Um vit skulu førleikamenna okkum listarliga, hevur tað týdning, at vit eisini seta yrkisfólk, ið ikki hava tilknýti til Føroyar. Tá er neyðugt at finna bústað. Miðað verður eftir at fáa so bíligar bústaðir sum møguligt, og vanligt hevur verið, at listafólk úr útlandinum búgva saman."*

### Inntøkur

Sambært lógini um Tjóðpall Føroya verður stovnurin fíggjaður við "inntøkufíggjaðum virksemi, stuðli og játtan á løgtingsfíggjarlógini". Á høvuðskontu 7.24.2.06. "Leiklist" var undirkonta 40 ætlað til inntøkufíggjað virksemi.

Inntøkurnar hjá Tjóðpallinum hava verið bókaðar á vanliga rakstrinum. Av tí at inntøkurnar mugu metast at hoyra til vanliga virksemið hjá stovninum, helt Mentamálaráðið tað vera í lagi at bóka allar inntøkurnar á vanliga raksturin. Mentamálaráðið umhugsaði at strika undirkontuna "Inntøkufíggjað virksemi", tí tørvur var ikki á henni, og tí tók Tjóðpallurin undir við. Í fíggjarlógini 2017 er undirkontan strikað.

### Prísáseting

Í roknskaparreglugerðini er brot um inntøkur, sum stava frá atgongumerkjum, arbeiði fyri aðrar stovnar v.m. Um stovnurin fyriskipar tiltøk fyri onnur, er prísurin eitt rakstrargjald, sum skal dekka útreiðslurnar av meirarbeiðinum.

Stjórin ásetti prísir fyri atgongumerkir, arbeiði fyri onnur v.m. og kunnaði Leiklistaráðið um broytingar. Stjórin ætlaði at taka spurningin um prísáseting upp við Leiklistaráðið, fyri at finna ein leist fyri ásetingini og møguligum avsláttarskipanum.

***Greiðar ásetingar um prísáseting og avsláttir skulu í roknskapar-reglugerðina.***

Mentamálaráðið hevði umrøtt við Tjóðpallin, at prísáseting og avsláttir skuldu verða ásett í roknskaparreglugerðini. Sambært landsstýrismanninum fór Mentamálaráðið at at tryggja, at greiðar ásetingar fóru at verða í reglugerðini um prísásetingar.

### Meirvirðisgjald

Tjóðpallurin er skrásettur at rinda meirvirðisgjald, og sambært stjóranum var alt virksemið MVG-skyldugt. MVG-skylduga sølan stavaði frá atgongumerkjasølu og sølu av tænastum til Kringvarp Føroya.

Tjóðpallurin bókaði sølu- og keyps-MVG á konturnar í fíggjarstøðuni og avroknaði avgjaldstilsvarið til TAKS. Harumframt bókaði Tjóðpallurin keyps-MVG á StRk. 7510 "Keyps-MVG land" og fekk tann partin afturgoldnan frá Gjaldstovuni.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Tjóðpallurin nú bókar MVG á 0831 og 0833, og ikki 7510.

### Ófráboðað kassaeftirlit

Í januar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Tjóðpalli Føroya. Landsgrannskoðanin taldi kassan upp og stemmaði av við Búskaparskipan landsins. Vit staðfestu ein minni mun, sum síðani er rættaður.

Sambært uppskoti til roknskaparreglugerð er kassahámarkið 10 t.kr. Eftirlitsdagin vóru góðar 21 t.kr. í kassanum. Landsgrannskoðanin mælti til at seta peningin inn oftari. Stjórin hevur greitt frá, at eftir okkara vitjan verður peningur settur inn, tá ið upphæddin fer upp um 10 t.kr.

Tjóðpallurin hevur eina peningastovnskontu, sum vit stemmaðu av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 5.19 Mentanargrunnur landsins (LG 2015/207-0242)

### Roknskaparreglugerð

Grunnurin sendi í januar 2016 eina roknskaparreglugerð til Mentamálaráðið at góðkenna.

### Støðling

Í ávísum førum játtar nevndin fyri Mentanargrunnin pening, sum ikki verður goldin út beinanvegin, antin tí at talan er um starvslønir, ella tí at nevndin ikki hevur fingið endaligt prógv fyri, at verkætlanin verður framd.

Mentanargrunnurin hevði tikið stig til at umskipa bókhaldið soleiðis, at skyldur grunsins altíð eru greiðar og kendar. Partur av umskipanini var at skipa fyri, at játtaður og støðlaður peningur, ið ikki var goldin út í játtanartíðarskeiðnum, varð fluttur aftur á stuðulskontuna.

### Lánigrunnur/útlán

Mentanargrunnurin átti 1,5 mió.kr. tilgóðar av "gamlari" áogn. Mentanargrunnur Føroya Løgtings varð stovnaður við lóg í 1946. Nakað eftir tað varð Lánigrunnurin stovnaður, sum serliga veitti lán til bókaútgávur, men eisini til t.d. plátuútgávur. Grunnurin var, nevndini kunnugt, virkin fram til einaferð í 1980'unum, tá ið prentkostnaðurin var minkaður so mikið, at ikki var neyðugt at læna pening til bókaútgávur o.a. Nevndini kunnugt, er peningur ikki læntur úr Lánigrunninum síðani.

Í 2000 varð Mentanargrunnur Føroya Løgtings við lóg umskipaður til Mentanargrunn landsins. Við lógarbroytingini hvarv møguleikin at lána úr Lánigrunninum, tó at grunnurin framvegis var til, tí nøkur lán enn vóru virkin.

Sambært forkvinnuni var meginparturin av samlaðu útlánunum úr Lánigrunninum mistur, tí skuldararnir vóru deyðir. Mentanargrunnurin hevði ikki boðað frá sínum krøvum á rætta staði í tøkum tíma, og staðfestast kundi tí, at størsti parturin av áognini var mistur.

Mentanargrunnurin ætlaði formliga at staðfesta, at størsti parturin av áognini var mistur, og at roknskapurin fyri Lánigrunnin skuldi vísa tað. Grunnurin fór at biðja Gjaldstovuna, sum umsitur Lánigrunnin, um at avskriva góðar 1,3 mió.kr. Grunnurin hevði viðgjørt málið um restáognina, ið var slakar 200 t.kr., og gjørt av at umleggja hana til stuðul til bókaútgávu. Umleggingin skuldi verða gjørd soleiðis, at restupphæddin varð játtað av stuðulsjáttan grunsins og flutt Lánigrunninum. Síðani fór Lánigrunnurin at verða gjørdur upp og endaður.

Í juli 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið samskifti við Mentanargrunnin um Lánigrunnin og ætlanirnar við honum. Miðað varð eftir at loysa málið á heysti 2016.

### Eftirmeting av grunninum

Sambært § 7 í starvsskipanini fyri grunnin skulu kunngerð og viðtøkur á hvørjum ári eftirmetast av nevndini og Mentamálaráðnum í felag. Eftirmetingin skal gerast í sambandi við, at roknskapur og ársfrágreiðing verða latin landsstýrismanninum.

Ongin felags eftirmeting var gjørd, men nevndin eftirmetti eftir nevndarfundirnar, tó tað ikki var skjalfest. Ongin formlig ársfrágreiðing var, men fundir vóru javnan við Mentamálaráðið, har kunnað varð um viðurskifti av týdningi fyri grunnin og ráðið.

Spurdur, um § 7 varð nøktandi umsitin, svaraði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið eftir tørvi hevur fundir við Mentanargrunnin, har virksemið varð umrøtt, og mál av týdningi vórðu tikin upp til viðgerðar. Mentamálaráðið helt ikki, at tørvur var á formliga at eftirmeta kunngerð og viðtøkur fyri grunnin á hvørjum ári, soleiðis sum starvsskipanin leggur upp til. Ráðið fór at umrøða tað nærri við grunnin og møguliga at tillaga ásetingina í starvsskipanini.

### Generellar viðmerkingar

Vanligar mannagongdir vóru ásettar í lóg, kunngerð og starvsskipan fyri grunnin. Aðrar mannagongdir vóru ikki niðurskrivaðar. Har lóg ella kunngerð ikki ásetti nærri boð, var

tað ein kvalifiserað meting hjá nevndini, ið ásetti, hvør skuldi hava stuðul, og hvat ein hóskandi upphædd var.

***Mælt varð til at lýsa umsitingarmanna-gongdir í roknskapar-reglugerðini.***

Landsgrannskoðanin helt, at tað kundi vera ein vansi fyri umsitingina, ella t.d. fyri eina nýggja nevnd, at ongar skrivligar mannagongdir vóru og mælti til at lýsa manna-gongdirnar í t.d. roknskaparreglugerðini.

Forkvinnan vísti á, at eftir teimum lógum og reglum, ið vóru galdandi fyri Mentanar-grunnin, skuldi nevndin gera eina ítøkiliga meting av hvørjari einstakari umsókn. Um metingin ella fortreytirnar, ið vóru brúktar, vórðu niðurskrivaðar og á tann hátt gjørdar ítøkiligar, helt forkvinnan, at meting nevndarinnar kundi verða sett til viks til fyrimuns fyri eina standardiseraða avgreiðslu. Tað vildi verið ólógligt sambært meginregluna um at seta meting undir reglu. Mentanargrunnurin helt tí, at tað skuldi vera nevndin, sum eftir einari ítøkiligari meting avgjørdi at játta stuðul ella ikki, og hvussu stórur ein játtaður stuðul skuldi vera.

Landsgrannskoðanin helt, at talan mátti vera um eina misskiljing av okkara tilmæli. Landsgrannskoðanin mælti ikki til at standardisera avgreiðsluna av umsóknunum, men helt tað vera skilagott at hava skrivligar mannagongdir, sum lýsa eina málsviðgerð, ið kundi tryggja gjøgnumskygni.

### A-inntøka ella B-inntøka

Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin um, at Mentanargrunnurin ikki rindar studning til einstaklingar sum A-inntøku, hóast ásett er í § 60, stk. 1, nr. 6, í skattalógini, at sum A-inntøka verður roknað "*studningar og aðrir skattskyldugir styrkir, veittir av almennum myndugleikum ella stovnum og felagsskapum ella av almennum ella privatum grunnum, gávufægrunnum og tílíkum*".

Mentanargrunnurin greiddi frá, at tey rindaðu út studningin soleiðis, sum avtalað varð við TAKS í 2004. Tá varð avtalað, at TAKS skuldi kunna lesa øll útgjaldsskjøl hjá grunninum í búskaparskipanini hjá Gjaldstovuni.

TAKS var av teirri áskoðan, at stuðulin var tikin við í teimum roknskapum, sum umsøkjarar sendu TAKS saman við sjálvuppgávum.

Landsgrannskoðanin staðfesti, at TAKS hevði ikki atgongd til skjølini í Búskaparskipan landsins. TAKS segði okkum, at tey ætlaðu at fáa atgongdina aftur fyri at hava møguleikan at hyggja eftir skjølunum.

Sambært landsstýrismanninum var Mentamálaráðið ikki vitandi um, at TAKS ikki hevði atgongd til at lesa útgjaldsskjølini í Búskaparskipan landsins. Ráðið fór í næstum at kanna málið nærri við tí fyri eyga, at TAKS fekk allar neyðugar atgongdir, sum teimum tørvaðu, fyri at kunna fremja neyðug eftirlit.

Í 2016 vísti landsstýrismaðurin á, at tá ið TAKS aftur hevði fingið atgongd til útgjaldsskjølini hjá Mentanargrunninum, skuldi málið verið loyst frá teirra síðu. Mentamálaráðið ætlaði at umrøða málið við TAKS.

***Stuðul er A-inntøka, sum skal verða ávíst um skattaskipanina.***

Landsgrannskoðanin helt, at so leingi tað var ásett í skattalógini, at stuðul er A-inntøka, átti stuðulin at verða ávístur um skattaskipanina. Var ætlanin, at stuðulin ikki skal vera A-inntøka, mugu reglurnar broytast.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýris-manninum til beinanvegin at fáa tað í rættlag.

### Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"arbeiðið at fáa roknskapar-reglugerðina góðkenda hongur saman við settu spurningum um Mentanargrunnin. Tá*

*ið hetta er komið uppá pláss, er roknskaparreglugerðin greið. Mentamálaráðið hevur arbeitt saman við nýggju leiðslu grunsins at fáa greiðu á øllum teimum spurningum, ið Landsgrannskoðanin hevur vísst á. Fundur hevur eisini verið við TAKS um útgjaldsmannagongdina. Enn er ikki komið heilt á mál."*

## 5.20 Søvn landsins (LG 2014/207-0243)

Stovnurin, Søvn landsins, varð skipaður í 2011. Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at dagføringar av lógum og kunngerðum høvdu tikið longri tíð enn væntað.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at lógir og kunngerðir enn ikki vóru dagførdar, hóast løgtingsgrannskoðararnir áður høvdu gjørt vart við málið.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at uppskot til:

- løgtingslóg um vernd av mentanararvi og náttúruarvi í sambandi við økisráðlegging og ognarumsiting (lógin skal koma ístaðin fyri lógina um at friða fornminni og bygningar),
- løgtingslóg um at broyta lógina um bókasavnsvirksemi,
- løgtingslóg um musealt virksemi, ið skal koma í staðin fyri lógirnar um fornminnissavn, um náttúrugripasavn, um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi, og
- løgtingslóg um skjalasavnsvirksemi, ið er endurskoðan av skjalasavnslógini

fóru at verða løgd fyri Løgtingið.

Landsstýrismaðurin kunnaði seinni um, at uppskot til løgtingslóg um savnsvirksemi var fyri á landsstýrisfundi í apríl 2015, har undirtøka var fyri at leggja uppskotið fyri Løgtingið. Gjørt varð tó av at bíða við at leggja málið fyri Løgtingið til eftir ólavsøku 2015.

Arbeiðið við savnslógini vísti seg at vera drúgvari enn væntað, og tí metti Mentamálaráðið, at arbeiðið við uppskotum til løgtingslóg um vernd av mentanar- og náttúruarvi, um bókasavnsvirksemi og um skjalasavnsvirksemi eisini fóru at taka longri tíð enn ætlað.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"eftir avgerð løgmans er Søvn landsins skilt sundur í 3 stovnar: Tjóðsavn Føroya, Føroya Landsskjalasavn og Føroya Landsbókasavn. Broytingin er sett í verk frá 1. august 2017. Í ólavsøkurøðu løgmans 2017 verður í løglistanum upplýst, at uppskot til løgtingslóg um musealt virksemi, sum kemur í staðin fyri lógirnar um Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn, verður ætlandi lagt fyri Løgtingið hesa tingsetuna. Eisini verður uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn, sum serliga snýr seg um varðveiting av talgildum savnindum og ymiskar dagføringar, lagt fyri Løgtingið hesa tingsetuna."*

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at hølisviðurskiftini hjá Søvnum landsins vóru ikki nøktandi, og arbeitt varð við at finna loysnir. Í fyrsta umfari varð roynt at útvega starvshøli, soleiðis at málini í samanleggingartilgongdini kundu verða rokkin skjótast gjørligt. Í øðrum lagi varð arbeitt við at nøkta tørvin á goymslu- og framsýningarhølum.

***Ikki nøktandi hølisviðurskifti.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at spurningurin viðvíkjandi hølisviðurskiftunum á savnsøkinum er ikki loystur.

### Ófráboðað kassaeftirlit

í februar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá Søvnum landsins. Søvn landsins hevur seks kassar skrásettar í Búskaparskipan landsins, av teimum taldu vit fýra upp. Vit høvdu í høvuðsheitum onki at finnast at. Vit mæltu til at hava atgongumerkini til Náttúrugripasavnið í nummarrøð.

Søvn landsins hava eisini nakrar peningastovnskontur. Landsgrannskoðanin hevur samanborið saldurnar í Búskaparskipan landsins við kontuavrit frá peningastovnum.

| Deild | BSL konta | Salda BSL | Salda PS | Munur |
|---|---|---|---|---|
| **Peningastovnskontur** | | | | |
| Fornminnissavnið | 0426.1010 | 11.688,94 | 11.688,94 | 0,00 |
| Fornminnissavnið | 0426.1060 | 92.004,37 | 22.538,37 | -69.466,00 |
| Landsbókasavnið | 0426.2871 | 15.084,91 | 15.084,91 | 0,00 |
| Náttúrugripasavnið | 0426.1102 | 298.986,91 | 322.658,91 | 23.672,00 |

Í mai 2017 hevur Søvn landsins kunnað um, at vantandi dagføring av bankakontunum er orsøkin til munirnar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið hevur mint stovnin á at gera roknskaparskrásetingar viðvíkjandi ogn og skuld upp javnan, og herundir at gera kassan hjá stovninum upp.

## 5.21 Kirkjugrunnurin (LG 2014/207-0245)

***Kunngerð um ger av fíggjarætlanum ikki lýst.***

Í fleiri ár hava vit víst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 “um fólkakirkjuna í Føroyum” ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at enn verður arbeitt við kunngerðunum.

# 6 Heilsu- og innlendismál

## 6.1 Heilsu- og innlendismálaráðið (LG 2016/211-0111)

Landsgrannskoðanin grannskoðaði roknskapin 2016 hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina hjá ráðnum og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

### Roknskaparreglugerð

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur eina roknskaparreglugerð frá januar 2013. Sambært ráðnum eru tey í ferð við at dagføra reglugerðina, men bíða eftir dagføringum frá Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum. Heilsu- og innlendismálaráðið og Almannamálaráðið arbeiða saman um at gera reglugerðirnar fyri ráðini, m.a. tí tey hava felags funktiónir.

### Lønir

22 fólk starvast í Heilsu- og innlendismálaráðnum. Játtanin er 14,5 mió.kr. í 2016, harav 11,9 mió.kr. eru til lønir.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri mars 2016 kannaðu vit fýra lønarmál. Sambært roknskaparreglugerðini er flexsalda +30/-15 tímar loyvd. Saldan hjá starvsfólkunum í teimum lønarmálum, vit grannskoðaðu, lá millum +56/-42 tímar. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur greitt frá, at orsøkin er, at starvsfólk viðhvørt gera avtalu um eyka frídagar, og tí fer tímatalið í minus. Eisini arbeiða nøkur starvsfólk serliga nógv í sambandi við ymsar verkætlanir. Ráðið umhugsar at orða í roknskaparreglugerðini, at frávikini ikki kunnu standa leingi óavgreidd.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit roknskaparskjøl, um tey hoyra til stovnin og eru konterað sambært galdandi reglum. Vit umrøddu m.a. spurningin um starvsfólkarøkt og jólagávur. Eisini umrøddu vit útreiðslur, sum stovnur rindar til starvsfólkatiltøk og venjingar. Heilsu- og innlendismálaráðið saknaði almennar reglur um starvsfólkaútreiðslur o.l.

***Heilsu- og innlendismálaráðið saknar reglur um starvsfólkaútreiðslur.***

### Uttanlands ferðauppgerðir

Vit kannaðu nakrar uppgerðir fyri ferðir uttanlands. Tá farið verður til Danmarkar í tænastuørindum, verður goldið fyri innivist á hotelli eftir rokning ella útlegg. Nakrar rokningar fyri innivist fara upp um 1.008 kr. fyri náttina, sum er mest loyvda upphædd sambært vegleiðingini hjá Fíggjarmálaráðnum. Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum er viðhvørt trupult at halda seg innanfyri ásettu upphæddina. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar.

### Gjaldkort

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur eitt gjaldkort, heimildarváttan er frá januar 2013.

**KT viðurskifti**
Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ikki skipanir, sum liggja uttan fyri Landsnet.

Vit spurdu, hvørji starvsfólk hava atgongd at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins. Vit fingu yvirlit yvir brúkarar, og sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum kunnu 15 góðkenna og 5 leysgeva. Onki var at finnast at.

## 6.2 Læknakanningar av børnum (LG 2014/211-0201)

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár gjørt vart við vantandi heilsukanningar av skúlabørnum. Í mars 2014 kom í gildi Ll. nr. 9/2014, sum hevði við sær, at fleiri skúlabørn kundu taka av tilboðnum um heilsukanningar.

Játtan og nýtsla til læknakanningar av børnum seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 850 | 850 | 850 | 850 | 750 |
| Nýtsla | 656 | 661 | 656 | 683 | 792 |
| **Meir-/minninýtsla** | **194** | **189** | **194** | **167** | **-42** |

Í oktober 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umsitingin av profylaksum var flutt til Heilsutrygd, men at enn sást ikki aftur í hagtølunum, at kommunulæknar høvdu fingið heimild til at gera kanningarnar.

Í juli 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsutrygd hevði sent kommunulæknunum og kommunulæknaviðtalunum vegleiðandi tilfar frá Sundhedsstyrelsen umframt kunning um lógarbroytingina í 2014 fyri at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum.

***Enn taka ov fá børn av tilboðnum um heilsukanningar.***

Í august 2016 vísti landsstýrismaðurin á, at tølini tykjast at økjast eitt sindur, men enn er ikki komið á mál.

Í august 2017 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið greitt frá, at allir skúlar hava fingið kort at kunna næmingar í 1.og 9. flokki um heilsukanningar. Ráðið heldur, at átøkini hava gjørt mun. Í talvuni síggjast, hvussu nógv børn, við ávíkavist við inn- og útskúling, hava tikið av tilboðnum seinastu trý árini.

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Læknakanning 1. flokkur | 56 | 139 | 370 |
| Læknakanning 9. flokkur | 2 | 15 | 81 |

## 6.3 Fólkaheilsuráðið (LG 2016/211-0201)

Fólkaheilsuráðið er skipað sum eitt fakráð og ráðgevur landsstýrismanninum um heilsufremjandi, sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøk. Í ráðnum eru 7 limir. Fólkaheilsuráðið gav t.d. landsstýrismanninum ráð í sambandi við álitið um rúsdrekka- og rúsevnapolitikk Føroya.

Stovnurin hevði mál- og avrikssáttmála við aðalráðið fyri 2015. Ongin mál- og avrikssáttmáli er gjørdur fyri 2016, tí ætlanin var at gera bygnaðarbroytingar við einum Fólkaheilsustovni, sum eisini fevndi um Fólkaheilsuráðið.

***Roknskaparreglugerð ikki góðkend.***

Roknskapareglugerðin er ikki góðkend. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur fingið eitt dagført uppskot til roknskaparreglugerð frá Fólkaheilsuráðnum.

Sambært § 4 í lógini um Fólkaheilsuráð skal landsstýrismaðurin áseta starvsskipan fyri stovnin eftir tilmæli frá ráðnum. Í februar 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevur fingið uppskot til starvsskipan frá Fólkaheilsuráðnum.

Sambært lógini skal stovnurin gera ársfrágreiðing í minsta lagi 2. hvørt ár. Fyrsta ársfrágreiðingin varð gjørd í 2013 fyri árini 2008 til 2012. Ein frágreiðing er gjørd í oktober 2015 fyri árini 2013 til 2015.

### KT viðurskifti

Fólkaheilsuráðið er partur av Landsneti og er fevnt av trygdarskipanunum hjá KT landsins; stovnurin hevur eymar persónsupplýsingar. Sambært Fólkaheilsuráðnum hevur Dátueftirlitið góðkent upplýsingar, ið stovnurin hevur savnað, og Siðsemisnevndin hevur góðkent verkætlanir, ið skulu góðkennast av nevndini, áðrenn tær eru byrjaðar.

Stovnurin hevur onkur forrit á lokalum teldum, har upplýsingar verða viðgjørdar og goymdar, til kanningar eru lidnar; síðani verða dáturnar strikaðar. Landsgrannskoðanin mælti til, at trygdaravrit verða tikin regluliga, og at tey verða goymd og burturbeind á forsvarligan hátt. Leiðslan tekur undir við tilmælinum.

Vit mæltu til at gera váðameting sambært rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum. Í august 2016 boðaði formaðurin frá, at tey fóru at gera váðameting.

***Váðameting ikki gjørd.***

### Roknskaparviðurskifti

Roknskapartøl frá 2012 til 2016:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 926 | 883 | 1.246 | 1.239 | 1.290 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 1.245 | 1.291 | 1.255 | 1.234 | 1.276 |
| 15-19 | Útbúnaður, leiga og ymiskt | 89 | 73 | 116 | 105 | 77 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 10 |
| 65 | Flytingarinntøkur úr útl. | 0 | 0 | 0 | 0 | -21 |
| | **Tilsamans** | **2.260** | **2.248** | **2.617** | **2.578** | **2.632** |

Við stakroyndum kannaðu vit nakrar útreiðslur. Fólkaheilsuráðið hevði ikki biðið um tilboð til t.d. keyp av tænastum frá veitara fyri góðar 200 t.kr. ella til keyp av útbúnaði og innbúgvi. Sambært stovninum royna tey at fáa so góðar prísir sum gjørligt, og tey vita, t.d. hvør fyritøka kann bjóða góðar tænastur til lýsingar, prent o.a.

***Fólkaheilsuráðið fylgir ikki altíð rundskrivinum um alment innkeyp.***

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin útvegar tilboð ella biður um prís frá fleiri veitarum, tá ið størri upphæddir verða nýttar. Eisini mæltu vit til, at greitt verður frá, í hvørjum sambandi peningur er brúktur til ferðir og umboðan, og at tað verður skjalprógvað.

Í februar 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevur biðið Fólkaheilsuráðið um at fylgja rundskrivinum um alment innkeyp.

Í 2015 og 2016 rindaði stovnurin 1.130 kr. fyri hvønn persón fyri jólaborðhald. Leiðslan heldur, at havandi í huga stóru orkuna ráðslimirnir brúka er tað ein rímilig upphædd at nýta fyri hvønn ráðslim saman við fyrisitingini til jólaborðhald. Sambært landsstýrismanninum hevur Heilsu- og innlendismálaráðið ikki felags politikk viðvíkjandi jólaborðhaldi og letur upp til stovnsleiðslurnar at skipa tey viðurskiftini.

### Gjaldkort

Stovnurin hevur eina peningastovnskontu, ið er skrásett í Búskaparskipan landsins, har gjaldkort er knýtt at. Sambært skrivstovuleiðaranum fara tey at strika kontuna og fáa sær kredittkort ístaðin.

### Ognaryvirlit

*Ognir stovnsins eru spjaddar á ymiskum stovnum og goymslum.*

Ognaryvirlitið hjá Fólkaheilsuráðnum er ikki dagført. Ognirnar eru spjaddar; nakrar á Eirargarði og á Deildini fyri almannaheilsu í Sigmundargøtu. Stovnurin hevur eisini ognir á goymslu hjá Bilrøkt. Fólkaheilsuráðið og Deildin fyri almannaheilsu hava samstarvað um verkætlanir, tí standa ognir hjá stovninum á Deildini fyri almannaheilsu. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað hevur týdning, at ognirnar eru merktar, ikki minst tá ið tær standa aðrastaðni.

*Onki ognaryvirlit.*

Vit kannaðu við stakroyndum, um ognirnar á Fólkaheilsuráðnum og á Deildini fyri almannaheilsu eru til. Vit høvdu onki at finnast at. Landsgrannskoðanin mælti til, at ognaryvirlitið verður dagført.

### Lønir

Starvið sum skrivstovuleiðari varð av fyrstan tíð sett sum tíðaravmarkað starv í 2013. Í juni 2016 hava skrivstovuleiðarin og formaðurin undirskrivað setanarbræv um tíðaravmarkað starv hjá skrivstovuleiðaranum frá 1. juli 2016 til 30. juni 2017. Lønin samsvaraði setanarbrævinum frá 2016.

*Fólkaheilsuráðið helt ikki setanarpolitikk landsins.*

Spurdur, hví starvið ikki varð lýst leyst, og hví Fíggjarmálaráðið ikki hevur góðkent lønina, svaraði landsstýrismaðurin, at tað var ein fyrisitingarligur feilur, og at viðurskiftini skuldu viðgerast saman við Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum.

Í august 2017 sigur landsstýrismaðurin, at málið er viðgjørt innanhýsis í aðalráðnum, og saman við Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum og Fólkaheilsuráðnum. Skrivstovuleiðarin varð sagdur úr starvinum í vár, og varð síðani lýst eftir einum fulltrúa til Fólkaheilsuráðið. Hetta starvið er nú sett, og setanar- og lønarviðurskiftini eru í lagi.

Fólkaheilsuráðið hevur havt avtalu við Ílegusavnið um at hava felags skrivstovufólk, og tey hava býtt útreiðslurnar ímillum sín. Fólkaheilsuráðið hevði sagt ta avtaluna upp til 1. november 2016, tí tey ætlaðu at umskipa arbeiðið. Afturat lønini til skrivstovufólk hevur Fólkaheilsuráðið goldið slakar 59 t.kr., viðmerkt “endurgjald fyri lønir” fyri ymiskar uppgávur, so sum umsitingina av “Gevi gætur”. Skrivarin hjá Fólkaheilsuráðnum hevur nú yvirtikið umsitingina av “Gevi gætur”.

Stovnurin hevur havt starvsfólk í løntari starvsvenjing. Sambært Fólkaheilsuráðnum var tað komið í lag, við at nógv ung fólk og stovnar hava vent sær til Fólkaheilsuráðið. Stovnurin hevur síðani mett um førleikar og møguleikar fyri samstarvi. Í flestu førum er talan um samstarv við lærustovn og ikki um eina setan. Vísandi til almenna starvsfólkapolitikkin mælti Landsgrannskoðanin til, at øll størv verða lýst leys.

Í februar 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at viðmerkingin frá Landsgrannskoðanini er tikin til eftirtektar.

## 6.4 Heilsutrygd (LG 2015/211-0202)

Landsgrannskoðanin grannskoðaði í 2016 Heilsutrygd fyri m.a. at kanna, um roknskapurin var rættur, herundir eisini um innanhýsis mannagongdir vóru tryggar.

*Roknskaparreglugerð ikki dagført.*

Roknskaparreglugerðin var ikki dagførd og innihelt ikki reglur viðvíkjandi Kommunulæknaskipanini. Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsutrygd í næstum fer at dagføra roknskaparreglugerðina.

Síðani 1. januar 2016 hevur Heilsutrygd brúkt journalskipanina 360. Skilnaður er í skipanini í millum mál, men ongar skrivligar mannagongdirnar vóru gjørdar. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar mannagongdir um journalisering.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at skrivligar mannagondir eru gjørdar viðvíkjandi journalini.

Frá 2013 til 2016 hevur Heilsutrygd goldið um 1,2 mió.kr. til fyritøku fyri leigubilar til kommunulæknaavloysarar. Í 2014 tók Heilsutrygd av tilboði frá sama veitara um sáttmála til apríl 2017. Vit hava spurt, hvat síðani er hent í málinum, men hava ikki fingið svar.

**Lønir hjá umsitingini**

Vit kannaðu lønirnar hjá tveimum starvsfólkum fyri november 2015. Vit høvdu onki at finnast at.

Í mai 2016 áttu trý av teimum 9 starvsfólkunum frá 57 til 110 tímar tilgóðar, og trý onnur skyldaðu frá 60 til 181 tímar. Landsgrannskoðanin vísti á, at tá ið so nógv starvsfólk eiga ella skylda nógvar tímar, kann roknskapurin ikki sigast at vera rættur. Heilsutrygd kunnaði um, at starvsfólkini skulu halda seg innan fyri reglurnar um flextíð, og at avtala er gjørd um at minka nógvu minustímarnar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsutrygd hevur strammað upp fyri at fáa tímasaldurnar hjá starvsfólkunum at vera innan fyri reglurnar um flekstíð.

### 6.4.1 Heilsutrygdarveitingar

Játtanin er á høvuðskontu 11.20.2.03. Sambært § 24, stk. 1, í Ll. nr. 178/2009 rinda øll, sum hava fylt 18 ár, og sum eru fevnd av lógini, 175 kr. um mánaðin umframt 0,6% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd. Persónar, ið búgva í Føroyum og t.d. sigla úti, gjalda mánaðarliga gjaldið.

***Tey, sum rinda til norsku Folketrygd, skulu ikki rinda til Heilsutrygd sambært kærunevndini.***

Sambært Heilsutrygd fekk ein persónur viðhald frá kærunevndini í almanna- og heilsumálum, at hann ikki skuldi gjalda til Heilsutrygd, tí hann rindaði til norska Folketrygd. Spurd, um avgerðin fór at fáa aðrar fylgjur fyri stovnin, svaraði Heilsutrygd, at tey framvegis viðgjørdu málið og væntaðu at vera komin á mál stutt eftir summarfrítíðina (2016).

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin sagt, at nýggjar upplýsingar eru komnar fram, ið hava gjørt, at Heilsutrygd hevur biðið kærunevndina um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

### 6.4.2 Fíggjarstøða

Stovnurin hevur eina kontu í peningastovni, ið er skrásett í Búskaparskipan landsins. Heilsutrygd tók undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um at seta reglur um peningastovnskontuna í roknskaparreglugerðina og at tøma kontuna regluliga.

Heilsutrygd rindar TAKS fyri at umsita innkrevjingina av heilsutrygdargjaldi. Ongin skrivlig avtala er millum Heilsutrygd og TAKS. Sambært yvirliti úr innheintingarskipanini hjá TAKS 9. mai 2016 vóru 2,8 mió.kr. útistandandi í gjøldum til Heilsutrygd.

Í juni 2016 vísti landsstýrismaðurin á, at stjórin á TAKS er stovnsleiðari á stovnsnummarinum í landsroknskapinum, og TAKS umsitur innkrevjingina og eftirstøðurnar av inngjøldum. Ráðið helt, at sum heild er ábyrgdarøkið hjá TAKS væl og greitt avmarkað.

Í játtanini til Heilsutrygdarveitingar, St.kt. 08 “stuttfreistað skuld” vóru avsettar góðar 2 mió.kr. til útreiðslur. Avsetingarnar árini 2011 til 2015 vóru:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 81 | Skuld, sum er greidd til útgj. | -187 | -202 | 0 | 0 | -486 |
| 88 | Onnur stuttfreistað skuld | -100 | -650 | -1.605 | -1.533 | -1.533 |
| | **Tilsamans** | **-287** | **-852** | **-1.605** | **-1.533** | **-2.019** |

Til skuld, greidd til útgjaldingar vóru 486 t.kr. settar av, sum øll upphæddin var goldin í 2016.

***Sett er av móti møguligari stilling av gjaldi til kommunulæknar.***

Í 2013 eru 1.533 t.kr. settar av til basisgjald til kommunulæknar, ið áður var fryst fast. Sambært skrivi 14. februar 2014 frá Heilsutrygd til Gjaldstovuna var talan um eina hóttandi útreiðslu, ið stovnurin mátti seta av til.

Í juli 2016 greiddi Heilsutrygd frá, at stilling av basisgjaldi til kommunulæknar var í fastari legu til apríl 2011. Tá vóru Kommunulæknafelag Føroya øðrumegin og Heilsutrygd og Heilsumálaráðið hinumegin ósamd um eina serliga stilling av gjaldinum.

Heilsutrygd segði víðari, at:
"*Ósemjan førdi til gerðarrættardóm, og síðani tá er basisgjaldið ikki stillað. Kommunulæknafelagið hevur strongt á at fáa stillingina aftur at virka, og tí hevur Heilsutrygd sett av til hesa hóttandi útreiðsluna.*

*Heilsutrygd hevur í ár, saman við Heilsu- og innlendismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum roynt at fingið semju við Kommunulæknafelagið um framtíðarstilling av basisgjaldinum. Semja er ikki fingin í lag enn, men vit meta framvegis, at hetta er ein hóttandi útreiðsla*."

Heilsu- og innlendismálaráðið hevði ikki viðmerkingar til, at upphæddir vóru settar av. Ráðið vísti á, at samráðingar vóru millum Fíggjarmálaráðið og Kommunulæknafelagið um málið.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hóast ongin endalig semja er gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya um stilling av basisgjaldinum, so er stillingin tó komin í fasta legu aftur. Ósemja er tó framvegis um eina upphædd, sum stavar heilt afturí frá 2011. Til semja er funnin, er talan um eina hóttandi útreiðslu.

### 6.4.3 Kommunulæknaskipanin

Játtanin er á høvuðskontu 11.20.2.04. Í seinastu frágreiðing okkara umrøddu vit lønir hjá Kommunulæknaskipanini. Eini 50 starvsfólkamál vóru í skipanini umframt avloysarar.

Kommunulæknar vóru løntir eftir sáttmála millum Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið 1. juli 2008. Afturat føstu samsýningini fingu kommunulæknar vaktargjøld og veitingargjøld. Vaktargjøldini vóru ikki javnað síðani 2011, men veitingargjøldini verða javnað tvær ferðir um árið við støði í donskum takstum.

Til kommunulæknar varð fasta samsýningin goldin um skattaskipanina og kommunulæknar í avloysarastørvum fingu allar samsýningar uttan profylaksir um skattaskipanina. Heilsutrygd visti ikki, hví munur var gjørdur á skattingini, men stovnurin hevði fylgt siðvenjuni, ið var galdandi, áðrenn Heilsutrygd tók yvir umsitingina av økinum.

Í 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ráðið hevði samskift við Heilsutrygd um útgjald av samsýningum til kommunulæknaavloysarar fyri profylaksir. Ráðið bað Heilsutrygd endurskoða mannagongdina og gera eina niðurstøðu um, um samsýningarnar ikki áttu at farið um skattaskipanina.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at síðani desember 2016 eru øll gjøld til kommunulæknaavloysarar fyri profylaktiskar veitingar farnar umvegis A-skattaskipanina.

Heilsutrygd upplýsti í juli 2016, at eftir summarfrítíðina fóru lønirnar at verða avgreiddar um VaktPlan, og at øll setanarskrivini fóru at verða kannað fyri at tryggja, at upplýsingarnar, ið verða tøppaðar í Vaktplan, eru rættar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at lønirnar til viðtalustarvsfólk (læknaskrivarar og sjúkrarøktarfrøðingar) hava síðan august 2016 verið avgreiddar umvegis VaktPlan.

## 6.5 Sjúklingatrygging (LG 2016/211-0203)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá sjúklingatryggingini. Endamálið við grannskoðanini var at kunna okkum um, hvussu skipanin virkar og at kanna, um roknskapurin var rættur.

Sjúklingatryggingin er heimilað í anordning nr. 1248 frá 19. desember 2011 "om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang indenfor sundhedsvæsenet". Játtanin er á høvuðskontu 11.20.3.24. "Sjúklingatrygging". Endurgjøld verða roknað sambært anordning nr. 582 frá 23. juni 2008 "om ikrafttræden for Færøerne af lov om erstatningsansvar".

Tryggingin fevnir um allar viðgerðir, sum eru framdar av ella eftir ávísing frá løggildum heilsustarvsfólkum og um øll viðgerðarstøð, har løggild heilsustarvsfólk starvast. Endurgjøld verða latin fyri mein av kanningum og viðgerðum í føroyska heilsuverkinum, fyri mein av heilivági, sum er fyriskrivaður av lækna í føroyska heilsuverkinum, og fyri skaðar, hendir í sambandi við kanning ella viðgerð uttanlands eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur gjørt vegleiðing um møguleikarnar fyri endurgjaldi, ið liggur á heimasíðuni hjá ráðnum. Ráðið hevur eisini orðað faldara, sum serliga er ætlaður sjúklingum, men er eisini góð vegleiðing hjá heilsustarvsfólkum.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur gjørt eitt fylgiskjal til komandi dagføringina av roknskaparreglugerðini hjá ráðnum, sum lýsir verandi mannagongd. Sjúklingatrygg-ingin fevnir um skaðar, sum eru hendir í 2012 ella seinni.

Í 2015 vóru 13 fráboðanir um føroysk mál til Patienterstatningen. Endurgjaldskrøv skulu vera fráboðað í seinasta lagi 3 ár eftir, at sjúklingurin varnaðist ella átti at havt varnast skaðan. Endaliga fyrningarfreistin er tó 10 ár eftir skaðan. Avgerðir hjá Patienterstatningen kunnu kærast til Ankenævnet for Patienterstatningen.

Játtanin til Sjúklingatrygging í 2016 var 2 mió.kr. og varð við eykajáttanarlóg desember 2016 hækkað 5 mió.kr. Endaligu roknskapartølini vórðu 7.416 t.kr.

Niðanfyri eru roknskapartølini 2012 til 2016:

*t.kr.*

| Sjúklingatrygging | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tilskot til einstaklingar | 0 | 205 | 491 | 6.505 | 7.416 |

### Umsiting av sjúklingatryggingini

Í BEK nr. 1040/2013 er ásett, at umsitingargjald verður goldið eftir einum lutfalli av øllum fráboðanum. Játtanin til umsitingina av sjúklingatryggingini er á høvuðskontu 11.20.3.23. "Umsiting av sjúklingatrygging".

***Patienterstatningen umsitur Sjúklinga-tryggingina.***

Roknskapartøl 2012 til 2016:

*t.kr.*

| Umsiting av sjúklingatrygging | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tænastum | 0 | 59 | 260 | 234 | 129 |

Heilsu- og innlendismálaráðið rindar hvønn ársfjórðing ákontugjøld til Patienterstatningen fyri at umsita sjúklingatryggingina. Kostnaðurin verður javnaður árið eftir fyri undanfarna ár.

**Útgjøld**

Oyðubløð til sjúklingatryggingina eru á heimasíðuni hjá Patienterstatningen. Danski stovnurin kunnar Heilsu- og innlendismálaráðið um fráboðanir frá føroyskum sjúklingum. Støðini, har einstaki skaðin er hendur, fáa eisini fráboðan. Viðgerðartíðin hjá Patienterstatningen er 6 til 8 mánaðir.

Øll løggild heilsustarvsfólk hava sambært lógini skyldu til at kunna sjúklingar um endurgjaldsmøguleikar, um tey gerast varug við ein skaða, ið kann verða endurgjaldsheimilaður. Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum kunnu sjúklingar venda sær til viðkomandi heilsustarvsfólk og Heilsu- og innlendismálaráðið fyri nærri kunning, vegleiðing og ráðgeving um endurgjaldsmøguleikar.

Um endurgjaldsmóttakarar biðja um tað, kunnu útgjøld frá sjúklingatryggingini verða fevnd av kreditorvernd sambært rættargangslógini. Tá ið endurgjøld verða latin børnum, eru krøv um, ”*at erstatningen anbringes i en godkendt forvaltningsafdeling*”. Tað kann ganga long tíð frá tí, at eitt mál er stovnað, til tað er endaliga avgreitt, og tí kann sami persónur fáa útgoldið endurgjald í fleiri játtanarárum.

*Kanning av útgjøldum*

Landsgrannskoðanin kannaði útgjøldini, sum til november 2016 vóru goldin. Vit kannaðu, um tey vóru í samsvari við avgerðir hjá Patienterstatningen. Onki var at finnast at.

***Móttakarar vóru navngivnir í BSL.***

Nøvnini á teimum, ið hava fingið endurgjøld, vóru at síggja í roknskaparskjølunum í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kann vera óheppið, og mælti til at umhugsa at taka málið upp við Dátueftirlitið fyri at kanna, hvørt talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar, og hvussu so skal farast fram.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ikki viðgjørt spurningin við Dátueftirlitið, men heldur, at talan er um eina viðmerking, ið er generell í sambandi við øll útgjøld, ið verða avgreidd umvegis Búskaparskipan landsins.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur vent sær til Gjaldstovuna við málinum um, at tað er óheppið, at nøvn eru sjónlig á kontukortum í Búskaparskipan landsins. Ráðið hevur nú fingið møguleika at avgreiða útgjøld soleiðis, at journalnummur verða sett á kontukort, heldur enn persónsnøvn. Ráðið heldur, at tað er ein góð og betri hóskandi loysn.

Endurgjøld vórðu, so vítt gjørligt, bókað á tað tíðarskeiðið, tá ið skaðin var fráboðaður. Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum vildi Gjaldstovan hava, at útreiðslurnar vórðu tíðaravmarkaðar, tí tær hoyrdu til farin tíðarskeið. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um tað var rætt at tíðaravmarka útgjøld vísandi til, at Sjúklingatryggingin ikki hevur skyldu at rinda, fyrr enn avgerð er tikin um endurgjald.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur aftur umrøtt spurningin við Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovuna. Frá 1. januar 2017 verða endurgjaldskrøvini bókað eftir dagfestingini, tá ið Patienterstatningen hevur tikið avgerð.

## 6.6 Gigni, heilsufrøði til børn og ung (LG 2016/211-0213)

Gigni er stovnur undir Heilsu- og innlendismálaráðnum, og til 2009 var stovnurin kallaður Barnatænastan. Høvuðsuppgávan er at geva børnum og ungum tilboð um

fyribyrgjandi kanningar og ráðgeving, frá tí at tey eru fødd, og til ásetta undirvísingarskyldan endar.

Endamálið við stovninum er lýst í Ll. nr. 63/2005 "um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung", har tað sambært § 1 er, at "*fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung skulu gera sítt til at tryggja teimum best møguligar fyritreytir fyri einum heilsugóðum uppvøkstri og vaksnamannalívi*".

Uppgávurnar hjá stovninum eru lýstar neyvari í K. nr. 88/2007 "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung".

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 grannskoðað roknskapin hjá Gigni. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparviðurskiftini, roknskaparreglugerðina og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

Orsakað av ógegninum hjá landsstýrismanninum í heilsu- og innlendismálum, varð frágreiðingin latin landsstýrismanninum í fíggjarmálum til viðmerkingar.

***Málið er flutt til Fíggjarmálaráðið, orsakað av ógegni hjá landsstýrismanninum.***

Roknskapartøl og játtanir seinastu 5 árini.

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 9.383 | 9.514 | 10.421 | 10.555 | 10.724 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 1.534 | 1.485 | 1.586 | 1.616 | 1.623 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 82 | 113 | 116 | 61 | 263 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 257 | 235 | 224 | 225 | 230 |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 57 | 60 | 66 | 67 | 67 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -16 | -16 | -16 | -18 | -18 |
| | **Tilsamans** | **11.296** | **11.390** | **12.396** | **12.508** | **12.889** |
| | Játtan | 11.275 | 11.375 | 12.322 | 12.439 | 12.871 |

Frá 2012 til 2016 er játtanin til Gigni hækkað 1,6 mió.kr. og øll árini hevur stovnurin meirnýtslu. Størsti parturin av játtanini fer til lønir.

### Lønir o.a.

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál hjá stovninum. Tað bar ikki til at siga, um lønirnar vóru rættar, tí lønarmálini vóru ikki nóg væl skjalfest. Í nøkrum førum manglaði skjalprógv fyri útbúgving og eftirútbúgving. Í einstøkum lønarmálum manglaði lýsing, umsókn o.l.

Sambært stjóranum var ein orsøk, at fleiri lønarmál eru gomul, og nógvar broytingar hava verið í skipanini av stovninum. M.a. var Barnatænastan eitt skifti undir Nærverkinum, síðani undir Almannamálaráðnum og nú undir Heilsu- og innlendismálaráðnum. Skjøl hava ikki altíð fylgt við flytingunum. Landsgrannskoðanin vísti á, at ikki øll lønarmálini vóru gomul, og at tey nýggju málini vóru heldur ikki nóg væl skjalfest.

Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra øll lønarmálini, soleiðis at prógv fyri útbúgvingum, eftirútbúgvingum, skeiðum o.l., eru til skjals í málunum. Tað hevur týdning fyri stovnin til eina og hvørja tíð at kunna sanna, at lønirnar eru rættar, og at starvsfólkini hava lógarkravdu førleikarnar at røkja størvini sum m.a. heilsufrøðingar. Sambært stjóranum, eru stig nú tikin til at dagføra øll lønarmálini.

***Mælt varð til at dagføra øll lønarmál.***

*Løn til leiðsluna*

Stjórin hevði onki setanarskriv. Tað er ikki í tráð við Ll. nr. 20/2008 um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

Stjórin og varastjórin hava síðani 2014 fingið 2.000 kr. hvør um mánaðin í viðbót fyri at vera "sjúkrarøktarfrøðingar við víðari útbúgving". Prógv ella góðkenningar vóru ikki í lønarmálunum. Sambært Fíggjarmálaráðnum er ongin formlig góðkenning givin at veita leiðsluni viðbótina.

***Viðbót givin uttan formliga góðkenning.***

Fíggjarmálaráðið hevur greitt frá, at størvini sum ávikavist stjóri og varastjóri í Gigni, krevja eina víðari útbúgving og eru flokkað í § 31 í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Sambært tí ásetingini eru tey flokkað á ávikavist 43. og 40. lønarstigi, og sambært § 32 í sáttmálanum fáa stjóri og varastjóri fyri heilsufrøðingar ábyrgdarviðbót á ávikavist 3.800 kr. og 2.000 kr. um mánaðin.

Landsgrannskoðanin heldur, at avgerðin um at gjalda viðbótina átti at verið tikin í samráði við Heilsu- og innlendimálaráðnum og/ella góðkend av Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, tí leiðslan er í serligari støðu, tá ið hon játtar viðbót og harvið lønarhækkan til sín sjálvs.

### *Størv ikki lýst leys*

***Størv ikki lýst leys.***

Størvini sum bókhaldari, KT grafiskur ráðgevi og reingerðarfólk eru ikki lýst leys. Lønarviðurskiftini hjá ráðgevanum vóru ikki í tráð við galdandi reglur á arbeiðsmarknaðinum, frítíðarlógini v.m. Í januar 2017 er hann settur í starv við setanartreytum sambært starvsmannafelagssáttmálanum, uttan at starvið varð lýst leyst.

Gigni hevur ikki fylgt lógarásettu reglunum um setanarviðurskifti, og samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at óskrivaði setanarpolitikkurin hjá Gigni er ikki í samsvari við setanarpolitikk landsins, sum ásetir, at øll almenn størv eiga at verða lýst leys.

### *Gjøld fyri útbúgving hjá leiðsluni*

Gigni hevur goldið fyri masterútbúgving hjá stjóranum. Umframt 120 t.kr. í skúlagjaldi, hevur stovnurin rindað fyri gisting, dagpening og flutningsútreiðslur. Sambært stjóranum vóru treytirnar viðvíkjandi útbúgvingini, og hvørjar útreiðslur Gigni kundi rinda, avtalaðar munnliga við Heilsu- og innlendismálaráðið.

Landsgrannskoðanin vísti á, at avgerðin um at gjalda fyri útbúgving hjá stjóranum, átti at verið tikin í samráði við aðalráðið, tí stjóri er í serligari støðu, tá ið hann bæði gevur loyvi til og játtar útreiðslurnar, ið standast av at útbúgva seg.

***Ongin formlig avtala um útbúgving.***

Sambært Fíggjarmálaráðnum hevur Heilsu- og innlendismálaráðið onga avtalu gjørt. Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at tað hevði verið rættast, at ein skrivlig avtala var gjørd, sum ásetir, hvørjar treytir eru galdandi, tá ið stjórin fer í holt við eina masterútbúgving. Hinvegin er tað ikki óvanligt, at ein stjóri fær játtað frá sínum arbeiðsgevara at taka eina leiðsluútbúgving, og at stovnurin rindar allar útreiðslurnar.

### *Serstøk frívika*

Síðani 2009 hevur stovnurin hvørt ár goldið stjóranum og varastjóranum serstøku frívikuna út. Síðani 2011 hevur leiðsluskrivarin eisini fingið serstøku frívikuna goldna út.

Leiðslan hevur ikki skrásett arbeiðstíðina ella frídagar. Tó verður summarferiulisti gjørdur fyri 5 vikur. Aðrir feriudagar, sum verða hildnir seinni í frítíðarárinum, eru ikki skrásettir. Heilsufrøðingarnir skráseta arbeiðstíð og feriudagar í VaktPlan, har greitt framgongur, hvussu nógvar tímar ella feriudagar, teir eiga ella skylda.

***Serstaka frívikan goldin út uttan hóskandi skráseting av feriu.***

Landsgrannskoðanin undrast á, at serstaka frívikan er útgoldin leiðsluni á hvørjum ári, uttan at feriudagar, hildnir seinni í frítíðarárinum, eru hóskandi skrásettir. Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini um, at tað er týdningarmikið at skráseta feriudagar, tá ið serstaka frívikan skal gjaldast út.

## Ferðaútreiðslur

Sambært bókhaldinum vóru 15 ferðaseðlar keyptir í 2016. Eftirlitsdagin vóru 8 ferðir, sum ikki vóru gjørdar upp. Flestu ferðirnar eru síðani gjørdar upp.

Nakrir ferðaseðlar vóru keyptir beint undan fráferð. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja keypini betri til rættis, fyri at tryggja so bíligar ferðaseðlar sum gjørligt.

Nærum allar hotel rokningar, sum Gigni hevur rindað fyri gistingar uttanlands hjá stjóranum, eru dýrari enn ásetti kostnaðurin, sum landið kann endurrinda.

***Hámark fyri gisting ikki hildið.***

Tænastumaður skal sjálvur rinda kostarhald av dagpeningunum. Stjórin hevur rindað matstovurokningar uttanlands við gjaldkortinum hjá stovninum, sum stjórin síðani hevur drigið partvíst frá í uppgerðini sum kost goldin av øðrum. Tað er ikki í tráð við reglurnar um tænastuferðir uttanlands.

### Keyp av vørum og tænastum

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað keyp av vørum og tænastum.

*Umboðan, matur og drykkjuvørur*

Gigni hevur í 2016 havt starvsfólkadag, jólaborðhald, fráfaringarsamkomu og latið starvsfólkunum jólapakkar.

Landsgrannskoðanin hevur áður gjørt tvørgangandi kanningar av útreiðslum til jólaborðhald, gávur o.l., og høvuðsreglan er, at starvsfólkið sjálvt rindar fyri jólaborðhald. Fíggjarmálaráðið metti í 2006, at jólaborðhald, saman við øðrum felags tiltøkum, var við til at menna og varðveita trivna á arbeiðsplássinum. Tískil var í lagi, at arbeiðspláss rinda partvíst fyri jólaborðhald, útferð e.l.

Gigni hevur ikki orðað starvsfólkapolitikk ella aðrar reglur um starvsfólkarøkt, og Landsgrannskoðanini kunnugt, rinda starvsfólkini ikki part av jólaborðhaldinum sjálvi. Sambært Fíggjarmálaráðnum finnast ikki ásetingar um, hvørjar upphæddir kunnu nýtast til starvsfólkarøkt, og tískil mugu stovnsleiðarar duga at vísa hógv. Tó er ikki óvanligt og heldur ikki órímiligt, at stovnsleiðslur nýta ein part av játtanini til starvsfólkarøkt.

Av tí at stovnurin hevur virksemi um alt landið og skipar fyri mammubólkum v.m., hevur Gigni kontur í flestu matvøruhandlum. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað hevði verið fíggjarliga skynsamari, um stovnurin hvønn mánað stemmaði kontuavrit frá veitarum av við bókhaldið, og tryggjaði sær, at starvsfólk, ið keypa, hava heimild at keypa, og at tey vátta keypið. Gigni hevur síðani tikið ítøkilig stig til at tryggja, at øll kontuavrit frá veitarum verða stemmað av við bókhaldið hvønn mánað og at starvsfólk, ið keypa, hava heimild til tess.

*Telefonnýtsla*

Starvsfólkini brúka fartelefonir sum arbeiðsamboð. Eftirlitið vísti, at onkur telefon varð nýtt nógv uttanlands og til at ringja til útlond. Telefonhaldini svaraðu ikki altíð til tørvin. Harafturat rindaði Gigni fyri telefonnummur, ið ikki vóru í brúki.

***Telefonhald svara ikki altíð til tørvin.***

*Biltryggingar*

Gigni hevur í 2016 goldið 34.544 kr. fyri biltryggingar. Útreiðslurnar vóru ikki rættar; goldið var dupult fyri ein bil. Upphæddin er síðani flutt aftur. Árstryggingin fyri annan bil var somuleiðis goldin tvær ferðir; talan var um skeiva tíðargreining.

Landsgrannskoðanin heldur, at um bókhaldið var skipað nøktandi, hevði tað minkað um vandan fyri, at rokningar vórðu goldnar tvær ferðir.

***Eitt skipað bókhald kundi minka um feilir.***

*Leiga av bili*

Sambært stjóranum ber ikki til hjá Gigni at útinna lógarásettu tænasturnar, uttan at starvsfólk hava atgongd til bil. Hinvegin er onki krav um, at heilsufrøðingar skulu hava bil tøkan til stovnin. Gigni hevur afturvendandi víst aðalráðnum á trupulleikan og tørvin á at fáa játtan til at keypa fleiri bilar til stovnin. Tá ið Gigni leigar bil, er torført at siga, hvørt tað er fyribils, í eitt stutt tíðarskeið, ella um tørvur er á bili longri tíðarskeið. Tað er tongt at teimum persónligu viðurskiftunum hjá starvsfólkunum, tí flestu nýta egnan bil til arbeiðis.

Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at mánaðarlig leiga av bili er langtíðarleiga og skal bókast á StRk. 1630 “langtíðarleiga og leiga annars”. Harafturat hava vit víst á, at langtíðarleiga krevur serstakt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum.

Sambært Fíggjarmálaráðnum hava tey ikki fingið nakra umbøn frá Gigni og Heilsu- og innlendismálaráðnum um langtíðarleigu. Fíggjarmálaráðið vísir á, at stovnar hava skyldu at halda galdandi ásetingar um langtíðarleigu. Ráðið heldur, at í summum førum er leigutíðarskeiðið ov stutt til, at talan kann vera um langtíðarleiga.

### *Keyp av útbúnaði*

Gigni hevur ígjøgnum tíðirnar keypt ymiskan útbúnað; tað veri seg størri flutnings-útbúnað, innbúgv, skrivstovuútbúnað og útbúnað, sum serliga er viðkomandi fyri heilsufrøðingar.

***Ognaryvirlit vantar.***

Landsgrannskoðanin mælti til, at Gigni regluliga førdi ognaryvirlit, so greitt var, hvørjar ognir stovnurin eigur, brúkar og hvar ognirnar eru.

Fíggjarmálaráðið hevur víst á, at stovnar hava skyldu til at fylgja galdandi áseting í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit. Tó er ikki ókent, at vantandi ella ikki dagført ognaryvirlit er støðan hjá fleiri av landsins stovnum.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvar teldurnar hjá stovninum vóru. Stjórin svaraði, at á høvuðsskrivstovuni vóru fimm teldur, keyptar frá KT landsins, ein til hvørt starvsfólkið. Harafturat hevði KT vørðurin eina og varaleiðarin eina heima. Stjórin hevði harafturat tvær teldur heima. Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja, hví starvsfólk hava tørv á fleiri teldum hvør.

***Stovnurin rindar kommunalar útreiðslur.***

Sambært stjóranum er tað uppgávan hjá kommununum at keypa teldur til starvsfólkini. Tá ið nakrar kommunur ikki gera tað, hevur Gigni keypt teldur til tey starvsfólkini.

***Vøra innflutt uttan at verða tollavgreidd.***

Í 2015 keypti stjórin eina teldu til stovnin í floghavn uttanlands. Teldan varð ikki tollað við innflutning til Føroya. Landsgrannskoðanin heldur tað vera átaluvert at keypa eina teldu við kortinum hjá stovninum og innflyta hana uttan at tolla hana.

### *Leiga, viðlíkahald og skattur*

Gigni hevur langtíðarleigað kopimaskinu. Leigusáttmálin var galdandi í 60 mánaðir, frá 30. november 2011, og kundi ikki sigast upp í leigutíðarskeiðnum. Mánaðarliga leigan var 1.972 kr. u/MVG, so tilsamans hevur Gigni rindað 118.320 kr. u/MVG.

***Kopimaskina langtíðarleiga.***

Í november 2016 greiddi stjórin frá, at tey júst høvdu fingið nýggja kopimaskinu og gjørt nýggja avtalu um leasing. Vit bóðu um avrit av nýggju avtaluni og kunnaðu stjóran um høvuðsregluna, at langtíðarleiga hjá landinum er ikki loyvd, uttan loyvi frá Fíggjarmálaráðnum. Nýggja leasingavtalan varð ikki undirskrivað, og Gigni keypti maskinuna fyri 71.432 kr. u/MVG.

### *Gjaldkort*

Høvuðsreglan er, at øll útgjøld skulu fara fram um Búskaparskipan landsins, men hevur ein stovnur fingið loyvi til gjaldkort e.t. verða reglurnar, sum Fíggjarmálaráðið ásetir, brúktar, og skal frágreiðing um kortnýtsluna verða ásett í roknskapar-reglugerðini fyri stovnin.

***Kortnýtslan ikki nóg væl skjalfest.***

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið kortnýtsluna í 2016. Sum heild var kortnýtslan ikki nóg væl skjalfest. Onkuntíð hevur stovnurin bókað eftir bankakontu-avriti, og kvittanir lógu ikki við. Tær kvittanir, ið vóru, høvdu ikki áskrift um, hvør hevði keypt, ella hvat endamálið við keypinum var. Landsgrannskoðanin kundi ikki við vissu staðfesta, um útreiðslurnar hoyrdu til virksemið hjá stovninum. Eftirsíðan hevur Gigni funnið fleiri kvittanir fram, og frágreiðing er skrivað á tær.

Tað kann vera ein vansi, at tann, ið hevur gjaldkortið um hendi, eisini er tann, sum skal góðkenna og leysgeva rokningar umframt at góðkenna mánaðarroknskapin mótvegis aðalráðnum.

Landsgrannskoðanin helt, at Gigni hevur ikki serliga stóran tørv á at hava gjaldkort, og mælti tí til, at stovnurin slapp sær av við kortið og í staðin brúkar konturnar í handlunum. Gigni hevur ikki longur gjaldkort.

### Samanumtikið

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at roknskapurin hjá Gigni hevur verið merktur av feilum og vánaligari umsiting.

Leiðslan hevur ikki víst hóskandi fíggjarligan atburð í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi tí virksemi, roknskapurin fevnir um. Feilir og vantandi skjøl eru úrslit av veikum ella ongum innaneftirliti. Nøktandi innaneftirlit kundi havt tryggjað, at feilir og manglar vórðu funnir og rættaðir. Kortnýtslan hevur verið av slíkum slagi, at ivi kann vera, um alt keypið er til raksturin hjá stovninum.

Leiðslan á Gigni var sum heild samd í, at roknskaparviðurskiftini høvdu ikki verið góð, og at tørvur hevði verið á at skjalfesta betur, at avgreiða rokningar til tíðina og at stemma av javnan. Sambært stjóranum hava tey tikið viðmerkingarnar til eftirtektar og gjørt mannagongdir, sum fara at tryggja, at øll keyp verða skjalfest rætt, og at roknskapurin fer at vísa eina rætta mynd.

## 6.7 Umhvørvisstovan (LG 2016/206-0374)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Umhvørvisstovuna í 2016. Stovnurin fyrisitur matrikul, tinglýsing, fólkayvirlit, landsadressuskrá, orku og el-veitingarlógina, fremur umhvørviseftirlit og umhvørvisvernd, umsitur viðarlundir o.a. Umhvørvisstovan hevur eisini týðandi leiklut í verkætlanini "Talgildu Føroyar".

### Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin frá 2014 er ikki dagførd. Inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi er ikki nevnt í roknskaparreglugerðini.

***Inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi er ikki nevnt í roknskaparreglugerðini.***

Umhvørvisstovan er í holt við at dagføra reglugerðina. Stovnurin vísti á, at tey hava hildið fram við siðbundnum roknskaparhátti, sum stovnarnir, sum áður umsótu málsøkini, høvdu uppbygt, og at talan er um virksemi, sum illa hóskar inn í vanliga raksturin. Vísandi til § 23 í roknskaparkunngerðini um frávik frá ásetingunum í kunngerðini fer Umhvørvisstovan at finna eina haldbæra loysn saman við Heilsu- og innlendismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Í apríl 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at mannagongdir fyri virksemi á roknskaparøkinum skulu vera við í roknskaparreglugerðini.

#### *Inntøkur*

Gjøld fyri kort og skráir eru 1.000 kr. Sambært Umhvørvisstovuni er orsøkin, til at prísurin fyri talgild kort er uttan MVG, at tað nærum bara eru stovnar og kommunur, sum keypa hesi kort. Landsgrannskoðanin mælti til, at MVG-skyldug søla verður umsitin sambært MVG-reglunum. Í apríl 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at reglurnar verða hildnar.

Prísirnir hjá Skógrøktini eru grundaðir á samtyktir hjá Skógfriðingarnevndini og samtykki landsstýrisins. Sambært Umhvørvisstovuni verða reglur um avsláttur og prísáseting settar í dagførdu roknskaparreglugerðina.

Gjøldini fyri tinglýsing eru ásett við lóg. Vit kannaðu við stakroyndum nakrar av inntøkunum hjá Tinglýsingini. Onki var at finnast at.

*Útreiðslur*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar útreiðslur, um tær hoyra til stovnin, eru bókaðar rætt, til rætta tíð, og um tær eru skjalprógvaðar. Afturat tí kannaðu vit, um neyðug búskaparlig atlit eru tikin, tá ið vørur og tænastur verða útvegaðar, t.d. um boðið verður út, ella um biðið verður um tilboð frá fleiri.

Stovnurin hevur skrásett rokning 150 t.kr. + MVG frá sær sjálvum vegna "rakstur og hýsing av FDS". Landsgrannskoðanin ivast í, um tað er rætt at senda rokning, har MVG eisini er lagt á, til sín sjálvs fyri tænastur. Landsstýrismaðurin vísir á, at FDS-samstarvið er undir avtøku, og virksemið verður lagt í vanliga raksturin hjá Umhvørvisstovuni í 2017.

***Umhvørvisstovan heldur ikki altíð reglurnar um alment innkeyp.***

Umhvørvisstovan hevði ikki biðið um tilboð í sambandi við veitingar, so sum lýsingarútreiðslur, keyp av flatskermum, el-veiting til nýggjar skrivstovur og timburarbeiði í sambandi við umbygging.

Landsgrannskoðanin mælti til, at allar útreiðslur verða skjalprógvaðar, og at greitt verður frá á matstovurokningum o.ø., í hvørjum sambandi útreiðslan er hildin, og hvør hevur verið við á matstovu. Eisini mæltu vit til, at biðið verður um tilboð frá fleiri veitarum í sambandi við størri keyp ella umvæling av bygningum.

### Inntøkufíggjað virksemi

Umhvørvisstovan hevur ikki greitt nærri frá inntøkufíggjaða virkseminum í viðmerkingunum í fíggjarlógini, soleiðis sum ásett í kunngerð. Í apríl 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at viðmerkingin hjá Landsgrannskoðanini verður viðgjørd og tikin til eftirtektar í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2018.

*Flyting av avlopi/halli*

Sambært Umhvørvisstovuni hevði aðalráðið givið loyvi til, at avlop/hall av virkseminum hjá Matrikul og Skógrøktini verður flutt yvir ár. Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð tað loyvið, tó at vit bóðu um tað í oktober 2016.

Í apríl 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært Umhvørvisstovuni er skipanin viðvíkjandi Skógrøktini komin í lag umleið 2005. Onki skjalprógv er at finna, sum loyvir skipanini.

*Skrásetingar á verkætlanarroknskapum*

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar oktober 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at skrásetingarnar á verkætlanunum vóru ikki nóg neyvar, og at tað forðaði gjøgnumskygni, at roknskapirnir fyri hvørja verkætlan ikki vóru fullfíggjaðir í Búskaparskipan landsins.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum segði tá, at Umhvørvisstovan helt, at bókingarnar av verkætlanunum vóru í lagi, men at stovnurin tó fór at endurskoða mannagongdirnar, so skrásetingarnar av flytingunum vórðu neyvari og meira nágreinaðar. Landsstýrismaðurin upplýsti eisini, at mannagongdirnar fóru at verða staðfestar í dagførdu roknskaparreglugerðini.

***Roknskapurin framvegis ikki rættur og ikki nóg gjøgnumskygdur.***

Landsgrannskoðanin kann staðfesta, at roknskapurin framvegis ikki er rættur, og at hann er ikki nóg gjøgnumskygdur. Eisini halda vit, at tað gruggar roknskapin, tá ið mótbókað verður á útreiðslukontum og bókað verður skeivt í fíggjarstøðuni. Í ávísan mun tykist tað, sum at Umhvørvisstovan hevur nýtt reglurnar um stuðulsfíggjað virksemi í sambandi við bókingar av inntøkufíggjaðum virksemi.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Umhvørvisstovan leggur roknskapin soleiðis til rættis, at hann verður sambært ásetingunum í játtanar- og roknskaparreglunum.

Umhvørvisstovan hevur greitt frá, at stovnurin hevur hildið fram við siðbundnum roknskaparhátti, sum stovnarnir, sum áður umsótu málsøkini, høvdu uppbygt, og at talan er um virksemi, sum illa hóskar inn í vanliga raksturin.

Í apríl 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið viðger viðmerkingina frá Landsgrannskoðanini.

*Roknskapir, býttir á staðartátt*

Í talvunum niðanfyri eru roknskapartøl fyri inntøkufíggjaða virksemið 2012 til 2016 fyri hvørt stað sær:

*Matrikul:*

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 5 | 9 | 8 | 16 | 25 |
| 14,16 | Keyp av vør. og tænast.+leiga | 8 | 66 | 20 | 12 | 27 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | 0 | -21 | -450 | -24 | -27 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -13 | -54 | 422 | -3 | -25 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **StRk.** | **Fíggjarstøða** | | | | | |
| 371 | Onnur áogn | 645 | 156 | 262 | 265 | 189 |
| 881 | Ikki innt.f. -gransk.styrk., gávur o.t. | 0 | 0 | -425 | -105 | -105 |
| | **Tilsamans** | **645** | **156** | **-163** | **160** | **83** |

Roknskapurin fyri Matrikul gevur ikki rættvísandi mynd av rakstrinum, m.a. tí at upphæddir verða fluttar ímillum rakstur og fíggjarstøðu soleiðis, at ársúrslitið er 0 kr. Umhvørvisstovan hevur altíð skrásett inntøkur og útreiðslur av útskiftingum soleiðis, at "úrslitið" av rakstrinum fyri árið verður støðlað. Orsøkin er, at útskiftingarmál kunnu vara í langa tíð, onkuntíð í 10 ár.

***Úrslitið av rakstrinum verður støðlað, og tí vísir roknskapurin ikki rættað mynd.***

*Skógrøkt:*

*t.kr.*

| St.kt. | Rakstur | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 975 | 998 | 1.044 | 1.113 | 1.348 |
| 14,15 | Vørur, tæn. og útbúnað | 457 | 559 | 382 | 431 | 496 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 453 | 516 | 372 | 291 | 177 |
| 17,19 | Avskrivingar, ym.rakstrarútr. | -1 | -4 | 2 | 0 | 1 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -1.600 | -1.681 | -2.034 | -1.891 | -2.066 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -35 | -138 | 234 | 56 | 44 |
| 76 | Innanh. flyt. m.alm. stovn. (innt) | -250 | -250 | 0 | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **StRk.** | **Fíggjarstøða** | | | | | |
| 881 | Ikki inntøkuf. - gransk.styrkir, gávur o.t. | -809 | -683 | -917 | -430 | -474 |
| | **Tilsamans** | **-809** | **-683** | **-917** | **-430** | **-474** |

Sambært Umhvørvisstovuni er tað neyðugt at støðla úrslitið av rakstrinum, tí annars kann Skógrøktin t.d. ikki gera neyðugar íløgur. Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tað samsvarar játtanarreglunum at støðla úrslit av inntøkufíggjaða virkseminum, eisini vístu vit á, at roknskapurin gevur ikki eina rættvísandi mynd av rakstrinum, m.a. tí at upphæddir verða fluttar ímillum rakstur og fíggjarstøðu soleiðis, at ársúrslitið er 0 kr.

*Vernd:*

*t.kr.*

| St.kt. | Rakstur | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 1 | 1 | 12 | 25 | 19 |
| 14-19 | Keyp | 173 | 582 | 128 | 369 | 285 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -73 | -126 | 0 | -257 | 0 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -101 | -456 | 160 | -5 | -210 |
| 65 | Flytingarinntøkur úr útlandinum | 0 | 0 | 0 | -11 | -24 |
| 71 | Innanh. flyt. m. alm. stovn. (útr) | 0 | 0 | 20 | 0 | 0 |
| 76 | Innanh. flyt. m.alm. stovn. (innt) | 0 | 0 | -320 | -120 | -70 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Úrslitið hjá Vernd er eisini flutt til fíggjarstøðuna. Sambært Umhvørvisstovuni er virksemið hjá Vernd í høvuðsheitum fíggjað yvir raksturin hjá Umhvørvisstovuni. Umhvørvisstovan vísir á, at í onkrum førum er talan um verkætlanir, fíggjaðar uttanífrá, og at tær verkætlanirnar framyvir verða skrásettar sum stuðulsfíggjað virksemi.

*Kort og skráir:*

*t.kr.*

| St.kt. | Rakstur | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 0 | 0 | 0 | 210 | 383 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 | 331 | 179 |
| 15 | Keyp av útbúnaði | 0 | 0 | 0 | 0 | 13 |
| 21-29 | Inntøkur | 0 | 0 | 0 | -793 | -704 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | 252 | 129 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **StRk.** | **Fíggjarstøða** | | | | | |
| 881 | Ikki inntøkuf. - gransk.styrkir, gávur o.t. | 0 | 0 | 0 | -252 | -456 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **-252** | **-456** |

Rakstrarúrslitini -252 t.kr. í 2015 og -129 t.kr. í 2016 eru debiterað StRk. 6390 og krediterað StRk. 0881. Landsgrannskoðanin heldur, at roknskapurin vísir ikki røttu myndina av rakstrinum.

Sambært Umhvørvisstovuni *er "FDS-samstarvið undir avvikling. Sum avleiðing av tí, verður alt hetta økið í 2017 lagt inn í vanliga raksturin hjá US. Harvið hvørvur hesin trupulleikin av sær sjálvum."*

Í apríl 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at viðmerkingarnar hjá Landsgrannskoðanini um flytingar av avlopi/halli verða enn viðgjørdar.

*Útreiðslur*

Við stakroyndum kannaðu vit eisini nakrar útreiðslur á "Inntøkufíggjað virksemi".

***Stovnurin heldur ikki altíð reglurnar um alment innkeyp.***

Í 2015 hevur Umhvørvisstovan keypt tænastur frá ráðgevum fyri ávikavist 75 t.kr., og 220 t.kr. Sambært Umhvørvisstovuni var ætlanin í fyrra førinum, at arbeiðið skuldi kosta í mesta lagi 50 t.kr., sum er markið í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum. Biðið varð ikki um tilboð, tí ein skikkaður persónur, ið áður hevði arbeitt á deildini, var tøkur at gera arbeiðið. Umhvørvisstovan helt, at tað í verandi støðu bæði var ov drúgt og kanska til fánýtis at leita eftir øðrum skikkaðum persóni.

Umhvørvisstovan bað ikki um tilboð í seinna førinum, tí *"Tænastan frá COWI snýr seg um dronu-kortlegging. Hetta er fyrstu ferð, at slíkt er gjørt í Føroyum, og arbeiðið er gjørt í tøttum samstarvi við US. COWI er pionerur við nógvum royndum á økinum, bæði í DK og GR, og eftirsum talan var um eina roynd, har útreiðslurnar verða býttar millum FDS-partarnar, valdi US at taka av tilboðinum frá COWI. US hevur nógvar royndir við fotoflúgving, og um samanborið verður við traditionella fotoflúgving, er kostnaðurin væl lægri."*

Í 2015 keypti Umhvørvisstovan tænastu frá Teknologisk institut fyri 168 t.kr. og frá hotelli fyri 51 t.kr. Stovnurin bað ikki um tilboð til skeiðið, tí Teknologisk institut er einasti veitari av skeiðum at røkja svimjihyljar. Sambært stovninum bóðu tey um prísir frá tveimum hotellum at hýsa skeiðnum.

### Stuðulsfíggjað virksemi

***Greitt er ikki frá stuðulsfíggjaða virkseminum í viðmerkingunum í fíggjarlógini.***

Sambært § 20 í játtanarlógini kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva stuðulsfíggjaðum virksemi. Umhvørvisstovan hevur ikki greitt nærri frá stuðulsfíggjaða virkseminum í viðmerkingunum í fíggjarlógini sum ásett í K. nr. 84/2011.

Í apríl 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at viðmerkingin um vantandi viðmerkingar í fíggjarlóg eru tiknar til eftirtektar.

Sambært Búskaparskipan landsins er saldan á "Ikki inntøkuførdum granskingarstyrki, gávum o.t.:

*t.kr.*

| StRk. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 881 | Ikki inntøkuf. -gransk.styrkir, gávur o.t. | -3.367 | -2.539 | -3.123 | -2.466 | -1.036 |

"Onnur áogn" hevur sambært Búskaparskipan landsins verið:

*t.kr.*

| StRk. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0371 | Onnur áogn | 645 | 156 | 262 | 265 | 189 |

***Nógvir feilir í bókingunum.***

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at upphæddirnar eru rættar, tá ið so nógvir feilir eru í bókingunum.

Umhvørvisstovan skrásetir verkætlanir í rokniarki, sum verður avstemmað regluliga við skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins. Sambært Umhvørvisstovuni verða verkætlanirnar skrásettar sum arbeiði í gerð, og merkir tað, at stuðul til verkætlanirnar verður innroknaður sum inntøka, so hvørt sum útreiðslurnar verða hildnar, tí stuðulin kann vera útgoldin, áðrenn útreiðslurnar eru hildnar. Til tær ymisku verkætlanirnar verður ofta brúkt innanhýsis tilfeingi, og tað er orsøk til umbókingar.

Umhvørvisstovan leggur afturat, at mannagongdin er sambærlig við galdandi reglur fyri danskar stovnar. Frá 1. januar 2017 ætlaði Umhvørvisstovan at skráseta verkætlanirnar sum stuðulsfíggjað virksemi.

### Verkætlanir

Vit kannaðu tvær verkætlanir, um roknskapirnir samsvaraðu við fíggjarætlanir og uppgerðir til stuðulslatarar. Út frá teimum báðum verkætlanunum kunnu vit ikki staðfesta, um roknskapurin fyri stuðulsfíggjaða virksemið er rættur.

Í januar 2017 hevur Umhvørvisstovan greitt frá, *at "Tað er ein avbjóðing at fyrihalda seg til tey ymisku roknskapar/bókingartøkniligu krøvini, sum eru, tá ið ymiskir stuðulsveitarar eru, og verkætlanirnar onkuntíð broyta skap og verða seinkaðar. Vit hava tó eyka kontroll av bókingum á verkætlanir, men hetta er skipan, sum ikki er knýtt at BSL. Í nýggju roknskaparreglugerðini fer US at gera greiðari mannagongdir fyri bókingar á verkætlanarøkinum."*

Niðanfyri hava vit tikið samanum kanningarnar av hesum báðum verkætlanunum.

#### *Verkætlan 7053 WWT in Nordic Arctic areas*

Umhvørvisstovan stendur fyri verkætlanini, sum er ein kanning av spillvatnsviðgerð í Føroyum, Íslandi, Norður Noregi og Grønlandi. Verkætlanin hevur fingið 699 t.kr. í stuðli frá Nordregio og 151 t.kr. frá Nordisk kjemikaliegruppe (NKG).

Upprunaliga fíggjarætlanin var 2.125 t.kr., og Umhvørvisstovan søkti um at fáa 1.053 t.kr. í stuðli. Verkætlanin skuldi vara frá 2013 til 2015, men hon varð ikki liðug fyrr enn seinast í 2016. Ein endurskoðað ætlan vísir, at tørvur er á fremmandari fígging á 1.097 t.kr. Tilsamans eru 830 t.kr. goldnar í stuðli. Av teimum eru 710 t.kr. frá Nordregio.

Nordregio umsitur pening fyri Nordic Ministers Arctic Cooperation programme, NMAC. NMAC hevur ikki játtað alla upphæddina, sum søkt varð um, men tilsamans 900 t.kr. Útreiðslurnar til verkætlanina hava til oktober 2016 verið 1.022 t.kr.

***Roknskapurin fyri verkætlanir vísir ikki rættvísandi mynd.***

Av tí at allar útreiðslurnar ikki eru skrásettar í rakstrinum fyri tey einstøku árini, vísir roknskapurin ikki eina rættvísandi mynd. Um hædd verður tikin fyri, at partur av inntøkunum og útreiðslunum er bert skrásettur í fíggjarstøðuni, kunnu vit staðfesta, at útreiðslurnar hava verið 1.033 t.kr. og inntøkurnar 823 t.kr.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at roknskapurin er ikki rættur, tí skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins eru ikki rættar.

***Frá ársbyrjan 2017 fer Umhvørvisstovan at flyta allar virknar verkætlanir á stuðulsfíggjað virksemi.***

Í januar 2017 hevur Umhvørvisstovan greitt frá, at *"Roknskaparreglugerðin verður dagført, og fer m.a. at nágreina nevndu viðurskifti, so ivi ikki er um, hvussu og nær bókast skal. Umhvørvisstovan fer frá ársbyrjan 2017, at flyta allar virknar verkætlanir, sum eru fíggjaðar við stuðli uttanífrá, yvir á stuðulsfíggjað virksemi. Tá er ætlanin at bóka útreiðslurnar so hvørt og at periodisera inntøkurnar."* Eisini kunnaði stovnurin um, at eftir avtalu við Nordregio skuldi verkætlanin gerast upp seinast í februar 2017.

### *Verkætlan 7065 PFC í fiski*

Umhvørvisstovan roknaði við, at verkætlanin skuldi kosta 1,7 mió.kr. Granskingarráðið játtaði 648 t.kr. í stuðli, og eginfíggingin skuldi vera 1.052 t.kr., harav 270 t.kr. skuldu fíggjast av privatum. Roknskapartøl frá 2014 til 2016 eru:

*t.kr.*

| St.kt. | Heiti | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 70 | 0 | 214 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 10 | -6 | 9 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 12 | 0 | 0 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 64 | 60 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -48 | -35 | -283 |
| 71 | Innanh.flyt.m.alm.stovnar (útr.) | 0 | 23 | 0 |
| 76 | Innanh.flyt.m.alm.stovnar (innt.) | -45 | -45 | 0 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** |

***Roknskapurin gevur ikki rætta mynd av verkætlanini.***

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at roknskapurin gevur ikki rætta mynd av inntøkum og útreiðslum av verkætlanini. Granskingarráðið hevur goldið 200 t.kr. til verkætlanina í 2014 og 398 t.kr. í 2015, uttan at upphæddirnar síggjast í roknskapinum. Útreiðslur, sum t.d. lønir, eru mótbókaðar inntøkunum á St.kt. 63.

## Kunningartøkni

Umhvørvisstovan hevur upplýsingar, dátugrunnar, skjøl o.a., ið hava stóran týdning fyri stovnin sjálvan, aðrar stovnar og samfelagið sum heild.

***Umhvørvisstovan hevur gjørt váðameting.***

Umhvørvisstovan hevur gjørt váðameting saman við Landsneti, og stovnurin heldur seg yvirskipað til reglur og mannagongdir hjá Landsneti, sum stendur fyri trygdar-átøkunum. Stovnurin hevur SLA við Landsnet frá 2015 og við Elektron frá 2011.

***KT økið er skipað við skrivligum avtalum.***

Fólkayvirlitið koyrir hjá Elektron. Sambært stovninum hevur Elektron greiðar reglur fyri, hvussu ofta tey t.d. gera restore testir, recovery testir, penetration testir og speglingar.

***Yvirlit yvir brúkarar verður kannað hvønn mánað.***

Starvsfólkini hava somu atgongd til stovnsnetið heimaníframá sum á arbeiðsplássinum, og reglurnar fyri tí eru sambært Landsneti.

Leiðslan kannar hvønn mánaða yvirlitið yvir brúkarar, ið tey fáa frá KT landsins.

Øll starvsfólkini í Tinglýsingini kunnu skráseta og broyta upplýsingar. Eitt starvsfólk skrásetir innkomin mál í dagbókina, meðan eitt annað starvsfólk tinglýsir skjalið. Innkomna skjalið verður skannað og lagt við í dagbókina.

Deildarleiðarin í Tinglýsingardeildini heldur, at tað er neyðugt, at øll sjey starvsfólkini hava heimild til at skráseta og broyta, tí annars fáa tey ikki gjørt sítt arbeiði. Allar skrásetingar verða loggaðar, og loggurin verður goymdur, soleiðis at tað til eina og hvørja tíð er møguligt at staðfesta, hvør tað er, ið hevur gjørt broytingar. Leiðslan kannar ikki loggarnar, uttan so at hon verður gjørd varug við skeivleikar.

Í apríl 2017 hevur landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum greitt frá, at sambært Umhvørvisstovuni er tað ongantíð sama starvsfólk, sum ávikavist førir dagbók, og sum tinglýsir. Starvsfólk á skrivstovueindini hava tinglýsingarkassan um hendi.

### Lønir

Játtanin til lønir í 2016 var 18,9 mió.kr. til 42 fulltíðarstørv. Harafturat eru 1,1 mió.kr. játtaðar til “Inntøkufíggjað virksemi” og 0,8 mió.kr. til “Stuðulsfíggjað virksemi”.

Við støði í lønarútgjaldingum fyri september 2016 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá tveimum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin hevur vísst á, at tað hevur týdning, at leiðslan á nøktandi hátt kannar, at tær lønir, ið verða goldnar út, eru rættar. Stórur partur av starvsfólkunum skyldar ella eigur tímar og serstaka fríviku til góðar, harvið kann roknskapurin ikki sigast at vera rættur.

***Roknskapurin vísir ikki rætta mynd, tá ið starvsfólk skylda ella eiga tilgóðar tímar og serstaka fríviku.***

Tað eru serliga starvsfólk á Skógrøktini og á Matriklinum, ið til tíðir hava nógvar tímar tilgóðar, men tað verður javnað yvir tíð, og tá ið árið er av, gongur upp. Tíðarskrásetingin verður tikin upp við ársbyrjan serskilt við tey starvsfólkini, sum antin eiga tímar til góðar ella skylda tímar út um tað, sum meginreglan ásetir.

Framyvir verður meginreglan viðvíkjandi serstøku frívikuni, at starvsfólk í mesta lagi hava eina fríviku tilgóðar afturat henni, sum verður innvunnin í verandi frítíðarári.

### Kassaeftirlit hjá Skógrøktini

Landsgrannskoðanin var á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá Skógrøktini í Hoydølum í september 2016. Uppgerðin vísti 471,75 kr. ov lítið í kassanum.

Kassin var ikki gjørdur upp síðani juli, hóast sølan hevði verið 130 t.kr. síðani tá. Sambært kassameistaranum høvdu tey so nógv at gera, og vóru so illa mannað, m.a. hevði ongin leiðari verið í longri tíð.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at kassin ikki verður gjørdur upp regluliga, og mælti til at stramma mannagongdirnar, og at upphæddirnar verða bókaðar so hvørt í Búskaparskipan landsins. Umhvørvisstovan hevur síðani boðað frá, at tey fara at gera greiðari mannagongdir í komandi roknskaparreglugerðini.

***Kassin eigur at verða gjørdur upp oftari.***

Landsgrannskoðanin stemmaði eisini peningastovnskontuna av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

### Kassaeftirlit á Umhvørvisstovuni

Í februar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Umhvørvisstovuni. Stovnurin hevur tveir forskotskassar skrásettar í Búskaparskipan landsins.

Sambært Búskaparskipan landsins áttu 12.300 kr. at vera í tí eina kassanum. Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð kassan. Tær 12.300 kr. eru bókaðar í 2008 frá Matrikkulstovuni til Umhvørvisstovuna. Okkum kunnugt verður kassin ikki nýttur og ivasamt er, um peningurin er til staðar. Umhvørvisstovan heldur, at kassin helst er ein "arvur" frá Matrikkulstovuni, men ongin dugir í dag at greiða nærri frá hesum.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið eftirsíðani hevur spurt Umhvørvisstovuna um málið. Tað tykist, at peningurin ikki er til staðar, og verður upphæddin tí bókað burtur.

*Peningastovnskontur*

Stovnurin hevur tríggjar peningastovnskontur skrásettar í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin stemmaði konturnar av við saldurnar í peningastovnunum; Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar enn eitt tilmæli um, at allar kontur skulu gerast upp regluliga.

### Frá ársfrágreiðing 2012

Í ársfrágreiðingini 2012 umrøddu vit grannskoðan á Umhvørvisstovuni og høvdu nøkur tilmæli.

Í 2013 greiddi landsstýrismaðurin í innlendismálum frá, at Innlendismálaráðið arbeiddi saman við Umhvørvisstovuni at gera uppskot til kunngerð um fólkaskráseting o.a. Ætlanin var, at kunngerðin skuldi vera liðug í juli 2014.

Í § 2 í lógini um fólkayvirlit stendur í 2. pkt.: "*Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um leiklutin hjá kommunustýrunum at halda Landsfólkayvirlitið viðlíka*."

Í august 2016 vísti landsstýrismaðurin á, at tá ið lógin um fólkayvirlit varð sett í gildi, bar ikki til tøkniliga at lúka øll krøvini í nýggju lógini, orsakað av tøkniligu avmarkingunum í gomlu landsfólkayvirlitsskránni. Nú nýggj talgild landsfólkayvirlitsskrá er ment og tikin í nýtslu, ber til at seta írestandi ásetingarnar í lógini í verk. Heimildin til tað í § 55, stk. 4, verður væntandi brúkt til endamálið.

Sambært landsstýrismanninum hevði málið ligið stilt, men fór at verða tikið uppaftur til viðgerðar.

Í august 2017 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið upplýst, at við heimild í § 55, stk. 4, er kunngerð nr. 18/2017 lýst.

# 7 Almannamál

## 7.1 Almannamálaráðið (LG 2016/212-0111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin 2016 hjá Almannamálaráðnum. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina hjá ráðnum og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

### Roknskaparreglugerð

Almannamálaráðið hevur eina roknskaparreglugerð frá januar 2013. Sambært ráðnum eru tey í ferð við at dagføra reglugerðina, men bíða eftir dagføringum frá Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum. Almannamálaráðið og Heilsu- og innlendismálaráðið arbeiða saman um at gera reglugerðirnar fyri ráðini, m.a. tí tey hava felags funktiónir.

***Roknskaparreglugerðin ikki dagførd.***

### Lønir

15 fólk starvast í Almannamálaráðnum. Játtanin er 10,4 mió.kr. í 2016, harav 8,3 mió.kr. eru til lønir. Við støði í lønargjaldingunum fyri mars 2016 kannaðu vit trý lønarmál. Almannamálaráðið hevur reglur í roknskaparreglugerðini um +30/-15 tímar í flexsaldu. Vit kannaðu eisini flexsaldurnar. Onki var at finnast at.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit roknskaparskjøl, um tey hoyra til stovnin og eru konterað sambært galdandi reglum. Vit umrøddu m.a. spurningin um innanhýsis reglur fyri starvsfólkarøkt og jólagávur. Almannamálaráðið viðmerkti, at tað vóru ikki reglur um øll viðurskifti innan starvsfólkaútreiðslur/starvsfólkarøkt.

### Uttanlands ferðauppgerðir

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar ferðauppgerðir fyri ferðir uttanlands. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar enn, at kostur goldin av øðrum altíð eigur at verða drigin frá, og at kvittanir, sum ikki viðvíkja ferðum, eiga ikki at verða viðheftar uppgerðunum. Ein minni munur var í einari uppgerð, sum sambært ráðnum er rættaður.

Tá ið farið verður til Danmarkar í tænastuørindum, verður goldið fyri innivist á hotelli eftir rokning ella útlegg. Nakrar fáar rokningar fyri innivist fara upp um 1.008 kr. fyri náttina, sum er mest loyvda upphæddin sambært vegleiðingini hjá Fíggjarmálaráðnum. Sambært Almannamálaráðnum er tað trupult altíð at halda seg innanfyri ásettu upphæddina. Almannamálaráðið hevur gjørt Fíggjarmálaráðið vart við trupulleikan.

***Trupult at halda seg innan fyri hægstu upphædd fyri innivist.***

### Gjaldkort

Almannamálaráðið hevur eitt gjaldkort; heimildarváttan er til kortið.

### KT viðurskifti

Almannamálaráðið hevur ongar skipanir, sum liggja uttan fyri Landsnet.

Vit spurdu, hvørji starvsfólk hava atgongd at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins. Vit fingu eitt yvirlit yvir brúkarar; onkur var á yvirlitinum, sum ikki longur

***Persónar, ið ikki longur eru í starvi, høvdu atgongd til BSL.***

starvast á Almannamálaráðnum. Ráðið hevur síðani kunnað um, at atgongdirnar eru dagførdar.

## 7.2 Almannaverkið (LG 2016/212-0211)

Í februar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Almannaverkinum. Vit stemmaðu kassan og peningastovnskonturnar av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 7.3 Hjálpartólamiðstøðin (LG 2016/212-211)

Í mars 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Hjálpartólamiðstøðini. Vit stemmaðu kassan av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 7.4 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-0213)

***Eftirstøðan av gjøldum móttikin av órøttum verður væntandi ikki goldin.***

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av barnapeningi, m.a. innheinting av barnagjøldum móttikin av órøttum. Í august 2016 var eftirstøðan av barnagjaldi móttikin av órøttum, 445 t.kr. Eftirstøðan verður kravd inn av Almannaverkinum, og rokna tey við, at meginparturin verður ikki goldin.

Spurt, hvørjar ítøkiligar ætlanir Almannaverkið hevur fyri at fáa peningin inn, svaraði stovnurin, at tey regluliga senda krøv og áminningar. Um skuldarin ikki kann rinda alla upphæddina í einum, fær hann boðið eina avdráttarskipan. Áminningar verða sendar skuldarunum, avtalur verða gjørdar um afturgjald, og viðhvørt verður mótroknað í forskotsrindan av barnagjaldi. Almannaverkið var í holt við at endurskoða mannagongdirnar at krevja gjøld aftur, ið eru móttikin av órøttum. Millum annað umhugsaðu tey møguleikan at senda krøv til innkrevjing hjá advokati, beinanvegin staðfest var, at afturgjaldsavtala ikki fekst.

***Heimild at heinta inn vantar.***

Landsstýrismaðurin ásannaði, at innheintingin kundi virkað betur. Almannaverkið var farið at endurskoða mannagongdirnar og samskifti við TAKS og Almannamálaráðið um møguleikan, at TAKS heintar inn krøvini. Til tað krevst lógarbroyting.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at endurskoða lógina um barnagjald soleiðis, at innkrevjingin virkar betur.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hóast tað er óvist, hvussu nógv gjøld, ið eru móttikin av órøttum og ímóti betri vitan veruliga kunnu krevjast inn, metir Almannamálaráðið, at heimild helst eigur at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, í tann mun tað ikki ber til at fáa í lag gjaldsavtalu við gjaldsskylduga.

Fyrireikingar eru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar. Sambært landsstýrismanninum verður arbeiðið gjørt í samráð við TAKS og Almannaverkið.

## 7.5 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-0213)

Grannskoðanin av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk varð umrødd í seinastu ársfrágreiðing frá Landsgrannskoðanini.

Ásetingarnar um einkjubarnastyrk eru í §§ 15-19 í Ll. nr. 71/1996 og fevna um gjøld til børn, hvørs faðirskapur ikki er staðfestur og til børn, har annað ella bæði foreldrini ikki eru á lívi. Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett nærri reglur, tí tørvur hevur ikki verið at áseta tær.

*Tørvur á innanhýsis vegleiðing.*

Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at orða eina greiða vegleiðing um, hvør hevur rætt til einkjubarnastyrk, nær rætturin steðgar og um skjalfesting av málsviðgerð. Almannamálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini um, at tørvur var á einari innanhýsis vegleiðing, og ætlaði at skriva vegleiðingina í 2016. Viðvíkjandi fráboðanarskylduni, helt Almannamálaráðið, at tað var nøktandi, at kunning framgongur av játtanarskrivinum í hvørjum einstøkum føri.

Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin, at málsviðgerðin var ikki nøktandi skjalprógvað, hóast umsóknir og viðkomandi skjøl vóru í málunum. Har Almannaverkið nýtti uppritið í journalini, var lætt at fylgja málsgongdini. Uppritið var tó sjáldan nýtt.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einkjubarnastyrkur nú verður goldin út um Heildarskipanina, ið eisini tryggjar skjalprógv í einstøku málunum.

### Mótrokning av endurgjaldi í sambandi við mistan uppihaldara

Um barn hevur rætt til endurgjald fyri mistan uppihaldara, skal endurgjaldið verða drigið frá í einkjubarnastyrkinum. Sambært viðmerkingunum til lógina skulu allar endurgjalds-upphæddir tó ikki verða mótroknaðar.

Almannaverkið hevði ikki mótroknað í nøkrum barnagjaldi í 2014. Í trimum málum, vit kannaðu, vóru umsóknir, har umsøkjarin hevði kunnað um, at barnið hevði rætt til endurgjald. Almannaverkið hevur ásannað, at málsviðgerðin hevur ikki verið nóg neyv í teimum trimum førunum, og at mannagongdin í framtíðini verður broytt.

Í 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannaverkið í næstum fór at gera eina vegleiðing til umsitingina av barnagjøldum, í førum tá ið einans annað ella hvørki av foreldrunum eru á lívi. Vegleiðingin fór at áseta reglur um nær endurgjald fyri mistan uppihaldara skal dragast frá gjaldinum.

Sambært landsstýrismanninum hevur Almannaverkið í november 2016 gjørt eina leiðbeining.

### Móttikið av órøttum

Sambært § 21, stk. 2, í lógini skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur.

*Mæltu til at styrkja eftirlitið, tá ið ongin lógarheimild var at krevja aftur.*

Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja gjaldið aftur við. Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga, átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skal forða fyri, at barnagjald verður móttikið av órøttum.

Viðvíkjandi reglum um innkrevjing av útgjøldum, helt Almannamálaráðið tað vera neyðugt at umrøða málið nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Sambært landsstýrismanninum hevur Almannaverkið í november 2016 gjørt eina leiðbeining um einkjubarnastyrk, ið fevnir um treytir fyri at fáa einkjubarnastyrk, skjalprógv í málsviðgerðini og mannagongd í sambandi við afturgjaldsskyldu, og nær endurgjald fyri mistan uppihaldara skal mótroknast í gjaldinum. Leiðbeiningin er ein liður í at betra um málsviðgerðina í mun til einkjubarnastyrk.

## 7.6 Barnaískoyti (LG 2015/212-0213)

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at ivi var um innheintingarheimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur.

Sambært Almannaverkinum var mannagongdin, at hoyringsskriv og avgerðarskriv vórðu send borgarum. Bókhaldið skrásetti síðani krøvini í roknskapin hjá Almannaverkinum og sendi tvær áminningar, um upphæddin ikki varð goldin.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at fylgja málinum upp.

***Heimild eigur helst at verða veitt til TAKS at heinta inn.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hóast tað er óvist, hvussu nógv gjøld, ið eru móttikin av órøttum og ímóti betri vitan, veruliga kunnu krevjast inn, metir Almannamálaráðið, at heimild helst eigur at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, í tann mun tað ikki ber til at fáa í lag gjaldsavtalu við gjaldsskylduga.

Fyrireikingar eru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar. Sambært landsstýrismanninum verður arbeiðið gjørt í samráð við TAKS og Almannaverkið.

## 7.7 Familjuískoyti (LG 2016/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað nýggju skipanina, sum hevur til endamáls at veita familjuískoyti. Rætturin til familjuískoyti tekur ikki hædd fyri, hvørjar útreiðslur familjur hava, men er ein skattafrí veiting, grundað á inntøkuna hjá familjuni 12 mánaðir aftur.

Heimildin at rinda familjuískoyti er í Ll. nr. 160 frá 24. desember 2015 "um familjuískoyti". Familjuískoyti er ætlað familjum við heimabúgvandi børnum, sum hava lága inntøku. At skilja sum familja er uppihaldari, stakur ella giftur/samlivandi, sum hevur heimabúgvandi barn ella børn.

*Veiting*

Fult familjuískoyti til støk við einum barni er sambært lógini 18.000 kr. og til pør 22.000 kr. um árið. Fyri hvørt barnið afturat hækkar veitingin við 5.000 kr. um árið. Niðanfyri er talva, sum vísir familjuískoytið um mánaðin fyri familjur við einum, tveimum og trimum børnum. Ískoytið hækkar 416,67 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið.

*kr.*

| | Stakur uppihaldari | Sambúgvandi/giftur uppihaldari |
|---|---|---|
| 1 barn | 1.500,00 | 1.833,33 |
| 2 børn | 1.916,67 | 2.250,00 |
| 3 børn | 2.333,33 | 2.666,67 |

Sambært lógartekstinum er rætturin til familjuískoyti grundaður á eina árliga inntøku, og ískoytið verður goldið mánaðarliga. Almannaverkið játtar fyri eitt 12 mánaðar tíðarskeið í senn óheft av kalendaraárinum, t.v.s. at kalendaraárið verður ikki brúkt sum grundarlag fyri A-inntøku. Eftirkanningin av fíggjarligu fortreytunum fyri útgjaldinum verður gjørd leypandi fyri seinastu 12 mánaðirnar, og harvið verður tryggjað, at røtt upphædd verður veitt í familjuískoyti.

*Inntøka*

Fyri at fáa fult familjuískoyti, skal samlaða inntøkugrundarlagi hjá familjuni ikki vera hægri enn 200 t.kr. (190 t.kr. áðrenn 1. august 2016). Er inntøkan hægri, verður

familjuískoytið mótroknað. Inntøka skal skiljast sum skattskyldug inntøka sambært skattalógini, kapitalvinningsskattalógini og leiguinntøka sambært § 8a í ásetingarlógini. Aðrar inntøkur, vinningur og møguligur annar stuðul verða løgd afturat inntøkuni. Barnagjald, røktarviðbót, avlamisveiting v.m. verða ikki tikin við sum inntøka.

Til at kanna um familjan hevur rætt til familjuískoyti, brúkar Almannaverkið A-inntøkuna seinastu 12 mánaðirnar. Fyri B-inntøku og kapitalvinning verður seinasta álíknaða inntøkuár brúkt. Um A-inntøkan broytist, kann avgerð um familjuískoyti grundast á eina inntøku frá tí mánaðinum, ið inntøkan broytist, og inntøkuskeiðið verður roknað frá tí mánaðinum og frameftir.

***Ongar reglur lýstar um inntøku.***

Landsstýrismaðurin hevur heimild til at áseta nærri reglur um inntøku. Enn eru ongar reglur lýstar, men í skrivi til Almannaverkið 24. mai 2016 hevur Almannamálaráðið ásett, at inntøkulækkingin skal vera í minsta lagi 20% í mun til miðal A-inntøkuna 12 mánaðir frammanundan. Eisini skal atlit takast at, um talan er um eina óvanliga støðu í mun til síðstu 12 mánaðirnar. Skrivið sigur onki um, hvat hendir, um inntøkan hækkar í mun til miðal A-inntøkuna seinastu 12 mánaðirnar.

***Kunngerð er ikki lýst enn.***

Sambært Almannaverkinum hava tey eina greiða praksis á økinum, sum er í samsvari við lógina og tekur støði í hvørjum einstøkum føri. Nøkur kunngerð við reglum um inntøkur er tó enn ikki lýst. Snýr tað seg um hækking í inntøku, slær tað beinanvegin ígjøgnum í mánaðarligu inntøkukanningunum, og útgjøldini lækka samsvarandi. Tá biðið verður um at víkja frá vanligu inntøkuásetingunum, kannar Almannaverkið fíggjarviðurskiftini hjá borgaranum fyri at staðfesta, at tað er so, sum borgarin boðar frá.

Er talan um eina óvanliga støðu í mun til seinastu 12 mánaðirnar, har inntøkulækkingin er munandi, t.v.s. í minsta lagi 20%, so kann víkjast frá galdandi reglum, og hægri útgjald veitast frá tí, at inntøkan lækkar munandi.

### *Ogn*

Familjuískoytið kann ikki veitast, um uppihaldarin eigur pening ella virðisbrøv, ið eru mett at vera omanfyri 30 t.kr. í virði uttan so, at ognin er endurgjald fyri varandi mein ella ikki-fíggjarligan skaða.

### *Mótrokning*

Skipanin byrjaði 1. januar 2016, og fram til 1. august 2016 fingu barnafamiljur við inntøku lægri enn 190 t.kr. fulla upphædd. 1. august 2016 hækkaði inntøkumarkið upp í 200 t.kr. Ískoytið lækkar stigvíst, so hvørt inntøkan hækkar.

***Familjuískoyti verður mótroknað, um inntøkan 12 mánaðir frammanundan var oman fyri 200 t.kr.***

Hevur familja havt inntøku seinastu 12 mánaðirnar, sum er hægri enn 200 t.kr., verður familjuískoytið mótroknað við einum prosentparti av muninum millum hámarkið og inntøkuna. Mótrokningin er sambært § 3, stk. 3, nr. 1-3:

- 20% fyri 1 barn,
- 25% fyri 2 børn, og
- 30% fyri 3 ella fleiri børn.

Tað vil siga, at ein stakur uppihaldari við einum barni fær onki goldið út, tá ið inntøkan seinastu 12 mánaðirnar hevur verið 290 t.kr. Um familjuískoytið ein mánað verður roknað til at verða 100 kr. ella minni, verður onki goldið út.

### *Rætturin heldur uppat*

Sambært § 9, stk. 3, verður familjuískoyti goldið út seinastu ferð fyri tann mánaðin, tá ið staðfest er, at rætturin til ískoytið fellur burtur.

***Ógreitt, nær rættindi til ískoyti fellur burtur.***

Landsgrannskoðanin helt, at tað tyktist ógreitt, nær rætturin til familjuískoyti fellur burtur. Grannskoðanin vísti, at uppihaldarar høvdu fingið lutað ískoyti ein mánað og so onki í fleiri mánaðir, tí tað varð fult mótroknað.

Sambært Almannaverkinum er játtanin galdandi fyri 12 mánaðir í senn. Vísandi til § 12 í lógini verður borgarin 10 mánaðir inni í játtanartíðarskeiðnum spurdur, um hann, aftaná 12 mánaða játtanarskeið, framhaldandi lýkur treytirnar fyri veitingini. Hevur hann ikki svarað mánaðin innan, at játtanin gongur út, steðgar játtanin og kann ikki takast upp aftur fyrr enn mánaðin eftir, at váttanin er móttikin. Almannaverkið sigur víðari, at rætturin til familjuískoyti førir ikki altíð til eitt útgjald.

*Skyldan at upplýsa um broytingar*

Umsøkjari hevur skyldu at boða frá broytingum í viðurskiftum, ið skerja rættin til familjuískoyti. Ásett er í lógini, at familjuískoyti skal rindast aftur, um tað er móttikið av órøttum og ímóti betri vitan. Stakroyndirnar vístu, at móttakarnir vórðu kunnaðir í játtanarskrivinum.

### Roknskapartøl o.a.

Familjuískoytið er ein nýggj skipan, og tí eru ongi søgulig tøl at samanbera við. Í fíggjarlógini 2016 vóru 8.350 t.kr. játtaðar til familjuískoyti. Í september varð greitt, at játtanin sannlíkt hevði avlop, og við eykajáttanarlóg september 2016 varð játtanin lækkað 4.117 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2016 varð nýtslan 4.027 t.kr.

***Talið av umsóknum lægri, enn mett.***

Sambært uppskotinum til eykajáttanarlógina var orsøkin til avlopið, at talan var um eina nýggja veiting. Talið av umsóknum hevði víst seg at vera lægri enn mett. Fyrsta mánaðin vóru tað um 90 familjur, sum fingu familjuískoyti, og hækkaði talið í juli til umleið 230 familjur. Virksemið var tá komið í eina meira fasta legu, tó at talan framvegis var um ein lítlan vøkstur í talinum av familjum, sum móttóku familjuískoyti. Sambært uppskotinum kundi vøksturin væntast at halda fram restina av árinum.

### Málsviðgerð

Familjuískoytið verður skrásett og goldið út gjøgnum KT heildarskipanina hjá Almannaverkinum. Skipanin við familjuískoyti er nýggj, og Landsgrannskoðanin hevur lagt dent á at kanna, hvussu Almannaverkið viðger umsóknir, kannar upplýsingar og fráboðar umsøkjarum.

***Umsøkjari og møguligur maki mugu loyva Almannaverkinum at útvega sær upplýingar frá øðrum stovnum og myndugleikum.***

Umsøkjari og møguligur maki skulu við undirskrift loyva Almannaverkinum at útvega sær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri málsviðgerðina frá skattamyndugleikum og peningastovnum.

*Leiðbeining*

Almannaverkið hevur orðað leiðbeining til viðgerð av umsóknum, har ábyrgdin verður løgd til málsviðgeran. Tá ið ein umsókn er móttikin, skal málsviðgerin eftirkanna upplýsingarnar. Tey samanbera við Landsfólkayvirlitið og kanna inntøku og ogn. Um umsøkjarin seinastu 12 mánaðirnar er fluttur til Føroya, skal inntøkan frá útlandinum kannast.

Sambært Almannaverkinum koma øll játtanar- og sýtanarskriv til deildarleiðara ella fulltrúa, men hvør einstøk játtan verður ikki eftirkannað. Fyritreytirnar fyri at fáa ískoyti eru í flestu førum objektiv krøv í mun til inntøku, ogn, familju-/samlívsviðurskifti og bústað. Hesar upplýsingar verða heintaðar beinleiðis úr skipanum hjá Landsfólkayvirlitinum og TAKS.

Samsvara upplýsingarnar, sum umsøkjarin upplýsir í umsóknini ikki við upplýsingarnar, sum Almannaverkið hevur í skipanini, heintar málsviðgerin fleiri upplýsingar, og umsøkjarin verður biðin um at skjalprógva viðurskiftini.

*Sýtanarskriv*

Landsgrannskoðanin hevur fingið avrit av uppskoti til eitt standard sýtanarskriv. Í uppskotinum er greitt frá, hvør sambært lógini hevur rætt til familjuískoyti, og brot er við grundgeving um, hví viðkomandi ikki hevur rætt til útgjald. Í uppskotinum er eisini brot um kæruvegleiðing. Landsgrannskoðanin hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

### Stakroyndir

Frá januar til september 2016 hevur Almannaverkið rindað familjuískoyti til 278 fólk. Vit valdu 35 stakroyndir til nærri grannskoðan, sum tá svaraði til 13% av móttakarunum og útgjaldinum, tilsamans 369 t.kr. Til og við september 2016 hevði Almannaverkið rindað út 2.791 t.kr.

Í øllum stakroyndunum vóru umsóknir. Bert ein stakroynd hevði langa viðgerðartíð, og sambært Almannaverkinum var talan um ein feil í skrásetingini av umsóknini. Feilurin er síðani rættaður.

Inntøkukanningin er sjálvvirkandi í KT heildarskipanini út frá upplýsingunum frá Landsfólkayvirlitinum og TAKS. Kanningin verður gjørd hvønn mánað. Av tí at kanningin er sjálvvirkandi, fær málsviðgerðin ikki fráboðan um broytingar so hvørt.

Tá ið Landsgrannskoðanin kannaði, um játtaða útgjaldið var rætt, komu vit fram á, at ein familja var skrásett sum stakur uppihaldari við trimum børnum, men mánaðarliga útgjaldið var til ein sambúgvandi uppihaldara við trimum børnum.

***Feilur í útgjaldi, tí skeiv uppseting var í forritinum.***

Almannaverkið kannaði málið, og ein skeiv uppseting í forritinum var orsøk til feilin. Støk, ið høvdu 3, 4 ella 5 børn høvdu av misgáum fingið skeivan sats knýttan at játtanini. Tað hevði við sær, at fleiri høvdu fingið ov stór útgjøld. Samanlagt vóru 90 t.kr. goldnar ov nógv út, treytað av, at ongin mótrokning er framd. Sambært Almannaverkinum varð feilurin rættaður í skipanini beinanvegin, so tað varð rætt frameftir.

Sambært landsstýrismanninum verða gjøld kravd innaftur við afturvirkandi kraft, tá ið tey eru goldin út av órøttum, og har móttakarin átti at vita, at upphæddin var skeiv. Í hesum føri var talan um ein feil, sum var íkomin í uppsetingini av KT heildarskipanini, sum móttakararnir av veitingini onki vistu um, samstundis sum tað var trupult ella nærum ómøguligt hjá móttakarunum at eftirkanna mánað fyri mánað, um veitingin var røtt. Tað varð gjørt sjálvvirkandi í KT heildarskipanini umvegis TAKS.

***Móttakarar í góðari trúgv.***

Landsstýrismaðurin heldur tí, at móttakararnir hava verið í góðari trúgv um, at veitingin var røtt, og harvið er tað ikki rætt mótvegis borgarunum at krevja ov nógv goldnu veitingina aftur.

***Viðgerðartíðin er stutt nú.***

Skipanin kom í gildi 1. januar 2016, og í fyrstani sendi Almannaverkið umsøkjarum váttan um, at umsóknin var móttikin og fór at verða viðgjørd so skjótt sum gjørligt. Almannaverkið byrjaði at rinda út í mai 2016. Tað gjørdi, at allar umsóknir áðrenn mai mánað høvdu langa viðgerðartíð. Síðani mai 2016 eru váttanir ikki sendar, men játtanirnar eru dagfestar stutt eftir móttøkuna av umsóknini, ofta dagin eftir. Sostatt er viðgerðartíðin stutt.

## 7.8 Kassaeftirlit á eindum undir barnavernd (LG 2016/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur í 2017 gjørt ófráboðað kassaeftirlit av forskotskassum hjá eindum undir Barnaheiminum. Barnaheimið er partur av eind 10 í Trivnaðardeplinum. Talan er um Móttøkudeildina, Garðsstovu, Jekarastovu og Nýggjustovu. Kassarnir verða umsitnir, har leiðslan heldur til, og verða áfyltir úti á deildunum eftir tørvi.

***Kassamunir vóru í øllum kassum.***

Landsgrannskoðanin stemmaði kassarnar av við Búskaparskipan landsins. Kassamunir vóru í øllum kassum. Sambært leiðaranum kann orsøkin til munirnar vera óstøðugt virksemi og nýggj starvsfólk. Roynt verður støðugt at bøta um við at greiða starvsfólkum frá og hava upplæring.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Almannaverkið fer at taka neyðug stig til at rætta uppá mannagongdirnar í sambandi við umsitingina av forskotskassum.

## 7.9 Kassaeftirlit á verkstøðum og verkhúsum (LG 2016/212-0216)

Landsgrannskoðanin hevur í 2017 verið á ófráboðaðum kassaeftirlitum á nøkrum verkstøðum og verkhúsum undir Almannaverkinum.

### Verkstaðið Vón

*Mælt til at seta pening inn títtari.*

Stovnurin hevur ein forskotskassa, ið er skrásettur í Búskaparskipan landsins. Kassin fevnir um stovnin, kantinuna og sølubúðina. Landsgrannskoðanin stemmaði kassan av við Búskaparskipan landsins. Verkstaðið Vón veit ikki at siga, hvar kassamunurin, sum var, stavaði frá. Landsgrannskoðanin mælti til at seta pening oftari inn í peningastovn.

### Verkhúsið Virkni

Virkni hevur ongan forskotskassa skrásettan í Búskaparskipan landsins, men ein kassa til sølu av vørum, sum eru framleiddar á verkhúsinum. Gjaldast kann við gjaldkorti ella reiðum peningi.

*Gera upp oftari og seta inn títtari.*

Kassin í sølubúðini var gjørdur upp nakrar ferðir í 2016, men peningurin varð fyrstu ferð settur inn í november 2016 fyri alt árið. Landsgrannskoðanin mælti til at gera kassan upp mánaðarliga og at seta peningin inn oftari.

### Verkstaðið á Brekku

Stovnurin hevur ein forskotskassa skrásettan í Búskaparskipan landsins. Vit stemmaðu kassa og peningastovnskontu av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

### Verkhúsið Stíggjur

Stíggjur hevur ein forskotskassa skrásettan í Búskaparskipan landsins. Kassin fevnir um stovnin og sølubúðina.

*Ein peningastovnskonta í BSL er ikki ogn hjá landinum.*

Stíggjur hevur tvær peningastovnskontur skrásettar í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin stemmaði konturnar av við Búskaparskipan landsins. Vit høvdu ikki aðra viðmerking enn, at tann eina peningastovnskontan er ikki ogn hjá landinum, og tí er hon landsroknskapinum óviðkomandi.

### Verkstaðið inni á Bakka

Stovnurin hevur ongan forskotskassa skrásettan í Búskaparskipan landsins, men ein kassa til inntøkur frá vørum, sum verkstaðurin selur.

Stovnurin ger ikki kassauppgerð, men setir av og á peningin inn í peningastovn. Vit samanbóru upptalda peningin og kvittanirnar; ein lítil munur var. Vit mæltu til at nýta talmerktar kvittanir, soleiðis at sølan kann stemmast av við kassapeningin.

*Ein peningastovnskonta hjá landinum var ikki skrásett í BSL.*

Stovnurin hevur eina peningastovnskontu, sum ikki var skrásett í Búskaparskipan landsins. Sambært leiðaranum verður tað gjørt sum skjótast.

### Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannaverkið fer at taka neyðug stig til at rætta uppá mannagongdirnar fyri at minka um møguligar kassamunir í sambandi við umsitingina av forskotskassum og øðrum kassum, har ímillum bóking og uppgerð av kassunum, og nær reiður peningur verður settur í banka.

Í sambandi við tilmælið frá Landsgrannskoðanini um at strika gávukontu í fíggjarstøðuni, tí hon er landsroknskapinum óviðkomandi, sigur landsstýrismaðurin, at Almannaverkið ikki er komið á mál hesum viðvíkjandi. Almannaverkið hevur boðað frá, at málið verður tikið uppaftur, soleiðis at kontan endaliga verður strikað í fíggjarstøðuni.

## 7.10 Dagpeningur vegna sjúku v.m. (LG 2014/212-0214)

Í seinastu frágreiðing varð greitt frá um grannskoðanina av dagpeningaskipanini. Vit kannaðu m.a., um Almannaverkið hevði skrivligar mannagongdir til umsitingina av dagpeningi, um umsøkjararnir høvdu rætt til dagpening, um inntøkumissurin var veruligur, um veitingarnar vóru rættar, og hvussu stovnurin hevði grundgivið fyri avgerðum og skjalprógvað tær.

### Innheinting frá arbeiðsgevarum

Almannaverkið skrásetir í KT Heildarskipanini krøvini, sum skulu krevjast inn frá arbeiðsgevarum fyri tveir teir fyrstu sjúkradagarnar hjá løntakarunum. Sambært § 20 í dagpeningalógini skal TAKS krevja peningin inn, og TAKS hevur heimild at panta eftir reglunum í skattalógini. TAKS skrásetir eftirstøðuna í landsroknskapin saman við øðrum krøvum. Mannagongdin gjørdi, at Almannaverkið ikki hevði yvirlit yvir útistandandi pening.

***Almannaverkið hevði ikki yvirlit yvir útistandandi pening, tí TAKS heintar inn.***

Almannaverkið ætlaði at gera mannagongdir fyri, hvussu inntøkur skrásettar í Búskaparskipan landsins verða stemmaðar av ímóti teimum krøvum, sum eru send TAKS. Almannaverkið ætlaði eisini at gera mannagongdir fyri avskrivað krøv soleiðis, at samsvar var millum TAKS og Almannaverkið.

Í juni 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at farið er í holt við at orða mannagongdir.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið og TAKS hava havt fund í juni, har tey hava avtalað eina mannagongd viðvíkjandi avstemman av krøvum, sum eru send TAKS.

***Mannagongd er avtalað, um avstemman av krøvum mótvegis arbeiðsgevarum.***

### Ásetingar og avgerðir um dagpening til stjórar

Í einstøkum málum høvdu stjórar fingið sjúkradagpening. Sambært Kærunevndini í almanna- og heilsumálum høvdu stjórar ikki rætt til dagpening undir sjúku, tí teir vóru ikki fevndir av persónsskaranum í § 3 í dagpeningalógini. Sambært Almannaverkinum bar tó til hjá stjórum í ávísum førum at fáa dagpening undir sjúku, t.d. um talan var um útróðrarmann, ið er stjóri í felagi, sum rekur útróður.

Landsgrannskoðanin mælti til at styrkja eftirlitið og helt tað vera óheppið, at vegleiðingin á oyðublaðnum kundi misskiljast. Mælt varð til at broyta vegleiðingina til oyðublaðið, soleiðis at greitt var, hvør hevði rætt til sjúkradagpening.

Sambært landsstýrismanninum varð arbeitt við at endurskoða umsóknarblaðið og vegleiðingina til umsóknarblaðið.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin víst á, at Ll. nr. 74/2001 um dagpening vegna sjúku v.m., er broytt við Ll. nr. 86/2017, m.a. soleiðis at stjórar í egnum felag, sum ikki ella bert í lítlan mun hevur leysa arbeiðsmegi afturat at sær, kunnu tekna sjálvbodna trygging.

***Stjórar í egnum felløgum kunnu tekna trygging og fáa rætt til sjúkradagpening.***

## 7.11 Almannaverkið, Trivnaðartænastan (LG 2016/212-216)

### 7.11.1 Trivnaðareind 4

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Trivnaðareind 4 hjá Almannaverkinum. Í eind 4 eru sambýlir, bústovnar, sambýli við stovnslíknandi fyriskipan inni, dagtilboð og frítíðartilboð. Endamálið við grannskoðanini var at kanna innanhýsis mannagongdir, um lógarverkið verður hildið, og um roknskapurin er rættur.

#### Skipan av eind 4

Eind 4 liggur undir Trivnaðardeplinum fyri sálarsjúk og barnavernd, og er skipað við einum eindarleiðara og tveimum leiðarum. 64 starvsfólk, umroknað til 48,2 ársverk, starvast í eindini. Eind 4 er staðsett í Suðurstreymoy og Vágum og er partvíst skipað sum bútilboð, bú- og viðgerðartilboð og veristað.

Niðanfyri er mynd, sum vísir bygnaðin av eind 4:




Fíggjarliga umsitingin og bókhaldið eru á Almannaverkinum í Tórshavn. Ein ábyrgdarpersónur er á hvørjum stovni, ið hevur ábyrgd av heilivági og felagskontu. Eindarleiðarin og leiðararnir hava býtt sambýlini ímillum sín og hava regluligar fundir um eindina og stovnarnar í eindini.

Vit hava ikki vitjað á øllum stovnunum, men har búfólkini meir ella minni hava fastan bústað, og har landið harvið helst hevur avgerandi leiklut í teirra gerandisdegi.

#### Sambýlir og bústovnar

Trivnaðartænasturnar virka yvirskipað við heimild í forsorgarlógini[10]. Arbeiðið er serliga lagt til rættis við kunngerðum, rundskrivum og vegleiðingum. Forsorgarlógin er broytt gjøgnum tíðina, og í 2013 varð heimildin at skipa bústovnar sambært § 16 broytt, og § 27 um bú- og viðgerðarstovnar varð sett í lógina.

Í § 27 er heimild at veita persónum við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum tilboð á bú- og viðgerðarstovnum og á stovnslíknandi fyriskipanum. Um onki nøktandi tilboð kann veitast í Føroyum, kann ein persónur fáa veitt tilboð uttanlands.

Í § 32 er heimild at veita vardan bústað til persónar við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, og sum tørva hjálp og stuðul

[10] Lovbekendtgørelse nr. 100/1988 “om offentlig forsorg”

til vanligt dagligt virksemi umframt møguliga røkt. Vardu bústaðirnir verða eisini nevndir sambýlir.

§ 16, stk. 2, í forsorgarlógini er nú soljóðandi:
*"Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur um trygdarfyriskipanir á bú- og viðgerðarstovnum og á stovnslíknandi fyriskipanum sambært § 27 og vardum bústøðum sambært § 32 og skyldu at veita hesi tilboð til persónar:*

1. *sum sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast,*
2. *sum sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað, ella*
3. *sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleysgeving verða settir í vardan bústað, ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað."*

***Ongar reglur um trygdarfyriskipanir ella skyldu at veita tilboð til persónar, sum eru dømdir at vera undir eftirliti av Almannaverkinum.***

Ongin kunngerð er enn lýst sambært § 16, stk. 2.

Almannaverkið heldur tað vera átrokandi, at reglur verða gjørdar viðvíkjandi trygdarfyriskipanum í vardum bústøðum og viðvíkjandi skyldu at veita tilboð til persónar, sum verða dømdir at vera undir eftirliti av Almannaverkinum ella at verða settir í vardan bústað.

***Átrokandi at gera reglur.***

Í eind 4 eru fimm stovnar. Tríggir eru í Vágum og tveir í Tórshavn, harav ein er ein samansettur bústovnur, har talan er um bæði búfólk í § 27 fyriskipan og § 32 vardum bústaði.

Onkur búfólk fáa fyritíðarpensjón, og onkur hevur aðra inntøku, meðan nøkur onga inntøku hava. Sambært forsorgarlógini er heimild at veita persónum, ið eru í § 27 ella § 32 fyriskipan og ikki hava aðrar inntøkur, fíggjarligan stuðul.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannamálaráðið er í holt við at smíða nýggja lóggávu um almannahjálp, tænastur, rættartrygd og tvingsil. Landsstýrismaðurin ætlar at leggja uppskotið fyri Løgtingið í hesari tingsetuni og at lóggávan skal fáa virknað frá 1. januar 2019.

Sambært landsstýrismanninum er endamálið við nýggju lóggávuni m.a. at tryggja rættindini hjá borgarum, sum bera brek.

Í sambandi við at nýggj lóggáva verður smíðað, verða kunngerðir, sum eru heimilaðar í verandi forsorgarlóg, eisini endurskoðaðar, eins og nýggjar kunngerðir verða orðaðar.

## Skipan av bústovnum

Til 2013 vórðu bústovnar skipaðir eftir kunngerð, sum hevði heimild í § 16, stk. 2 og 3, í forsorgarlógini. Í 2013 varð § 16 umorðað, og § 27 sett í lógina, og landsstýrismaðurin skal sambært stk. 5, áseta nærri reglur um virksemi, um upptøku og gjald, og treytir fyri at veita tilboð uttanlands.

***Ongin nýggj kunngerð um virksemi, upptøku og gjald ella treytir fyri at veita tilboð uttanlands.***

Ongin kunngerð er lýst, og Almannaverkið heldur tað vera átrokandi, at reglur verða ásettar.

Kunngerðin um bústovnar frá 2005 hevði heimild í tágaldandi reglum í § 16, stk. 2, "um skipan av bústovnum". Íbúgvarnir á bústovnunum bera víttfevnandi sálarlig ella likamlig brek, og sambært Almannaverkinum fylgir stovnurin kunngerðini, men hon treingir til dagføringar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at umskipanin av bústovnum til sambýlir hongur ikki saman við broyting í forsorgarlógini, men hongur saman við, at løgtingslóg um uppihald á stovni varð sett úr gildi. Broytingar eru síðani gjørdar í

forsorgarlógini. Verandi kunngerðir verða ikki dagførdar, men nýggjar kunngerðir verða settar í gildi samstundis, sum nýggj lóggáva verður sett í gildi.

### Sambýlir / vardir bústaðir

Sambýlir eru eisini skipað eftir kunngerð frá 2005, sum hevur heimild í tágaldandi § 32, stk. 2, í lógini og rundskrivi "um skipan av sambýlum" frá 1. januar 2009. Eftir at kunngerðin kom í gildi, er § 32 í forsorgarlógini umskipað soleiðis, at heitið í dag er vardir bústaðir.

***Ongin nýggj kunngerð lýst.***

Umskipanin hevði eisini við sær, at heimildin hjá landsstýrismanninum at áseta reglur um upptøku, leigurættindi, virksemi og gjøld, nú er í § 32, stk. 3. Enn er ongin nýggj kunngerð lýst, og kunngerðin frá 2005 og rundskrivið frá 2009 hava enn gildi.

Síðani kunngerðin og rundskrivið komu í gildi, eru munandi bygnaðarbroytingar framdar í Almannaverkinum, soleiðis at ábyrgdarbýtið er broytt. Í dag eru sambýlini undir leiðslu av Almannaverkinum, men ábyrgdin av eftirlitinum og kærumyndugleikin eru ikki formliga ásett í kunngerð ella rundskrivi. Sambært rundskrivinum hevur leiðarin á einstaka sambýlinum ábyrgd av umsitingini av felagskontuni, og Nærverkið skal hava eftirlit við sambýlinum og skipa fyri grannskoðan av felagskontuni í minsta lagi eina ferð um árið. Einstaka húsfólkið hevur rætt til innlit í felags fíggjarviðurskiftini hjá sambýlinum og kann kæra um tey til Nærverkið. Við núverandi bygnaði er ikki leiðari á hvørjum sambýli, og Nærverkið er sum stovnur ikki til longur.

Í august 2017 ásannar Almannamálaráðið, at verandi regluverk hevur ikki nóg nágreiniligar ásetingar um eftirlitsskyldu, eins og verandi kunngerðir ikki eru dagførdar í mun til tær broytingar, sum eru framdar við samanlegging av stovnum o.ø. Sambært landsstýrismanninum verða reglur um eftirlit settar í nýggju lóggávuna, soleiðis at tað verður greitt, hvør hevur eftirlitsskylduna, og hvat eftirlitið fevnir um. Kærumøguleikar verða eisini ásettir í nýggju lóggávuna.

Landsstýrismaðurin skal góðkenna nýstovnað sambýli og líknandi stovn, ið verður umskipaður til sambýli. Landsgrannskoðanin spurdi Almannaverkið, nær stovnarnir í eind 4 vóru góðkendir. Almannaverkið svaraði, at sambýlir o.l. verða góðkend antin við reglugerð ella við virksemislýsing, sum verður góðkend av landsstýrismanninum.

***Fleiri stovnar virka uttan góðkenning.***

Sambært Almannaverkinum eru fleiri sambýli í eind 4, sum ongar reglugerðir eru gjørdar fyri. Almannamálaráðið hevur góðkent virksemisætlan fyri Íslandsveg og reglugerð fyri Bóndaheyg. Stoffalág hevur góðkenda virksemisætlan, umframt at uppskot til reglugerð er gjørt, sum í næstum verður sent ráðnum at góðkenna. Almannamálaráðið hevur ábyrgd av, at reglugerðir verða gjørdar fyri øll sambýlini.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið í næstum fer at gera uppskot til reglugerðir.

### Felagskonta

Fýra av fimm stovnum í eind 4 hava felags peningastovnskontur, sum búfólk rinda pening á. Peningurin verður brúktur til gerandiskeyp hjá sambýlunum. Felagskontan skal sambært rundskrivi brúkast til fastar útreiðslur, størri rokningar, sum koma viðhvørt, forskotskassa og smærri rokningar, sum koma viðhvørt.

***Ógreiðar reglur um, hvat felagskontan kann brúkast til.***

Landsgrannskoðan heldur ikki, at rundskrivið gevur nakra veruliga vegleiðing um, hvat felagskontan kann ella skal brúkast til.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann er samdur við Landsgrannskoðanini, at rundskrivið í fleiri førum er ógreitt, og at tað er átrokandi at dagføra tað. Sambært landsstýrismanninum arbeiða Almannaverkið og Gjaldstovan við at fáa umsitingina av felagskassunum inn í hjároknskapin hja Búskaparskipan landsins.

Sambært rundskrivinum skulu stovnarnir føra roknskap fyri alla nýtslu av felagskontuni. Á vitjanunum á stovnunum løgdu vit merki til, at tað var ymiskt, hvussu felagskonturnar vórðu umsitnar, og ikki allir roknskapirnir vóru komnir aftur frá grannskoðarunum, heldur ikki fyri undanfarna ár.

*Umsiting og grannskoðanin av felagskontum hevur ikki verið nøktandi.*

Landsgrannskoðanin heldur, at umsitingin av og eftirlitið við felagskontunum hevur ikki verið nøktandi. Sambært Almannaverkinum hava tey í ár arbeitt saman við Gjaldstovuni við at fáa umsitingina av felagskontunum inn í Búskaparskipan landsins.

Ongin uppgerð verður gjørd av felagskontuni, og ivi kann vera um, hvat felagskontan skal rinda. Reglurnar um, hvat búfólk á sambýli skulu rinda fyri til felags innbúgv, eru ikki greiðar. Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at endurskoða reglurnar. Almannaverkið hevur tikið tilmælið hjá Landsgrannskoðanini til eftirtektar og fer taka neyðug stig til at fáa gjørt greiðar reglur fyri felagskontuna.

*Endamálið við kontuni er ikki at savna pening saman, men at rinda dagliga raksturin.*

Sambært kunngerðini skulu búfólk rinda húsaleigu og felags útreiðslur av at reka sambýlið. Á nøkrum stovnum leyp peningur av á felagskontuni, og tí tók leiðslan avgerð um, at búfólkini fóru at ferðast. Landsgrannskoðanin heldur, at endamálið við felagskontuni, sum búfólkini eiga, er ikki at spara pening saman. Tá ið búfólkini hava rindað meira til dagliga raksturin, enn veruligi kostnaðurin bleiv, eiga tey at fáa avlopspeningin goldnan aftur, og gjaldið eigur at verða sett niður. Almannaverkið tekur undir við Landsgrannskoðanini.

### Reglur um valdsnýtslu

Reglur um valdsnýtslu eru í K. nr. 1/2005 “um valdsnýtslu” og í rundskrivi frá Almanna- og heilsumálaráðnum frá 4. januar 2005, ið er stílað til øll starvsfólk, ið arbeiða á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum.

*Sjey fráboðanir um harðskap síðani januar 2014.*

Almannaverkið hevur kunnað um, at teirra fatan er, at harðskapur og valdsnýtsla koma ikki ofta fyri í eind 4. Síðani januar 2014 hava tað verið sjey fráboðanir.

### Heilivágur

Á øllum stovnunum í eind 4 búgva fólk, sum fáa heilivág. Heilivágurin er í læstum skápum í starvsfólkarúmunum. Almannaverkið hevur vegleiðing og skrivligar mannagongdir, sum skulu fylgjast, tá ið starvsfólk geva búfólki heilivág.

Bæði vegleiðingin og mannagongdirnar leggja dent á, at rættur heilivágur verður givin, at heilivágurin verður viðfarin rætt, og at feilir skulu skrásetast og fráboðast. Starvsfólkini skulu altíð síggja, at viðkomandi tekur heilivágin.

### Persónsupplýsingar og KT

Landsgrannskoðanin heldur, at tá ið telda verður brúkt til dagbøkur, virkisætlanir v.m. um búfólk, so er talan persónsupplýsingar og allarhelst eisini um viðkvæmar persónsupplýsingar. Greiðar mannagongdir eiga at vera, sum eru við til at forða fyri, at óviðkomandi koma fram at persónsupplýsingunum.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvørjar mannagongdir Almannaverkið hevur í mun til KT nýtslu og KT trygd, og hvussu leiðslan tryggjar sær, at starvsfólkini eru kunnað um tryggjan av persónsupplýsingum og um at fylgja mannagongdunum.

Almannaverkið hevur skrivligan KT trygdarpolitikk, og KT nýtsla er einans á Landsneti, har loyniorð er kravt fyri hvørt starvsfólk. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru skjalfestar fyri hvørt búfólk, har bert starvsfólk, sum eru knýtt at sambýlinum, hava atgongd. Á innannetinum hjá Almannaverkinum liggja KT vegleiðingar, og har kunnu øll starvsfólk finna neyðuga vitan.

## Roknskaparviðurskifti

Í 2016 eru 279,5 mió.kr. brúktar til Trivnaðartænastur, harav 26,3 mió.kr. til eind 4. Størsti parturin er til lønir, 24,3 mió.kr. Bókhaldið er miðsavnað á fíggjardeildini hjá Almannaverkinum.

Tveir stovnar hava forskotskassar, og vit gjøgnumgingu kassauppgerðirnar fyri 2016 hjá einum stovni. Landsgrannskoðanin heldur, at tað ov ofta vanta kvittanir fyri keyp, og at tað er ikki nøktandi, at stovnurin brúkar kontantkassan til keyp í handlum, har stovnurin hevur kontu. Meginreglan er, at allar gjaldingar skulu fara um Búskaparskipan landsins. Sambært leiðaranum kemur tað sjáldan fyri longur, tí tey hava sett kostrøktarstarvsfólk, sum hevur alt gerandiskeypið um hendi.

***Meginreglan er, at gjaldingar fara um BSL.***

### *Roknskaparreglugerð*

Almannaverkið hevur kunnað um, at arbeitt hevur verðið við at fáa eina felags roknskaparreglugerð fyri alt virksemið hjá Almannaverkinum. Reglugerðin er enn ikki góðkend av Almannamálaráðnum.

***Ongin góðkend roknskaparreglugerð.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannaverkið hevur bíðað við at gera endaligt uppskot til roknskaparreglugerð, til nýggja roknskaparrundskrivið hjá Fíggjarmálaráðnum er sett í gildi.

### *Ognaryvirlit*

Sambært roknskaparkunngerðini skal yvirlit gerast yvir ognir. Ongin stovnur hevði ognaryvirlit, men síðani vit vóru á vitjan, hava stovnarnir tikið stig til at gera yvirlit.

***Ongin stovnur hevði gjørt ognaryvirlit.***

Týdningarmesta endamálið við at skráseta almennar ognir er, at tað almenna hevur yvirlit yvir, hvat tað eigur. Eisini hevur tað týdning at síggja, hvørji virðini av almennum ognum eru, so roknskapurin kann geva eina sanna mynd.

Í Búskaparskipan landsins hevur Trivnaðartænastan skrásett 40 ognir. Húsini hjá einum stovni í eind 4 eru ikki skrásett, men tvær aðrar ognir, sum vórðu seldar í 2016, eru enn skrásettar. Ongin av bilunum hjá Almannaverkinum, sum stovnarnir í eind 4 hava, eru skrásettir. Landsgrannskoðanin heldur, at skrásetingin av ognum hjá landinum hevur ikki verið nøktandi.

***Yvirlit yvir støðis-ognir í BSL er ikki eftirfarandi.***

Sambært Almannaverkinum taka tey viðmerkingarnar hjá Landsgrannskoðanini til eftirtektar og fara at dagføra støðisognirnar. Almannaverkið upplýsti, at tað er Almannamálaráðið, ið umsitur íløguognirnar og keypir og selur.

Øll akfør hjá landinum skulu verða týðiliga merkt við navninum á tí stovni, sum akfarið hoyrir undir ella við búmerki stovnsins. Akstovan kann í heilt serligum førum loyva undantøkum, t.d. tá ið talan er um eftirlits- og innheintingaruppgávur hjá almennum stovnum. Bilarnar hjá tveimum stovnum í eind 4 vóru ikki merktir. Sambært Almannaverkinum ynsktu tey ikki at stigmatisera búfólkini, sum kunnu vera niður í 14 ára aldur.

***Akfør hjá landinum skulu vera týðiliga merkt. Akstovan kann loyva undantøkum í serligum førum.***

Sambært landsstýrismanninum verða allar ognir hjá Almannaverkinum skrásettar í næstum, og Almannaverkið fer at søkja Akstovuna um undantak at merkja bilarnar.

## Samanumtikið

Landsgrannskoðanin heldur, at reglurnar um skipan av bústovnum og sambýlum eru ikki tíðarhóskandi. Bygnaður, ábyrgdarbýti og forsorgarlógin eru broytt síðani kunngerðirnar frá 2005 vórðu settar í gildi. Heimildirnar til stovnslíknandi fyriskipanir og vardar bústaðir eru í dag §§ 27 og 32, sum báðar heimila landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um virksemi, upptøku, gjøld, leigurættindi v.m., men ongar nýggjar reglur eru lýstar.

***Ótíðarhóskandi reglur.***

Landsgrannskoðanin er ikki vorðin varug við týðandi feilir í roknskapinum, men ógreiðu reglurnar um, hvat felagskontan eigur at rinda, vantandi ognaryvirlit og vantandi

skrásetingar av ognum í Búskaparskipan landsins, gera, at vit kunnu ikki siga, at roknskapurin 2016 vísir eina rætta mynd.

### 7.11.2 Lønargrannskoðan, eind 4

Landsgrannskoðanin hevur kannað nøkur lønarmál hjá eind 4 fyri at sanna, um útgoldnu lønirnar eru rættar, og um almenni setanarpolitikkurin verður fylgdur.

Lønirnar eru 92% av útreiðslunum í eind 4, og tað er tí av alstórum týdningi, at útgoldnu lønirnar eru rættar, at arbeiðstíðin er hóskandi skjalfest, og at stovnurin heldur sáttmálarnar, sum landið og avvarandi feløg hava bundið seg til.

*Plantímar og meirtímar*

Trivnaðartænastan brúkar VaktPlan at skráseta arbeiðsvaktir, feriur, avspákingar v.m.

Flestu starvsfólkini arbeiða tað, tey eiga at arbeiða yvir eina rullandi vaktarætlan. Nøkur starvsfólk hava tó arbeitt meira, enn vaktætlanin áleggur, og rindar Almannaverkið meirtímarnar sambært avtalu við einstaka starvsfólkið.

Tvey fulltíðarsett starvsfólk hava fingið útgoldið fyri serliga nógvar meirtímar, bæði í 2016 og higartil í 2017, ávikavist 948 og 997,5 meirtímar í 2016, og 650 og 678,6 meirtímar til juli í ár.

***Reglur um hvílitíð verða ikki altíð hildnar.***

Spurd, hvussu reglurnar um hvílitíð verða hildnar, svaraði Almannaverkið, at tey miða eftir at halda reglurnar. Í ávísum førum eru uppgávurnar tó so samansettar, at bert ávís starvsfólk kunnu og vilja átaka sær tær. Stovnurin arbeiðir áhaldandi við at loysa avbjóðingina.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Almannaverkinum verður málið, um at tryggja at reglurnar um hvílitíð, meirtíð og úrtíð verða hildnar, tikið upp við eindarleiðslurnar.

***Fulltíðarsett starvsfólk arbeiða meira uttan at fáa yvirtíð.***

Almannaverkið er samt við Landsgrannskoðanina, at meirtíð er tann tíðin, sum ein parttíðarsettur arbeiðir meira enn egnan brøk og upp til fulla tíð, og at fulltíðarsett starvsfólk, sum arbeiða meira enn fulla tíð, hava rætt til yvirtíð, eisini um tey sjálvboðin arbeiða meira.

Sambært Almannaverkinum er tað ein gomul siðvenja ella skipan millum starvsfólk og arbeiðsgevara, at sama tímaløn verður goldin fyri vanligar tímar og yvirtímar. Landsgrannskoðanin ivast í, um siðvenjan er í tráð við galdandi sáttmálar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at onki er hent í málinum, síðani Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum í 2011 greiddi frá, at tað er ikki heilt í tráð við ásetingarnar í sáttmálunum, men tað var ein fyrimunur fyri bæði arbeiðsgevara og lønmóttakara. Sambært landsstýrismanninum fer Almannamálaráðið at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið.

*Eftirløn*

Almannaverkið rindar mánaðarløntum starvsfólkum eftirlønargjald sambært sáttmálum, og tímalønt starvsfólk skulu rinda bundna eftirløn sambært eftirlønarlógini.

Munur var á eftirlønunum hjá starvsfólkunum. Onkur hevði rindað bundna eftirløn av yvirtíð, og onkur hevði fingið fult eftirlønargjald sambært sáttmála fyri yvirtíð.

Landsgrannskoðanin heldur, at umsitingin av eftirlønargjaldi viðvíkjandi meirtíð, yvirtíð og tímaløn er ógreið.

Almannaverkið hevur víst á, at sáttmálarnir eru ymiskir, og tí verður eftirlønin útgoldin ymiskt. T.d. fyri tímalønt verður eina ferð um árið gjørt upp samlaða tímatalið, og eftirløn verður rindað starvsfólkunum sambært sáttmála.

Stakroyndirnar vístu, at mánaðarløntu starvsfólkini vanliga ikki rinda bundið eftirlønargjald av eyka tímum, men tá ið somu starvsfólk taka vaktir á øðrum stovnum fyri tímaløn, rinda tey bundið eftirlønargjald av tímaløninni.

***Ymiskt er, nær bundin eftirløn verður rindað.***

Tá ið Almannaverkið rindar yvirtíð til fastlønt saman við føstu lønini, rindar starvsfólkið ikki bundna eftirløn av yvirtíðini, men stovnurin rindar eftirløn av mánaðarlønini sambært sáttmála. Verður yvirtíðin goldin fyri seg í serskiltari lønarkoyring, verður bundna eftirlønargjaldið afturhildið av lønini.

Sambært Almannaverkinum kann ongin løn gjaldast út, uttan at eftirløn verður goldin, antin sambært sáttmála ella sambært lógini um bundna eftirløn.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið fer at kannað málið nærri.

### *Grannskoðan av lønarmálum*

Sambært almenna setanarpolitikkinum eru starvssetanir at meta sum fyrisitingarligar avgerðir og eru tí fevndar av ásetingunum í fyrisitingarlógini og persónsupplýsingarlógini. Í almenna setanarpolitikkinum er m.a. ásett, at:

- starvið skal lýsast leyst,
- umsóknarfreist skal í minsta lagi vera 14 dagar,
- váttast skal fyri móttøku av umsókn,
- umsøkjari, sum ætlanin er at seta í starv, skal fáa játtandi svar sum tilboð, sum viðkomandi kann taka støðu til, áðrenn endaligt setanarbræv verður skrivað, og
- setanarbrævið skal vera latið, áðrenn viðkomandi byrjar í starvinum, og tað er frá 2008 eitt lógarkrav.

***Lønarmálini ikki nóg væl skjalfest.***

Vit kannaðu 8 lønarmál, um lýsingar, umsóknir, prógv, tilmælir, setanarskriv v.m. vóru tøk. Ymiskt var, hvussu lønarmálini vóru skjalprógvað. Tað kemst av, at nøkur mál eru gomul, og at setanarmyndugleikin er broyttur orsakað av bygnaðarbroytingum og samanleggingum. Í flestu førum kundu vit ikki siga, um starvið var lýst leyst, tí ongin lýsing var í málinum, heldur ikki var altíð møguligt at staðfesta, um lýst varð við minst 14 daga freist.

Í onkrum máli vantaði setanarbræv, og í onkrum var setanarbrævið undirskrivað væl eftir, at viðkomandi tók við starvinum. Í onkrum lønarmáli vantaði prógv fyri útbúgving.

***Almannaverkið eigur at eftirkanna lønarmálini og møguliga dagføra tey.***

Landsgrannskoðanin heldur, at Almannaverkið eigur at eftirkanna lønarmálini og møguliga dagføra tey. Í minsta lagi eigur Almannaverkið at hava skjalprógv fyri, at starvsfólk hava ta útbúgving, ið er fyritreyt fyri starvinum.

Sambært Almannaverkinum er tað rætt, at tað er munur á skrásetingunum í starvsfólkamálunum, og at tað hongur saman við, hvussu gomul starvsfólkamálini eru, og at setanarmyndugleikin í fleiri førum er broyttur vegna bygnaðarbroytingar og samanleggingar. Starvsfólkamálini hjá Almannaverkinum liggja m.a. talgild í fleiri journalskipanum.

Almannaverkið hevur í 2015 orðað innanhýsis mannagongd viðvíkjandi setanum. Mannagongdin skal tryggja, at stovnurin fylgir lógar- og sáttmálaásetingum viðvíkjandi setanum og almenna setanarpolitikkinum.

Sambært Almannaverkinum tryggja mannagongdirnar, at øll fáa setanarbræv, og at øll prógv og váttanir um tænastu og lønaraldur verða skrásett í starvsfólkamálinum. Fysisku arkivini fara at verða gjøgnumgingin og mál skannað inn í talgildu skipanirnar

í ár. Almannaverkið heldur, at tað fer at geva teimum neyðuga yvirlitið at eftirkanna, um alt liggur í málinum, sum skal liggja í, og at dagføra málini hareftir.

### 7.11.3 Kassaeftirlit

**Ófráboðað kassaeftirlit á stovninum við Íslandsvegin**

Í februar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á stovninum á Íslandsvegi. Vit stemmaðu kassan av við salduna í Búskaparskipan landsins og kassauppgerðina. Onki var at finnast at.

**Ófráboðað kassaeftirlit í sambýlinum í Stoffalág**

Í februar 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti í sambýlinum í Stoffalág. Vit samanbóru upptalda peningin við salduna í Búskaparskipan landsins og staðfestu ein lítlan mun.

## 7.12 Vanlig forsorg (LG 2014/212-0217)

Síðani nítiárini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir arbeiddu við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti.

Fyrsta stigið í broytingunum var skipanin við hjálparráðum frá 2010. Annað stigið var lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum kom í gildi í 2013. Tá vantaði at endurskoða ásetingarnar um fyribils og varandi hjálp, um tilboð til børn sum bera brek og um tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi.

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at forsorgarlóggávan átti ikki at verða savnað í einari einstakari lóg, og broytti tí upprunaligu verkætlanina. Yvirskipað var ætlanin at gera nýggja lóggávu um uppihaldsveitingar og nýggja lóggávu um tænastur. Tær skuldu, sum frá leið, avloysa verandi forsorgarlóg.

Í apríl 2015 setti landsstýrismaðurin ein arbeiðsbólk at orða ein tænastupolitikk, sum skuldi vera grundarsteinurin undir einari tænastulóg. Lógin skuldi betra innihaldið í tænastum og rættartrygdina hjá borgarum við serligum avbjóðingum, ið hava tørv á tænastum. Miðað varð eftir at náa á mál í august 2015, men arbeiðið steðgaði, tá ið val varð skrivað út.

Í juni 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at miðað varð eftir at fáa tænastupolitikkin lidnan á sumri 2016. Gekst sum ætlað, fór landsstýrismaðurin í almannamálum at leggja fram uppskot um nýggja tænastulóg fyri Løgtingið tíðliga í 2017. Tænastulógin verður eftir ætlan ein nýggj høvuðslóg, sum kemur ístaðin fyri ásetingarnar í forsorgarlógini um tænastur, sum t.d. stuðulsfólkaskipanina og bútilboð.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2017 greitt frá, at tilmæli um tænastupolitikk hevur verið til aðalorðaskifti í tinginum. Arbeiðsætlan fyri lógaruppskotið er gjørd. Ætlanin er, at uppskotið verður sent til hoyringar seinast í hesum árinum. Lógaruppskotið skal eftir tíðarætlanini leggjast fyri løgtingið í hesari tingsetuni.

***Landsstýrismaðurin ætlar at leggja nýggja tænastulóg fyri Løgtingið í hesari tingsetuni.***

## 7.13 Varandi veiting (LG 2015/212-0217)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av varandi veiting og vísti m.a. á, at Almannaverkið hevur ikki ásett greiðar reglur fyri, hvussu leingi fyribilshjálp kann verða veitt, áðrenn farið verður til varandi veiting. Greiðar reglur eru heldur ikki fyri, hvussu leingi fólk kunnu fáa varandi hjálp, eftir at tey eru fylt 50 ár. Meira enn helvtin av teimum, ið fingu varandi veiting í 2015, vóru yvir 50 ár.

***Ógreiðar reglur um, hvussu leingi fyribils hjálp kann veitast, og hvussu leingi fólk omanfyri 50 ár kunnu fáa varandi veiting.***

Ein persónur varð 50 ár í 2009, og skuldi Almannaverkið tá taka upp mál um fyritíðarpensjón til viðgerð. Í 2016 var málið ikki avgreitt. Almannaverkið ásannaði, at tey generelt ikki hava fylgt nóg neyvt við, og tí er støða ikki tikin til fyritíðarpensjón. Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi.

Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tá ið varandi veiting fór at verða skrásett í KT heildarskipanini, varð møguligt at gera sjálvvirkandi kanning av inntøkuviðurskiftunum. Tað fór at verða gjørt seinni í 2016 ella fyrst í 2017. Við hesi broyting fór eftirlitið og skjalfestingin at gerast betri. Til arbeiðið við nýggju KT heildarskipanini var liðugt, fór Almannaverkið at seta øll mál í áminning 3. hvønn mánað.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir tað ikki vera nøktandi og mæltu til at fyribyrgja, at slíkir feilir hendu aftur.

***Varandi veiting er enn ikki komin í KT heildarskipanina.***

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at varandi veiting er enn ikki skrásett í KT heildarskipanini, men sum nevnt, hevur Almannaverkið gjørt av at kanna málini 3. hvønn mánað, til tað verður møguligt at gera sjálvvirkandi kanning av inntøkuviðurskiftunum. Landsstýrismaðurin heldur, at mannagongdin, sum Almannaverkið hevur sett í verk, er nøktandi.

## 7.14 Sjúkratrygd (LG 2015/212-0344)

***Ongin góðkend Roknskaparreglugerð.***

Í seinastu frágreiðingini umrøddu vit grannskoðanina av Sjúkratrygd. Vit vístu m.a. á, at Trygdargrunnurin hevði eina roknskaparreglugerð fyri sjúkratrygd og flutningsstuðul. Roknskaparreglugerðin, ið var dagfest 1. oktober 2012, var ikki góðkend.

Í apríl 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Trygdargrunnurin fyrisitur ávísar uppgávur fyri Almannamálaráðið sambært avtalu frá 1. januar 2012. Ráðið umhugsaði at gera eina serliga roknskaparreglugerð fyri umsitingina av játtanini.

***Vegleitt varð ikki um kærumøguleika.***

Trygdargrunnurin vegleiddi ikki um kærumøguleikar, tá ein umsókn ikki varð gingin á møti, og ongar ásetingar vóru um tað í lógini um sjúkratrygd. Landsstýrismaðurin vísti á, at tá ið ongar ásetingar eru í lóggávu um kærumøguleika, kann avgerðin kærast til hægri myndugleika. Tað er landsstýrismaðurin í almannamálum, ið varðar av Trygdargrunninum, og tí kunnu avgerðir grunsins kærast til Almannamálaráðið.

Almannamálaráðið fór at boða Trygdargrunninum frá, at grunnurin í sýtanum kann vegleiða um kærumøguleika til hægri myndugleika. Eisini vísti § 5 í lógini um sjúkratrygd til Fiskimálaráðið, og átti lógin at verði broytt soleiðis, at vístvarð til rættan myndugleika. Í sambandi við hesa broyting, fór Almannamálaráðið eisini at seta reglur inn um kærumøguleika og kærufreist.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin víst á, at lógin um sjúkratrygd til fiskimenn við Ll. nr. 117/2016 er sett úr gildi. Fiskimenn eru frá 1. januar 2017 fevndir av dagpeningalógini.

# 8 Uttanríkis- og vinnumál

## 8.1 Uttanríkis- og vinnumálaráðið (LG 2016/213-0111)

Landsgrannskoðanin grannskoðaði roknskapin 2016 hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina hjá ráðnum og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

### Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin hjá Vinnumálaráðnum verður brúkt, hon er frá 2010. Eftir at ráðið er lagt saman við uttanríkistænastuna, er roknskaparreglugerðin ikki dagførd. Ráðið arbeiðir við at dagføra starvsfólkahondbókina og at endurskoðað roknskaparreglugerðina.

***Roknskaparreglugerð ikki dagførd.***

### Lønir

25 fólk starvast í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Játtanin er 19,4 mió.kr. í 2016, harav 15,7 mió.kr. eru til lønir. Við støði í lønarútgjaldingunum fyri mars 2016 grannskoðaðu vit fýra lønarmál. Vit samanhildu setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onkrar viðmerkingar, t.d. vantaðu lýsing og umsókn í einum máli. Vit hava síðani fingið avrit av lýsingini.

Ráðið hevur reglur um flextíð í starvsfólkahondbókini +80/-20 tímar. Tá ið tey, sum arbeiða á sendistovunum og aðalstjórin ikki eru íroknað, var tímasaldan í november 2016 hjá starvsfólkunum millum +119 tímar og -360 tímar.

***Stórar flexsaldur.***

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum stendst munurin av, at starvsfólk ikki rætta feilstemplingar ella vantandi stemplingar. Leiðslan arbeiðir við at bøta um mannagongdina til, at saldurnar verða dagførdar javnan, so tað er samsvar millum tað, sum verður skrásett, og veruligu tíðarnýtsluna.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur roknskaparskjøl, um tey hoyrdu til stovnin og vóru konterað sambært galdandi reglum. Onki var at finnast at.

Vit umrøddu m.a. spurningin um vantandi føroyskt meirvirðisgjald á skeiðsrokningum frá donskum veitarum, tá ið skeið verða hildin í Føroyum. Vit mæltu til, at ráðið vendir sær til TAKS, tá ið ivi er um avgjaldsskyldugar/-fríar tænastur. Ráðið hevur síðani kunnað um, at tey hava havt samskifti við TAKS um MVG-spurningarnar. Sambært ráðnum, helt TAKS, at rætt varð farið fram viðvíkjandi meirvirðisgjaldsskylduni hjá útlendska virkinum.

### Uttanlands ferðauppgerðir

Vit kannaðu nakrar ferðauppgerðir uttanlands. Á uppgerðunum stóð t.d., at ørindini eru “Kunningarferð...” og “Ferðavinnupolitikkur”, uttan at víst varð til hvørji ørindini annars vóru, ella á annan hátt greitt frá døgunum, ið ferðin vardi. Vit mæltu til at lýsa ørindini við ferðunum neyvari.

***Hámark fyri gisting í Danmark ikki hildið.***

Tá ið starvsfólk fara uttanlands í tænastuørindum, rindar Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyri innivist á hotelli eftir rokning ella fyri útlegg. Fleiri rokningar fyri innivist í Danmark fara upp um 1.008 kr., sum er mest loyvda upphæddin sambært vegleiðingini hjá Fíggjarmálaráðnum. Fyri ferðir uttan fyri Danmark rindar ráðið meira enn ásettu upphæddina fyri gisting. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er trupult altíð at halda seg innanfyri ásettu upphæddina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur síðani kunnað um, at tey hava lagt seg eftir at leggja neyvari lýsingar við ferðauppgerðunum frá uttanlands arbeiðsørindum, og er mannagongdin sostatt broytt á hesum økinum. Mannagongdin verður eisini nágreinað í roknskaparreglugerðini.

### Gjaldkort

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur 10 “kredittkort MasterCard – Gold Business”, við atknýttari bankakontu. Heimildarváttanir eru til øll gjaldkortini, og vóru tær undirskrivaðar í august 2016. Gjaldkortini eru nú upprættað av nýggjum, og Gjaldstovan er kunnað.

### KT viðurskifti

Umframt Búskaparskipan landsins brúkar Uttanríkis- og vinnumálaráðið journal-skipanina 360. Vit spurdu, hvørji starvsfólk hava atgongd at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 8.2 Kunngerðir o.a. til vinnufelagalógina (LG 2014/206-0111)

Í seinastu frágreiðingunum hava vit umrøtt “nýggju” vinnufelagalógina, Ll. nr. 73/2011 “um parta- og smápartafeløg”, sum kom í gildi 1. januar 2012. Nýggja lógin tók av gomlu lógirnar um parta- og smápartafeløg, anordning nr. 1356/2007 og nr. 1111/2007.

Í nýggju vinnufelagalógini fekk landsstýrismaðurin fleiri heimildir at áseta nærri reglur, herundir serligu reglurnar fyri landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskapar-lógini. Landspartafelag er sambært § 5, nr. 29, í lógini eitt partafelag, har landið hevur sama tilknýti, sum móðurfelag hevur til dótturfelag.

Við nýggju lógini vóru kunngerðir, fyriskipanir, loyvir, góðkenningar v.m. sambært gomlu lógini framvegis galdandi, til tær vórðu broyttar, afturkallaðar, fóru úr gildi ella vórðu strikaðar eftir ásetingunum í nýggju lógini. Gomlu kunngerðirnar eru frá 2007 og 2009, og eru allar enn í gildi.

Í desember 2014 segði Vinnumálaráðið seg leggja seinastu hond á nýggjar kunngerðir. Ætlanin var, at tær skuldu koma í gildi stutt eftir ársskiftið 2014/15, men tann ætlanin helt ikki.

Í august 2017 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at hesar kunngerðirnar skulu avloysast av nýggjum kunngerðum :

1. Kunngerð um fráboðan, skráseting, avgreiðslugjald og almannakunngering v.m. hjá Skráseting Føroya (fráboðanarkunngerðin).
2. Kunngerð um lán til útlendsk móðurfeløg.
3. Kunngerð um treytir hjá kapitalfeløgum í sambandi við skráseting av umbýtiligum skuldarbrøvum í einari virðisbrævamiðstøð.
4. Kunngerð um fráboðan um týðandi kapitalpostar.
5. Kunngerð um útloysingarskyldu.
6. Kunngerð um starvsfólkaumboð í parta- og smápartafeløgum.
7. Kunngerð um gjøld til Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.

8. Kunngerð nr. 18 frá 27. februar 2012 um skiftisskipanir í sambandi við gildiskomu av vinnufelagalógini.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum eru hesar nýggju kunngerðirnar nú settar í gildi:

1. Kunngerð nr. 109 frá 10. juli 2017 um lán o.a. til útlendsk móðurfeløg.
2. Kunngerð nr. 107 frá 10. juli 2017 um útloysingarskyldu og útloysingarrætt tilboðsgevaranna í sambandi við eitt yvirtøkutilboð.
3. Kunngerð nr. 106 frá 10. juli 2017 um treytir hjá kapitalfeløgum í sambandi viðskráseting av umbýtiligum skuldarbrøvum í einari virðisbrævamiðstøð.

***Allar kunngerðir verða lidnar í heyst.***

Ráðið kunnaði um, at hinar kunngerðirnar verða væntandi avgreiddar um mánaðarskiftið september/oktober. Kunngerðin um fráboðan um týðandi kapitalpostar kann tó ikki setast í gildi, fyrr enn KT skipanin hjá Skráseting Føroya er ment til at klára uppgávuna. Hetta hevur eisini samband við ætlanina um Talgildu Føroyar, men væntandi kann finnast ein fyribils loysn fyrst í komandi ári.

Í álitinum til Lm. nr. 42/2010 mælti Vinnunevndin til, at ein føroysk vegleiðing varð gjørd til lógina. Nevndin helt tað vera umráðandi at gera eina greiða vegleiðing til eina so týðandi lóggávu, sum ávirkar øll parta- og smápartafeløg, soleiðis at lætt og ómaksleyst var hjá øllum at skilja galdandi reglur. Vinnunevndin helt, at ein vegleiðing hevði lætt um hjá komandi íverksetarum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnaði í 2015 um, at fyrimyndin til nýggju lógina var danska selskabsloven. Erhvervsstyrelsen hevði gjørt 32 ymiskar vegleiðingar til donsku lógina; harav nakrar heilt drúgvar. Ráðið hevði tikið upp spurningin við Skráseting Føroya um at gera vegleiðingar til vinnufelagalógina.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur ikki orku at fara undir arbeiði at umseta vegleiðingina.

### Eigarapolitikkur landsins

Í juni 2016 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið eisini um, at embætisbólkurin, sum hevur arbeitt við eigarapolitikki landsins, hevði sent til hoyringar uppskot um eigarapolitikk landsins og uppskot um landspartafeløg. Í uppskotinum um landspartafeløg vóru uppskot til fýra kunngerðir:

- uppskot til kunngerð um at seta ásetingar um landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini í gildi,
- uppskot til kunngerð um almannakunngering av fráboðanum frá landspartafeløgum,
- uppskot til kunngerð um broyting í innlatingarkunngerðini, og
- uppskot til kunngerð um frágreiðing um virkisleiðslu og frágreiðing um samfelagsábyrgd á heimasíðu felagsins.

***Uppskot um eigarapolitikk verður handaður landsstýrismanninum í ár.***

Í august 2017 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at embætisbólkurin, sum ger uppskot til eigarapolitikk landsins, er um at verða liðugur við arbeiði sítt, og verða frágreiðing og tilmæli, eftir ætlan, handað landsstýrismanninum á heysti 2017.

Landsstýrið fer at leggja frágreiðing um eigarapolitikk landsins fyri Løgtingið. Eigarapolitikkur landsins fevnir um partafeløg og onnur líknandi vinnufeløg, sum landið eigur, og sum liggja uttan fyri fíggjarlóg og vanligu landsfyrisitingina. Eigarapolitikkur landsins er leiðreglur um, hvussu avvarðandi landsstýrismaður eigur at útinna eigaraleiklutin í vinnufeløgum hjá landinum og um, hvussu landið væntar, at leiðslan í vinnufeløgunum útinnir sín leiðsluleiklut. Endamálið við eigarapolitikkinum er,

- at landið skal virka sum ein professionellur eigari,

- at vinnufeløg landsins virka eins og eitt væl rikið privat vinnufelag, við atliti at munadyggum rakstri og íløgum (effektiviteti), gjøgnumskygni og eftirmeting av náddum úrslitum í mun til sett mál, og
- at tryggja, at kapping millum vinnufeløg landsins og privat vinnufeløg fer fram á jøvnum føti.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum skal embætisbólkurin eisini gera uppskot um landspartafeløg, t.e. uppskot um ígildissetan av ásetingunum um landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini.

Í § 303 í vinnufelagalógini er heimilað landsstýrismanninum at seta hesar reglur í gildi við kunngerð. Orsakað av, at møguligar broytingar verða gjørdar í ásetingunum (møguliga strika § 306 í vinnufelagalógini um serligar skyldur at almannakunngera), er ætlanin at seta ásetingarnar í gildi við lóg, t.e. við broyting í vinnufelagalógini.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum verður uppskot til løgtingslóg um broytingar í vinnufelagalógini fyri at seta í gildi serligu ásetingarnar um landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini lagt fyri Løgtingið í heyst. Í tí sambandi hevur ráðið gjørt uppskot til hesar kunngerð, sum skulu setast í gildi, tá ið lógarbroytingin er framd:

- Uppskot til kunngerð um almannakunngerð av fráboðanum frá landspartafeløgum.
- Uppskot til kunngerð um broyting í innlatingarkunngerðini.
- Uppskot til kunngerð um frágreiðing um virkisleiðslu og frágreiðing um samfelagsábyrgd á felagsins heimasíðu.

Harumframt er gjørt uppskot til vegleiðing um landspartafeløg.

## 8.3 Stuðulsjáttanir undir uttanríkis- og vinnumálum (LG 2016/213-0111)

Við samanleggingini av Vinnumálaráðnum og Uttanríkistænastuni komu stuðulsjáttanirnar samlaðar at liggja undir nýggja Uttanríkis- og vinnumálaráðnum við felags umsiting. Landsgrannskoðanin hevur í 2017 grannskoðað umsitingina av stuðulsjáttanunum, sum eru játtaðar undir § 13 í fíggjarlógini.

Endamálið við grannskoðanini var at staðfesta,

- at stuðul verður latin við heimild í lóg, fíggjarlóg ella við aðrari heimild,
- at fíggjarlig heimild er fyri útgjaldinum,
- at umsitingin av stuðlinum er skipað innan fyri galdandi reglur og undir eftirliti,
- at samsvar er millum játtaða og útgoldna stuðulin, og
- at stuðulin er útreiðsluførdur í røttum fíggjarári við rættari upphædd.

Vit kannaðu innanhýsis mannagongdir og lógargrundarlag fyri at veita stuðulin.

Tilsamans eru 43,5 mió.kr. játtaðar sum stuðul. Roknskapur og játtan 2016:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.13.2.04. | Millumtjóða samstarv | 3.067 | 3.100 |
| 13.13.3.02. | Neyðhjálp | 1.000 | 1.000 |
| 13.13.3.04. | Menningarsamstarv | 2.500 | 2.500 |
| 13.32.1.04. | Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi | -75 | -75 |
| 13.36.1.04. | Havbúnaðarroyndir | 9.500 | 9.500 |
| 13.37.2.02. | Vinnuframagrunnurin | 3.200 | 3.200 |
| 13.37.2.04 | Endurgjald til skipasmíð | 6.038 | 6.574 |
| 13.37.2.11. | Íverksetarahúsið í Klaksvík | 1.100 | 1.100 |
| 13.37.2.16. | Kolagrevstur | 700 | 700 |
| 13.37.6.01. | Lánsafturgjald | -18 | 0 |
| 13.38.5.02. | P/f Visit Faroe Islands | 13.400 | 13.400 |
| 13.38.5.03. | Limagjald til NATA | 500 | 500 |
| 13.38.5.05. | Marknaðarføra Føroyar | 1.965 | 2.000 |
| | **Tilsamans** | **42.877** | **43.499** |

### Skipan av grannskoðanini

Stuðulsjáttan verður brúkt til tað, sum ikki kann bólkast sum rakstar-, lógarbundin- ella løgujáttan. Nærri reglur um stuðulsjáttanir eru ásettar í K. nr. 125/2011 “um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan”.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað málsviðgerðina, bæði við atliti at endamálinum við grannskoðanini og við atliti at krøvum í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Har stuðulsjáttan er undir øðrum reglum og krøvum, hevur grannskoðanin eisini tikið støði í teimum reglunum.

Stuðulsjáttanir til partafeløg og grunnar fyri ávís virksemi eru eisini í § 13. Avtalur verða gjørdar millum Uttanríkis- og vinnumálaráðið og stuðulsmóttakarnar fyri tann stuðulin, har avtalaða virksemið verður ásett. Uttanríkis- og vinnumálaráðið kallar feløg og grunnar til fundar kvartárliga, har fíggjarliga støðan verður løgd fram, og har avtalað virksemi verður gjøgnumgingið.

Landsgrannskoðanin hevur hugt at, um grannskoðaður roknskapur er latin inn, at avtalur eru gjørdar, og at kvartárligu fundirnir hava verið.

Grannskoðanin hevur ikki umfatað høvuðskonturnar 13.32.1.04. “Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi” og 13.37.6.01. “Lánsafturgjald”.

## 8.3.1 Millumtjóða samstarv

Játtaðar eru 3,1 mió.kr. á høvuðskontu 13.13.2.04.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.13.2.04. | 01. The Northern Periphery | 849 | 870 |
| 13.13.2.04. | 02. IMO | 43 | 50 |
| 13.13.2.04. | 03. NORA | 250 | 250 |
| 13.13.2.04. | 04. Altjóða veiðifelagsskapir | 1.782 | 1.800 |
| 13.13.2.04. | 05. FAO og UNESCO | 142 | 130 |
| | **Tilsamans** | **3.067** | **3.100** |

***Føroyar eru við í fleiri ymiskum millumtjóða samstørvum.***

### The Northern Periphery Programme (NPP)

NPP er ein grunnur, sum stuðlar verkætlanum í útjaðaraøkjum. Í farna verkætlanartíðarskeiðnum rindaðu Føroyar tilsamans 7,6 mió.kr. Nýggja verkætlanarskeiðið 2014 til 2020 eitur Northern Periphery and Arctic Programme. Vit hava biðið landsstýrismannin um avrit av avtaluni fyri tíðarskeiðið.

Føroyska íkastið er nú minkað til 850 t.kr. um árið ella tilsamans 6 mió.kr. fyri alt sjey ára skeiðið. Limagjaldið fyri 2016 var 113.880 EUR, svarandi til 849 t.kr., og er goldið í august 2016.

### IMO

Endamálið við játtanini er at rinda fyri atlimaskap Føroya í sjóvinnufelagsskapinum IMO. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er gjaldið roknað eftir einum føstum ST frymli.

Móttakarin av gjaldinum er skrivstovan hjá IMO í London. Hesar upphæddir eru goldnar frá 2012 til 2016:

*kr.*

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| IMO | 46.548 | 49.473 | 48.588 | 70.514 | 43.193 |

Spurdur, hví upphæddin í 2015 er hægri enn hini árini, hevur landsstýrismaðurin svarað, at ráðið kannar málið.

### NORA

Sambært fíggjarlógini eiga Føroyar at rinda 250 t.kr. Rokningin fyri luttøkugjaldið er komin frá Nordisk Atlantsamarbejde og er goldin í oktober 2016.

### Altjóða veiðifelagsskapir

Talan er um felagsskapirnar ICES, NEAFC, NAFO, NAMMCO, NASCO og SPRFMO.

#### *ICES*

Játtanin er til árliga gjaldið fyri Føroyar til ICES í Altjóða havgranskingarráðnum. Gjaldið svarar til ein part av gjaldslyklinum hjá ICES fyri Føroyar og Grønland, og avtalað er millum Føroyar og Grønland, at Føroyar rinda 80%, og Grønland rindar 20% av gjaldinum. Móttakarin er ICES skrivstovan í Keypmannahavn. Gjaldið verður goldið við grundarlagi í einum árligum kravi frá ICES, sum fyri 2016 er 334 t.kr., og er rindað í juli 2016.

#### *NEAFC*

Játtanin er til at fíggja árliga gjald Føroya til NEAFC. Gjaldið er partur av felags NEAFC limagjaldinum hjá Føroyum og Grønlandi (Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland). Móttakarin er NEAFC skrivstovan í London. Upphæddin fyri 2016 er 61.696 pund, svarandi til 616 t.kr. Í 2015 var gjaldið 580 t.kr. og í 2014: 649 t.kr. Orsøkin til hækkingina í 2016 er, at NEAFC skal flyta í nýggj høli, har leigukostnaðurin er munandi hægri.

#### *NAFO*

NAFO er nevndin fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í útnyrðingspartinum av Atlantshavinum. Álagda gjaldið hjá Føroyum fyri 2016 var 27.873 CAD og varð goldið í juli 2016 við 143 t.kr.

#### *NAMMCO*

Endamálið við játtanini er fíggja árliga gjald Føroya til NAMMCO. Føroyar hava sjálvstøðugan limaskap í NAMMCO. Limagjaldið byggir á eitt gjaldsbýti millum fýra verandi limalond: Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg, sum varð avtalað í 1992, tá ið NAMMCO varð sett á stovn.

Sambært avtaluni rinda Føroyar og Grønland 12,5% hvørt, Ísland 25% og Noreg 50%. Árliga gjaldið verður ásett við støði í fíggjarætlanini fyri NAMMCO, ið verður samtykt á NAMMCO ársfundinum á hvørjum ári. Móttakarin av gjaldinum er NAMMCO skrivstovan í Tromsø. Fyri 2016 varð gjaldið 427 t.kr., sum varð avgreitt í januar 2016.

*NASCO*
Føroyar eru limir í North Atlantic Salmon Conservation Organization saman við Grønlandi, sum Danmark "in respect of the Faroe Islands and Greenland". Limagjaldið verður býtt millum Føroyar og Grønland. Grønland rindar millum tveir triðingar og tríggjar fjórðingar av felags limagjaldinum, tí at ein komponentur í útrokningini av limagjaldinum er veiða. Føroyar hava onga laksaveiðu og rinda tí bert fasta partin av limagjaldinum, sum fyri 2016 var 14.207 pund, svarandi til 142 t.kr. Útrokningin av limagjaldinum var ikki røtt, tí útroknaða uppgerðin av felags limagjaldinum 50.648 pund stemmaði ikki við uppkravda limagjaldið 51.078 pund, og tískil sendi NASCO 147 pund í eykarokning, sum er goldin í apríl 2016.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tey kannað, hví eykarokning er komin. Tað sær eisini út til, at tey hava goldið ov nógv í 2015.

*SPRFMO*
SPRFMO er samstarv um fiskiveiðu í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum. Føroyar gjørdist sáttmálapartur í 2010. Við at taka lut í SPRFMO eru Føroyar við til at tryggja sær rættindi at fiska í sáttmálaøkinum í Suðurkyrrahavinum. Luttøkugjaldið verður goldið fyri eitt ár í senn frá 1. juli til 30. juni. Í 2016 eru 23.435 NZD kravdir fyri limagjald, svarandi til 117 t.kr., har upphæddin er býtt javnt millum 2016 og 2017. Sostatt er helvtin av limagjaldinum fyri 2016/17, sum er 59 t.kr., umframt helvtin av limagjaldinum fyri 2015/16, sum var 59 t.kr., bókað í 2016. Tilsamans 118 t.kr.

### Rakstrarútreiðslur
Fyri allar undirkonturnar uttan 03. NORA er flytingarkostnaður bókaður á stuðulsjáttanina. Landsgrannskoðanin heldur, at útreiðslurnar av at flyta pening fyri limagjøldini er ein rakstrarútreiðsla, sum átti at verið hildin av ráðnum.

***Landsgrannskoðanin heldur, at umsitingargjøld skulu rindast av játtanini hjá UVMR.***

### Játtanarslag
Uttanríkistænastan umsitur millumtjóða samstarv. Endamálið við játtanini er at rinda limagjald fyri at vera í ymiskum millumtjóða felagsskapum. Heimild er fyri útgjøldunum, og goldið verður eftir uppkrøvum.

Sambært játtanarlógini verður rakstrarjáttan brúkt, tá ið endamálið við játtanini fyrst og fremst verður rokkið við virksemi, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslurnar í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur.

Sambært fíggjarlógini fevna uttanríkismál undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum um millumtjóða samstarv. Limaskapur í millumtjóða samstarvi kann tískil metast sum ein partur av virkseminum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og endamálið við játtanini verður rokkið við m.a. limaskapi í millumtjóða felagsskapum. Útreiðslurnar av at vera í millumtjóða samstarvi kunnu samanberast við aðrar rakstrarútreiðslur, tí tær standast av virkseminum hjá stovninum.

***Landsgrannskoðanin heldur, at limaskapur í millumtjóða samstarvi er partur av virkseminum hjá UVMR.***

## 8.3.2 Neyðhjálp og menningarsamstarv

Játtaðar eru 3,5 mió.kr. á tveimum høvuðskontum.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.13.3.02. | Neyðhjálp | 1.000 | 1.000 |
| 13.13.3.04. | Menningarsamstarv | 2.500 | 2.500 |
| | **Tilsamans** | **3.500** | **3.500** |

***Uttanríkis- og vinnumálaráðið umsitur stuðlar til neyðhjálp v.m.***

### Menningarsamstarv
Endamálið við játtanini er at útinna Ll. nr. 44/2007 "um altjóða menningarsamstarv", hvørs endamál er at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við millum annað at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi. Sambært fíggjarlógini verður samstarvað

við sjálvbodnar felagsskapir, bæði her heima og uttanlands og við altjóða stjórnarfelagsskapir. Harumframt verður játtanin nýtt til at gagnnýta føroyska vitan og at fáa føroyingar at starva sum altjóða ráðgevar.

Stuðul verður bert latin eftir umsókn. Nærri ásetingar um viðgerð av umsóknum og treytir fyri stuðli eru ásettar í K. nr. 72/2008 "um altjóða menningarsamstarv".

Eftir kunngerðini um stuðulsjáttan krevst bert serstøk viðgerð, tá ið talan er um umfatandi stuðulsskipanir, sum sambært § 16 í kunngerðini eru 5 mió.kr. ella størri.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað fýra verkætlanir; um málsviðgerð er farin fram, sum ásett í K. nr. 72/2008. Onki var at finnast at.

***Ein nevnd letur landsstýrismanninum ráð.***

Sambært § 4 í lógini um menningarsamstarv, skal ein nevnd fyri menningarsamstarv geva landsstýrismanninum ráð, hvussu hann kann fremja lógina í verki, og í stk. 3, er ásett, at landsstýrismaðurin ger fyriskipan fyri virksemi nevndarinnar. Fyriskipanin varð sett í verk 1. november 2007. Nevndin varð seinast vald á heysti í 2015.

Okkara stakroyndir vístu, at kannaðu málini eru løgd fyri ráðgevandi nevndina, og at fundarfrágreiðingar við tilmæli til landsstýrismannin eru gjørdar.

Í kunngerðini um menningarsamstarv er ikki ásett tíðarfreist fyri, nær frágreiðingar og áteknaður roknskapur saman við grannskoðanarprotokoll skulu latast ráðnum. Tá ið játtanin er ein stuðulsjáttan, er tíðarfreistin sostatt ásett í § 22, stk. 2, pkt. 7, í kunngerðini um lógarbundna- og stuðulsjáttan at vera 1. apríl árið eftir, at stuðulin var latin.

### *Standardsáttmálar*

Tá ið avgerð er tikin um at veita stuðul, skrivar Uttanríkis- og vinnumálaráðið avtalu við stuðulsmóttakaran á standardskjalið "Grant Agreement 2016", har móttakarin gongur undir treytirnar hjá ráðnum. Stakroyndirnar vístu, at Grant Agreement var nýtt sum standard sáttmáli í øllum kannaðu málunum.

### *Útgjald*

Stuðulin verður vanliga goldin út frammanundan. Uttanríkis- og vinnumálaráðið ger skrivliga avtalu við hvønn stuðulsmóttakara sær um frágreiðingar og roknskap. Harumframt ger ráðið stakroyndir av verkætlanum, ið ráðið hevur stuðlað.

Landsgrannskoðanin hevur kannað hesi útgjøld til verkætlanir í 2015:

*kr.*

| Verkætlan | Upphædd |
|---|---|
| "Strengthening Rural Health Systems for Improved Maternal and Child Health in Narok Country, Kenya 3rd year" | 373.170 |
| "Control of active and blinding Tranchoma in North and South Ari, South Omo, Ethiopia hjá felagsskapinum AMREF Health Africa UK" | 292.000 |
| "SAT 7 – Kids Channel" til verkætlanina "My School" at gera undirvísingartilfar til børn í flóttafólkalegum í Libya | 166.060 |
| Come v/Paula Nolsøe | 24.000 |

Vit kannaðu um frágreiðingar og grannskoðaðir roknskapir eru latnir ráðnum, eftir at verkætlanirnar eru lidnar. Onki var at finnast at.

## Neyðhjálp

***Sjálvbodnir hjálparfelagsskapir býta út neyðhjálpina.***

Endamálið við játtanini er at veita neyðhjálp, tá ið vanlukkur brádliga raka úti í heimi. Hjálpin verður vanliga latin frammanundan gjøgnum sjálvbodnar hjálparfelagsskapir sum t.d. Reyða Kross og altjóða stjórnarfelagsskapir sum Heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu Tjóðum og World Food Programme. Gjøgnum ársfrágreiðingar og

roknskapir hjá felagsskapum fær Uttanríkis- og vinnumálaráðið at vita, hvussu peningurin er nýttur. Ráðið arbeiðir við at orða reglur og mannagongdir fyri umsiting av stuðulsjáttan til neyðhjálp.

Øll upphæddin er í juli 2016 goldin Reyða Krossi til manngóða neyðhjálp í Sýria. Landsstýrismaðurin ger av, hvørjum játtanin skal latast, og hvussu hjálpin verður latin. Ráðið hevur ikki mannagongdir ella reglur um, hvussu neyðhjálp kann latast, men tryggjar sær, at peningurin kemur á rætta stað við at lata hjálpina gjøgnum stórar altjóða felagsskapir.

### 8.3.3 Gjald fyri seismisk kanningarloyvi

Játtaðar eru 75 t.kr. á høvuðskontu 13.32.1.04. "Gjald fyri seismisk kanningarloyvi".

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.32.1.04. | Gjald fyri seismisk kanningarloyvi | -75 | -75 |

Gjøldini eru heimilað í Ll. nr. 31/1998 "um kolvetnisvirksemi". Feløg rinda 75 t.kr. fyri loyvi at gera seismiskar kanningar, umframt eitt ómaksgjald á 10 t.kr. til Jarðfeingi.

Jarðfeingi umsitur játtanina. Grannskoðanin av játtanini er tikin við í grannskoðanina av Jarðfeingi fyri 2016

Í frágreiðing okkara í 2013 helt Landsgrannskoðanin ikki, at her er talan um eina stuðulsjáttan í týdninginum, sum er útgreinaður í § 24 í játtanarlógini. Jarðfeingi var samt við Landsgrannskoðanini og skuldi taka málið upp við Vinnumálaráðið í sambandi við fíggjarlógina fyri 2014. Játtanin er enn stuðulsjáttan.

***Landsgrannskoðanin heldur, at talan er ikki um stuðulsjáttan.***

### 8.3.4 Havbúnaðarroyndir

Roknskapur og játtan 2016:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.36.1.04. | Havbúnaðarroyndir | 9.500 | 9.500 |

Játtanin er stuðulsjáttan til gransking og menning á P/f Fiskaaling og til at fíggja granskingarverkætlanir, sum P/f Fiskaaling er partur av. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum verða flestu granskingarverkætlanirnar gjørdar í samstarvi við onnur lond.

***Játtanin er til P/f Fiskaaling.***

Ráðið ger eina trý ára avtalu um granskingarvirksemi. Avtalan skal endurnýggjast í 2017 fyri komandi trý ára skeiðið. Roknskapur verður gjørdur fyri hvørja verkætlan sær.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið kallar nevndina fyri P/f Fiskaaling inn til fundar, har kvartárligi roknskapurin verður lagdur fram saman við frágreiðing um virksemi og ætlanir.

15. juni 2017 fekk ráðið avrit av grannskoðaða roknskapinum 2016 frá P/f Fiskaaling.

### 8.3.5 Ymiskur studningur

Roknskapur og játtan 2016 á høvuðskontum:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.37.2.02 | Vinnuframagrunnurin | 3.200 | 3.200 |
| 13.37.2.04 | Endurgjald til skipasmíð | 6.038 | 6.574 |
| 13.37.2.11 | Íverksetarahúsið í Klaksvík | 1.100 | 1.100 |
| 13.37.2.16 | Kolagrevstur | 700 | 700 |
| | **Tilsamans** | **11.038** | **11.574** |

*Vinnuframagrunnurin*
Vinnuframagrunnurin varð stovnaður við Ll. nr. 81/2001 ”um Vinnuframagrunn”. Endamál grunsins er at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og menna burðardyggar føroyskar fyritøkur. Játtaða stuðulsupphæddin verður goldin út eina ferð árliga, tá ið Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum roknskapi og eftirmeting av árinum frammanundan.

Vinnuframi ger á hvørjum ári uppskot um, hvussu stuðulin skal raðfestast. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hyggur, um virksemið, sum greitt er frá í grannskoðanarprotokollini, sær rímiligt út. Grannskoðaður roknskapur er latin ráðnum 10. juli 2017.

*Endurgjald til skipasmíð*
Endamálið við játtanini er at lata landsstýrismanninum fíggjarliga heimild at veita føroyskum skipa- og bátasmiðjum 8% í studningi av sáttmálaprísinum til at nýbyggja og umbyggja flótandi eindir. Materiella heimildin er Ll. nr. 73/1996 “um studning til skipasmiðjur”. Við K. nr. 61/2002 eru treytirnar útgreinaðar, og Vinnuframagrunnurin gjørdur umsitingarmyndugleiki.

Í fíggjarlógini 2016 vóru játtaðar 2,6 mió.kr. til stuðul til skipasmíð. Í eykajáttanarlóg fyri september varð játtanin hækkað 3.174 t.kr., orsakað av nógv øktum játtanartørvi. Í eykajáttanarlóg fyri desember vóru játtaðar 800 t.kr., soleiðis at samlaða játtanin fyri 2016 var 6.574 t.kr.

Fyri at staðfesta játtanartørvin tekur Vinnuframi upp samband við allar skipa- og bátasmiðjur fyri at vita, hvør tørvurin á stuðli fer at verða. Hesar upplýsingar verða síðani latnar ráðnum.

***Stuðulin latin, tá ið verkætlan er liðug.***

Ongin tíðarfreist er at lata roknskap inn fyri verkætlanir, ið fáa stuðul eftir reglunum um stuðul til skipasmíð. Stuðulin verður ikki latin, fyrr enn verkætlanirnar eru lidnar, og kravdu skjølini eru komin Vinnuframa í hendi. Við at gjalda afturút verður vandin fyri tapi hjá landskassanum lítil ella ongin, um verkætlanin ikki gerst liðug.

Landsgrannskoðanin kannaði 6 av 14 innkomnum málum. Vit kannaðu, um krøvini í K. nr. 61/2002 fyri at veita stuðul eru lokin, og um málsviðgerð fer fram av umsóknunum. Samanumtikið vóru allar kravdar upplýsingar og fylgiskjøl í málunum.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað 4 útgjøld í 2016, um útgjøldini eru í tráð við ásettu reglurnar, at samsvar er millum játtaðan og útgoldnan stuðul, og um útgjøldini eru í tráð við kunngerðina um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Onki var at finnast at.

*Íverksetarahúsið í Klaksvík*
Goldnar eru 1,1 mió.kr. í 2016. Grannskoðaður roknskapur er latin ráðnum í mai 2017.

*Kolagrevstur*
Jarðfeingi umsitur játtanina. Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til kolagrevstur saman við grannskoðanini av Jarðfeingi.

### 8.3.6 Útlán

Ongin játtan er til endamálið.

*kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.37.6.01. | Lánsafturgjald | -17.682 | 0 |

Sambært fíggjarlógini er talan yvirhøvur um afturgjald av lánum hjá Húsalánsgrunninum, Ídnaðargrunninum og Menningargrunninum, sum Íløgugrunnurin, Grunnur Ferðavinnurnar og Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál lótu. Flestu lán eru afturgoldin.

### 8.3.7 Ferðavinna

Í 2016 eru játtaðar tilsamans 15,9 mió.kr.:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|---|
| 13.38.5.02. | P/f Visit Faroe Islands | 13.400 | 13.400 |
| 13.38.5.03. | Limagjald NATA | 500 | 500 |
| 13.38.5.05. | Marknaðarføra Føroyar | 1.965 | 2.000 |
| | **Tilsamans** | **15.865** | **15.900** |

*P/f Visit Faroe Islands*

Ferðaráð Føroya varð endurstovnað við Ll. nr. 56/2011. Í 2014 var P/f Visit Faroe Islands stovnað, og virksemið hjá Ferðaráðnum varð lagt í nýstovnaða felagið. Játtanin er til rakstur av partafelagnum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið ger tvey ára avtalu við P/f Visit Faroe Islands og fylgir upp kvartárliga, har virksemið og fíggjarliga støðan verða umrødd. Sambært ráðnum verður avtalan eftirhugd árliga.

***Ógreiða um freistir at lata roknskapir inn.***

Ársroknskapur skal sendast ráðnum í seinasta lagi 1. juni sambært avtaluni, hóast tíðarfreistin sambært kunngerðini um stuðulsjáttan er 1. apríl. Sambært ársfrásøgn fyri 2015 varð aðalfundurin hildin 14. juni 2016, har roknskapurin varð góðkendur. Roknskapurin kann tí ikki hava verið ráðnum í hendi áðrenn 1. juni. Sambært avtaluni skal stuðulin, sum P/f Visit Faroe Islands fær, framganga av fíggjarstøðuni. Í ársfrásøgnini fyri 2015 er ongin ábending um stuðul ella um stødd av stuðli í fíggjarstøðuni. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevði ikki fingið avrit av protokollini.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið hevur fingið avrit av protokollini.

*Limagjald til NATA*

***Ferðavinnusamstarv.***

NATA er ferðavinnusamstarv millum Føroyar, Grønland og Ísland. Skipan og virksemi er staðfest í avtalu millum londini, sum varð sett í gildi 1. januar 2011. Avgreiðslustovan er í Føroyum og er skipað undir Ferðavinnufelagnum, sum er felag undir Vinnuhúsinum. Føroysku umboðini í NATA eru ferðavinnustjórin í Føroyum, sum er føddur limur, og eitt umboð fyri P/f Atlantic Airways.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. til árligt limagjald í NATA, sum Føroyar við avtaluni hava bundið seg til at rinda fyri samstarvið.

Sjálvstøðug frágreiðing hevur ikki verið gjørd um virksemið hjá NATA. Í 2016 varð farið undir at gera frágreiðing um virksemið. Frágreiðingin fyri 2016 er send P/f Visit Faroe Islands.

NATA letur eisini stuðul til verkætlanir. Í grannskoðaðu ársfrásøgnini fyri samstarvið er yvirlit yvir stuðlaðu verkætlanirnar. Sambært skrivaranum hjá NATA verða sjálvstøðugir roknskapir gjørdir fyri hvørja verkætlan, sum NATA hevur stuðlað.

Grannskoðaða ársfrásøgnin fyri 2016 varð góðkend av nevndini í NATA á fundi 21. mars 2017. Grannskoðarin gevur roknskapinum blanka átekning. Sambært avgreiðslustovuni verður roknskapurin sendur P/f Visit Faroe Islands og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum áðrenn 1. apríl árið eftir, sum eisini er ásett í pkt. 7 í avtaluni og fylgir § 22, stk. 2, punkt 7, í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

NATA hevur í januar 2016 sent P/f Visit Faroe Islands rokning áljóðandi 500.000 kr. fyri limagjald 2016. Rokningin er goldin í februar 2016.

*Marknaðarføra Føroyar - heimildir*

Sambært fíggjarlógini er játtanin partur av málsøkinum, Ferðavinna. Av undirkontu 01. "Innanlands" verður stuðul latin til produktmenning og til økisferðavinnu, og av undirkontu 02. "Uttanlands" verður stuðul latin ferðavinnuni at marknaðarføra Føroyar, sum liður í krónu fyri krónu skipan. P/f Visit Faroe Islands umsitur høvuðskontuna.

Stuðul til økisferðavinnufeløg

K. nr. 84/2002 "um stuðul til økiferðavinnufeløg" varð lýst við heimild í Ll. nr. 155/2001. Sambært kunngerðini kundu økisferðavinnufeløg fáa stuðul frá Ferðaráð Føroya, um feløgini uppfyltu treytirnar í kunngerðini; m.a. at viðtøkurnar hjá feløgunum skuldu góðkennast av Ferðaráð Føroya og skuldu innihalda ásettar upplýsingar. Í 2006 varð lógin tikin av við lóg, ið eisini ásetti í § 2, stk. 2, at kunngerðin verður framvegis í gildi, til hon verður sett úr gildi við kunngerð frá landsstýrismanninum.

Ongin nýggj kunngerð varð lýst við heimild í lógini frá 2011 um Ferðaráð Føroya.

Í 2014 varð virksemið hjá Ferðaráð Føroya við Ll. nr. 62/2014 lagt í P/f Visit Faroe Islands, og lógin frá 2011 varð sett úr gildi. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður víst til, at játtanin til ferðavinnuna í Føroyum í 2013 var m.a. stuðul til limagjald í NATA, til økisferðavinnu og til krónu fyri krónu skipanina, og at Ferðaráðið umsat hesar tríggjar konturnar. Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at hesar játtanir framhaldandi verða hildnar uttan fyri vanliga virksemið hjá partafelagnum. Orsøkin er sambært uppskotinum, at talan er um myndugleikauppgávur, sum eitt partafelag ikki eigur at hava fulla heimild yvir.

Stuðul til økisferðavinnu hevur formliga verið partur av føroysku ferðavinnuni, síðani lógin um Ferðaráð Føroya kom í gildi í juni 1990. Tá varð kunngerð um stuðul til kunningarstovur lýst við heimild í lógini. Skipanin, at Ferðaráð Føroya hevur umsitið stuðulin til marknaðarføring, er flutt við restini av virkseminum hjá Ferðaráðnum yvir til P/f Visit Faroe Islands.

Umsiting av stuðli til ferðavinnufeløg

Kunngerðin um stuðul til ferðavinnufeløg, sum upprunaliga hevði heimild í lógini um Ferðaráð Føroya, røkkur ikki til nýstovnaða partafelagið. Stuðulsumsitingin í partafelagnum er ikki undirløgd almennum reglum. K. nr. 125/2011 "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan" er galdandi fyri játtanirnar, men umsitingin liggur uttan fyri myndugleikan.

Í Búskaparskipan landsins er stjórin á P/f Visit Faroe Islands stovnsleiðari og hevur heimild at gjalda út av høvuðskontu 13.38.5.05. "Marknaðarføra Føroyar" og 13.38.5.03. "Limagjald NATA". Stjórin er ikki í starvi hjá myndugleikanum og røkir tískil ikki eina myndugleikauppgávu.

***Ógreið heimild at lata stuðul.***

Heimildin fyri at lata stuðulin er ikki greið. Av tí at umsitingin og avgerðin um at lata stuðul framvegis liggur hjá P/f Visit Faroe Islands, og at stjórin í felagnum er skrásettur stovnsleiðari í Búskaparskipan landsins, er fyrisitingin og avgerðarheimildin delegerað til P/f Visit Faroe Islands innan fyri myndugleika.

***Myndugleikaupp-gávur útintar av P/f Visit Faroe Islands.***

Landsgrannskoðanin ivast í, um landsstýrismaðurin kann fremja óskipaða delegatión av avgerðarheimildini til P/f Visit Faroe Islands. Felagið umsitur stuðulin sambært kunngerð, har ásett er, at landsstýrismaðurin skal taka støðu til at lata stuðul; lógin, har kunngerðin var heimilað, er ikki í gildi longur. Eftir kanningunum hjá Landsgrannskoðanini at døma, so tekur P/f Visit Faroe Islands sjálvt avgerðina. Vit hava mælt landsstýrismanninum til at kanna heimildarnar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað er helst rætt, at ongin heimild er at lata P/f Visit Faroe Island umsita stuðulsjáttanirnar. Uttanríkis- og vinnumálaráðið ætlar at umskipa økið og avtaka hesar stuðulsjáttanir frá 1. januar 2018.

### 8.3.8 Marknaðarføring av Føroyum

Í 2016 eru játtaðar 2 mió.kr. til Marknaðarføring av Føroyum; 1.525 t.kr. á undirkontu 01 “Innanlands” og 475 t.kr. á undirkontu 02 “Uttanlands”.

#### 01. Innanlands

Sambært fíggjarlógini verður játtanin latin til produktmenning og økisferðavinnu innanlands.

Eftir avtalu millum økisferðavinnufeløgini og P/f Visit Faroe Islands verður stuðulsupphæddin býtt millum økisferðavinnufeløgini. Sambært P/f Visit Faroe Islands verður stuðulin latin feløgunum í tveimum. Fyrsta ársfjórðingsgjaldið verður goldið, uttan at frágreiðing um virksemið er gjørd, og grannskoðaður roknskapur er latin inn. Tey írestandi ársfjórðingsgjøldini verða síðani goldin í einum, tá ið grannskoðaður roknskapur er latin P/f Visit Faroe Islands.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroynd kannað 3 útgjøld í 2016 fyri at staðfesta, um frágreiðing um virksemið hjá økisferðavinnufelagnum er latin P/f Visit Faroe Islands saman við grannskoðaðum roknskapi. Onki var at finnast at.

#### 02. Uttanlands

Endamálið við játtanini er at lata ferðavinnuni stuðul til at marknaðarføra Føroyar sum liður í eini krónu fyri krónu skipan.

***Marknaðarføring uttanlands.***

*Umsiting*

Í 2016 komu 13 umsóknir inn, har søkt varð um 1.354 t.kr. Stuðul varð játtaður til 7 verkætlanir fyri tilsamans 475 t.kr. Útgoldnar vóru 426 t.kr. til 5 verkætlanir. Í tveimum førum var stuðul játtaður, sum ikki varð goldin í árinum.

Verður umsókn gingin á møti, fær umsøkjari játtandi svarskriv, har treytirnar fyri stuðlinum eru ásettar. Dømi um treytir eru, at umsøkjari fylgir egnum ætlanum fyri verkætlanina, at útreiðslurnar eru skjalprógvaðar, og at grannskoðari váttar, at uppgerðir samsvara við játtanartreytirnar. Treytirnar fyri útgjaldi eru, at P/f Visit Faroe Islands hevur fingið grannskoðaðan verkætlanarroknskap og neyva skrivliga frágreiðing og eftirmeting av tiltakinum. Góðkendur roknskapur skal latast P/f Visit Faroe Islands í seinasta lagi 1. november 2016.

Verður umsóknin ikki játtað, fær umsøkjari noktandi svar við grundgeving. Landsgrannskoðanin hevur kannað eitt játtandi og eitt noktandi svar. Onki var at finnast at.

*Útgjøld*

Stuðul verður játtaður og útgoldin í sama ári. Stuðulin verður bert goldin út um grannskoðað uppgerð av kostnaðinum og frágreiðing um verkætlanina fyriliggja. Verkætlanirnar skulu vera framdar í fíggjarárinum og allur stuðul skal vera avgreiddur fyri ársenda.

Vit kannaðu trý útgjøld í 2016; um goldið er út eftir ásettu reglunum, samsvar er millum játtaðan og útgoldnan stuðul, og um útgjaldið er í tráð við kunngerðina um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Tvey útgjøld høvdu vit onki at finnast at.

*Ov nógv útgoldið í stuðli*

Í oktober 2016 eru 46 t.kr. goldnar í stuðli til verkætlanina “A Handful of Stories”. Saman við útgjaldingarskjalinum er grannskoðanarváttan av uppgerðini undirskrivað 16. september 2016 av løggildum grannskoðara, við niðurstøðuni: “*Tað er okkara uppfatan, at uppgerðin av verkætlanini viðvíkjandi A Handful of Stories – The Old Cemetery er røtt*”. Ítøkilig frágreiðing og eftirmeting av verkætlanini dagfest 25. september 2016 er viðløgd.

Sambært grannskoðaðu uppgerðini er samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina 46 t.kr. P/f Visit Faroe Islands hevur greitt frá, at í umsóknini varð samlaði kostnaðurin mettur at verða 120 t.kr. Søkt varð um 69 t.kr., og játtaðar vórðu 50 t.kr. Útgoldna upphæddin er 46 t.kr.

*Ov nógvur stuðul útgoldin.*

Tá ið P/f Visit Faroe Islands fekk uppgerðina frá grannskoðaranum, hevur felagið yvirsæð, at útreiðslurnar til alla verkætlanina einans vóru 46 t.kr. P/f Visit Faroe Islands segði, at tað er ein feilur at rinda alla upphæddina, og at rætta stuðulsupphæddin skuldi verið 23 t.kr. Landsgrannskoðanin mælti P/f Visit Faroe Islands at krevja ov nógv goldna peningin aftur.

Í juni 2017 greiðir P/f Visit Faroe Islands frá, at tey hava samskift við stuðulsmóttakaran, sum hevur sagt, at talan var um eina misskiljing, í mun til, hvussu tølini eru sett upp, og at samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina var hægri enn tað, sum grannskoðaða uppgerðin vísti. Stuðulsumsøkjarin hevði eisini gjørt P/f Visit Faroe Islands vart við, at verkætlanin var mett til 120 t.kr., og at hann skuldi fáa øll skjølini grannskoðað av nýggjum.

Í nýggju uppgerðini hevur umsøkjarin tikið virðismett eginavrik við. Tann uppgerðin vísir, at verkætlanin kostar 106 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur spurt P/f Visit Faroe Islands, um felagið góðtekur virðismett eginavrik sum útreiðslu, ið gevur rætt til stuðul av krónu fyri krónu leistinum. P/f Visit Faroe Islands hevur svarað, at egin løn til verkætlanina kann ikki roknast sum útreiðsla í sambandi við stuðulin. Tey vísa á, at í hesari verkætlanini eru tað ikki útreiðslur til eginavrik hjá umsøkjaranum, men til eginavrik hjá øðrum persóni, sum hevur verið partur av verkætlanini.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at vandin fyri, at landið rindar fleiri ferðir fyri sama eginavrik, stingur seg upp, tá ið annað enn skjalfestar beinleiðis útreiðslur liggja til grund fyri stuðlinum.

Landsgrannskoðanin mælir landsstýrismanninum til at áseta reglur um, hvat kann roknast við í grundarlagið at játta stuðul eftir, fyri at byrgja upp fyri, at ivi stingur seg upp um stuðulsgrundarlagið.

*Ov nógv goldin upphædd skal krevjast aftur.*

*Stuðul kann ikki latast fyri eginavrik.*

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur ikki heimild vera at rinda pening út til eginavrik. Ráðið heldur, at tað er púra greitt, at endurgjald verður útgoldið fyri skjalprógvaðar útreiðslur, og at tað er peningur og ikki roknað eginvirðið. Ráðið heldur tí, at ov nógv útgoldni stuðulin eigur at verða afturgoldin.

### 8.3.9 Eftirmeting av stuðli

Sambært § 13 í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan, skal endamálið við at veita stuðul vera ásett í einari endamálsgrein í heimildarlógini, samanber § 25 í játtanarlógini. Í stk. 2 er ásett, at í viðmerkingunum til heimildarlógina skal, so neyvt sum gjørligt, verða sagt frá, hvørjar fyritreytir verða settar at uppfylla endamálið og møguliga, hvussu ein seinni eftirmeting av stuðulsskipanini kann verða gjørd.

Vit hava spurt, hvussu ráðið eftirmetir stuðulsskipanirnar undir § 13 í fíggjarlógini.

## 8.4 Jarðfeingi (LG 2016/213-0321)

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 grannskoðað Jarðfeingi. Jarðfeingi fyrisitur, granskar, ráðgevur og breiðir út kunnleika um kolvetni og jarðfrøðilig náttúruvirði. Stovnurin umsitur rakstrarjáttanirnar “Jarðfeingi” og “Marknaðarføring av land-

grunninum til kolvetnisleiting", og stuðulsjáttanirnar "Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi" og "Kolagrevstur". Harafturat umsitur stovnurin "Víddargjøld", sum eru skrásett á § 20.

### Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin hjá Jarðfeingi er frá 2014, og er ikki dagførd síðani.

*Keyp*

Jarðfeingi hevur ikki biðið um prís frá fleiri veitarum, tá ið tey hava keypt t.d. konsulenttænastur og projektleiðaraskeið fyri 25 til 50 t.kr. Sambært stjóranum ber ikki til at biðja um prís frá fleiri, tá ið talan er um sertænastur, ella tænastur, ið eru treytaðar av ávísum persóni.

Jarðfeingi rindar upp til 2.000 kr. fyri fartelefon fyri hvørt starvsfólk. Stovnurin hevur fingið MVG-ið av fartelefonunum afturborið frá landskassanum av allari keypsupphæddini. Vit mæltu til, at MVG'ið av partinum hjá starvsfólkunum verður rindað av starvsfólkunum.

*Inntøkur*

Jarðfeingi selur tænastur til virkir og kommunur. Niðanfyri er yvirlit yvir inntøkurnar hjá stovninum:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -828 | -1.186 | -698 | -2.091 | -1.326 |
| 25 | Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -945 | -243 | -675 | -1 | -10 |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | 0 | 0 | 0 | -4 | 0 |
| 63 | Vanligar flyt.innt. | -1.682 | -1.957 | -949 | -263 | -1.989 |
| 65 | Flyt.innt. úr útlandinum | 0 | 0 | 0 | 55 | 0 |
| | **Tilsamans** | **-3.455** | **-3.386** | **-2.322** | **-2.304** | **-3.325** |

Inntøkurnar frá sølu av tænastum í 2016 eru frá oljufeløgum, Eystur- og Sandoyartunlar og Tórshavnar Havn. Inntøkurnar fyri eftirlits og umsjónaravgjøld eru minkaðar niður í nærum onki.

Árini 2012 til 2015 eru skrásetingarnar undir vanligum flytingarinntøkum fyri tað mesta flytingar av upphæddum úr fíggjarstøðuni, svarandi til kostna av verkætlanum, ið hava fingið fremmanda fígging. Í 2016 er størsti parturin umsitingargjald frá verkætlanum.

Við árslok 2016 var samlaða skuldaraáognin hjá Jarðfeingi 95 t.kr. Stovnurin hevur avskrivað slakar 43 t.kr.

*Peningastovnskonta*

Jarðfeingi hevur peningastovnskontu við gjaldkorti, sum er skrásett í Búskaparskipan landsins. Kontan verður gjørd upp eina ferð um mánaðin. Vit stemmaðu kontuna av við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

### KT viðurskifti

***Váðameting og trygdarpolitikkur eru ikki gjørd.***

Jarðfeingi hevur ikki egnar KT skipanir. Stovnurin goymir allar dátur á Landsneti. Jarðfeingi hevur SLA við Landsnet. Vit mæltu til, at Jarðfeingi ger váðameting sambært rundskrivi frá Vinnumálaráðnum. Jarðfeingi hevur boðað frá, at tey fara at gera váðameting í ár.

Í 2013 kunnaði Jarðfeingi um, at stovnurin fór at gera skrivligar mannagongdir um trygdartiltøk. Reglurnar eru ikki gjørdar.

### Lønir

Vit kannaðu við stakroyndum, um lønirnar hjá tveimum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

Jarðfeingi hevur reglur um tímaskráseting við møguleika fyri +30/-15 tímum. Meginreglan er, at yvirskotstímar skulu avspákast. Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan váttar, at tímarnir, ið goldið verður fyri, eru rættir.

***Jarðfeingi gevst at stempla arbeiðstíð.***

Jarðfeingi hevur boðað frá, at stovnurin rindar næstan ongantíð yvirtíð og hevur ongar ætlanir um at fara at gera tað. Jarðfeingi ætlar at fara burtur frá at stempla arbeiðstíð og ætlar at strika reglurnar um loyvda yvir- og undirtíð.

Í juli 2017 hevur landsstýrismaðurin vístá, at tað gongur ikki fram av ásetingunum í roknskaparkunngerðini, hvat hóskandi tíðarskráseting er, men at tað er eyðsæð, at okkurt slag av grundarlagi má vera undir lønarútgjaldingum til tess at tryggja, at arbeiðsgevarin fær avtalaðu veitingina fyri avtalaðu lønina.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum fer Jarðfeingi yvir til avriksstýring, sum inniber, at fylgt verður við, hvørt settu málini verða rokkin, og at tey verða rokkin til ásettu tíðina.

***Uttanríkis- og vinnumálaráðið mælir til at føra yvirlit yvir sjúkrafráveru og feriu.***

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur, at tað er upp til stovnsleiðsluna at skipa arbeiðið á stovninum og tryggja, at tíðarskrásetingin er í samsvari við ásetingina í roknskaparkunngerðini, og at tað er samsvar millum nýtta arbeiðsorku og útgoldna løn. Ráðið hevur ongar viðmerkingar til, at stovnurin fer yvir til avriksstýring, um leiðslan heldur, at tað er best egnað til stovnin, men heldur tó, at nýggja skipanin eigur at verða eftirmett t.d. eftir einum ári. Uttanríkis- og vinnumálaráðið mælir tó til, at Jarðfeingi førir yvirlit yvir sjúkrafráveru og feriu.

## Verkætlanir

Frá 2014 hevur Jarðfeingi havt serskilda undirkontu til stuðulsfíggjaða virksemið. Inntøkur og útreiðslur eru skrásettar á undirkontuna, men tá ið árið er av, eru úrslitini av einstøku lidnu verkætlanunum flutt til vanliga raksturin. Landsgrannskoðanin mælti til, at inntøkur og útreiðslur til stuðulsfíggjaðar verkætlanir, bara verða skrásettar á undirkontuna, stuðulsfíggjað virksemi. Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við tí tilmælinum.

### *EduArtic*

Verkætlanin hevur fingið stuðul frá European Union's Horizon 2020 research and innovation programme. Verkætlanin byrjaði 1. mai 2016 og varir í 3 ár. Hon er fíggjað við 13,4 mió.kr.; føroyski parturin er 2,1 mió.kr.

Í mai 2016 fekk Jarðfeingi slaka 1,1 mió.kr. til verkætlanina og hevur brúkt 207 t.kr. í 2016. Munurin í millum inntøkuna og nýtsluna er fluttur til fíggjarstøðuna.

Jarðfeingi sendir stuðulsveitaranum uppgerð 6. hvønn mánaða. Uppgerðirnar verða ikki váttaðar av nøkrum, men sambært Jarðfeingi ger yvirskipaði verkætlanarleiðarin á EduArtic viðmerkingar til uppgerðina.

### *InterAct*

Í 2013 kannaðu vit m.a. verkætlanina, InterAct, ið Jarðfeingi hevur verið við í saman við øðrum londum. FP7 játtaði Jarðfeingi 2 mió.kr. í stuðli. Verkætlanin skuldi verða liðug í desember 2014. Landsgrannskoðanin staðfesti, at tað bar ikki til at sanna, at roknskapurin fyri verkætlanina var rættur, tí Jarðfeingi hevði ikki bókað allan kostnaðin út á verkætlanir.

***Ikki fullfíggjaður roknskapur fyri verkætlan í BSL.***

Í januar 2017 bað Landsgrannskoðanin um endaligan roknskap fyri verkætlanina. Vit fingu uppgerð, ið verkætlanarleiðarin hevur latið FP7. Sambært uppgerðini hevur verkætlanin kostað 2.076 t.kr. Jarðfeingi hevur søkt um og fingið 1.421 t.kr. frá FP7.

Jarðfeingi hevur ikki gjørt fullfíggjaðan roknskap fyri verkætlanina í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin kann tí ikki sanna, at roknskapurin er rættur.

### 8.4.1 Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi

Stuðulsjáttanin er á høvuðskontu 13.32.1.04. Feløg rinda 75 t.kr. fyri loyvi at gera seismiskar kanningar, umframt 10 t.kr. í ómaksgjaldi til Jarðfeingi. Tað hava ikki verið tær stóru inntøkurnar seinastu árini.

Roknskapartøl 2012 til 2016:

*t.kr.*

| St.kt. | Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -225 | -300 | -300 | 0 | -75 |

### 8.4.2 Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetnisleiting

Rakstrarjáttanin er á høvuðskontu 13.32.1.05. Við Ll. nr. 41/2014 eru lógirnar um 1., 2. og 3. útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum broyttar. Við lógini fekk landsstýrismaðurin heimild at nýta pening, sum loyvishavari hevur latið aftur, ella fer at lata aftur, til marknaðarføring av leitimiðum kring Føroyar.

***Peningur til marknaðarføring av leitimiðum kring Føroyar.***

Sambært viðmerkingunum til § 1 í lógini kann landsstýrismaðurin við serstakari játtan í fíggjarlógini lata Jarðfeingi 1.567 t.kr., sum ENI hevur rindað landskassanum í sambandi við, at felagið lat sítt loyvi inn, til eina miðvísa marknaðarføring av leitimiðum kring Føroyar.

Roknskapir fyri Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetnisleiting 2014 til 2016 og játtan 2017:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2014 | 2015 | 2016 | J 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 314 | 492 | 489 | 500 |
| 14-19 | Keyp | 643 | 267 | 566 | 450 |
| 64 | Aðrar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | -950 |
| 65 | Flyt.innt. úr útlandinum | -957 | -259 | -1.055 | 0 |
| | **Tilsamans** | **0** | **500** | **0** | **0** |

Inntøkurnar sambært talvuni omanfyri eru goldnar av játtanini “Víddargjøld oljuvinna”. Í 2014 og 2015 er peningurin fluttur frá verkætlanini ENI førleikapengar. Í 2016 eru 350 t.kr. fluttar av verkætlanini ENI og 705 t.kr. av verkætlanini Statoil førleikapengar til marknaðarføring.

Í juli 2017 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at felagið ENI ynskti at lata landið yvirtaka umsitingina av førleikapengunum, tá ið felagið lat leitiloyvið innaftur.

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2016 hevur marknaðarføringin í 2014 verið fult fíggjað og í 2015 partvíst fíggjað við peningi frá gjaldi, sum loyvishavarar hava rindað í grunn til førleikamenning, og sum hevði avlopspening eftir at nýta, tá loyvini gingu út. Avtalað varð, at avlopspeningur frá grunni til førleikamenning fult út fíggjar marknaðarføringina í 2016. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2017 stendur, at avtalan er við oljuvinnufelagið.

***Landið yvirtikið umsitingina av førleikapengum.***

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum arbeiddi Landsstýrið um sama mundið við at kveikja áhugan fyri oljuleiting á føroyska landgrunninum aftur. Til tess at fíggja marknaðarføringina av føroyska landgrunninum, varð hildið, at ENI-pengarnir kundu nýtast til partvísa fígging av hesi verkætlan. Í fíggjarlógini 2014 varð verkætlanin 100% inntøkufíggjað, meðan játtanin fyri 2015 varð partvíst inntøkufíggjað við ENI-pengunum. Tað var orsøkin til, at tað bert var munurin millum játtan og samlaðar útreiðslur, sum varð endurgoldin av ENI-pengum í 2015.

### 8.4.3 Aðrar inntøkur, víddargjøld oljuvinnan

Á játtanini 20.52.3.10. “Aðrar inntøkur” í fíggjarlógini eru víddargjøld til oljuvinnuna skrásett á undirkontu 11. Seinastu 5 árini hava inntøkurnar verið:

*t.kr.*

| St.nr. | Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 139424 | Víddargjøld oljuvinna | -16.644 | -21.581 | -16.565 | -2.137 | 0 |

***Peningur frá oljufeløgum til útbúgvingar.***

Partur av inntøkunum frá oljufeløgum skuldi bera kostnaðin av hægri ástøðiligari og verkligari útbúgving av starvsfólki hjá føroyskum myndugleikum og almennum stovnum og føroyskum fyritøkum til tess at veita hesum hóskandi útbúgving innan olju- og gassídnaðin. Peningurin frá oljufeløgunum er fluttur til fíggjarstøðuna á hesari játtanini, og hevur seinastu 5 árini verið:

*t.kr.*

| Verk. | Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7106 | Inngoldið av Sindri | -22.934 | -26.790 | -28.352 | -27.585 | -22.580 |
| 7107 | Umhvørviskanningar | -5.846 | -7.041 | -8.236 | -8.463 | -8.323 |
| 7141 | ENI-Førleikapengar (ekst.) | -1.567 | -1.567 | -610 | -351 | 0 |
| 7147 | Statoil førleikapengar | 0 | 0 | 0 | -3.000 | -2.295 |
| 7150 | Statoil L008 | 0 | 0 | 0 | 0 | -3.984 |
| 7151 | DONG - Førleikapengar | 0 | 0 | 0 | 0 | -1.050 |
| | **Tilsamans** | **-30.347** | **-35.398** | **-37.198** | **-39.399** | **-38.233** |

Peningur, inngoldin av ENI og Statoil er nýttur til marknaðarføring, og tað, sum er nýtt av Sindri peninginum, er farið til verkætlanir hjá Jarðfeingi.

### *Sindri pengar*

***Sindri pengar til Jarðfeingi.***

Í reglugerð hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum fyri nýtslu av Sindri peningi frá august 2016 er allýsing av Sindri, og upplýst er, at fæið, ið loyvishavarar hava rindað árliga á kontu hjá Jarðfeingi, var 27,2 mió.kr. ultimo 2015.

Jarðfeingi umsitur peningin, ger avtalur við umsøkjarar um verkætlanir og tryggjar, at peningurin verður nýttur til verkætlanir av týdningi fyri framtíðar oljuleiting í Føroyum. Í reglugerðini er ásett, at verkætlanir hjá Jarðfeingi, ið skulu fíggjast frá Sindri, skulu góðkennast av Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og at Jarðfeingi sendir ráðnum umsókn við somu treytum, ið aðrir umsøkjarar skulu lúka. Tíðarnýtslan verður avroknað við 890 kr./tíman.

Í juli 2017 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at til tess at tryggja, at Jarðfeingi ikki kemur í eina støðu, har stovnurin játtar pening til sín sjálvs, hava Jarðfeingi og Uttanríkis- og vinnumálaráðið gjørt avtalu um, at ráðið skal góðkenna umbønirnar frá Jarðfeingi um pening til verkætlanir úr Sindri. Jarðfeingi viðger umbønir frá øðrum umsøkjarum.

Niðanfyri er yvirlit yvir verkætlanir hjá Jarðfeingi, sum stovnurin hevur søkt Uttanríkis- og vinnumálaráðið um at fáa Sindri pengar til at fíggja:

*t.kr.*

| Dagf. | Verkætlan | |
|---|---|---|
| 160816 | Gosgrýtissøgan | 1.068 |
| 160816 | Seismisk kortlegging | 1.371 |
| 160816 | Kortlegging av móðurgrýti | 875 |
| 180816 | Deep burials | 350 |
| 200816 | Endurmeting av Marjun | 400 |
| 211016 | Fyrireiking av djúpari landboring 1./3 | 838 |
| | **Tilsamans** | **4.902** |

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í desember 2016 boðað Jarðfeingi frá, at ráðið góðkennir umsóknirnar. Tað var fyrstu ferð hesin framferðarháttur varð nýttur, og tí var neyðugt at finna ein hóskandi leist. Jarðfeingi hevur í januar 2017 flutt peningin til stuðulsfíggjaða virksemið hjá Jarðfeingi.

## 8.5 Sjóvinnustýrið (LG 2015/206-0351)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Sjóvinnustýrinum. Sjóvinnustýrið hevði roknskaparreglugerð, sum fevndi um Skipaskrásetingina og Skipaeftirlitið. Uttanríkis- og vinnumálaráðið tók undir við, at tað varð formaliserað, hvør hevði heimild at seta og loysa fólk úr starvi, og hvør hevði heimild til at játta yvirtímar.

Sjóvinnustýrið brúkar tíðarskrásetingina Totalview; starvsfólkini skráseta, nær tey koma og fara, fráveru og feriu. Landsgrannskoðanin mælti til, at mørkini fyri flexsaldur verða ásett í innanhýsis reglunum. Sjóvinnustýrið segði, at tey fóru at verða sett í Dygdarhondbókina.

Í august 2017 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at reglugerðin seinast er broytt í oktober 2015. Sambært reglugerðini setir stjórin starvsfólk. Ásett er, eisini at starvsfólk skulu skráseta arbeiðstíð í Totalview. Meirtímar verða avspákaðir ella útgoldnir sambært avtalu. Ásett er, at flexsalda +50/-20 tímar er loyvd.

Sjóvinnustýrið hevði ikki ognaryvirlit. Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ognaryvirlit er gjørt í juni 2016.

Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umsitingin hjá Sjóvinnustýrinum í Tórshavn var flutt í onnur hølir. Í Vágunum var umsitingin fyribils flutt í onnur hølir orsakað av soppi.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at stovnurin húsast framvegis í fyribilshølum.

***Sjóvinnustýrið húsast enn í fyribils hølum.***

## 8.6 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2016/213-0373)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Rúsdrekkasølu landsins, fyri m.a. at kanna innanhýsis mannagongdir, og um roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av virksemi stovnsins.

Rúsdrekkasøla landsins verður rikin eftir Ll. nr. 20/1992 “um innflutning og sølu av rúsdrekka” og K. nr. 144/1992 “um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins”. Játtanin er á høvuðskontu 13.37.3.01. Rúsdrekkasølan er landsfyritøka; tí er kravið um lønarkarm ikki galdandi. Í 2016 var nettojáttanin 16.848 t.kr. Seinastu árini hevur yvirskotskravið verið støðugt:

*t.kr.*

| Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 105.152 | 105.152 | 105.152 | 105.152 | 102.152 |
| Rakstrarinntøkur | -122.000 | -122.000 | -122.000 | -122.000 | 119.000 |
| **Tilsamans** | **-16.848** | **-16.848** | **-16.848** | **-16.848** | **-16.848** |

Sambært Búskaparskipan landsins hava inntøkur og útreiðslur seinastu 5 árini verið:

*t.kr.*

| St.kt. | | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 12.065 | 11.612 | 12.540 | 12.843 | 13.285 |
| 14 | Keyp av vørum og tæn. | 87.770 | 86.219 | 87.543 | 91.837 | 93.388 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 1.188 | 1.496 | 260 | 1.700 | 1.397 |
| 16 | Leiga, viðlíkah.og skattur | 2.291 | 2.286 | 2.507 | 2.609 | 2.746 |
| 19 | Ymsar rakstrarútr. | 161 | 120 | -130 | 11 | -13 |
| 21 | Søla av vørum og tæn. | -120.325 | -118.507 | -119.286 | -125.766 | -127.438 |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | 0 | -2 | -78 | -89 | -96 |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | 1 | 1 | 4 | 1 | 0 |
| 67 | Rentuinnt. og vinningsbýti | 0 | 0 | -11 | -3 | 0 |
| 76 | Innanh.flyt.m.alm.stovn. (innt) | 0 | -81 | 0 | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **-16.849** | **-16.856** | **-16.650** | **-16.856** | **-16.732** |

### Roknskaparviðurskifti

*Roknskaparreglugerð er frá 2007, og er ikki dagførd síðani.*

Roknskaparreglugerðin hjá Rúsdrekkasøluni er frá 2007 og er ikki dagførd síðani. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at dagføra roknskaparreglugerðina, soleiðis at hon svarar til tað, sum verður gjørt á stovninum.

Rúsdrekkasølan hevur skipaðan innanvirkis roknskap, sum er býttur í deildir og lokatiónir. Uppbýtið í deildir vísir kostnaðin av deildunum í einum deildarroknskapi, soleiðis at leiðslan sær kostnaðin av hvørjari deild sær. Lokatiónsuppbýtið knýtir seg at vørum. Høvuðsskrivstovan ber umsitingarliga kostnaðin av deildunum.

Rúsdrekkasølan brúkar egna búskaparskipan til skrásetingar av keypi og sølu, og allar hendingar tí viðvíkjandi, herundir MVG og umsitingarkostnað av stovnsrakstrinum, t.d. ferðaútreiðslur. Lønir verða tó goldnar í felags lønarskipanini hjá Gjaldstovuni.

### Flyting av bókingum frá Navision til Búskaparskipan landsins

*Egin búskaparskipan eigur at verða stongd samstundis sum BSL verður stongd.*

Kontubrúgv er gjørd millum egnu búskaparskipanina, Navision, og Búskaparskipan landsins, soleiðis at allar kontur í Navision hava tilknýtt eitt standardroknskapar-kontunummar í Búskaparskipan landsins.

Rúsdrekkasølan hevur eina skipaða tilgongd til at flyta roknskapartøl millum egna búskaparskipan og Búskaparskipan landsins, men steingir ikki roknskapartíðarskeiðini í Navision. Tað hevur við sær, at vandi er fyri, at bókað verður í farnum tíðarskeiði, eftir at stovnurin hevur rapporterað til Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Rúsdrekkasølan steingir tíðarskeiðini í Navision samstundis, sum stovnurin rapporterar til Búskaparskipan landsins. Stovnurin hevur svarað, at tey eru sjáldan klár at rapportera og lata tíðarskeiðini aftur, tá ið Gjaldstovan letur aftur fyri bókingum í Búskaparskipan landsins ímillum 8. og 10. í mánaðinum. Stovnurin leggur afturat, at alt, sum skal skrásetast, er ikki avgreitt um hetta mundi.

Sambært Rúsdrekkasøluni fara tey at umrøða við Uttanríkis- og vinnumálaráðið, um tey kunnu vera ein mánað afturút við at rapportera tøl til Búskaparskipan landsins.

### Stakroyndir av skjølum

Vit hava við stakroyndum kannað nøkur bókingarskjøl, sum Rúsdrekkasølan flýggjaði okkum. Vit kannaðu grundarlagið undir konteringarskjalinum, herundir upphæddir, konteringar, um tænastuveitarin er sannlíkur og um rokningin er stílað til Rúsdrekkasøluna.

Fleiri rokningar lúka ikki treytirnar í roknskaparkunngerðini, um at skrásetingar skulu verða prógvaðar við einum skjali, ið prógvar viðskifti, ið eru skrásett í bókhaldinum. Viðvíkjandi útreiðslum til t.d. matstovur er neyðugt at upplýsa í hvørjum sambandi útreiðslan er hildin, og hvør/hvørji hava luttikið.

*Mælt er til, at viðmerkja í hvørjum sambandi útreiðslur eru hildnar.*

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Rúsdrekkasølan viðmerkir á rokningar og kvittanir, í hvørjum sambandi útreiðslurnar verða hildnar og er talan um matstovu-rokningar at viðmerkja, hvør var við.

### Keyp og kreditorar

Kreditorar hjá Rúsdrekkasøluni eru føroyskir og útlendskir veitarar, ið afturvendandi veita vørur og tænastur til Rúsdrekkasøluna. Stjórin og bókhaldið kunnu skráseta kreditorar.

Sambært roknskaparkunngerðini skal útgjaldsmannagongdin verða løgd soleiðis til rættis, at starvsfólkaligur skilnaður er millum skráseting og útgjald.

Stjórin hevur greitt frá, at innkeypsdeildin og fíggjardeildin skráseta, meðan stjórin og bókhaldarin saman gjalda út. Tað skulu altíð vera tvey um at góðkenna gjaldingar í netbankanum.

### Ferðauppgerðir

Rúsdrekkasølan rindar starvsfólkum kilometurpening sambært almennu reglunum fyri at nýta egnan bil til arbeiðsørindi. Vit kannaðu tríggjar ferðauppgerðir. Onki var at finnast at.

Vit kannaðu eina ferðauppgerð hjá stjóranum fyri ferðing uttanlands. Vit fingu svar upp á nakrar spurningar og høvdu annars onki at finnast at.

***Landsgrannskoðanin mælir til at brúka uppgerðarskjøl hjá Gjaldstovuni.***

Landsgrannskoðanin mælti stovninum til at nýta uppgerðarskjølini hjá Gjaldstovuni bæði til innan- og uttanlands ferðauppgerðir.

### Søla og skuldarar

Rúsdrekkasølan selur rúsdrekka til privatpersónar, skeinkistød, veitingarfeløg og útgerðarfeløg. Sambært roknskaparreglugerðini er øll søla kontant. Loyvt er tó at selja upp á borg til skeinkiloyvishavarar.

Sambært roknskaparreglugerðini gera kassafólkini kassarnar upp og leiðarin eftirkannar teir.

Landsgrannskoðanin hevur avstemma skrásettu skuldararnar í egnu búskaparskipan Rúsdrekkasølunar við Búskaparskipan landsins um ársskifti. Onki var at finnast at.

Kundar, sum keypa upp á borg, skulu veita trygd. Sambært veittuv trygdunum kann Rúsdrekkasølan taka pening beinleiðis av trygdini, um tað gerst neyðugt.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað skuldara saldurnar í búskaparskipan Rúsdrekkasølunar við bókhaldið hjá skuldarunum. Onki var at finnast at.

***Munur í skuldarasaldum.***

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað skuldarasaldurnar í búskaparskipan Rúsdrekkasølurnar við bókhaldið hjá skuldarunum um ársskifti 2016. Munir vóru í tveimum førum. Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið frágreiðing um annan munin, og fer at venda aftur til Rúsdrekkasøluna.

### Goymsla

Innkeypsleiðarin bíleggur vørur til høvuðsgoymsluna. Tá ið vøran er komin, stemmar høvuðsgoymslan av og bókar hana inn á goymsluna. Um munur er á, kunnar goymslan innkeypsleiðaran ella skrivstovuna.

Deildirnar runt landið bíleggja vørur frá høvuðsgoymsluni. Høvuðsgoymslan bókar vørurnar út, so hvørt tær fara av goymsluni. Tá ið vøra kemur út á deildirnar, telja deildirnar vørurnar og stemma tær av við bíleggingina.

#### *Brotlistar*

Defektar vørur verða skrásettar í brotlistum. Deildirnar senda sínar brotlistar til høvuðsgoymsluna, saman við tí brotnu vøruni. Leiðarin á goymsluni eftirkannar saman við einum starvsfólki frá skrivstovuni, um brotlistarnir stemma við tær brotnu vørurnar. Skrivstovan bókar síðani brotlistan og sendir avrit til deildarleiðaran.

#### *Útrokningar av kostprísum*

Goymslan er virðisásett við støði í kostprísi, ið verður roknaður sum: Keypsprísur + frakt + avgjald. Avgjaldið er lógarbundið og verður ásett, alt eftir um talan er um vín, spiritus ella øl. Virðið á goymsluni við árslok 2016 er sambært Navision 14 mió.kr., sum eisini samsvarar við Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin hevur eftirroknað kostprísin á 5 vørum. Vit høvdu nakrar spurningar, men fara at venda aftur til Rúsdrekkasøluna viðvíkjandi kostprísi og innrokning av vørum.

Rúsdrekkasølan hevur greitt frá, at vørurnar verða mettar eftir FIFO prinsippinum, og við atliti at kostprísinum viðger stovnurin tær soleiðis. Goymslur eru á 10 ymiskum støðum, ið hava vørur ymiskar í aldri. Samanumtikið er talan um ein vigaðan miðalprís av øllum vørum á goymslu.

### Meirvirðisgjald

Rúsdrekkasøla landsins er MVG-skrásett. Landsgrannskoðanin hevur kannað, um tølini fyri 2016, ið eru latin til TAKS, samsvara við bókhaldið.

Størsti parturin av søluni er MVG-skyldug, tó at nakað verður selt uttan MVG. Samlað er MVG-uppgerðin til TAKS fyri 2016:

| | *kr.* |
|---|---|
| **Heiti** | |
| Sølu-MVG | 29.948.820 |
| Keyps-MVG | 27.933.069 |
| **At gjalda** | **2.015.751** |
| MVG-frí søla | 9.996.070 |

Í 2016 vóru inntøkurnar sambært Búskaparskipan landsins 127,4 mió.kr. Upphæddin er bert fyri rúsdrekka, og ikki aðrar tænastur so sum pant, útkoyring, ómaksgjøld o.a., hóast MVG eisini er á teimum vørunum og tænastunum.

Sambært innanhýsis MVG-avstemmanini hjá Rúsdrekkasøluni stemmar sølu-MVG'ið.

Sambært uppgerðunum fyri 1. til 4. ársfjórðing 2016, er MVG-fría sølan 9.996.070 kr. Sambært innanhýsis MVG-avstemman hjá Rúsdrekkasøluni er MVG-fría sølan í minsta lagi 10.138.317,12 kr. Landsgrannskoðanin spurdi, hvat veruliga MVG-fría sølan fyri 2016 átti at vera, og bóðu vit eisini um eina útgreining av upphæddini.

***Feilur í uppgerð av MVG-fríari sølu.***

Í august 2017 hevur Rúsdrekkasølan greitt frá, at tey hava gjøgnumgingið meirvirðisgjaldið og staðfest, at tey hava givið ov lítið upp í MVG-fríari sølu 2016, og at rætta talið er 10.285.642 kr. Orsøkin til feilin sigur Rúsdrekkasølan vera, at bókingar, ið ikki eiga at verða tiknar við í uppgerðina, eru tiknar við. Sambært stjóranum hevur stovnurin gjørt teknisku uppsetingina saman við KT veitaranum, og hevur uppsetingin tikið onkrar postar við, ið hon ikki átti at tikið við.

Rúsdrekkasølan hevur greitt frá, at MVG-fríar sølukontur verða ikki brúktar, men at vørur verða bókaðar við og uttan MVG á somu sølukontu.

Landsgrannskoðanin fer at taka málið um MVG-fríu søluna upp aftur við Rúsdrekkasøluna.

### Lønir

Um 60 fólk starvast hjá Rúsdrekkasølu landsins. Áleið helvtin eru fastlønt. Í 2016 vóru lønarútreiðslurnar 13,3 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur kannað lønarumsitingina. Vit kannaðu grundarlagið fyri lønunum, og um tær eru rættar.

Stovnurin nýtir Totalview at skráseta tímar. Øll starvsfólk skulu stempla inn, tá ið tey koma til arbeiðis og stempla út, tá ið tey fara.

Starvsfólkini í handlunum arbeiða í vaktum. Vaktirnar eru settar í Totalview við ásetta talinum av tímum fyri vaktina. Normeraða tímatalið skal vera miðaltímatalið yvir eitt tríggjar vikur tíðarskeið.

Leiðarin kann áleggja úrtíð. Starvsfólk skulu avtala við leiðaran og sølu- og tænastuleiðaran, hvat arbeiðið fatar um, og hvussu tað skal avroknast.

Leiðararnir fáa ein lønarkarm, sum teir skulu halda. Uppundir mánaðarligu lønarkoyringarnar eftirkanna leiðararnir tímarnar og geva sølu- og tænastuleiðaranum boð um, um tímasaldurnar eru rættar, áðrenn lønarkoyringarnar verða gjørdar.

Starvsfólk kunnu eiga tímar, svarandi til arbeiðstíð í eina viku tilgóðar ella skylda eina viku. Landsgrannskoðanin hevur kannað tímasaldurnar 30. november 2016. Saldurnar lógu ímillum +65 og -34 tímar. Sølu- og tænastuleiðarin kannar, at tímasaldurnar eru innan fyri avtalaða markið. Tó kemur fyri, at bráfeingis meirarbeiði ger, at onkur salda verður hægri enn ásetta markið.

*Stakroyndir av lønarútgjøldum*

Við støði í lønarútgjaldingunum í november 2016 kannaðu vit fýra lønarmál. Í tveimum lønarmálum manglaðu lýsing, umsókn o.l. Landsgrannskoðanin mælti til at hava fullfíggjaðar upplýsingar í starvsfólkamálunum, soleiðis at skjøl í setanartilgongdini og aðrar upplýsingar av týdningi fyri setanina verða goymdar skipað.

### Peningastovnskontur

Vit samanbóru saldurnar á peningastovnskontuavritinum pr. 31. desember 2016 og 30. juni 2017 við saldurnar í Navision og Búskaparskipan landsins. Samsvar var ímillum saldurnar 31. desember 2016.

Sambært Rúsdrekkasøluni varð 6. tíðarskeið 2017 innrapporterað 17. juli 2017. Tá stemmaðu peningastovnskonturnar pr. 30. juni 2017.

Tvey fyrrverandi starvsfólk høvdu fulltrú í hvør sínum peningastovni. Í august 2017 hevur stjórin kunnað um, at fulltrúirnar eru strikaðar.

### Kassa- og goymslueftirlit

Seinasta árið hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum av deildum Rúsdrekkasølunar. Vit stemmaðu dagligu søluna av við bókhaldið og peningastovnskonturnar og stemmaðu goymslurnar á sølustøðunum av við goymsluyvirlitið í høvuðsbókhaldinum. Um ársskiftið gjørdu vit eftirlitsteljingar av høvuðsgoymsluni. Hóast smávegis munir, hava vit onki at finnast at.

# 9 Samferðslumál

## 9.1 Samferðslumálaráðið (LG 2016/217-0111)

Í oktober 2016 hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað roknskapin hjá Samferðslumálaráðnum. Endamálið var at kunna okkum um roknskaparreglugerðina hjá stovninum og við stakroyndum at kanna lønarútreiðslur, ferðauppgerðir og aðrar útreiðslur.

**Roknskaparreglugerð**
Samferðslumálaráðið varð sett á stovn í september 2015. Samferðslumálaráðið hevur eina roknskaparreglugerð.

**Lønir**
7 fólk starvast í Samferðslumálaráðnum. Játtanin er 4,5 mió.kr. í 2016, harav 3,7 mió.kr. eru til lønir. Ráðið brúkar klokkuskipanina Totalview. Reglur um flextíð eru í roknskaparreglugerðini, og har er lýst, hvussu yvirtíð og skyldugir tímar skulu verða avroknað. Reglurnar áseta m.a., at flexsaldan ikki má fara út um +30/-30 tímar.

Við støði í lønarútgjaldingunum í 2016 grannskoðaðu vit trý lønarmál. Landsgrannskoðanin hevði viðmerkingar til tað eina málið.

*Setan av løgfrøðingi*
Lønarmálið byrjaði tíðliga í 2016, tá ið Samferðslumálaráðið søkti eftir løgfrøðingi. Umsóknarfreistin var 1. apríl, og 26. mai fekk umsøkjarin starv frá 1. september 2016 at rokna.

Samferðslumálaráðið søkti síðani eftir barsilsavloysara, og 6. juli 2016 varð avloysari settur at byrja 1. september. Frá september rindaði Samferðslumálaráðið bæði starvssetta og avloysaranum løn.

Landsgrannskoðanin spurdi landsstýrismannin, um tað áður er komið fyri, at ein løntakari hevur tikið við einum starvi og fer í farloyvi við løn frá 1. degi. Landsgrannskoðanin spurdi eisini, hvussu ráðið tulkar óarbeiðsføri, vísandi til § 7 í BLF sáttmálanum, sum sigur: *"Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði við løn í 24 vikur tilsamans at rokna frá tí, at starvskvinnan gerst óarbeiðsfør, tó í fyrsta lagi 8 vikur undan mettum barnsburði."*

***Landsstýrismaðurin svaraði ikki spurningi um starvssetan.***

Vit fingu ikki beinleiðis svar.

Sambært vegleiðingini hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum frá 23. september 2016 punkt 2.3, hevur kvinna rætt til fulla løn undir barsilsfarloyvi í samanlagt 24 vikur. Vikurnar skulu nýtast samanhangandi og teljast frá tí, at kvinnan gerst óarbeiðsfør ella í seinasta lagi, tá ið hon hevur átt, og 24 vikur fram.

***Starvsfólk hjá SMR betri sømdir enn fakfelagssáttmálar áseta.***

Landsgrannskoðanin undrast á, at Samferðslumálaráðið hevur rindað starvsfólki fulla løn undir barsli – útyvir 24 vikur tilsamans eftir barnsburð, og harvið hevur givið einum

løntakara hjá sær betri sømdir, enn sáttmálarnir, sum Fíggjarmálaráðið hevur gjørt, gera.

### Uttanlands ferðauppgerðir

Landsgrannskoðanin mælti til neyvari eftirlit við ferðauppgerðunum. Vit kannaðu nakrar uppgerðir fyri ferðir uttanlands. Vit mæltu til at lýsa ørindini við ferðini neyvari og vísa til, hvørjar dagar fundirnir eru hildnir, nær ráðstevna byrjar og endar, ella á annan hátt at greiða frá døgunum, ið ferðin varir.

Í uppgerðunum, sum vit hava kannað, er ikki altíð drigið frá fyri kost goldnan av øðrum. Tað kundi borið okkum til at staðfest, um uppgerðirnar vóru rættar, um t.d innbjóðing ella skrá fyri fundir vórðu løgd við ferðauppgerðunum.

Feilur var í einari uppgerð, tí ferðin var gjørd upp tvær ferðir. Samferðslumálaráðið hevur síðani rættað ferðauppgerðina.

Landsgrannskoðanin vísti á, at ferðir skulu verða gjørdar upp innan 3 vikur eftir heimkomu, og at ferðaloyvi eigur ikki at verða givið, um gamlar ferðir ikki eru avroknaðar. Dømi er um, at ferðir í november 2015 og januar 2016 eru gjørdar upp í apríl 2016. Tað kann verða orsøkin til, at útreiðslurnar ikki altíð svara til dagarnar, ið ferðin var.

***Hámark fyri gisting í Danmark ikki hildið.***

Ráðið heldur seg ikki innan fyri mest loyvdu upphæddina 1.008 kr. fyri gisting í Danmark. Síðani taksturin lækkaði 15. februar 2016, er bert ein gisting, har goldið er innan fyri ásetta markið. Sambært ráðnum er tað sera trupult at finna innivist fyri lægri kostnað enn ásett, og tí hevur ráðið goldið hesar meirútreiðslurnar.

### Aðrar útreiðslur

Við stakroyndum kannaðu vit roknskaparskjøl, um tey hoyra til stovnin og eru konterað sambært galdandi reglum. Onki var at finnast at.

### KT viðurskifti

Samferðslumálaráðið hevur ongar skipanir, sum liggja uttanfyri Landsnet. Vit spurdu, hvørji starvsfólk hava atgongd at lesa, skráseta og leysgeva í Búskaparskipan landsins. Sambært útskrift frá Gjaldstovuni hava bert viðkomandi starvsfólk rættindi í rokningaverkgongd. Onkur rætting skuldi tó gerast í atgongdini til Leiðslukunningarskipanina.

## 9.2 Brunaeftirlitið (LG 2016/217-0311)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin 2016 hjá Brunaeftirlitinum.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum kunnað um, at roknskaparreglugerð er gjørd fyri Brunaeftirlitið og góðkend av ráðnum.

Stovnurin var partur av váðametingini og trygdarpolitikkinum hjá Vørn. Samferðslumálaráðið hevur kunnað um, at farið verður í næstum undir at gera váðameting og trygdarpolitikk fyri Brunaeftirlitið.

Brunaeftirlitið hevur journalskipan, og stovnurin hevur eisini atgongd til gomlu málini í journalskipanini hjá Vørn. Sambært Samferðslumálaráðnum eru tey um at vera liðug at orða mannagongd fyri journalisering. Ognaryvirlitið skal eftir ætlan vera liðugt í september 2017.

Vit kannaðu tvær ferðauppgerðir. Vit høvdu onki at viðmerkja um upphæddirnar, men mæltu til, at t.d. fundar- ella arbeiðsskráir framyvir verða viðlagdar uppgerðunum og eisini skjalprógv fyri, um onnur rinda kost.

Vit kannaðu lønina hjá einum starvsfólki, um umsókn, starvslýsing, prógv og setanarsáttmáli vóru í málinum. Harumframt kannaðu vit, um lønin verður goldin eftir røttum sáttmála og lønarstigi. Onki var at finnast at.

### Flyting av stovninum

Brunaeftirlitið er, frá 2017 at roknað, vorðið partur av Arbeiðseftirlitinum, og í 2017 er játtanin til stovnin á høvuðskontu 17.39.1.07. "Arbeiðseftirlitið".

Brunaeftirlitið hevur lagt orku í at fáa viðurskiftini úteftir, t.e. mótvegis borgarum og virkjum, at rigga, soleiðis at stovnurin kundi halda fram ótarnaður.

Vit kannaðu, um innbúgv, teldur, sjónvarpsskermar, kaffimaskina og fototól, ið eru keypt seinastu árini, vóru á staðnum. Onki var at finnast at.

## 9.3 Landsverk (LG 2015/203-0381)

Í 2016 kannaði Landsgrannskoðanin m.a. nakrar lønir hjá Landsverki. Vit høvdu onki at finnast at lønunum.

Sum grundgeving fyri at gera fráfaringaravtalur við starvsfólk í 2013 og 2014 vísti Landsverk til reglurnar hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum um uppsagnir.[11] Landsgrannskoðanin bað um skjalprógv fyri kostnaðinum av ávikavist fráfaringar-avtalunum og vanligum uppsøgnum. Landsverk svaraði við aftur at vísa til reglurnar hjá Lønardeildini.

Landsstýrismaðurin svaraði ikki spurningi okkara um, hvat tað kostaði at gera fráfaringaravtalur í mun til vanliga uppsøgn, men greiddi í juni 2016 frá, *"at starvsfólkamál eru ofta sera trupul, og hevur Lønardeildin tí gjørt eina nágreiniliga vegleiðing um uppsøgn, sum Landsverk hevur fylgt. Tað skuldi tryggjað starvsfólki virðilig kor í eini truplari støðu, sum er tað avgerðandi."*

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá kostnaðinum fyri ávikavist fráfaringaravtalu og kostnaðin av vanligari uppsøgn í tveimum ávísum málum í 2013 og 2014. Sambært landsstýrismanninum var munurin lítil:

***Landsverk vísir á, at lítil munur er á kostnaðinum at gera fráfaringaravtalur við starvsfólk, heldur enn at brúka avtalaðar uppsagnarreglur.***

*t.kr.*

| Starvsfólkamál 2013 | Fráfaringar-avtala | Vanlig uppsøgn |
|---|---|---|
| Løn (ávikavist 6 og 3 mánaðir) | 278 | 137 |
| Løn í uppsagnartilgongd (ávaring og hoyring 3 mánaðir) | 0 | 141 |
| Egin advokatkostnaður | 31 | 31 |
| Advokatkostnaður sambært avtalu | 25 | 0 |
| **Tilsamans** | **334** | **309** |

| Starvsfólkamál 2014 | Fráfaringar-avtala | Vanlig uppsøgn |
|---|---|---|
| Løn (ávikavist 5 og 3 mánaðir) | 338 | 152 |
| Løn í uppsagnartilgongd (ávaring og hoyring 3 mánaðir) | 0 | 152 |
| Hoyring (farið um mánaðarskifti 1 mánað) | 0 | 51 |
| Egin advokatkostnaður | 26 | 26 |
| **Tilsamans** | **364** | **381** |

[11] http://www.fmr.fo/media/4239/veglei%C3%B0ing-um-upps%C3%B8gn.pdf

Sambært talvunum kostaðu fráfaringarnar ávikavist 25 t.kr. meira og 17 t.kr. minni enn vanlig uppsøgn.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum boðað frá, at hann er samdur við Landsgrannskoðanina, at løn skal rindast sum løn. Landsstýrismaðurin leggur afturat, "*at Landsverk tekur tað sum givið, at fólk sum gera eitthvørt arbeiði fyri LV, og sum ikki eru í starvi á LV, geva inntøkuna upp til Taks. Um so er, at viðkomandi beinleiðis biður um, at rokningin skal rindast gjøgnum A-skattaskipanina, so verður tað gjørt. Tó so at fundarpeningur og ferðapeningur, sum verður goldin í sambandi við nevndararbeiði, verður rindað umvegis lønarskipanina hjá Gjaldstovuni.*"

### Inntøkufíggjað virksemi

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at útreiðslur, ið hoyrdu til stovnsraksturin hjá Landsverki, vórðu skrásettar á "Inntøkufíggjað virksemi". Landsverk hevði í 2015 víst til § 23, stk. 2, í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan", og helt seg hava heimild til at brúka yvirskot á inntøkufíggjaðum virksemi.

Landsgrannskoðanin tók undir við, at yvirskot frá inntøkufíggjaðum virksemi kann nýtast til rakstur av stovninum annars. Hóast tað játtanarliga er høvuðskontan, ið skal verða hildin, helt Landsgrannskoðanin, at útreiðslurnar skuldu skrásetast, har tær hoyra heima, og í hesum førinum var tað á raksturin hjá Landsverki.

Í juni 2016 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið var stórt sæð samt við Landsgrannskoðanina, at talan var um vanligar rakstrarútreiðslur, men at tá ið ein partur av starvsfólkunum hjá Landsverki bert arbeiðir við inntøkufíggjaðum virksemi, kundi partur av útreiðslunum møguliga bókast har.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum boðað frá, at skrásetingin er broytt soleiðis, at starvsfólkakostnaðurin verður skrásettur á deildirnar/undirkontur.

### Meirvirðisgjald

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit m.a., at tað var ymiskt, hvar Landsverk legði meirvirðisgjald á rokningar til stovnar. Landsverk legði MVG á fyri tænastur til almennar stovnar, har Landsverk ikki hevur ræðisrætt á játtanini. Sambært Landsverki hevði TAKS góðkent mannagongdina.

Í juni 2016 helt TAKS, at Landsverk var ikki í kapping við onnur, tá ið stovnurin veitti tænastu til sín sjálvs ella millum egnar deildir, men at tá ið stovnurin veitti tænastu til onnur uttan fyri stovnin sjálvan, skuldi MVG leggjast á tænastuna, um tænastan var í kapping við onnur vinnurekandi virki.

***Landsverk sigur seg halda seg til niðurstøðuna hjá TAKS um MVG.***

Landsgrannskoðanin undraðist á niðurstøðuna, sum m.a. innibar, at Landsverk hevði lagt MVG á sølu til t.d. Hjálpartólamiðstøðina og aðalráð, men ikki á aðra byggiráðgeving og -eftirlit hjá stovnum, har Landsverk hevur ræðisrætt á játtanini, t.d. Landssjúkrahúsið.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum kunnað um, at Landsverk heldur seg til niðurstøðuna hjá TAKS.

## 9.4 Landsverk, løgujáttanir (LG 2015/203-0381)

Í frágreiðingini 2015 umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av nøkrum løgujáttanum, ið Landsverk hevur ræðisrætt á.

### 9.4.1 Umvæling av almennum bygningum

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at tað vóru ikki ásettar nærri reglur, vegleiðingar ella mannagongdir um, hvørjar bygningar løgujáttanin, Umvæling av almennum bygningum, skuldi rinda fyri, ella hvat var at rokna sum umvæling, viðlíkahald og bjálving av almennum bygningum, enn tað, sum nevnt varð í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir til, at landsstýrið ger reglurnar.

#### Norðoya røktarheim

Tó at eldraøkið 1. januar 2015 varð flutt frá landinum til kommunurnar at umsita, hevði Landsverk skrásett útreiðslur til "Norðoya røktarheim" á løgujáttanina, Umvæling av almennum bygningum.

Landsverk vísti á, at bygningurin var landsins ogn, tí hann stendur á økinum hjá Sjúkrahúsinum, og at sama var við Suðuroyar sjúkrahúsi.

Í august 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at bygningarnir, Norðoya røktarheim og Suðuroyar røktarheim, fylgdu ikki við, tá ið eldraøkið varð flutt til kommunurnar at fyrisita og fíggja.

Sambært landsstýrismanninum var Norðoya røktarheim á matriklinum hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi, og Suðuroyar røktarheim á matriklinum hjá Suðuroyar sjúkrahúsi, sum eru bygningar, ið landið eigur. Røktarheimini eru í stóran mun samanbygdir og integreraðir partar av sjúkrahúsunum við fleiri felags funktiónum og útreiðslum.

***Býtið av útreiðslum millum land og kommunur enn ógreitt.***

Sambært Samferðslumálaráðnum arbeiddu avvarðandi partarnir við at finna eina praktiska loysn fyri býtinum av útreiðslunum. Prinsippið var, at kommunurnar rinda fyri rakstur og viðlíkahald av tí partinum av bygningunum, sum røktarheimini brúka.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá, at ongin avtala er gjørd. Sambært landsstýrismanninum er talan helst um eitt mál millum Almanna-málaráðið og Klaksvíkar kommunu.

### 9.4.2 Landssjúkrahúsið, útbygging

#### Ferða- og skeiðsútreiðslur v.m.

Landsverk hevur ræðisrættin á høvuðskontu 11.20.3.08. "Landssjúkrahúsið, útbygging" og kann gera av, hvørjar útreiðslur vórðu skrásettar á verkætlanina. Roknskapurin er grannskoðaður av statsautoriseraðum grannskoðanarvirki.

Á fakturunum frá Landsverki sást ikki, hvussu stórur partur var løn, og hvussu stórur partur var umsiting, men í einum rokniarki sást, at lønin var 335 kr. og umsitingin var 80 kr., samanlagt 415 kr. fyri tíman.

Sambært roknskaparreglugerðini hjá Landsverki vóru, umframt sáttmálalønina, allar beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur tiknar við, tá ið tímaprísurin fyri verkfrøðingar o.o. varð ásettur.

Landsgrannskoðanin undraðist á, at umsitingargjaldið ikki fevndi um útreiðslur til skeiðsgjøld og ferðing hjá starvsfólkunum hjá Landsverki.

Landsverk greiddi frá, at stovnurin skilti ímillum tey sokallaðu generellu skeiðini og tey skeið, sum vóru beinleiðis knýtt at einari ávísari verkætlan. Generellu skeiðini rindaði Landsverk, meðan hini rindaði verkætlanin beinleiðis.

Í august 2016 segði landsstýrismaðurin, at hann helt, at hátturin, sum Landsverk bókar skeiðsvirksemi, er nøktandi.

*Landsverk heldur, at uppáhaldið um at vandi er fyri, at løgujáttan rindar somu útreiðslur tvær ferðir, er eitt hugsað dømi.*

Landsgrannskoðanin er ikki samd við landsstýrismannin vísandi til, at Landsverk á henda hátt kann fáa rindað tvær ferðir fyri somu tænastu av játtanum, sum Landsverk sjálvt hevur ræðisrætt til; eina ferð gjøgnum sítt "overhead", og eina ferð við at bóka útreiðsluna beinleiðis á verkætlanina.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá, at sambært Landsverki hevur stovnurin ikki rindað nakra upphædd tvær ferðir fyri somu veiting í sambandi við skeið. Landsverk leggur afturat, at tá ið sagt verður, at Landsverk kann rinda tvær ferðir fyri somu tænastu, er tað eitt hugsað dømi.

### 9.4.3 Bústovnar o.a.

**Sambýli til sálarsjúk í Tórshavn**

Í juli 2016 kunnaði Landsverk um, at endalig uppgerð fyri kostnaðin av byggingini av sambýli til sálarsjúk í Tórshavn í mun til verklagslóg, mettan kostnað og tilboð var ikki gjørd enn.

*Sambýli kostaði 900 t.kr. meira enn játtað var í verklagslógini.*

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum boðað frá, at verkætlanin er liðug. Tað vóru játtaðar 20,8 mió.kr. til verkætlanina í verklagslógini, og nýtslan var 21,7 mió kr tilsamans.

### 9.4.4 Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu frágreiðing á fleiri viðurskifti hjá Landsverki. Landsverk, sum stendur fyri øllum byggingum hjá landinum, skrivaði rokningar til hesar byggikontur, váttaði og rindaði sjálvt til sín sjálvs. Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at ein vandi kundi vera í, at stovnar, sum umsita stórar játtanir, løgdu fyrisitingarútreiðslur á hesar játtanir. Tað kundi vera við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur, og veruligi fyrisitingarkostnaðurin varð tá fjaldur fyri Løgtinginum, t.d. var starvsfólkaveitsla bókað á inntøkufíggjað virksemi.

Landsverk hevði rindað 400 t.kr. fyri innlegging av ventilatión í bygningi, stovnurin leigaði, og sambært landsstýrismanninum var tað, fyri at leigan ikki skuldi fara upp.

Løgtingsgrannskoðararnir hildu, at avgerðin um at játta til útbúgving hjá stjóranum skuldi verðið tikin í samráði við aðalráðið, tí stjóri var í serligari støðu. Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað vera skeivt, at umsitarar av almennum pengum kundu játta til sín sjálvs.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) átalaðu løgtingsgrannskoðararnir harðliga viðurskiftini á Landsverki og mæltu landsstýrinum til at taka upp nevndu viðurskifti.

## 9.5 Strandfaraskip landsins (LG 2016/217-0382)

### 9.5.1 Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum til 2015

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á fleiri viðurskifti, sum ikki vóru nøktandi. Landsgrannskoðanin helt, at eftirlitsumhvørvið hjá Strandferðsluni var ov veikt, m.a. vantaðu skrivligar ásetingar og skjalfesting av teimum eftirlitum, ið leiðslan framdi, t.d. í sambandi við góðkenning av tíðarskeiðsroknskapunum. Strandferðslan var ikki samd og vísti á arbeiðsmannagongdirnar millum stjóran og fíggjarleiðaran á stovninum. Landsgrannskoðanin skuldi taka málið upp av nýggjum við Strandferðsluna.

Í 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at umsitingin av lønum hjá Strandferðsluni kundi vera sárbær. Táverandi grannskoðarin hjá Strandferðsluni hevði somu viðmerkingar í grannskoðanarprotokollini 10. februar 2014.

Strandferðslan hevði góðar 3 mió.kr. í skyldugum lønum til sjófólk, har nøkur áttu tímar nógv ár aftur í tíðina.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) vístu løgtingsgrannskoðararnir á, at stórir veikleikar høvdu verið við fíggjarstýringini hjá Strandferðsluni seinnu árini, og aftur nú komu nýggir veikleikar fram. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu fíggjarviðurskiftini hjá Strandferðsluni og mæltu landsstýrismanninum til at fáa viðurskiftini í rættlag.

### 9.5.2 Grannskoðan 2016

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin 2016 hjá Strandfaraskipum landsins. Endamálið var at kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar, m.a. um leiðslan hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit, sum tryggjar rættan roknskap, og at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

#### Innaneftirlit

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at eftirlitsumhvørvið hjá Strandfaraskipum landsins var ov veikt.

Strandferðslan hevur bøtt um innaneftirlitið og um skjalfestingina av átøkum, leiðslan ger í sambandi við roknskapargóðkenningar. Hvønn mánað samanheldur leiðslan nýtsluna við búskettið. Eisini leggur hon dent á at tryggja roknskapin og støðugt betra mannagongdir og eftirlit.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Strandferðslan steingir egnu fíggjarskipanina mánaðarliga samstundis sum Búskaparskipan landsins. Sambært Strandferðsluni er tað gjørt seinastu mánaðirnar, tó at tað onkuntíð hevur verið neyðugt at opna stongd tíðarskeið aftur, men ansað hevur verið eftir, at tað ikki ávirkar roknskapin.

***Egin búskaparskipan eigur at verða stongd samstundis sum BSL verður stongd.***

#### KT viðurskifti

Í 2017 hevur Strandferðslan orðað KT politikk og KT trygdarpolitikk. Stovnurin hevur eisini dagførda váðameting.

Strandferðslan stovnar og strikar brúkarar á Landsneti í AD hjá Landsneti við umbønum gjøgnum ServiceDesk skipanina. Tey nýta oyðubløð, váttað av stjóranum, til at stovna brúkarar í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin mælti í 2016 til, at mannagongdir til brúkarastýring verða gjørdar; tilmælið stendur við.

Í seinastu frágreiðing mælti Landsgrannskoðanin til, at stovnurin tryggjaði sær, at backup/restore/recovery virkaðu eftir ætlan. Tilmælið stendur við.

***Tilmælini um KT trygdarviðurskifti standa við.***

Tilmælið í seinastu frágreiðing um, at Strandferðslan ger change management mannagongdir stendur við.

Strandferðslan hevur, sum liður í at menna KT trygdina, gjørt vegleiðing um, hvussu nakrar av KT skipanunum skulu handfarast um ársskifti. Ársskiftisvegleiðingin er ikki fullfíggjað, men arbeitt verður víðari við tí.

Strandferðslan hevur stovnað Dropboxkontur at flyta lønardátur millum skipini og høvuðsskrivstovuna. Skipini hava hvør sína kontu, og lønarumsitarin eina. Skipanin við Dropboxkontunum heldur fram, inntil hon verður avloyst av VaktPlan á heysti 2017.

#### Roknskaparviðurskifti

Í juli 2017 hevur Strandferðslan sent dagførda roknskaparreglugerð til Samferðslumálaráðið til góðkenningar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin er nøktandi og verður góðkend av ráðnum.

## Egin búskaparskipan

Strandferðslan hevur sent formliga umsókn til Fíggjarmálaráðið um loyvi at brúka egna búskaparskipan.

***Formligt loyvi er ikki fingið til egna búskaparskipan.***

Stovnar, sum hava fingið loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at bóka í egnari búskaparskipan, skulu skrivliga lýsa skipanina, og hvussu umsetingin fer fram úr teirra skipan til Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at egna kontuskipanin og konteringarleiðbeiningin verða lýstar skrivliga, og at allar neyðugu avstemmingarnar verða skjalfestar.

### *Konteringar*

Sambært rundskrivinum um roknskaparreglugerðir er tað eitt grundleggjandi krav, at stovnur konterar sambært Kontuskipan landsins og eftir konteringarleiðbeiningini, ið hoyrir til.

***Skeivar konteringar gera, at roknskapurin hjá Strandferðsluni er ikki rættur.***

Nógvar skeivar konteringar eru í roknskapinum hjá Strandferðsluni 2016. Tað ger, at roknskapurin er ikki rættur, og at gjøgnumskygnið í roknskapinum verður gruggað. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at leiðslan setir tiltøk í verk fyri at fáa rættar konteringar. Strandferðslan er samd og hevur í juli boðað frá, at ein kontrollarafunktión verður sett á stovn, sum skal tryggja, at konteringarnar gerast rættari.

Dømi um skeivar konteringar eru:

- Leiga og eftirlitsgjald fyri bjargingarbátar og eldsløkkjarar er skrásett sum “Keyp av vørum”.
- Keyp av gassolju er skrásett sum “Matur og drykkjuvørur”.
- Farmaflutningur til Mykines er skrásettur sum “Flutningsútbúnaður”.
- Fleiri rokningar fyri mat eru skrásettar sum “Skrivstovuútbúnaður”.
- Keyp av bilum eru skrásett sum “Umvæling, viðlíkahaldsútr. av maskinum, innbúgvi og øðrum útbúnaði”.

## Inntøkur

Í seinastu frágreiðing nevndu vit m.a., at tað var torført at fylgja eftirlitsslóðini viðvíkjandi farmabrøvum. Tað bar illa til at staðfesta, at allur farmur varð faktureraður, og at sølan harvið var røtt. Sambært Strandferðsluni skrásetir farmastøðin í Tórshavn nú, hvør fær blokkar við farmabrøvum. Strandferðslan er samd við Landsgrann-skoðanini í, at mannagongdir vanta, sum tryggja, at størri ómakur verður lagdur í, tá farmabrøv verða útfylt.

Í juni 2017 staðfestu vit, at viðgerðin av farmabrøvum er óbroytt. Strandferðslan hevur boðað frá, at økið við farmabrøvum verður eftirhugt frá grundini, nú vandamikið góðs skal skrásetast neyvari.

## Keyp av vørum og tænastum

Sambært Strandferðsluni biðja tey altíð um prís frá fleiri veitarum til størri keyp. Stjórin vísti á serligu støðuna hjá Strandferðsluni, at stovnurin t.d. kann ikki keypa hillavøru, tá ið hann skal hava eykalutir til skip. Sambært stjóranum er neyvan nøkur kapping, sjálvt um tey biðja um prísir. Tá ið stovnurin søkir um eykajáttan til eina umvæling, upplýsa tey, hvussu nógv tey vænta, at umvælingin fer at kosta. Tað ger, at møguligir veitarar bjóða áleið ta upphæddina, ið biðið verður um.

### *Ferðing og flutningur innanlands*

***Ferðauppgerðir hjá Strandferðsluni eru ikki nøktandi.***

Strandferðslan er samd við Landsgrannskoðanina um, at ferðauppgerðirnar fyri ferðir innanlands eru ikki nøktandi. Sambært Strandferðsluni verður nú strammað upp.

Strandferðslan hevur rindað starvsfólki, ið búgva í Tórshavn, tíma- og dagpening og koyripengar fyri at ferðast frá Tvøroyri til Tórshavn. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at treytin, fyri at stovnurin kann rinda endurgjald, er, at starvsfólk hevur havt útreiðslur av at ferðast fyri arbeiðsgevaran.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið er samt við Strandferðsluni, at tá ið starvsfólk stovnsins verða send til Havnar í arbeiðsørindum fyri stovnin, so hevur tað ein meirkostnað við sær, sum eigur at verða endurrindaður eftir galdandi ásetingum.

*Ferðing og flutningur uttanlands*

Vit kannaðu við stakroyndum nakrar ferðauppgerðir uttanlands. Onki var at finnast at.

*Matur og drykkjuvørur*

Keyp av mati og drykkjuvørum er skrásett á StRk. 1430 og er býtt soleiðis:

*t.kr.*

| Endamál | Heiti | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|
| 0 | Ógreinað. | 65 | 79 | 86 |
| 1280 | M/B Silja Star | 3 | 0 | 0 |
| 1400 | Tekniska-/sjódeildin | 1 | 5 | 5 |
| 1500 | Ritan | 22 | 19 | 30 |
| 1520 | Sam | 32 | 34 | 38 |
| 1540 | M/B Jósup (Sp/f Mykines) | 0 | 0 | 12 |
| 1560 | Ternan | 313 | 272 | 383 |
| 1580 | Teistin | 441 | 342 | 526 |
| 1600 | Sildberin | 3 | 1 | 3 |
| 1620 | Smyril | 1.115 | 900 | 803 |
| 2000 | Bygdaleiðir | 1 | 0 | 0 |
| 3400 | Farstøðin Tórshavn | 0 | 0 | 3 |
| 4000 | Høvuðsskrivstovan | 83 | 65 | 91 |
| | **Tilsamans** | **2.079** | **1.717** | **1.979** |

Strandferðslan hevur greitt frá, at ein orsøk til hækkaðu útreiðslurnar frá 2015 til 2016 hjá Ternuni og Teistanum er, at manningartalið er økt. Í 2016 eru góðar 220 t.kr. skrásettar sum proviantur, sum áttu at verðið skrásettar aðrastaðni í roknskapinum. Strandferðslan tekur undir við, at talan er um skeiva kontering.

*Keyp av vørum annars*

***Ferðing, matur o.a. til starvsfólk er skrásett sum vørukeyp.***

Landsgrannskoðanin heldur, at útreiðslur til ferðing, mat o.a. hjá starvsfólki, kann ikki sigast at koma undir “Keyp av vørum annars”. Strandferðslan er samd og sigur, at frameftir verður ferðing innanoyggja bókað á StRk. 1410, og matur til starvsfólk, meðan siglt verður, verður bókaður á StRk. 1430.

Gjald til veitara av trygdarútgerð, viðmerkt “Lisingsgjald fyri bjargingarbátar” er eisini konterað undir “annað vørukeyp”.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Strandferðslan ikki hevur fingið loyvi at leasa bjargingarbátarnar.

*Postgjøld*

Útreiðslurnar eru 195 t.kr. Minsti parturin av upphæddini er postgjald og frímerkir. Strandferðslan er samd í, at eisini onnur avgreiðslugjøld enn postgjøld eru bókað á kontuna.

*Keyp av tænastuveitingum annars*

Í 2016 hevur Strandferðslan rindað 1.251 t.kr. fyri skeiðsútreiðslur. Í 2015 vóru útreiðslurnar 702 t.kr. Strandferðslan hevur greitt frá, at tað er m.a. grundað á nýggj krøv til skiparar og manningar á farma- og ferðafólkaskipum.

Í 2016 hevur Strandferðslan rindað 3.011 t.kr. fyri “umbidna eykakoyring” (bussáttmálar). Í 2015 vóru útreiðslurnar 4.470 t.kr. Sambært Strandferðsluni er eykakoyringin minkað á flestu leiðum, og sáttmálin við skúlan á Oyrarbakka varð uppsagdur í 2016.

### Keyp av útbúnaði

*Útbúnaður er skrásettur sum viðlíkahald.*

Sambært Búskaparskipan landsins hevur stovnurin keypt útbúnað fyri 1,6 mió.kr. Samlaða keypið er tó munandi størri, tí bilar fyri 1,6 mió.kr., herundir stjórabilur fyri um 300 t.kr., eru skrásettir á StRk. 1654 "Umvæling og viðlíkahald av maskinum, innbúgvi og øðrum útbúnaði".

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at keyp av bilum, maskinum og innbúgvi skulu skrásetast á St.kt. 15 "Keyp av útbúnaði, netto". Sambært Strandferðsluni skráseta tey keypið á St.kt. 16, tí at stovnurin fyrr hevði tvær játtanir, eina rakstrarjáttan og eina løgujáttan. Tá skrásettu tey alt keyp av útbúnaði á St.kt. 16 fyri at halda skil á, hvat var rakstur, og hvat var løgur. Tey hava tí hildið fram við at skráseta keyp av nýggjum tólbúnaði á StRk. 1653 og 1654, eftir at tey ikki longur hava nakra løgujáttan.

Landsgrannskoðanin heldur, at roknskapurin gevur ikki eina rætta mynd, tá ið keyp av útbúnaði eru skrásett sum viðlíkahald.

Í august 2017 sigur landsstýrismaðurin, at Samferðslumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini, at keyp av tólbúnaði, bilum, maskinum og innbúgvi eigur at skrásetast á standard kontu 15.

### Leiga, viðlíkahald og skattur

*Húsaleiga*

*Strandferðslan goldið dupulta húsaleigu.*

Strandferðslan hevur goldið húsaleigu fyri bygningin hjá Sp/f 98, meðan stovnurin var í øðrum hølum, ið tey eisini rindaðu leigu fyri. Sambært Strandferðsluni høvdu tey í 2016 gjørt meirkostnaðin upp og avtalað við Sp/f 98, at tey skuldu mótrokna meirkostnaðin í komandi leigugjøldum.

Strandferðslan hevur skrásett krav móti felagnum á 350 t.kr. sum inntøku í 2016. Útleigarin hevur ikki goldið upphæddina, og Strandferðslan hevur heldur ikki mótroknað í húsaleiguni 2017. Sambært Strandferðsluni eru stovnurin og útleigarin samd um, at upphæddin skal gjaldast til Strandferðsluna, og samráðast tey í løtuni um hvussu.

*Leiga av bjargingarútgerð*

Síðani 2007 hevur Strandferðslan havt leigu- og eftirlitssáttmála við fyritøku um bjargingarbátar og eldsløkkjarar. Árliga leigan var 512 t.kr. fram til árslok 2012. Tá varð sáttmálin longdur við 5 árum, og gjaldið sett til 456 t.kr. um árið. Sambært Strandferðsluni eru 270 t.kr. goldnar í 2016 fyri viðlíkahald av tí, sum leiguavtalan fatar um. Frá 2014 til 2016 hevur Strandferðslan rindað fyritøkuni um 900 t.kr. um árið fyri tænastur, ið ikki eru fataðar av avtaluni.

*Leiga av kopimaskinum*

*Strandferðslan ikki fingið loyvið til langtíðarleigu.*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði ikki góðkent langtíðarleigusáttmálar viðvíkjandi kopimaskinum. Stovnurin hevur nú keypt eina kopimaskinu og ætlar at keypa eina afturat og at sleppa sær úr leigusáttmálanum.

### Lønir

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at ein tann størsti váðin í roknskaparviðurskiftunum hjá Strandferðsluni lá í avgreiðslu av lønum. Lønarumsitarin var einsamallur á økinum. Strandferðslan hevur bøtt nakað um støðuna við at seta ein næming. Leiðslan viðgongur, at tað er ikki nóg mikið, tí næmingurin skal eisini á aðrar deildir í lærutíðini. Lønirnar verða enn avgreiddar við Excel rokniørkum.

Strandferðslan hevur boðað frá, at samráðingar eru millum Gjaldstovuna, Suðuroyar sjúkrahús og Strandferðsluna um at samstarva um lønarøkið fyri at tryggja, at økið ikki er so sárbært. Strandferðslan hevur gjørt av at nýta Vaktplan til lønarskrásetingar frá 1. august 2017.

Niðanfyri er yvirlit yvir lønir hjá Strandferðsluni í 2015 og 2016:

*t.kr.*

| StRk. | Heiti | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| 1110 | Mánaðarlønt | 51.137 | 55.051 |
| 1112 | Tímalønt | 13.430 | 15.353 |
| 1140-1180 | Samsýningar og ymisk gjøld | 8.254 | 10.051 |
| 1190 | Ymiskt | 574 | -1.010 |
| | **Tilsamans** | **73.395** | **79.444** |
| 0880 | Skyldug løn | -3.203 | -1.437 |

Skylduga lønin við árslok er lækkað frá 3,2 mió.kr. til 1,4 mió.kr. Sambært leiðsluni eiga starvsfólk nú ikki meira enn eina vakt tilgóðar.

***Skylduga lønin er lækkað***

### *Starvsfólkaágóðar*

Í februar 2014 mælti táverandi grannskoðari stovnsins leiðsluni til at taka støðu til, um reglurnar viðvíkjandi fríum ferðum hjá starvsfólkunum til og frá arbeiði við bussum og skipum hjá stovninum framvegis skuldu galda, og hvussu tað fyrisitingarliga skuldi skipast. Grannskoðarin vísti eisini á, at tað mátti metast at vera sera avmarkaðir møguleikar at fylgja við, um ferðirnar eru í tráð við reglugerðina hjá stovninum. Í juli 2015 vísti grannskoðarin á, at málið enn var opið.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at leiðslan framvegis heldur, at starvsfólk eiga at hava rætt til at ferðast ókeypis við skipum og bussum hjá Strandferðsluni til og frá arbeiði.

Í juli 2017 hevur Strandferðslan kunnað um, at tey hava sent kunning til Samferðslumálaráðið, um at leiðslan heldur, at starvsfólk skulu hava fríar ferðir og bústað v.m.

### *Stakroyndir av lønarmálum*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál, um lýsingar, umsóknir, prógv og setanarsáttmálar vóru í málunum. Við støði í lønargjaldingum fyri november 2016 kannaðu vit, um lønirnar vóru rættar. Vit hava ikki aðrar viðmerkingar, enn at setanarskriv vóru ikki undirskrivað, og at nøkur starvsfólk ikki skráseta vanligar tímar men bert yvir- og meirtímar.

### *Lønar- og starvsfólkaviðurskifti hjá stjóranum*

Stjórin varð settur í starv í apríl 2014 við setanarbrævi frá Vinnumálaráðnum. Seinni hevur Samferðslumálaráðið biðið um at fáa ein stjórasáttmála, og hann er undirskrivaður 15. mars 2017.

***Strandferðslan rindað ráðgevingarútreiðslur hjá stjóranum í sambandi við setanarsáttmála.***

Stovnurin hevur rindað 8.800 kr. fyri ráðgeving o.a. viðvíkjandi stjórasáttmálanum. Landsgrannskoðanin vísti á, at setanarsáttmálin hjá stjóranum er eitt privat mál millum stjóran og aðalráðið. Landsgrannskoðanin heldur tí, at stovnurin kann ikki rinda fyri útreiðslur hjá stjóranum til advokathjálp í sambandi við setanarsáttmálan.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað er ikki óvanligt, at stovnar gjalda fyri ráðgeving um setanarmál, og er tað helst í lagi, at stovnurin rindar fyri ráðgevingina í sambandi við stjórasáttmálan, tá ið ivamál eru, og stjórin mælir til at gera broytingar.

Strandferðslan hevur rindað fyri keyp av stjórabili, tó at tað er ásett í stjórasáttmálanum, at stovnurin rindar fyri nýtslu av egnum bili eftir reglunum, ið eru galdandi hjá tí almenna.

***Strandferðslan keypt stjórabil.***

Spurdur, eftir hvørjari heimild stovnurin hevur keypt stjórabil, hevur stjórin svarað, at bilurin varð keyptur í juli 2016, t.v.s. áðrenn stjórin varð biðin um at undirskriva

serstakan stjórasáttmála. Strandferðslan kunnaði fíggjarfulltrúan í Samferðslumálaráðnum um ætlanina at keypa bil til nýtslu hjá stjóranum. Sama dag, sum bilurin varð tikin í nýtslu, kunnaði Strandferðslan TAKS um tað.

***Stjórabilur ikki merktur.***

Sambært rundskrivi um merking av akførum hjá landinum eiga øll akfør hjá landinum at verða merkt. Landsgrannskoðanin heldur, at talan er um ein sokallaðan stovnsbil, sum átti at verðið merktur.

Landsgrannskoðanin hevur spurt Samferðslumálaráðið, um ráðið hevur góðkent keypið av stjórabilinum, eftir hvørjari heimild Strandferðslan kann keypa stjórabil, og um so er, hví ráðið síðani hevur ásett í stjórasáttmálanum, at stovnurin rindar fyri nýtslu av egnum bili.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Samferðslumálaráðið ætlar at kanna málið um stjórabilin nærri og tryggja, at øll viðurskifti koma í rættlag. Samferðslumálaráðið tekur undir við Landsgrannskoðanini, at bilurin eigur at verða merktur sum stovnsbilur.

## Meirvirðisgjald

Samlaða søla hjá Strandferðsluni í 2016 var 67,5 mió.kr. Sambært stovninum var MVG-fría søla 30 mió.kr. Landsgrannskoðanin heldur, at uppgivna MVG-fría søla er ikki røtt.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Strandferðslan ger eina nágreiniliga uppgerð av, hvat er MVG-skyldug søla, og hvat er MVG-frí søla. Strandferðslan er samd við Landsgrannskoðanini um, at øll MVG-frí søla verður á uppgerðunum frameftir.

Stovnurin skrásetir ikki altíð MVG'ið á MVG-kontuna; keypsprísurin fyri vøru ella tænastu verður tá ov høgur, og roknskapurin verður ikki rættur. Latingar til skip kunnu eftir ávísum treytum í MVG-lógini vera uttan MVG.

***MVG-frí søla ikki røtt uppgivin til TAKS.***

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at meirvirðisgjaldið verður umsitið rætt, og at gjørt verður upp og avroknað til TAKS til tíðina. Landsgrannskoðanin heldur, at tað eigur ikki at koma fyri, at Strandferðslan fær sekt ella rentur fyri at lata uppgerðir inn ov seint.

Strandferðslan ásannar, at feilir eru gjørdir í øllum liðum frá kontering til góðkenning og leysgeving, og at tað eigur ikki at koma fyri, at uppgerðir verða latnar inn ov seint. Sambært Strandferðsluni er strammað upp á økinum.

## Fíggjarstøða

### *Peningastovnskontur*

Landsgrannskoðanin hevur samanborið peningastovnskonturnar við Búskaparskipan landsins pr. 31. desember 2016.

Føroysku peningastovnskonturnar stemma við Búskaparskipan landsins. Strandferðslan hevur 45 t.kr. standandi í skotska peningastovninum, Clydesdale, men fær ikki kontuavrit frá Clydesdale. Tey hava í fleiri ár roynt at fingið peningin fluttan til Føroya, og sambært Strandferðsluni er ein nýggj roynd gjørd í juli 2017. Saldan hevur staðið órørd, síðani Smyril gavst at sigla til Aberdeen.

### *Kassar*

***Stórir kassamunir.***

Stórir kassamunir eru skrásettir á kassamunarkontuna. Netto er útreiðslan 228.448 kr. Serliga eru tað á Smyrli og Teistanum, at munir eru.

Á Smyrli var kassamunurin netto 378.609 kr. Í desember 2016 hevur Gjaldstovan bókað 452.252 kr. burtur úr fíggjarstøðuni og útreiðsluført upphæddina sum kassamun. Gjaldstovan kann ikki siga við vissu, hvaðani upphæddin stavar, men teirra

besta boð er, at talan er um, at inntøkur frá Tellerkortum eru inntøkuførdar tvær ferðir, t.v.s. at bæði søla og gjald eru inntøkuførd.

Á Teistanum var kassamunurin netto -147.470 kr. Strandferðslan hevur greitt frá, at gjaldsterminalurin á Teistanum varð skiftur út í 2016, men forrætningsnummarið varð ikki skift, og tí komu nógvar inngjaldingar ísenn. Inngjaldingarnar vórðu bókaðar á kassamun og ikki á sølukontu.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvørji kassaeftirlit eru gjørd í 2016 og 2017. Strandferðslan sigur, at ófráboðað innanhýsis kassaeftirlit er innført á stovninum í 2017.

*Ófráboðað kassaeftirlit*
Í juni 2017 vóru vit á ófráboðaðum kassaeftirliti á Teistanum. Tveir kassar vóru umborð. Fasti kassapeningurin í kioskini var ikki skrásettur í Búskaparskipan landsins. Sambært Strandfaraskip landsins verður tað gjørt. Vit høvdu nakrar spurningar og tilmæli, ið Strandferðslan hevur svarað. Annars var onki at finnast at.

*Skuldarar*
Strandferðslan hevur ruddað upp í avsetingunum. Í seinastu frágreiðing vístu vit m.a. á, at kredittmetingar vórðu ikki altíð skjalfestar. Landsgrannskoðanin kannaði tríggjar skuldarar. Onki var at finnast at.

*Goymslur*
Strandferðslan hevur gjørt yvirlit yvir vørugoymslurnar umborð á Smyrli, Teistanum og av klædnagoymsluni. Yvirlit er eisini yvir proviant á goymsluni á Smyrli. Goymslu-listarnir eru ikki váttaðir av persóni við ábyrgd av goymsluni.

Strandferðslan skrásetir hvønn mánað virðisbroytingarnar á oljugoymslunum í Búskaparskipan landsins.

Onki yvirlit er yvir slitlutir, eykalutir o.a., men Strandferðslan hevur greitt frá, at hjá MEST eru fleiri eykalutir, eins og nakrir liggja á Krambatanga. Landsgrannskoðanin hevur ikki gjørt goymslueftirlit.

*Rakstrargøgn*
Strandferðslan hevur ikki gjørt ognaryvirlit yvir smærri ognir. Landsgrannskoðanin mælti til at gera yvirlit yvir allar ognir hjá stovninum. Fleiri av akførunum eru skrásett í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum, men ikki øll.

***Onki ognaryvirlit.***

*Aðrir fíggjarstøðupostar*
Strandferðslan greiddi frá, at trupulleikarnir, ið vóru við primopostum í árunum frammanundan, nú eru ruddaðir burtur.

*Ognarar*
Bókhaldarin stemmar ognararnar av við uttanhýsis kontuavrit javnan og váttar á kontuavritið.

**Sakarmál**
Sambært stjóranum hevði Strandferðslan eitt sakarmál um mishald av sáttmála um koyring av skúlabørnum. Rættarmálið snúði seg um krav á eina mió.kr.

## 9.6 Akstovan (LG 2015/206-0384)

Í 2016 fylgdi Landsgrannskoðanin upp tilmælunum til Akstovuna, ið vóru lýst í árs-frágreiðing okkara 2014.

### Tinglýsing og veðhavaralýsingar

Akstovan leggur út fyri tinglýsingargjøld og gjøld fyri veðhavaralýsingar fyri viðskiftafólk. Stovnurin krevur gjøldini inn frá eigarunum, tá ið akførini verða skrásett.

Í 2014 var ein munur á 7 t.kr. Akstovan hevur í 2016 greitt frá, at meginparturin av muninum stavar frá tíðaravmarkingum, og at stig eru tikin, sum bøta um viðurskiftini.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum boðað frá, at Akstovan hevur avtalað við Gjaldstovuna, at útlegg fyri tinglýsing av panti og veðhavaralýsingum framyvir verða stýrd í fíggjarstøðuni á nýggjum endamáli undir kontu 0371-4000, sum leypandi verður stemmað av og skal stemma við árslok.

### KT viðurskifti

Teldurnar høvdu samband við alnetið gjøgnum Landsnet, og Akstovan luttók eisini í trygdarpakkanum hjá KT landsins. Akstovan hevði fakskipanir, har stovnurin sjálvur skipaði trygdartiltøkini, m.a. koyrikortsskrá, akfarsskrá, vegskattaskrá, sýnsskrá og kassaskipan.

Akstovan tók trygdaravrit dagliga og hevði lýst mannagongdirnar í trygdarhandbókini. Skipanin var sett upp soleiðis, at ambætararnir vórðu speglaðir. Speglambætarin stóð í sama rúmi sum høvuðsambætarin. Rúmið var ikki brandtrygt.

Landsgrannskoðanin mælti til, at trygdaravrit varð goymt trygt og á øðrum staði enn á Akstovuni. Í frágreiðing okkara 2014 varð nevnt, at ætlanin var at flyta speglambætaran til hølini hjá Akstovuni í Klaksvík. Tann ætlanin var slept í 2016, tí Akstovan arbeiddi við aðrari loysn saman við KT landsins.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum kunnað um, at Akstovan fer at flyta ambætaraútbúnaðin í hesum mánaðinum, soleiðis at hann frameftir verður hýstur á Elektron. Akstovan fer at seta firewall upp í sínum egnu hølum, sum skal binda flutta útbúnaðin í restina av kervinum.

### Ófráboðað kassaeftirlit

Í mars 2017 hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á Akstovuni í Tórshavn. Samsvar var millum talda peningin, salduna í Búskaparskipan landsins og kassauppgerðina. Vit samanhildu eisini saldurnar í peningastovnskontum við Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

## 9.7 Barsilsskipanin (LG 2016/220-0521)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av Barsilsskipanini. Endamálið við skipanini er at veita barsilspening til foreldur, sum eru í barsilsfarloyvi.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum gjørt vart við, at "*frágreiðingin hjá Landsgrannskoðanini viðger mál, sum í nøkrum førum røkka fleiri ár aftur í tíðina. Tað er sum fráfaringarstøði skylda Samferðslumálaráðsins at svara øllum spurningum, men skal svarskrivið takast við fyrivarni, tí SMR ikki hevur fult innlit í einstøk mál, sum verða umrødd.*"

### Reglur um inngjøld í skipanina

Allir løntakarar, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum og eru millum 16 og 67 ár, eru skyldugir at rinda til Barsilsskipanina sambært § 17 í Ll. nr. 48/2001 "um Barsilsskipan". Somuleiðis eru øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum, skyldug at rinda.

Sambært lógini kunnu ávísir persónar, eftir umsókn, sleppa undan at gjalda barsilsgjald. TAKS hevur bert fingið umsóknir frá tveimum persónum og hevur avtalað við teir, at teir fáa barsilsgjaldið endurrindað hvønn ársfjórðing.

TAKS krevur ikki, at persónar senda inn umsókn fyri at sleppa undan at gjalda, tí Almannaverkið hevur serlig V-tøl til at rinda út veitingar, ið ikki eru gjaldsskyldugar.

Sambært lógini kunnu nakrar samsýningar, eftir umsókn, sleppa undan at rinda barsilsgjald. Umsóknir verða ikki brúktar, men Gjaldstovan og Almannaverkið stýra teimum útgjøldunum við at hava serskild V-tøl til tær samsýningarnar.

Í apríl 2017 hevur TAKS sent umbøn til Samferðslumálaráðið um at strika § 17, stk. 4, í barsilslógini og at fáa broytt § 18, stk. 2. Ásetingarnar eru um skyldu at søkja um undantak frá gjaldskyldu.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum kunnað um, at Samferðslumálaráðið arbeiðir við málinum um at broyta rættarreglur viðvíkjandi fyrisiting av inngjøldum til Barsilsgrunnin, herímillum um undantøk fyri at gjalda Barsilsgjald, soleiðis sum TAKS skjýtur upp.

Árliga gjaldið fyri persónliga teknaða trygging er 500 kr. Í 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at í mun til hvat A-skattgjaldarar rinda, er tann upphæddin í lægra lagi. Við galdandi prosentgjaldi svarar upphæddin til 0,71% av einari ársinntøku á 70.422 kr. Landsgrannskoðanin samskifti við Vinnumálaráðið og seinni við Samferðslumálaráðið um málið, men enn er gjaldið óbroytt. Sambært TAKS hava tey sent málið til Samferðslumálaráðið. Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Samferðslumálaráðið arbeiðir við málinum um at hækka sjálvbodna tryggingargjaldið.

***Árliga tryggingargjaldið er óbroytt, síðani lógin um Barsilsskipan kom í gildi.***

TAKS hevur umsitið reglurnar sum um, at tryggingarnar galda fyri eitt kalendaraár. Landsgrannskoðanin vísti á, at lógin ásetir, at gjaldið er fyri eitt ár. Í apríl 2017 hevur TAKS boðað frá, at stovnurin hevur sent áheitan til Samferðslumálaráðið um at broyta ásetingina soleiðis, at kunngerðin samsvarar við praksis.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at lógarbroytingin eisini skal fata um at tryggingargjaldið skal verða galdandi fyri eitt kalendaraár.

### Reglur um útgjøld úr skipanini

Reglur um, hvør hevur rætt til at fáa útgjøld úr skipanini, eru í lógini og í kunngerðum. Ásett er neyvt, hvussu nógv og hvussu leingi umsøkjarar kunnu fáa barsilspening. Fyri at fáa útgjald, skulu umsøkjarar søkja innan ávísa freist.

### Barsilsgrunnurin

Í 2015 varð Barsilsgrunnurin settur á stovn. Møguligt avlop verður uppspart í grunninum og kann nýtast til útgjøld, um skipanin hevur hall, ella avgerð verður tikin at hækka útgjaldið. Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum sum eksternur grunnur.

Grunnurin endurrindar landskassanum útreiðslurnar av umsitingini av Barsilsskipanini. Sambært lógini umsitur landsstýrismaðurin grunnin, men kann leggja umsitingina til annan almennan stovn. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um umsiting og virksemi grunsins í kunngerð.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Samferðslumálaráðið heldur, at umsitingaravtalan við TAKS er nøktandi, og at tað tí ikki er neyðugt at gera nevndu reglugerð.

***Landsstýrismaðurin heldur, tað er óneyðugt at áseta nærri reglur í kunngerð.***

Sambært lógini ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur fyri íløgurøkt Barsilsgrunsins soleiðis, at hon er í samsvari við íløgupolitikk landsins.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at avlopið er ein partur av gjaldføri landskassans. Ein loysn, sum er verd at kanna, er møguleikin fyri at gera ein avtalu við Landsbankan um at røkja fæ grunsins.

### Umsitingin av Barsilsskipanini

Avtalan, sum er um umsiting av pørtum av Barsilsskipanini, er ikki dagførd, eftir at málsøkið er flutt til Samferðslumálaráðið. Sambært TAKS hava tey gjørt uppskot til nýggja avtalu.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Samferðslumálaráðið sum heild heldur, at avtalan, sum varð gjørd millum Vinnumálaráðið og TAKS í 2011, er nøktandi.

Síðani 2012 hevur TAKS avroknað umsitingarútreiðslur og útreiðslur til KT rakstur millum Barsilsskipanina og TAKS. Seinastu 5 árini hava útreiðslur og játtan verið:

*t.kr.*

| Útreiðslur til umsiting | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsiting av skipan | 1.800 | 1.800 | 2.105 | 2.505 | 2.147 |
| Játtan | 1.800 | 1.800 | 2.150[12] | 2.000 | 2.000 |
| **Meir-/minninýtsla** | **0** | **0** | **45** | **-505** | **-147** |

***Útreiðslurnar til umsiting av Barsilsskipanini eru ikki nóg væl útgreinaðar.***

TAKS skrásetir ikki tíðina, tey nýta til Barsilsskipanina. Í 2016 rindaði Barsilsskipanin TAKS 1.830 t.kr. fyri umsiting, 120 t.kr. fyri KT tænastur og 21 t.kr. fyri samsýning til Føroya kærustovn, tilsamans 1.971 t.kr. Afturat tí eru 126 t.kr. goldnar Elektron fyri at broyta útrokningargrundarlagið og vegna lógarbroytingar. 50 t.kr. eru goldnar í samsýningum til kærunevndina.

Spurt, hví meirnýtslan á játtanini er 147 t.kr., hevur TAKS svarað, at orsøkin er, at Barsilsgrunnurin hevur goldið fyri KT menningarútreiðslur, eins og hann eisini gjørdi í 2015.

Sambært TAKS er viðlíkahald av KT skipanum við í avtaluni við Vinnumálaráðið, men menning av skipanum er ikki við, og tí hevur Barsilsgrunnurin goldið tað, sum ikki rúmtist innan fyri játtanina. Frá 2017 er mannagongdin broytt til, at rokningar fyri KT menningarútreiðslur verða sendar beinleiðis frá Elektron til grunnin.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at veruligu útreiðslurnar fyri umsiting av Barsilsskipanini verða útgreinaðar í Búskaparskipan landsins.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Samferðslumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina um, at útreiðslurnar til rakstur kunnu verða meira útgreinaðar í Búskaparskipan landsins.

***Heimild er ikki at fara út um játtanina.***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at heimild er ikki at fara út um játtanina til umsiting, uttan mun til, um tað er Barsilsgrunnurin, ið rindar fyri umsitingina.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin svarað, at rakstrarjáttanin er ein netto-útreiðslujáttan, har játtanarlógin og kunngerð um rakstrarjáttanir tilskilað, at hægri inntøkur kunnu fíggja hægri útreiðslur, bara nettojáttanin heldur.

Inntøkurnar til Barsilsskipanina/grunnin fíggja lógarbundnu útreiðslurnar (høvuðskonta 17.39.4.01. Barsilsskipan) og rakstrarútreiðslurnar. Inntøkurnar eru væl størri enn útreiðslurnar, og er tað í lagi, at (brutto)útreiðslurnar verða hægri enn mett frammanundan.

[12] Íroknað eykajáttan 150 t.kr.

### Innaneftirlit

TAKS hevur ávísar mannagongdir viðvíkjandi innaneftirliti, tó samanbera tey ikki upphæddirnar við umsóknirnar frá borgarunum. Okkara stakroyndir vístu, at feilir eru í útgjøldum, og mæltu vit til, at eftirlit verður gjørt og skjalfest, t.d. við stakroyndum, um skrásettu upplýsingarnar samsvara við umsóknirnar.

Sambært TAKS hava tey broytt mannagongdirnar soleiðis, at umsóknirnar verða býttar millum tveir málsviðgerar og sendar til triðja málsviðgeran at góðkenna.

*Avstemman av inngjøldum*

Í 2013 mælti Landsgrannskoðanin TAKS til, at orsøkir til munir í avstemmanum vórðu staðfestar, og møguligar rættingar gjørdar so skjótt sum gjørligt.

TAKS góðtekur munir, ið eru undir 0,5%, tí tey halda, at talan er um avrundingarmunir. Sambært avstemmingum 31. desember 2016 millum Barsilsskipanina og útgoldna A-inntøku var munurin í arbeiðsgevaragjøldunum 127.567 kr. ella 0,2%, og í løntakara-gjøldunum var hann 56.001 kr. ella 0,1%.

TAKS tekur stakroyndir, tá ið prosentvísa inngjaldið broytist, fyri at tryggja, at tað er broytt í skipanini. TAKS kannar ikki, um munirnir, ið Elektron upplýsir fyri TAKS, eru staðfestir munir, ella um teir eru rætt bókaðir.

***Ikki nøktandi, at TAKS ikki kannar upplýsingarnar frá Elektron.***

Sambært landsstýrismanninum er tað ikki nøktandi, at TAKS bert ger stakroyndir, tá ið inngjaldið broytist. Eitt hugskot er, at TAKS eisini ger stakroyndir fyri at kanna, um upplýsingar frá Elektron sum heild eru staðfestir munir, og um teir eru rætt bókaðir.

*Avstemman av útgjøldum*

TAKS stemmar hvønn mánað av millum Barsilsskipanina og tað, sum verður flutt til Gjaldstovuna. TAKS hevur ikki stemmað Barsilsskipanina av við upphæddirnar, ið eru skrásettar í rakstrinum í Búskaparskipan landsins, men hevur stemmað av við StRk. 0849 í fíggjarstøðuni. Tey stemma ikki av millum Barsilsskipanina og skattaskipanina hjá TAKS.

TAKS hevur eftirlit við, um persónur fær løn samstundis, sum viðkomandi fær barsilspening. Tey kanna útgjøld frá privatum arbeiðsgevarum. Tað, at allar almennar lønir verða goldnar um V-talið hjá Gjaldstovuni, ger, at TAKS fær ikki havt eftirlit við teimum lønunum. TAKS hevur nú fingið lyfti frá Gjaldstovuni um, at Gjaldstovan skrivar V-talið hjá stovninum á yvirlitið framyvir.

Búskaparskipan landsins er grundarlagið undir landsroknskapinum. Tað er tí neyðugt, at skipanir, sum skulu fóðra Búskaparskipan landsins, eru stemmaðar av við endaligu tølini í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin mælti til, at avstemmanir verða gjørdar og skjalfestar, soleiðis at roknskapurin verður so gjøgnumskygdur sum gjørligt, og eftirlitsslóðin er greið. Samferðslumálaráðið tekur undir við tilmælinum.

***Neyðugt at stemma skipanir av við BSL.***

### Kærunevndaravgerð

Avgerð hjá kærunevndini hjá Barsilsskipanini í 2013 hevði við sær, at nógvir borgarar hava fingið ov lítið í barsilsgjaldi í fleiri ár. Við tíðindum á heimasíðu sínari hevur Barsilsskipanin í november 2016 kunnað foreldur um úrslitið av kæruavgerðini. Eftir kærunevndaravgerðina varð lógin um barsilsgjald broytt í mai 2014.

### Roknskaparviðurskifti

Stovnurin hevur nýggja roknskaparreglugerð, undirskrivað av stjóranum á TAKS og góðkend av Samferðslumálaráðnum.

*Inngjøld til Barsilsskipanina*

Inntøkurnar til Barsilsskipanina eru játtaðar á høvuðskontu 20.52.1.28. “Gjald til barsilsskipan”. Inngjøld og játtanir til Barsilsskipanina seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur frá einstaklingum | -44.365 | -45.040 | -46.505 | -48.934 | -58.901 | 243.745 |
| Inntøkur, einstakl. sjálvb. Inngj. | 0 | -43 | -52 | -48 | -64 | -207 |
| Inntøkur feløg, (sjálvv.) | -4 | 0 | 0 | 0 | 0 | -4 |
| Inntøkur frá feløgum | -46.593 | -46.482 | -48.855 | -51.579 | -62.052 | 255.561 |
| Tryggingar | -21 | 0 | 0 | 0 | 0 | -21 |
| Avskrivingar/avsetingar | 17 | 55 | 67 | 82 | 7 | 228 |
| **Tilsamans** | **-90.966** | **-91.510** | **-95.346** | **-100.478** | **-121.010** | -499.310 |
| Játtan, inntøkur | 89.300 | 90.100 | 95.000 | 98.000 | 116.000 | 488.400 |
| **Meirinntøkur** | **-1.666** | **-1.410** | **-346** | **-2.478** | **-5.010** | **-10.910** |

Inntøkurnar hava ligið millum 91 mió.kr. og 121 mió.kr. árini 2012 til 2016, meðan inntøkujáttanirnar hava verið millum 89 og 116 mió.kr. Inngjøldini frá arbeiðsgevarum hava verið hægri enn inngjøldini frá persónum, sjálvt um prosentgjaldið er tað sama. Munurin hevur verið ímillum 2,2 mió.kr. og 3,1 mió.kr. hvørt árið.

Sambært TAKS stendst munurin av, at arbeiðsgevarar rinda barsilsgjald av lønum, sum løntakarar ikki gjalda av, t.d. persónar, ið ikki hava fulla skattskyldu í Føroyum.

Í 2016 vóru útgoldnu A-inntøkurnar tilsamans 9.982 mió.kr. Arbeiðsgevarar rindaðu barsilsgjald av 8.794 mió.kr. Landsgrannskoðanin bað TAKS um eina útgreining av, hvussu tey eru komin fram til tær lønir (1.188 mió.kr.), ið ikki skulu rinda barsilsgjald.

TAKS svaraði, at tey tryggja, at øll, ið eiga at rinda barsilsgjald, rinda barsilsgjald, við at ongin arbeiðsgevari kann skráseta eitt V-tal, uttan at støða verður tikin til, um barsilsgjald skal gjaldast ella ikki. Eisini verður gjaldsskyldan stýrd av skattakotuni hjá persónum undir avmarkaðari skattskyldu.

Við 0,71% av lønunum skuldi samanlagda gjaldið av 8.794 mió.kr. verðið 62.439 t.kr. Sambært Búskaparskipan landsins eru inngjøldini 62.016 t.kr. Munurin er 387 t.kr.

Sambært TAKS eru einar 900.000 lønarflytingar um árið, og orsøkin til munin er m.a., at hvør einstøk útgoldin løn verður niðurroknað til heilar krónur, at broytingar eru í skattakotum hjá persónum, og at hædd verður ikki tikin fyri avstemmanum í bókhaldsskipanini hjá TAKS. Samlaða A-inntøkan, ið løntakarar rinda barsilsgjald av, er 8.311 mió.kr., t.v.s. at 1.671 mió.kr. í A-inntøkum eru frítiknar fyri at rinda.

Landsgrannskoðanin bað TAKS um eina útgreining av, hvussu komið er til tølini. TAKS svaraði, at munurin er tær A-inntøkur, ið ikki eru gjaldsskyldugar sambært § 18 í lógini.

Spurt, um TAKS ger nakað fyri at tryggja, at øll, ið eiga at rinda barsilsgjald, rinda barsilsgjald, hevur TAKS svarað, at tey tryggja sær, at barsilsgjald verður goldið, við at V-tøl, sum verða skrásett sum lønávísarar, verða skrásett til at rinda barsilsgjald. TAKS kannar av og á, hvørji virkir eru skrásett við avvarðandi kotum at rinda barsilsgjald.

### *Áogn hjá Barsilsskipanini*

Áognin hjá Barsilsskipanini seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Útg. | Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 800 | Barsilsgjald, arbeiðsgevarar | 5.203 | 6.380 | 5.947 | 6.240 | 7.347 |
| 850 | Barsilsgjald, sjálvboðin skrás. | 0 | 4 | 12 | 1 | -4 |
| | **Tilsamans** | **5.203** | **6.384** | **5.959** | **6.241** | **7.343** |

***Áogn støðugt hækkað.***

Í 2010 hækkaði áognin hjá Barsilsskipanini frá 1,3 mió.kr. til 5,1 mió.kr. og hevur verið støðugt hækkandi síðani, við undantaki av 2014.

Orsøkin, til at áognin hjá Barsilsskipanini er hækkað seinastu árini, er sambært TAKS, at tá ið peningastovnarnir fluttu frá Elektron til SDC í 2010, misti TAKS møguleikan at krevja inn barsilsgjald, samstundis sum lønir vórðu fluttar. Tá var ikki longur tekniskt møguligt at fáa gjaldið inn sjálvvirkandi. Elektron hevur ment eina skipan, har virkir kunnu stovna gjaldsavtalu. Sambært TAKS virkaði tann skipanin ikki optimalt fyrstu árini, men nú er hon dagførd, og sær tað út til, at fleiri virkir nýta skipanina.

### *Útgjøld úr Barsilsskipanini*

Árini 2012 til 2016 hava játtan og útgjøld á høvuðskontu 17.39.4.01. verið:

*t.kr.*

| Útreiðslur til veitingar | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Veiting til persónar, sum ikki eru í starvi | 44.846 | 48.818 | 59.600 | 55.602 | 69.034 |
| Veiting til pers. umvegis arbeiðsgevara | 29.378 | 29.831 | 29.354 | 32.093 | 32.930 |
| Frítíðarløn, eftirløn v.m. | 5.818 | 5.731 | 7.039 | 8.063 | 9.734[13] |
| Veitingar tilsamans | **80.042** | **84.380** | **95.993** | **95.758** | **111.699** |
| Játtan | **87.500** | **83.300** | **96.100** | **96.000** | **114.000** |
| **Meir-/minninýtsla** | **7.458** | **-1.080** | **107** | **242** | **-2.301** |

### *Avsetingar og avskrivingar*

Barsilsskipanin hevur hvørt ár sett pening av í fíggjarstøðuni til útgjøld í januar, sum hoyra til árið fyri. Í 2014 setti Barsilsskipanin av til útreiðslur í sambandi við kærunevndaravgerð frá november 2013 og í sambandi við, at lógin varð broytt í mai 2014. Seinastu 5 árini hava avsetingarnar verið:

*t.kr.*

| Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Skuld, greidd til útgjald. ymsar skipanir | -7.839 | -6.524 | -14.412 | -12.585 | -10.911 |

Í 2014 var meiravsetingin 7,8 mió.kr., og er samlaða avsetingin munandi hægri enn árini frammanundan. Nýtsla og avseting í 2014:

***Munandi størri meiravseting í 2014.***

*t.kr.*

| St.kt. 52 "Tilskot til einstaklingar" | |
|---|---|
| Goldið í árinum | 81.580 |
| Avsett primo | -6.514 |
| Avsett 31. desember 2014 | +14.412 |
| **Nýtsla tilsamans** | **89.478** |
| Avsett til kærunevndaravgerð og lógarbroyting | 6.514 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **95.992** |

Landsgrannskoðanin bað um útgreining av, hvussu avsettu upphæddirnar til væntaðar útreiðslur av kærunevndaravgerðum og lógarbroytingum eru goldnar út, og hvussu nógvar skyldur eru eftir at avgreiða. Sambært TAKS hava tey ikki tøl fyri, hvat kærunevndaravgerðin og lógarbroytingin hava kostað, tí upphæddirnar eru við í samlaðu útgoldnu veitingunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var ikki rætt at avseta munin millum játtanina í fíggjarlógini og nýtsluna í 2014. Sambært roknskaparkunngerðini § 13 kann ein útreiðsla verða skrásett, tá ið eitt rættarligt krav eftir einari væl greinaðari upphædd

[13] Í upphæddini eru frítíðarløn, eftirløn, ógreinað tilskot, og gjøld til ALS, BAS og AMEG.

kann gerast galdandi. Um eitt munandi krav móti landinum, sum er til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann gerast upp endaliga, áðrenn roknskaparárið er lokið, skal upphæddin verða skrásett á eina útreiðslukontu í roknskapinum fyri tað fíggjarárið, grundað á eina meting, soleiðis at upphæddin verður rættað í tí fíggjarári, tá ið kravið endaliga kann verða gjørt upp.

***Avsetingar til væntaðar útreiðslur av kærunevndar-avgerð v.m. skuldu verðið brúktar til tær útreiðslurnar.***

Vit halda tí, at upphæddin, sum varð sett av til væntaðar útreiðslur, sum fóru at standast av kærunevndaravgerðini og lógarbroytingum, skuldi verðið brúkt til tær útreiðslurnar, soleiðis at staðfestast kann, um upphæddin var røtt. Landsgrann-skoðanin heldur, at roknskapurin hjá Barsilsskipanini fyri 2014 var ikki rættur, tí 6,5 mió.kr. ov nógv vórðu útreiðsluførdar.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Samferðslumálaráðið skilir málið soleiðis, at TAKS ikki visti, hvat endaliga avsetingin skuldi verða í 2014, og kundi upphæddin uppá 6,5 mió kr. tí verða ein kvalifiserað meting í fyrsta umfari.

Í 2015 eru 447 t.kr. útreiðsluførdar við tekstinum “bóka burtur gamlar munir”. Sambært TAKS er talan um gamla skuld til skipanina, frá tí at Barsilsskipanin varð sett á stovn, harav 243 t.kr. eru fyrnað krøv.

### *Ov nógv goldið út*

***Ikki heimild at lata vera við at krevja skuld undir 2.500 kr. inn.***

TAKS krevur ikki upphæddir inn, ið eru undir 2.500 kr. Spurt, hvar heimildin er ásett til ikki at krevja upphæddir undir 2.500 kr. inn, hevur TAKS svarað, at TAKS hevur gjørt eina meting av, hvat tað kostar at krevja inn eftirstøður. TAKS heldur, at tað loysir seg ikki at seta arbeiðsorku av til innkrevjing av upphæddum, sum eru minni enn 2.500 kr.

Landsgrannskoðanin heldur, at ein tílík regla eigur at vera heimilað í lóg. Til samanberingar kann nevnast, at sambært skattalógini verður írestandi skattur, sum er 100 kr. ella minni, ikki kravdur.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Samferðslumálaráðið fer at gera eina áseting í barsilslógini um, at upphæddir undir 2.500 kr. ikki skulu krevjast inn.

Fleiri upphæddir “hanga” sum skuld í skipanini. Talan er bæði um munir í sambandi við lógarbroytingina og eisini um upphæddir, ið persónar hava rindað aftur, tí teir hava fingið ov nógv goldið út.

TAKS hevur greitt frá, at tey kunnu ikki bóka upphæddirnar burtur, tí KT skipanin er ikki gjørd til tað, og at uppgávan er ikki raðfest hjá TAKS.

Landsgrannskoðanin spurdi, hví dagføringar av KT kervinum hjá Barsilsskipanini eru partur av raðfestingini hjá TAKS, tá ið Barsilsgrunnurin rindar fyri menningar-útreiðslurnar. TAKS svaraði, at tá ið TAKS umsitur Barsilsskipanina, raðfestir TAKS uppgávurnar hjá Barsilsskipanini saman við samlaðu uppgávunum hjá TAKS.

***Dagføringar eiga at verða gjørdar av KT kervinum.***

Landsgrannskoðanin heldur, at tað átti at borið til at gjørt neyðugu dagføringarnar av KT skipanunum, soleiðis at bókhaldið kann virka eftir reglunum. Samferðslumálaráðið tekur undir við Landsgrannskoðanini.

## Stakroyndir av útgjøldum

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað 18 mál um barsilsgjøld, sum eru goldin út í desember 2016. Vit kannaðu, um allar upplýsingar, ið eru kravdar í sambandi við útgjald úr Barsilsskipanini, vóru til skjals, og um útgjøldini vóru røtt. Vit høvdu onki at finnast at málsviðgerðini.

Vit høvdu tó spurningar viðvíkjandi tveimum málum. TAKS hevur svarað, at í tí eina málinum var lønargrundarlagið skeivt, og í einum var ov nógv goldið út, tí farloyvistíðar-skeiðið var ikki rætt.

# 10 Fíggjarstøða

## 10.1 Fíggjarstøða (LG 2016/300-0000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2016 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Í talvuni niðanfyri eru samandráttir úr fíggjarstøðuni við árslok árini 2012 til 2016.

*mió.kr.*

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| **OGN** | | | | | |
| Kapitalinnskot | 297 | 285 | 459 | 451 | 461 |
| Virðisbrøv | 1.386 | 1.470 | 1.480 | 1.485 | 1.521 |
| Útlán | 131 | 127 | 126 | 125 | 122 |
| Áogn o.a. | 591 | 496 | 544 | 440 | 533 |
| Tøkur peningur | 2.559 | 3.150 | 2.536 | 2.792 | 2.905 |
| **Ogn tilsamans** | **4.964** | **5.528** | **5.145** | **5.293** | **5.542** |
| **SKULD** | | | | | |
| Skuld | 5.416 | 6.113 | 5.750 | 6.120 | 6.076 |
| Útjavningarkonta | -452 | -585 | -605 | -827 | -534 |
| **Skuld tilsamans** | **4.964** | **5.528** | **5.145** | **5.293** | **5.542** |

### 10.1.1 Kapitalinnskot (LG 2016/300-0102)

Kapitalinnskotið fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik, og uppskriving av partapeninginum í P/f Lív Holding (Lív samtakið).

*t.kr.*

| Kapitalogn í landsfyritøkum | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Kapitalogn við ársbyrjan | 285.216 | 459.468 | 451.312 |
| Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum | 174.252 | -77.656 | 78.613 |
| Uppskriving av partapeninginum í Lív | - | 69.500 | -69.500 |
| **Kapitalogn við ársenda** | **459.468** | **451.312** | **460.425** |

Í 2015 lækkaði kapitalognin í Fíggingargrunninum 77,7 mió.kr., frá 459,5 mió.kr. til 381,8 mió.kr., og í 2016 hækkaði hon 78,6 mió.kr. til 460,4 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri roknskaparárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút.

Av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið roknskaparár ikki er tøkur fyrr enn eftir, at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari

meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá Fíggingargrunninum, sí talvuna omanfyri.

Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2015 var ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 426,1 mió.kr., sum svaraði til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2015. Kursvirðið var 76,9 mió.kr. hægri enn við árslok 2014, tá ið kursvirðið var 349,3 mió.kr. Í ársfrágreiðingini greiðir leiðslan frá, at kursurin á partabrøvunum hjá P/f BankNordik hækkaði úr 104,5 við árslok 2014 í 127,5 við árslok 2015.

Viðmerkjast kann, at eginpeningurin í Fíggingargrunninum við árslok 2016 var 487,3 mió.kr., t.v.s. 26,9 mió.kr. hægri enn við árslok 2015. Sambært ársfrásøgnini 2016 er høvuðsorsøkin til hækkingina, at virðið á partabrøvunum í P/f BankNordik er hækkað. Kursurin við árslok 2015 var 127,5; hann var 135,5 við árslok 2016.

Fíggingargrunnurin hevur fingið 7 mió.kr. í vinningsbýti frá P/f BankNordik fyri fíggjarárið 2015. Tað er lutað víðari til landskassan í 2016.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum árini 2015 og 2016, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í P/f BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

***Uppskriving av partapeninginum í Lív samtakinum bókað sum kapitalinnskot. Eftir søluna av felagnum varð uppskrivaða virðið konverterað til partapening.***

Í 2016 varð Lív samtakið selt. Ognarfelagið Lív fekk 50% av partabrøvunum uttan viðurlag, og P/f Fakfelag keypti 33,3% av partapeninginum. Landið eigur framvegis 16,7% av partapeninginum. Sambært landsroknskapinum[14] vórðu partabrøvini í Lív samtakinum roknað at hava eitt virði 70 mió.kr. Í landsroknskapinum vórðu tey tikin upp til útveganarvirði í 1999; 500 t.kr. Tí varð virðið uppskrivað við 69,5 mió.kr, so avhendan til fakfeløgini og sølan av teimum seinastu 16,7% av partabrøvunum kundi skrásetast sambært metta virðinum 70 mió.kr. Uppskrivingin bleiv bókað sum kapitalinnskot primo 2016, og tá sølan fór fram í 2016, varð upphæddin konverterað til partapening.

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Í oktober 2013 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

***Mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Húsalánsgrunninum ikki heilt komin í rættlag.***

Í 2014, 2015 og aftur í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins, meðan krøvini frá arbeiðsgevarum skuldi verða kravd inn um TAKS skipanina. Enn er mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Húsalánsgrunnurin ikki heilt komin í rættlag.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum “Eksternir grunnar”. Frameftir er ætlanin, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum verður tikin við í landsroknskapin undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Eftir er at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kunnu takast við í landsroknskapin.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað verður áhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Húsalánsgrunnurin og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum

[14] Kelda: síða 227 í Landsroknskapinum 2016.

lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin. Sí annars brot 3.1 “Landsroknskapurin er ikki fullfíggjaður”.

### 10.1.2 Virðisbrøv

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.479.821 | 1.484.821 | 1.520.988 |

Frá 2014 til 2015 eru virðisbrøvini hækkað 5 mió.kr., og frá 2015 til 2016 eru tey hækkað 36,2 mió.kr. Orsøkin til hækkingina frá 2015 til 2016 er, at landið sambært Ll. nr. 30/2014 hevur sett 25 mió.kr. í partapeningi í P/f Eystur- og Sandoyartunlar, og at virðið á partabrøvunum í Lív samtakinum er uppskrivað. Landið eigur nú 16,7% av partapeninginum í Lív samtakinum, sum svarar til 11,7 mió.kr. Við árslok 2015 var virðið á partabrøvunum 500 t.kr. Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

*t.kr.*

| Skrásett í landsroknskapinum | 2014 | 2015 | 2016 | Til skjals |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 160.300 | 160.300 | Ja |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 235.000 | 235.000 | Ja |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 77.948 | 77.948 | Ja |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 43.000 | 43.000 | Ja |
| P/f Fiskaaling | 17.375 | 17.375 | 17.375 | Ja |
| P/f Føroya Lívstrygging | 500 | 500 | 11.667 | Ja |
| P/f Vága Floghavn | 807.818 | 807.818 | 807.818 | Ja |
| P/f Atlantic Airways | 86.912 | 86.912 | 86.912 | Ja *) |
| P/f Elektron | 2.347 | 2.347 | 2.347 | Ja |
| P/f Føroya Dátusavn | 200 | 200 | 200 | Ja |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 20 | 20 | Nei |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 32.760 | 32.760 | Ja |
| P/f Tjaldur | 140 | 140 | 140 | Nei |
| P/f Føroya Banki | 1 | 1 | 1 | Ja *) |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 500 | 500 | Nei **) |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 15.000 | 20.000 | 45.000 | Nei **) |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.479.821** | **1.484.821** | **1.520.988** | |

*) Partabrøvini eru skrásett “elektroniskt” og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapircentralen.
**) Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur kunnað um, at partabrøv verða ikki útskrivað longur.

P/f Føroya Dátusavn er tikið av og strikað í partafelagsskránni í januar 2016. Gjaldstovan hevur ikki bókað partapeningin burtur.

Í 9 feløgum eigur landið allan partapeningin:

*t.kr.*

***Samlað roknskapartøl fyri feløg, sum landið eigur einsamalt.***

| Roknskapartøl 2016 | Brutto-vinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 11.552 | 387 | 188.584 | 177.936 |
| P/f Norðoyatunnilin | 17.707 | 4.968 | 272.518 | 253.137 |
| P/f Føroya Tele (samtak) | 257.676 | 45.184 | 780.319 | 458.586 |
| P/f Postverk Føroya (samtak) | 60.363 | 1.188 | 163.545 | 31.816 |
| P/f Fiskaaling | 14.408 | -18.127 | 14.174 | -8.323 |
| P/f Vága Floghavn (samtak) | 51.901 | 12.315 | 861.887 | 813.777 |
| P/f Atlantic Airways | 190.926 | 27.993 | 828.850 | 223.754 |
| P/f Visit Faroe Islands | 3.329 | 1 | 1.394 | 507 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | -737 | -2.632 | 2.723.744 | 39.382 |
| **Tilsamans** | **607.125** | **71.277** | **5.835.015** | **1.990.572** |

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgum var ein vinningur 71,3 mió.kr. eftir skatt, og samlaði eginpeningurin varð 1.991 mió.kr. Í 2015 var samlaða úrslitið hjá feløgum, sum landið eigur allan partapeningin í, 48,7 mió.kr. og eginpeningurin 2.038 mió.kr. Í mun til 2015 er ein partur av Lív samtakinum seldur í 2016.

Í 2016 áttu minnilutapartaeigararnir í dótturfeløgum hjá P/f Føroya Tele 9,1 mió.kr., og minnilutapartaeigararnir dótturfeløgum hjá P/f Vága Floghavn áttu 7,2 mió.kr.

### *Samlað roknskapartøl hjá feløgunum*

Yvirlit yvir samlaðu roknskapartølini árini 2008 til 2016, fyri feløg sum landið eigur allan partapeningin í, síggjast í talvuni niðanfyri:

*t.kr.*

| Ár | Brutto vinn-ingur/søla | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| 2008 | 925.524 | -42.241 | 5.005.434 | 1.300.876 |
| 2009 | 695.048 | -23.045 | 5.185.597 | 1.421.735 |
| 2010 | 714.585 | 27.672 | 5.983.268 | 1.524.940 |
| 2011 | 732.782 | -268.123 | 7.241.118 | 2.201.249 |
| 2012 | 608.022 | -513.502 | 3.730.656 | 1.631.006 |
| 2013 | 620.290 | 91.263 | 3.898.691 | 1.710.169 |
| 2014 | 660.020 | 67.148 | 4.201.625 | 1.819.871 |
| 2015 | 866.069 | 48.714 | 4.856.817 | 2.038.028 |
| 2016 | 607.125 | 71.277 | 5.835.015 | 1.990.572 |

### *Virðismeting*

***Skrásetta keypsvirðið gevur onga ábending um virðið á feløgum.***

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum 2016 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Niðanfyri sæst innara virðið á 12 feløgum, samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2016:

*t.kr.*

| | Keypsvirðið sambært landsroknskapinum | Innara virðið |
|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 177.936 |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 253.137 |
| P/f Vága Floghavn *) | 807.818 | 813.777 |
| P/f Føroya Tele **) | 77.948 | 458.586 |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 31.816 |
| P/f Fiskaaling | 17.375 | -8.323 |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 21.839 |
| P/f Atlantic Airways | 86.912 | 223.754 |
| P/f Elektron | 2.347 | 4.870 |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 41.441 |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 507 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 45.000 | 39.382 |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.520.627** | **2.058.722** |

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 7,2 mió.kr.
**) Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 9,1 mió.kr.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið. Í 2012 segði landsstýrismaðurin, at Gjaldstovan hevði slept ætlanini at nýta innara virðið í landsroknskapinum, í øllum førum fyribils.

Í 2008 kannaði Landsgrannskoðanin, um partabrøvini vóru til skjals í teimum førum, har “pappírs” partabrøv eru. Landsgrannskoðanin fekk goymsluyvirlit frá Værdipapir-centralen, har partabrøvini bert eru elektroniskt skrásett. Síðani hevur Landsgrann-skoðanin bert kannað broytingar í partabrævagoymsluni.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| P/f Føroya Tele | 30.000 | 32.000 | 25.000 |

Í 2016 fekk landskassin harafturat 6,5 mió.kr. útlutaðar frá P/f Smyril Line og 652 t.kr. frá P/f Tjaldur.

### 10.1.3 Útlán

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Útlán ársbyrjan | 350.136 | 329.646 | 330.748 |
| Tilgongd í árinum | 18.464 | 20.132 | 19.142 |
| Frágongd í árinum | -38.954 | -19.030 | -21.143 |
| **Útlán ársenda brutto** | **329.646** | **330.748** | **328.747** |
| Sett av ímóti tapi | -203.814 | -205.534 | 207.096 |
| **Sambært roknskapinum** | **125.832** | **125.214** | **121.651** |

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt, og at lán er veitt til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini í Vágum. Frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lestrarlán eru goldin aftur, og at onnur lán eru niðurgoldin. Samanlagt eru útlánini lækkað netto 3,6 mió.kr. frá 2015 til 2016.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar broytingar í útlánum í 2016. Onki var at finnast at.

#### Rentu- og avdráttarfrí útlán

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan | 268.965 | 272.427 | 278.427 |
| Tilgongd í árinum | 3.500 | 6.000 | 6.250 |
| Frágongd í árinum | -38 | 0 | 0 |
| **Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda** | **272.427** | **278.427** | **284.677** |
| Sett av móti tapi | -272.427 | -278.427 | -284.677 |
| **Sambært roknskapinum** | **0** | **0** | **0** |

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýlir og Postverk Føroya. Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.

Eitt studningslán er hækkað við 6,3 mió.kr. í 2016.

Sambært landsroknskapinum verða rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr. Orsøkin er, at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað enn upprunaliga endamálið.

### 10.1.4 Áogn o.a.

#### Skatta-, toll- o.t. skuldarar

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Áogn landskassans brutto | 398.677 | 346.743 | 381.846 |
| Sett av ímóti tapi | -91.723 | -120.414 | -95.114 |
| **Sambært roknskapinum** | **306.954** | **226.329** | **286.732** |

Frá 2015 til 2016 eru skuldararnir hækkaðir 60,4 mió.kr. netto. Størstu broytingarnar kunnu útgreinast soleiðis:

*t.kr.*

| **Broytingar 2015 – 2016** | |
|---|---|
| Tollavgjøld | 36.994 |
| Felagsskattur | 17.222 |
| Tøkugjald á alivinnu | 14.012 |
| Vanligur landsskattur | 6.379 |
| Skattarentur | -17.767 |

Sambært landsroknskapinum[15] var áognin av skatta-, toll o.t. skuldarum javnað í fíggjarstøðuni primo 2016. Orsøkin var, at ein gjøgnumgongd av vanligum landsskatti, felagsskatti og meirvirðissgjaldi vísti, at samsvar var ikki millum móðurskipanina hjá TAKS og Búskaparskipan landsins. Skuldarar viðvíkjandi vanligum landsskatti og felagsskatti vórðu niðurskrivaðir við ávikavist 128 mió.kr. og 6,8 mió.kr., og skuldarar viðvíkjandi meirvirðisgjaldi vórðu uppskrivaðir við 68,9 mió.kr.

### Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Landssjúkrahúsinum og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

*t.kr.*

| | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|
| Tøkugjald á alivinnu | 9.436 | 1.615 | 32.887 |
| Apoteksverkið | 22.706 | 28.308 | 29.921 |
| Inntøkufíggjað virksemi, Landsverk | 8.166 | 9.089 | 20.928 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | 15.179 | 20.795 | 7.039 |
| Kringvarp Føroya | 10.223 | 11.612 | 6.794 |
| Landssjúkrahúsið | 7.412 | 6.330 | 6.661 |
| Fróðskaparsetur Føroya, inntøkuf. virksemi | 4.212 | 4.850 | 6.477 |
| Ríkisstuðul, endurgjøld | 8.299 | 6.269 | 6.333 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 3.994 | 5.287 | 5.648 |
| Gjald til Heilsutrygd | 4.603 | 4.927 | 5.643 |
| Kapitalvinningsskattur | 8.689 | 5.587 | 3.943 |
| Jarðfeingi | 29.148 | 1.193 | 1.406 |
| Víddargjøld | 8.018 | 4.082 | 1.050 |
| Ymiskir skuldarar | 31.455 | 34.461 | 44.498 |
| **Tilsamans sambært roknskapinum** | **171.540** | **144.405** | **179.228** |

Talan er um fleiri hækkingar og lækkingar, sum netto geva eina hækking 34,8 mió.kr. frá 2015 til 2016. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað tænastu-, vøru- og aðrar skuldarar fyri at sanna, at upphæddirnar eru rættar og rætt bókaðar. Onki var at finnast at.

### Goymslur

*t.kr.*

| | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 65.008 | 68.898 | 67.308 |

Talan er um vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Landsverki, KT landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

[15] Kelda: síða 227 í Landsroknskapinum 2016

Netto er virðið á goymslunum lækkað 1,6 mió.kr. frá 2015 til 2016. Millum annað er goymslan hjá Apoteksverkinum hækkað 1,2 mió.kr. Hinvegin er goymslan hjá Námi lækkað 2,1 mió.kr. og hjá Landsverki, inntøkufíggjaðum virksemi 1,8 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir, um goymsluuppgerðir hjá nøkrum stovnum samsvara við Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur eisini tikið stakroyndir av goymsluni hjá Rúsdrekkasølu landsins við árslok 2016, og tá ið kassa-eftirlit eru gjørd.

**Ognir og útbúnaður** (LG 2016/300-0101)

*Fleiri stovnar hava ikki dagført ognar-yvirlit.*

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á øllum stovnum. Yvirlitið skal fevna um ognir og útbúnað, har keypsvirðið er minni enn 75 t.kr. Ognir og útbúnaður, har keypsvirðið er yvir 75 t.kr., skulu vera skrásett í Búskaparskipan landsins. Í sambandi við vitjanir á stovnum í 2016 og 2017 staðfestu vit aftur, at enn eru fleiri stovnar, sum ikki hava dagførd yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í oktober 2012 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið saman við Gjaldstovuni skuldi fremja málrættað átøk fyri at fáa stovnar landsins at hava dagførd ognaryvirlit. Sum liður í hesum var ætlanin at lækka smálutakravið til ognaryvirlit.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir tað als ikki vera nøktandi, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað, sum hava verið í gildi síðani 2001, framvegis ikki vórðu hildnar. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at so lítið ítøkiligt hendi.

Í 2017 er roknskaparkunngerðin broytt við K. nr. 110/2017. § 20 í kunngerðini er broytt til, at stovnar skulu gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað, verða ikki hildnar. Roknskaparrundskrivið er ikki broytt enn, men Gjaldstovan hevur gjørt uppskot.

Í august 2017 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at broyting í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit er komin í gildi, men enn vantar tøknilig menning av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins til tess at fáa skrásett ognir við virði yvir 50 t.kr.

### 10.1.5 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 3, stk. 1, í Ll. nr. 140/2012 “um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting” er gjaldføri landsins umsitið av Gjaldstovuni eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum. Endamálið við umsitingini er, at:

- landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann rinda sínar skyldur,
- landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 3, stk. 2 og 3, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari lands-umsitingini, øllum landsstovnum v.m. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum, ótrektir kredittir í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøkur peningur býttur í tveir bólkar:

1. Virðisbrøv o.tíl., og
2. Bankakontur, girokontur og kassapeningur.

### Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya varð tikin av við virknaði frá 1. apríl 2013, og umsitingin av gjaldføri og skuld landsins flutt til Gjaldstovuna. Sambært landsroknskapinum s. 290 var tann parturin av tøka peninginum, sum Landsbanki Føroya áður hevði sett í stuttfreistað virðisbrøv, flokkaður sum "Innistandandi í Landsbanka Føroya". Posturin nevnist nú "Virðisbrøv o.tíl." Hesi virðisbrøv eru tikin við til marknaðarvirðið.

*Fígging landsins hevði dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum.*

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 2.014.750 | 2.374.359 | 2.339.213 |

Fígging landsins, sum fram til ársenda 2016 var deild undir Gjaldstovuni, hevði dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum. Plaseringin byggir á ein íløguinstruks frá Gjaldstovuráðnum, har ásetingar eru um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

*Uttanhýsis grannskoðanarvirkið hevur kannað plaseringar.*

Uttanhýsis grannskoðanarvirki, sum Landsgrannskoðanin hevur útveitt henda partin av grannskoðanini til, hevur m.a. kannað, um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært íløgureglunum í Ll. nr. 140/2012, og eisini um tær eru sambært íløguinstruksinum. Grannskoðarin hevði onki at finnast at. Sí eisini brot um grannskoðan av Fígging landsins.

*1. januar 2017 varð umsitingin av gjaldføri og skuld landsins flutt til Landsbankan.*

Viðmerkjast kann, at 1. januar 2017 varð umsitingin av gjaldføri og skuld landsins flutt til endurstovnaða Landsbankan, og Ll. nr. 140/2012 sett úr gildi.

### Banka- og girokontur og kassapeningur

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 521.734 | 417.996 | 566.036 |

#### *Banka- og girokontur*

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2016 kann upphæddin greinast sundur í tær banka- og girokontur, sum Gjaldstovan umsitur, og tann partin, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

1. Um kontuavrit fra peningastovnum stemma við Búskaparskipan landsins.
2. Um peningur í fremmandum gjaldoyra er tikin við í roknskapin við røttum virði.
3. Um saldur av plaseringum hjá Fígging landsins eru rætt skrásettar í landsroknskapinum og Búskaparskipan landsins.
4. Um Fígging landsins liggur inni við ov nógvum gjaldføri.
5. Um reglurnar um minsta gjaldføri eru hildnar.

Ad. 4) Fígging landsins hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Við árslok 2016 var innistandandi í peningastovnunum í tráð við reglugerðina.

Ad. 5) Sambært § 4 í Ll. nr. 140/2012 skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyriskipa, at landsins gjaldføri, sambært § 3, stk. 2 og 3, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Gjaldstovuráðið skal í august mánað áseta

minsta gjaldførið. Fígging landsins hevur upplýst, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið Gjaldstovuráðið skal áseta minstagjaldførið, verður seinasta uppgjørda talið brúkt, eisini um talan er um fyribilstal.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í tøka peninginum 2014 til 2016:

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 2.536.484 | 2.792.356 | 2.905.250 |
| Harav minstagjaldføri | 2.025.000 | 2.150.000 | 2.290.000 |
| **Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri** | **511.484** | **642.356** | **615.250** |

§ 3 ásetir, at gjaldførið fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Gjaldførið fevnir eisini um trygg, lætt sølubær og óveðsett virðisbrøv. Sambært Fígging landsins kemur allur tøki peningurin í fíggjarstøðuni undir hesar treytir og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Tøki peningurin hjá landskassanum er hækkaður 112,9 mió.kr. frá 2015 til 2016, meðan kravið til minstagjaldførið er hækkað 140 mió.kr., t.v.s. at munurin millum tøka peningin (gjaldførið) og minstagjaldførið er minkaður við 27 mió.kr. frá 2015 til 2016.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina enn tær, sum eru til pkt. 4 og 5.

*Kassapeningur*

Landsgrannskoðanin hevur gjørt fleiri kassaeftirlit í 2016, har vit hava stemmað kassapeningin av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnarnir peningastovnskontur, verða tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar í ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

### 10.1.6 Skuld

#### Innanlandsskuld, langfreistað

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 4.417.294 | 4.677.984 | 4.634.235 |

Við árslok 2016 var talan um 5 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 170627, áljóðandi 1.000 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2017.
- FO-LB 180610, áljóðandi 20,8 mió.kr., sum verður niðurgoldin fram til 10. juni 2018.
- FO-LB 190620, áljóðandi 1.100 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 20. juni 2019.
- FO-LB 200611, áljóðandi 1.045 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 11. juni 2020.
- FO-LB 210622, áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 22. juni 2021.

Við árslok 2016 var samlaða áljóðandi skuldin 4.516 mió.kr.

Fíggjarmálaráðið broytti í 2011 meginreglurnar fyri, hvussu lánsbrøv og broytingar í kursvirðum skuldu viðgerast í landsroknskapinum soleiðis, at skuldin ikki sum áður skuldi takast við til marknaðarvirði. Í staðin fyri varð skuldin virðisásett til amortiseraðan kostprís. Lánsbrøv vórðu tikin við í fíggjarstøðuna til áljóðandi virði, og møguligir kursmunir, sum komu í sambandi við útgávuna, vórðu avskrivaðir liniert yvir ætlaðu afturgjaldstíðina. Endamálið við broytingini var, at rentuútreiðslur landskassans, har kursmunir eisini verða bókaðir, ikki skuldu verða merktar av teimum sveiggjum, sum leypandi broytingar í kursvirðunum hava við sær.

***Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini aftur gjørd upp eftir marknaðarvirði. Áður vórðu tey virðisásett til amortiseraðan kostprís.***

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini aftur gjørd upp eftir marknaðarvirði. Í hesum sambandi er upphæddin við ársbyrjan 2016 javnað 104 mió.kr. í mun til við árslok 2015, úr 4.574 mió.kr. í 4.678 mió.kr.

Gjaldstovan selur meginpartin av brævalánunum uttanlands, og óvist er, hvør keyparin er. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Nevnast kann, at Landsbankin, vegna landskassan, hevur endurfíggjað lánsbrævalán 1.000 mió.kr. (FO-LB 170627) í mai og juni 2017.

### Uttanlandsskuld, langfreistað

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 500.000 | 500.000 | 500.000 |

Upphæddin er eitt lán, 500 mió.kr., ið stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: "*Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer*."

*Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári*

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 889.500 | 1.360.000 | 1.010.000 |

Sambært Fígging landsins vóru veruligu afturgjøldini:

- Eftir skránni fullu 880 mió.kr. av FO-LB 150611 í juni 2015 og 9,5 mió.kr. vórðu goldnar av FO-LB 180610. Tilsamans vórðu 889,5 mió.kr. goldnar í 2015.
- Eftir skránni fullu 1.350 mió.kr. av FO-LB 160622 í juni 2016 og 9,8 mió.kr. vórðu goldnar av FO-LB 180610. Tilsamans vórðu 1.359,8 mió.kr. goldnar í 2016.

Sambært Landsbankanum eru 1.000 mió.kr. av FO-LB 170627 goldnar í juni 2017 umframt 10,2 mió.kr. av FO-LB 180610. Tilsamans eru 1.010,2 mió.kr. goldnar fram til august 2017.

### Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 832.744 | 942.566 | 941.431 |

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Upphæddin við ársbyrjan 2016 er javnað (hækkað) við 10,3 mió.kr. í mun til við árslok 2015 í sambandi við ásetingar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum frá 16. januar 2017 um tíðaravmarking av lønum í landsroknskapinum. M.a. er ásett, at lønir, sum standast av vaktum, skulu tíðaravmarkast. Í hesum sambandi blivu lønir innan heilsuverkið og almannaverkið tíðaravmarkaðar.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað stuttfreistaða skuld, um upphæddirnar eru rættar, og um tær eru bókaðar rætt. Onki var at finnast at.

### 10.1.7 Útjavningarkonta (LG 2015/300-0203)

*t.kr.*

| | 2015 | 2016 |
|---|---|---|
| Salda 1. januar | -719.233 | -827.215 |
| RLÚ-úrslit | -78.559 | 213.638 |
| Búskapargrunnur Føroya | - | 23.333 |
| Ymiskar broytingar | -29.423 | 56.159 |
| **Salda 31. desember** | **-827.215** | **-534.085** |

*Útjavningarkontan er ikki konta fyri eginpening.*

"Ymiskar broytingar" fevnir um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskapar-meginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip og vegir, verða ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

Upphæddin við árslok 2015 er javnað við 110,6 mió.kr. úr 716,6 mió.kr., soleiðis at saldan við ársbyrjan 2016 er 827,2 mió.kr. Talan er um eina nettoupphædd av javningum av øðrum postum í fíggjarstøðuni.

## 10.2 Fígging landsins (LG 2016/203-0151)

Síðani 1. apríl 2013 hevur Fígging landsins umsitið gjaldførið og skuldina hjá landinum.

Lógargrundarlagið undir virkisøkinum hjá Fígging landsins er Ll. nr. 140/2012 "um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting". Sambært § 1 verða landsins gjaldføris- og skuldarviðurskifti fyrisitin av Gjaldstovuni eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum. Sambært § 2, stk. 1, er Gjaldstovuráðið ovasti myndugleiki fyri tí virksemi, sum Gjaldstovan skal fremja sambært lógini.

Landsgrannskoðanin grannskoðar Gjaldstovuna, herundir eisini Fígging landsins. Í sambandi við grannskoðan av Fígging landsins fyri fíggjarárið 2016 hava vit við heimild í § 9, stk. 3, í grannskoðanarlógini útveitt ein part av grannskoðanini til løggilt grannskoðanarvirki. Avtalað er, at Landsgrannskoðanin kannar landskassaskuldina, meðan grannskoðanarvirkið kannar porteføljuskipanina og plaseringar av gjaldføri.

*Í 2016 umsat Fígging landsins gjaldførið og skuldina hjá landinum. Frá 1. januar 2017 er uppgávan løgd til Landsbankan at røkja.*

Landsgrannskoðanin hevur eisini kannað tøkan pening, sum Fígging landsins umsitur ein part av. Greitt verður frá tí í serstøkum broti undir fíggjarstøðuni.

1. januar 2017 kom Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" í gildi. Lógin setti úr gildi Ll. nr. 140/2012. Gjaldstovan fyrisitur tí ikki longur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins, men er uppgávan løgd til Landsbankan at røkja frá 2017.

### 10.2.1 Landskassaskuld - brævalán

#### Heimild at læna

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya" kann lán ella borgan, ið skuldbindur løgting, Landsstýrið ella stovnar undir landinum, ikki verða tikið ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 "um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum" verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2016. Onki var at finnast at.

### Lánini í tráð við prospektið

Í sambandi við lántøku ger Gjaldstovan kunningartilfar til íleggjarar og onnur, nevnt prospekt. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlaða upphædd, rentu, kurs, leypitíð og fondskotu.

***Lánini í tráð við prospektini.***

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2016, eru í tráð við prospektini. Onki var at finnast at.

### Skráseting av brævalánum

Brævalánini síggjast í landsroknskapinum sum langfreistað innanlandsskuld í fíggjarstøðuni. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Samlaða bókaða virðið av brævalánunum við árslok 2016 er 4.634 mió.kr. í mun til 4.678 mió.kr. við ársbyrjan 2016. Báðar upphæddirnar eru sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum 2016 grundaðar á marknaðarvirðið á brævalánunum umframt tíðargreinaðar rentur.

*t.kr.*

| **Brævalán** | **2015** | | | **2016** |
|---|---|---|---|---|
| | *Brævalán* | *Swaps* | *Tilsamans* | *Brævalán* |
| Marknaðarvirði | 4.610.227 | 19.788 | 4.630.015 | 4.605.240 |
| Viðhangandi renta | 25.578 | 22.391 | 47.969 | 28.995 |
| **Tilsamans** | **4.635.805** | **42.179** | **4.677.984** | **4.634.235** |

* Viðhangandi renta er tíðargreinað renta viðvíkjandi roknskaparárinum, men sum er goldin eftir roknskaparlok.

***Av tí at virðisáseting-armeginreglan er broytt í 2016, er brævalánsupphæddin við ársenda 2015 javnað við 104 mió.kr.***

Í landsroknskapinum 2015 var samlaða upphæddin fyri brævalánini 4.574 mió.kr. og var grundað á eina restskuld uppá 4.526 mió.kr. umframt amortiseraðan kursmun og tíðargreinaða rentu. Munurin millum bókaðu upphæddirnar við árslok 2015 og við ársbyrjan 2016 er 104 mió.kr. og stavar frá broytingini í virðisásetingarmeginregluni. Broytingin ávirkaði ikki tíðargreinaða rentu. Brævalánsupphæddin við ársenda 2015 varð javnað í 2016, soleiðis at hon hækkaði við 104 mió.kr., og javningarkontan í landsroknskapinum varð mótbókað við somu upphædd.

*t.kr.*

| **FO-LB** | **Restskuld við byrjan 2016** | **Virði við byrjan 2016** | **Munur** | **Restskuld við árslok 2016** | **Virði við árslok 2016** | **Munur** | **Broyt. í markn. virði** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Swaps | 0 | 19.788 | 19.788 | 0 | 0 | 0 | -19.788 |
| 180610 | 30.603 | 32.153 | 1.550 | 20.775 | 20.775 | 0 | -1.550 |
| 160622 | 1.350.000 | 1.354.050 | 4.050 | 0 | 0 | 0 | -4.050 |
| 170627 | 1.000.000 | 1.024.200 | 24.200 | 1.000.000 | 1.009.299 | 9.299 | -14.901 |
| 190620 | 1.100.000 | 1.146.255 | 46.255 | 1.100.000 | 1.147.210 | 47.210 | 955 |
| 200611 | 1.045.000 | 1.053.569 | 8.569 | 1.045.000 | 1.072.518 | 27.518 | 18.949 |
| ***Tils.*** | ***4.525.603*** | ***4.630.015*** | ***104.412*** | ***3.165.775*** | ***3.249.802*** | ***84.027*** | ***-20.385*** |
| *Upptøka í árinum* | | *Virði* | *Munur* | | | | |
| 210622 | 1.350.000 | 1.351.661 | 1.661 | 1.350.000 | 1.355.438 | 5.438 | 3.777 |
| **Tilsamans** | | | | **4.515.775** | **4.605.240** | **89.465** | **-16.608** |

Í talvuni hava vit greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin ávikavist við árslok 2015 og við árslok 2016. Sum sæst, er kursmunurin við árslok 2016 minkaður í mun til við ársbyrjan. Kursbroytingin verður tikin við í raksturin undir høvuðskontu 20.50.1.01. ”Rentur at gjalda” sum staðfestur og ikki staðfestur kursmunur.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2016 | Kursur smbr. roknskapi | Kursur smbr. VP* | Restskuld við árslok 2016 | Virði smbr. VP* | Munur í virði |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 180610 | 20.775 | 100,0000 | 95,6000 | 20.775 | 19.861 | -914 |
| 170627 | 1.000.000 | 100,9299 | 101,3000 | 1.009.299 | 1.013.000 | 3.701 |
| 190620 | 1.100.000 | 104,2918 | 104,4000 | 1.147.210 | 1.148.400 | 1.190 |
| 200611 | 1.045.000 | 102,6333 | 102,8500 | 1.072.518 | 1.074.783 | 2.265 |
| 210622 | 1.350.000 | 100,4028 | 100,0750 | 1.355.438 | 1.351.013 | -4.425 |
| **Tilsamans** | **4.515.775** | | | **4.605.240** | **4.607.057** | **1.817** |

* VP er stytting fyri VP Securities A/S, sum tekur sær av skráseting og handli av børsskrásettum virðisbrøvum.

Í talvuni síggjast brævalánsrøðirnar við árslok 2016. Sambært roknskaparmeginreglunum verða árligu broytingarnar í keypsskála skrásetta kursvirðinum tiknar við í roknskapin. Vit hava samanborið lánini og kursin, sum er brúktur í landsroknskapinum, við upplýsingar sambært skjølum frá VP Securities A/S fyri at vissa okkum um upphæddirnar, sum eru í umferð, og at brúkti kursurin samsvarar við marknaðarkursin við árslok. Munur er í øllum brævalánsrøðunum í mun til kursin hjá VP við árslok 2016.

***Kursmunur er í øllum brævalánsrøðunum í mun til kursin hjá VP.***

Fígging Landsins hevur greitt frá, at stovnurin brúkar PandaConnect sum virðisbrævabókhaldara, og PandaConnect heintar kursirnar frá keypsskálum og Bloomberg. Tey vísa á, at munurin, sum Landsgrannskoðanin vísir á, er uppá alla skuldina bara 0,04%.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2016 | Tíðargreinað renta* | Rentudagur | Dagar | Roknað renta í %* | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 180610 | 20.775 | 435 | 10-06-2016 | 204 | 3,7603 | 3,7500 |
| 170627 | 1.000.000 | 8.966 | 27-06-2016 | 187 | 1,7548 | 1,7500 |
| 190620 | 1.100.000 | 10.231 | 20-06-2016 | 194 | 1,7548 | 1,7500 |
| 200611 | 1.045.000 | 5.812 | 11-06-2016 | 203 | 1,0027 | 1,0000 |
| 210622 | 1.350.000 | 3.551 | 22-06-2016 | 192 | 0,5000 | 0,5000 |
| **Tilsamans** | **4.515.775** | **28.995** | | | | |

* Rentan er eftirroknað við 366 døgum í 2016 – bókaða tíðargreinaða rentan er roknað út frá 365 døgum, tó ikki lán 210622.

Í talvuni hava vit eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2016. Onki var at finnast at.

### Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.

Sambært landsroknskapinum vóru rentuútreiðslur o.a. 63 mió.kr. í 2016. Av hesum eru 9 mió.kr. fluttar undir "Frávik frá játtan til rentur", soleiðis at rentur o.a. undir høvuðskontu 20.50.1.01. "Rentur at gjalda" samsvara við játtanina uppá 54 mió.kr.

Í 2015 vóru rentur o.a. av brævalánunum 106 mió.kr. Tað ber tó ikki beinleiðis til at samanbera við upphæddina fyri 2016, tí broytta virðisásetingarmeginreglan við ársbyrjan 2016 hevur við sær, at stórar kursbroytingar eru partur av upphæddini í 2016.

*t.kr.*

| Heiti | 2015 | | 2016 | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Goldnar rentur* | | 103.265 | | 94.765 |
| Munur – tíðaravmarkað og goldin renta | | -1.719 | | -18.974 |
| Ómaksgjøld o.a. | | 2.090 | | 2.700 |
| Staðfestir kursmunir | | 0 | | -24.336 |
| Ikki staðfestir kursmunir | | 1.038 | | 7.728 |
| Aðrar rentuútreiðslur | | 966 | | 1.125 |
| Innanhýsis flyting millum almennar stovnar | | 0 | | -9.008 |
| **Tilsamans** | **115.000** | **105.640** | **54.000** | **54.000** |

* Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar – upphæddirnar eru sambært yvirlitum úr porteføljuskipanini Panda.

Í talvuni niðanfyri eru goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2016 býttar á brævalánini. Vit hava roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er í mun til eina miðalsaldu á láninum í árinum. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni.

*t.kr.*

| FO-LB | Miðalsalda í 2016 | Goldin renta | Tíðargreinaðrenta | Renta tilsamans | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 180610 | 25.689 | 1.147 | -202 | 945 | 3,6805 | 3,7500 |
| 160622 | 675.000 | 46.417 | -22.390 | 24.026 | 3,7436 | Var. |
| 170627 | 1.000.000 | 17.500 | 24 | 17.524 | 1,7524 | 1,7500 |
| 190620 | 1.100.000 | 19.250 | 28 | 19.278 | 1,7525 | 1,7500 |
| 200611 | 1.045.000 | 10.450 | 16 | 10.466 | 1,0015 | 1,0000 |
| 210622 | 675.000 | 0 | 3.551 | 3.551 | 0,5014 | 0,5000 |
| **Tilsamans** | **4.520.689** | **94.764** | **-18.973** | **75.790** | | |

Brævalánið FO-LB 160622 er útgoldið í 2016. Renturnar av láninum hava verið oman fyri 50 mió.kr. hvørt árið. Í 2016 er nýtt lán somuleiðis uppá 1.350 mió.kr. upptikið við 0,5% rentu, svarandi til út við 7 mió.kr.

Samlaða kursbroytingin í rakstrinum 2016 er 16,6 mió.kr. í vinningi. Sum sæst í talvuni omanfyri við marknaðarvirðinum av hvørjum brævaláni, hava vit eftirroknað samlaðu kursbroytingina, t.e. munurin á marknaðarvirðinum við ársbyrjan og við árslok. Vit hava somuleiðis eftirroknað býtið í staðfestar og ikki staðfestar kursbroytingar. Onki var at finnast at útrokningunum.

***Aðrar útreiðslur av brævalánum, enn rentur og kursmunir, verða bókaðar á "Rentur at gjalda".***

Aðrar útreiðslur av brævalánunum, enn rentur og kursmunir, eru uppá góðar 3,8 mió.kr. Talan er um ómaksgjøld í sambandi við upptøku av nýggjum lánum, gjald fyri ráðgeving, skráseting, eftirlit o.a. Eisini eru nakrar útreiðslur av føroyskum peningastovnskontum hjá Gjaldstovuni. Í einum føri eru útreiðslur av tollkreditti hjá almennum stovni. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at áseta, hvørjar útreiðslur kunnu takast við í játtanina, t.d. í viðmerkingunum til játtanina í fíggjarlógini.

Útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini verða rindaðar av játtanini til Fígging landsins, nú Landsbankin. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01. "Rentuinntøkur av innistandandi".

Fígging Landsins hevur greitt frá, at tey fylgja einari innanhýsis mannagongd. Allir kostnaðir í sambandi við lántøkur verða bókaðir á rentur at gjalda, t.d. VP-gjøld, NASDAQ-gjøld, søluprovisjón og stovningarprovisjón. Hinvegin verður bókhaldið av skuldini (Panda) ikki sæð sum ein partur av lántøkuni, men av umsitingini, og tí goldin av rakstrinum.

***Uppgávan at røkja gjaldførið varð boðin út í 2012. Landsbankin ætlar at bjóða hana út av nýggjum.***

Landsbankin hevur brúkt Nordea sum ráðgeva síðani fyrst í 90'unum. Uppgávan at røkja gjaldførið varð boðin út í 2012. Landsbankin ætlar at bjóða út av nýggjum. Porteføljuskipanin er ikki boðin út, men Landsbankin hevur kannað fleiri skipanir til endamálið. Tá vóru ikki nógvar skipanir at velja ímillum, m.a. tí at fleiri av skipanunum vóru gjørdar til stórar peningastovnar og hóskaðu tí ikki.

### Virðisásetingarmeginreglan fyri brævalán broytt aftur í 2016

Í landsroknskapinum 2011 vórðu meginreglurnar fyri viðgerð av lánsbrøvum og broytingum í kursvirðinum broyttar soleiðis, at skuldin ikki longur varð tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Endamálið við broytingini var, at rentuútreiðslurnar ikki skuldu vera merktar av teimum sveiggjum, sum broytingar í kursvirðinum kundu hava við sær.

***Virðisásetingarmeginreglan fyri viðgerð av lánsbrøvum broytt aftur í 2016.***

Í landsroknskapinum 2016 eru virðisásetingarmeginreglurnar aftur broyttar, soleiðis at brævalán og broytingar í kursvirðinum verða tikin við í roknskapin til marknaðarvirði.

Í § 3 í lógini um játtanarskipan landsins stendur m.a., at fíggjarlógin skal vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir, sum til ber. Fíggjarlógin skal vera ætlað eftir somu meginreglum, sum eru galdandi fyri gerð og uppseting av landsroknskapinum sambært lógini um landsins almenna roknskaparhald v.m.

Roknskaparligar meginreglur eru ásettar í roknskaparkunngerðini. Fíggjarmálaráðið tekur somuleiðis avgerð í samráði við Gjaldstovuna um meginreglur, og um tær skulu broytast. Landsgrannskoðanin veit ikki um nakað savnað yvirlit yvir skriv ella avgerðir frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparligar meginreglur, men í landsroknskapinum er greitt frá ymiskum roknskaparmeginreglum.

Tað finnast altjóða roknskaparstandardir fyri almenna geiran, nevndir IPSAS. IPSAS 29 er um ”financial instruments: recognition and measurement”. Útgangsstøðið er, at um skuld ikki er stovnað við handli fyri eyga, skal skuldin virðisásetast til amortiseraðan kostprís. Tað samsvarar eisini við ársroknskaparlógina. Er skuldin stovnað í sambandi við íløguognir, skal skuldin hinvegin ásetast til dagsvirði.

Sigast kann, at eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, í mun til tað, sum er samtykt. Tann mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum ein landsstýrismaður ella stovnsleiðsla tekur.

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar á hvørjum ári ikki útreiðslur ella inntøkur við sær yvir samlaðu lánstíðina. Tað er goldna rentan, sum hevur útreiðslur við sær á hvørjum ári, og sum endurspeglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upplýsingar, men kunnu heldur hinvegin órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

***Óheppið at broyta roknskaparligar meginreglur við stuttum millumbili.***

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er óheppið at broyta roknskaparligar meginreglur við stuttum millumbili. Tað ávirkar gjøgnumskygni og møguleikan at samanbera. Landsgrannskoðanin heldur eisini, at tær brúktu roknskaparmeginreglurnar eiga at vera tær, sum á bestan hátt endurspegla tær avgerðir, sum verða tiknar í einum fíggjarári.

Fígging landsins mælti til broytingina í 2015 um at brúka marknaðarvirði, soleiðis at somu meginreglur eru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísir á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hava reservarnar hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

### Rentur o.a. av brævalánum

***Broytingar gjørdar í upplýsingum av rentum o.ø. í landsroknskapinum. Frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80, sum er partur av RLÚ II.***

Í landsroknskapinum 2016 eru eisini gjørdar broytingar í upplýsingunum av rentum o.ø. Viðgerðin av rentuinntøkum og -útreiðslum, kursbroytingum o.ø. er broytt soleiðis, at inntøkurnar og útreiðslurnar gjøgnum árið verða tiknar við í § 20, sum er partur av RLÚ I, men við árslok verða tær javnaðar soleiðis, at frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 Rentur, sum er partur av RLÚ II. Bókaðu rentuútreiðslurnar uppá 63 mió.kr. í 2016 eru tí býttar sundur við 54 mió.kr. undir vanliga rakstrinum og 9 mió.kr. undir óvanligum útreiðslum.

Í fíggjarlógini 2016 undir høvuðskontu 20.50.1.01. ”Rentur at gjalda” er greitt frá, at nýggj meginregla verður nýtt, har effektiva rentan verður brúkt. Metingar av rentuútreiðslum og -inntøkum verða síðani grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik í mun til játtan, vegna ikki staðfestar kursbroytingar, verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

Í § 6 í lógini um játtanarskipan landsins stendur, at játtanir verða veittar á høvuðskontum sum bruttojáttanir við serstakari játtan til at halda útreiðslur og hava inntøkur. Í fíggjarlógini 2016 er ongin § 80 og tíansheldur nøkur játtan. Til renturnar undir § 20

er heldur ongin átekning um at flyta millum høvuðskontur í tráð við § 13 í lógini um játtanarskipan landsins.

Fígging landsins heldur, at frávik frá metingini av rentunum í fíggjarlógini skulu ikki vera partur av RLÚ I, men skulu vera tikin við sum óvanligar útreiðslur undir RLÚ II. Tey vísa á, at soleiðis fara rentu-/kursbroytingar í árinum ikki at ávirka fíggjarlógina.

***Landsgrannskoðanin er í iva, um tað er rætt at javna ella at flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.***

Sum Landsgrannskoðanin hevur víst á omanfyri, er tað eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, í mun til tað, sum er samtykt. Tað eigur at vera sjónligt fyri hvørja høvuðskontu sær. Landsgrannskoðanin er tí í iva um, hvørt tað er rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Fígging landsins vísir á, at tað eru ikki bara rentuútreiðslurnar, sum verða býttar sundur, men verða rentuinntøkurnar eisini viðgjørdar á sama hátt.

### 10.2.2 Porteføljuskipanin og plaseringar av gjaldføri

***Partur av grannskoðanini er útveittur.***

Sum nevnt, hevur Landsgrannskoðanin útveitt ein part av grannskoðanini. Grannskoðanarvirkið Januar hevur grannskoðað hesi øki:

*Porteføljuskipanin:*
Grannskoðarin hevur útvegað og mett um grannskoðanarváttan, um skipanina, og hevur kannað:

- um øll trygdartiltøk verða hildin (innritan, funktiónsskilnaður, trygdaravrit o.s.fr.),
- um skipanin roknar rætt (goymslu, kursvinning/tap, rentur o.s.fr.),
- um útskriftir eru rættar og álítandi,
- um transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er í lagi, og
- um samsvar er millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins.

*Plaseringar av gjaldføri:*
Grannskoðarin hevur kannað:

- um Gjaldstovan hevur nøktandi og dagførdar skrivligar mannagongdir um, hvar hon plaserar gjaldførið,
- um mannagongdirnar verða hildnar,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært Ll. nr. 140/2012,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru í tráð við instruksin frá Gjaldstovuráðnum,
- um Fígging landsins heldur seg til roknskaparinstruksin við Fíggjarmálaráðið viðvíkjandi plaseringum av gjaldføri, og
- um starvsfólk, ið gera íløgur, hava heimild, og um tey halda seg til hana.

***Niðurstøðan er, at týðandi eftirlit eru nøktandi.***

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er, at kontrollirnir, sum eru knýttir at nevndu kontrollmálum, í øllum týðandi lutum kunnu metast at vera nøktandi og hava verið nøktandi í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2016.

Grannskoðarin hevur hesar ískoytisupplýsingar:

***Roknskaparinstruksurin enn ikki góðkendur.***

*"Vit hava undir okkara arbeiði staðfest, at roknskaparinstruksurin við Fíggjarmálaráðið, sum m.a. umfatar ásetingar um plaseringar av gjaldføri, fyriliggur sum uppskot, men ikki er endaliga samtyktur."*

Grannskoðarin vísir á, at transaktiónsslóðin millum porteføljeskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki optimal, tí at tað ikki ber til at finna allar skrásetingar av einari bóking í Búskaparskipan landsins, men neyðugt er at fara víðari til porteføljuskipanina, um skrásetingar av einari transaktión skulu finnast fram.

# 11 Orðalisti

**360** - er ein journalskipan, sum fleiri almennir stovnar brúka.

**Brúkararættindi** - eru rættindini hjá tí einstaka til at lesa og/ella broyta dátur í KT skipanum.

**Búskaparskipan landsins** - er felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

**C.átekning** - við C.átekning kann heimild verða givin til at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, ella til innanhýsis flytingar millum høvuðskontur sama ár.

**Change management** - Broytingarleiðsla ella stýring av broytingum fyri at tryggja, at allar broytingar verða gjørdar eftir ávísum standardum at tryggja kvalitetin á broytingunum.

**Cosmic** - er ein KT skipan til at gera samlirokningar frá læknum at rinda úr eftir.

**Doculive** - er ein journalskipan.

**Eftirlitsumhvørvi** - leggur støði undir hugburðin, starvsfólkini hava til eftirlit og stýring, og er grundarlagið undir, hvussu væl innaneftirlitið er skipað.

**Eksternir grunnar** - eru grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

**Eykajáttanarlóg** - fevnir um broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

**Fígging landsins** - deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur umsiting av gjaldførinum hjá landinum um hendi.

**Fíggjargrannskoðan** - er, at ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Fyrisitingargrannskoðan** - er, at ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

**Gjaldstovuráðið** - tað er Gjaldstovuráðið, sum ger ásetingarnar um røktina av landsins gjaldføri og skuld, sum Fígging Landsins fyrisitur eftir. Ásetingar um landssins gjaldføri og skuld eru at finna í løgtingslóg nr. 49 frá 12. mai 2015 “um broyting í løgtingslóg um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting”.

**Grannskoðanarlógin** - løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

**Høvuðskonta** - játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

**Íløgujáttan/løgujáttan** - er eitt játtanarslag. Løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

**Innaneftirlit** - eru tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

**Innheintingarskipanin hjá TAKS** - er ein KT skipan til at krevja inn skatt og o.a., sum er fallið til gjaldingar.

**Inntøkufíggjað virksemi** - er virksemi, ið ber handilsligan dám, og kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemið eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan".

**Kervisskoðan** - er grannskoðan av KT skipanum.

**Kontuskipan landsins** - er kontuplanur fyri tað almenna.

**KT heildarskipanin** - í frágreiðingini meinast við nýggju KT heildarskipanina hjá Almannaverkinum, sum partvíst er tikin í brúk.

**KT landsins** - er deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

**Landsnet** - er tænasta, sum KT landsins veitir. Tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT support til brúkarar.

**Landspartafelag** - er eitt partafelag, sum landið hevur sama tilknýti til, sum móðurfelag til dótturfelag.

**Landsroknskapurin** - er samlaði ársroknskapurin hjá landinum og fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og aktiv og passiv landsins. Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

**Løgfrøðilig-kritisk grannskoðan** - er grannskoðan, har hugt verður eftir, at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Mál- og avrikssáttmáli** - er sáttmáli millum aðalráð og teirra stovnar um mál og nádd úrslit.

**Markamót** - er heit á sambindingarliði millum ymiskar skipanir.

**Profylaksir** - er eitt heilsufrøðiligt heiti á fyribyrgjandi tiltøkum.

**Ræðisrættur** - er at hava ræði á einari kontu ella játtan.

**Rakstrarjáttan** - er ein játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur o.a.

**Roknskapargóðkenningarskipanin** - stytt RGS, er ein KT skipan, sum góðskutryggjar tann almenna roknskapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

**Roknskaparlógin** - løgtingslóg nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m."

**Roknskaparkunngerðin** - Kunngerð nr. 22/2007 "um roknskaparverk landsins"

**Roknskaparreglugerð** - er ein reglugerð fyri roknskaparhaldið hjá stovninum við ábyrgdar og heimildarreglum.

**Roknskaparrundskrivið** - Roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

**Samlirokning** - er KT skipan hjá m.a. Heilsutrygd at rinda veitingar eftir.

**SLA** – Service Level Agreement - er heiti á einari rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu millum partar.

**Stovnskassi** - er ein peningakassi til smákeyp.

**TAKS-skipanir** - í frágreiðingini verður heitið brúkt um KT skipanir hjá TAKS

**TGumsitingarskipan** - er nýggj KT skipan hjá Trygdargrunninum, til m.a. at rokna og skjalfesta gjøld fyri sjúkratrygd.

**Totalview** - er klokkuskipan, sum fleiri almennir stovnar brúka.

**Trygdarpolitikkur** - er ein yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

**Undirkonta** - verður brúkt, tá ið neyðugt er at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

**Váðameting** - er at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

**VaktPlan** - er KT skipan at skráseta arbeiðstímar í og at avgreiða lønir við.

**Verkætlan** - er t.d. bygging av einum bygningi ella vegi og granskingarverkætlanir.

**Verkætlanarleiðsla** - leiðslan fyri einari verkætlan.

**Verklagslóg** - er lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

**Víðkað fyrisitingargrannskoðan** - er ein størri og meira víðfevnd kanning, enn vanlig fyrisitingargrannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

**Vinnugluggin** - er ein portalur, har virkir og feløg kunnu avgreiða síni viðurskifti við TAKS.

**Web-løn** - er ein KT skipan til lønaravgreiðslu hjá Gjaldstovuni.